# Les

## Tekstasavn

## 3

*Ritstjórnað hevur*
*Lydia Didriksen*

Føroya Skúlabókagrunnur 2009

**Les 3**
*Tekstasavn*
Ritstjórnað hevur Lydia Didriksen
Fakligur stuðulsbólkur:
Kirsten Brix, Anja Pálsdóttir og Heðin M. Klein
Tekning á vinstra forsatsi: Gunnar Hoydal
© Føroya Skúlabókagrunnur, høvundarnir, listafólkini
og fotografarnir
Perma: Ingi Joensen
Umbróting, repro, prent og innbinding: Føroyaprent
Útgáva: Føroya Skúlabókagrunnur 2009

ISBN 978-99918-2-010-1

# Innihaldsyvirlit

## Blomstur í kavanum


Steinbjørn B. Jacobsen: Aldan og landið alda . . . . . . . . . 12
Sámal Joensen-Mikines: Súgur við lendingina . . . . . . . . . 13
Martin Joensen: Maðurin umborð. . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
Óluva Johannessen: Kanska fara . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 23
Guðrið Helmsdal: Mjørkanáttin. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29
Grønlendsk frumsøgn: Sálin í hvalinum (føroysk týðing) . 30
Mikkjal Dánjalsson á Ryggi: Leggið út árar . . . . . . . . . . . 33
Hans Pauli Olsen: Uppskorin hvalur. . . . . . . . . . . . . . . . . 34
Lydia Didriksen: Blóð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 38
Rannvá Kunoy: Return to Paradise . . . . . . . . . . . . . . . . . . 39
Tróndur Patursson: Náttúrulýsing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 46
Rikard Long: Vætan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 47
V. U. Hammershaimb: Blankans ríma. . . . . . . . . . . . . . . . 49
Heðin M. Klein: Grasrót. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 52
Ólavur Michelsen: Rossini á Skoradali . . . . . . . . . . . . . . . 54
Jack Kampmann: Elduvík . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 55
Bárður Oskarsson: Kroppur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 63
Tóroddur Poulsen: Fepurdreymur um blomstrini . . . . . . 69
Jens Kristian Vang: Mótasýning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 70
Jakob Jakobsen: Teir sjey svanirnir . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Edward Fuglø: Nornurnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 74
Guðrið Helmsdal: Í skýmingini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 78
Marmar: Fragmented Unison . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 79

## Eg ikki eg

Sigri M. Gaïni: Eg eri . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82
Karsten Hoydal: Barnið, bergið og blómurnar. . . . . . . . . 83
Petur Pólson: 1. (myrkur) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 85
Heiðrik á Heygum: Through the looking-glass . . . . . . . . 87
Petur Pólson: 2. (lýsi) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 88
Regin Dahl: Ikki komi eg til tín. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 90
Carl Jóhan Jensen: the reverend dünn's concept of God 91
Hans A. Djurhuus: Hagin og kirkjan. . . . . . . . . . . . . . . . . 93
Hanus Kamban: Undir tínum veingjabreiði . . . . . . . . . . . 94
Bárður Eklund: Varðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 95
Sigrun Gunnarsdóttir: Einglavakt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 104
Tita Vinther: Segl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 111
Kristian Osvald Viderø: Himnafaðir, eg teg biði . . . . . . . 114
Tóroddur Poulsen: Fjarskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 116
Ingálvur av Reyni: Genta í rúmi. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 117
William Heinesen: Brot úr „Móðir Sjeystjørna“
(føroysk týðing) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 118
Lydia Didriksen: Frostrósan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 124
Svanhild Strøm: Latitude . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 125
Lina Sandell: Ongum er so trygt (føroysk týðing) . . . . . . 130
Marius Olsen: Sjálvsmynd. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 132
Alexandur Kristiansen: Brot úr „Man guð vera nøgdur“. 133

## Hví stendur tú her

Rói Patursson: Býurin (og reklaman í glugganum) . . . . . 136
Annika Hansen: Power . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 138
Sólrún Michelsen: Summi renna í stuttum brókum . . . . 139
Hanni Bjartalíð: Uttan heiti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 146
Agnar Artúvertin: Hundurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 147
Firouz Gaïni: Prógvið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 150
Hanus Kamban: Sangur um flyting . . . . . . . . . . . . . . . . . 152

Astrid Andreasen: Æti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 153
Oddvør Johansen: Brot úr „Tá ið eg havi málað summarhúsið“ . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 155
Beinta av Reyni: Barnaminni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 163
William Heinesen: Sjálvband og samstýri . . . . . . . . . . . . . 172
Gunnar Hoydal: Bræv til Marionnu . . . . . . . . . . . . . . . . . 173
Beinta av Reyni: Eminem aka Slim Shady . . . . . . . . . . . . 180
Heine Hestoy: Taskan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 181
Poul F. Joensen: Samfelagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 189
Høgni Magnussen: Á G! . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 190

## Eg fann teg

Sendistovan: Máltræ . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 192
Jóannes Patursson: Eg veit ein kvist . . . . . . . . . . . . . . . . . . 193
Rasmus Effersøe: Úr øllum ættum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 195
Christian Matras: Móðurmálið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 196
Petur & Petur: Eg elski mína mús . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 197
Haldur Suni: Eg’ið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 198
Agnar Artúvertin: Message 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 199
Jónley á Løgmansbø: Message 28 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 200
Diana Joensen: Message 18 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 201
Heðin Kambsdal: Kona . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 202
Petur Pólson: Loynimálið – Bábel revisited . . . . . . . . . . . 203
Óli Petersen: Málfúti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 207
Stefan í Skorini: Málslig intoleransa skeiklar almenna kjakið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 208
Eivør Pálsdóttir: Mín móðir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 211
Sigri M. Gaïni: Minst til . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 212
Hans A. Djurhuus: Høsnatos . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 213
Ruth Smith: Nes . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 215
Jóanes Nielsen: Fyri tvær fløskur av konjakki . . . . . . . . . . 222
Anna Katrina Højgaard: Føroysk delikatessa . . . . . . . . . . 223

Tóroddur Poulsen: Dulnevni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 230
Fríðrikur Petersen: Søgan um floksmenninar . . . . . . . . . 231
Jacob Olsen: Fjallaoyggjar í kava . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 237
Erla Marita Askham: Kvinna við vesikummu . . . . . . . . . . 242
Kári P.: Meirilutin ræður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 243
Heine Hestoy: Óboðin ferðamaður. . . . . . . . . . . . . . . . . . 244
Christian Matras: Hitt blinda liðið. . . . . . . . . . . . . . . . . . . 250
Astrid Andreasen: Babyboom. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 251

## Regnið og lívið

Hávamál (ørindi 76 og 77). . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 254
Tummas Jákup Thomsen: Uttan heiti. . . . . . . . . . . . . . . . 255
Hávamál (ørindi 76 og 77) (føroysk týðing) . . . . . . . . . . 256
Nordahl Grieg: Til ungdommen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 257
Marius Olsen: Mynd við flaggstong . . . . . . . . . . . . . . . . . . 260
Karl Bruckner: Brot úr „Sadako vil liva“ (føroysk týðing) 261
Annika á Lofti: Tár . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 268
Poul F. Joensen: Heimspolitikkur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 272
Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi . . . 273
Fridtjof Joensen: Móðir og barn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 274
Wolf Biermann: Eggjan (føroysk týðing) . . . . . . . . . . . . . 280
Jan Müller og Jóannes Dalsgaard: Mandela – hugtak og ímynd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 282
Jóannes Dalsgaard: Framtíðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 288
Malan Poulsen: Vón . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 290
Margretha Nónklett: Mannarættindadagurin 2006 . . . . . 291
Steintór Rasmussen: Tey dansa eins og skuggar. . . . . . . . 294
Jan Guillou: Brot úr „Óndskapurin“ (føroysk týðing) . . . 295
Bárður Dal Christiansen: Maybe: a Battle. . . . . . . . . . . . . 299
Oddvør Johansen: Við eygum so stórum sum tekoppar . 305
Edward Fuglø: Microstate Hiker . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 309
Hanus Kamban: Amerikakvæðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 316

Alexandur Kristiansen: Tá fáa vit frið . . . . . . . . . . . . . . . . 318
Hans Henrik Tholstrup: Havnin í Havn . . . . . . . . . . . . . . 320

Keldur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 322
Innihaldsyvirlit eftir høvundi/listafólki . . . . . . . . . . . . . . . . 330
Innihaldsyvirlit eftir heiti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 334

# Formæli

Hetta tekstasavnið er ætlað undirvísingini í føroyskum eftir 9. skúlaár. Tilfarið er skipað í fimm partar við hvør sínum heiti. Hvør partur hevur sítt høvuðsevni, ið bindur tekstirnar saman. *Blomstur í kavanum* er um sambandið ímillum menniskju og náttúru. *Eg ikki eg* er um lívsvirði og viðurskifti ímillum menniskju og Guð. *Hví stendur tú her* er um broytingar, bæði persónligar og samfelagsligar. *Eg fann teg* er um mál okkara og føroyskan samleika. *Regnið og lívið* er um Føroyar og útheimin – útheimin sæddan við føroyskum eygum.

Heitið á pørtunum er ein felagsnevnari, ið lýsir evnið og innihaldið og er tikið úr teksti, sum er í partinum.

Tekstirnir í savninum eru valdir eftir fleiri fortreytum. Hugsað hevur verið um, at teksturin skal vera góður og tala til aldursbólkin. Hann skal vera á hóskandi torleikastigi. Úrvalið skal umboða ymisk tekstasløg. Bæði eldri og yngri skaldskapur skulu vera við. Samstundis hevur verið hugsað um, at úrvalið í einstaka partinum hongur saman sum ein fjølbroytt eind.

Kirsten Brix, Heðin M. Klein og Anja Pálsdóttir hava veitt ráðgeving í sambandi við tekstaúrvalið.

Í myndaúrvalinum er dentur lagdur á fjøltáttaðu føroysku myndlistina, at myndin hóskar til tekstin, og at myndin talar til aldursbólkin, ið tekstasavnið er ætlað til.

Myndaúrvalið hava Gunnar Hoydal, Jóannes Gaard, Gyðja Hjalmarsdóttir og Lydia Didriksen gjørt.

Til tekstasavnið er lærarabók við dømum um arbeiðsgongd og greiningar av ymiskum tekstasløgum og myndum, stutt-

ur samandráttur um føroysku myndlistasøguna, arbeiðsspurningar til tekstirnar, høvunda- og listafólkayvirlit, eins og víst verður á evnis- og ískoytislesnað.

Vónandi fer arbeiðið við tekstunum at fremja lesihugin og at víðka sjónarringin hjá hvørjum einstøkum.

Fyri holla ráðgeving og gott samstarv fari eg at takka Kirsten Brix, Heðini M. Klein, Anju Pálsdóttur, Gunnari Hoydal, Jóannesi Gaard, Gyðju Hjalmarsdóttur, Býarbókasavninum, Landsbókasavninum, Føroyamálsdeildini og Listasavni Føroya.

*Lydia Didriksen*

# Blomstur í kavanum



STEINBJØRN B. JACOBSEN

# Aldan og landið alda

Aldan aldar
havaldan lyftir seg upp
søkkur so aftur djúpt niður
aldudalarnir
ývna líðandi
fyllast
skjóta rygg
bogin spennist
stendur sum eitt fjall
ein ælabogi
til hann flaknar
hoknar
aldudalarnir reisa seg
upp móti hválvinum
bogna niður úr hválvinum
havaldan ferðast
reikar um høvini
fram móti sjónarringinum
út undir væðingina
sjófuglurin situr á sjónum
glíður niðan á alduryggin
oman í aldudalin
landið søkkur
skjýtist uppaftur
landið aldar.

# Súgur við lendingina



**Sámal Joensen-Mikines.** Oljumálningur 1952, 100 x 125 cm.

MARTIN JOENSEN

# Maðurin umborð

Tað var eitt av hesum ringu várunum á Suðurlandinum: einki fiskiveður og so at liggja bakk í heilum. Kóka greyt til døgurða og keða seg so, at allir eru um at sálast.

Tað var í slíkum líkindum eina hundavakt, at vit sótu rúgvaðir saman í lugarinum – øll vaktin, bara ein maður á dekkinum. Onkur lá og hálvsyvjaði útstrektur eftir beinkinum; tveir høvdu sitið krøktir yvir eitt talvborð, og hinir høvdu roynt at finna sær eitt samrøðuevni, tað var tað, ið treyt.

Skipið tøvdi og slongdist, doyvandi og svøvnkend ljóð komu bæði úr einum og øðrum hornum; hundavaktin er hin ringasta hjá sjómanninum. Allur hansara hugur miðar seg móti svøvninum og koyggjuni, hann øvundar sínar lagsmenn, sum hava frívakt og liggja og bólta í søtum svøvni í sínum koyggjum. Tá ið slíkt lag er á monnum, er ikki so gott at koma fram á góð hugalig evni at tosa um. Konufólk var slept, men so var tað ein, ið var so heppin at benda tosið á ónatúrligar lutir. Alt hetta, sum ivi er um, sum ikki skilst, og sum fiskimaðurin og sjómaðurin eru so royndir í og oftast trúgva fult og fast uppá.

Hetta vakti lív í okkum. Teir, ið syvjaðu, lyftu seg upp, og talvleikararnir fóru at lurta.

Røðan snúgvaði seg um tað áhugaverda og nógv umrødda: antin maður kundi síggja seg sjálvan í hamferð ella eisini onnur fáa varhugan av, tá ið onkur fór av verðini:

bátar og skip gingu burtur og slík undarlig boð frá øðrum heimi. Eisini um mannin umborð: henda mannin, sum skal vera á hvørjum skipi, varar manningina undan óveðri og vandum, og er so knýttur til skipið, at hann rýmir av tí, áðrenn tað gongur burtur.

Allir vóru fastir í hesi trúgv, at tílík boð vóru send ímillum, og at hin deyði ferðaðist í sínum heimi, visti um tað dulda, ið henda skuldi, og mangan segði teimum livandi frá.

Eg skuldi látast at vera ivingarsamur og siga ímóti kanska fyri at tykjast klókur og dáma at hava aðra áskoðan enn hinir.

„Eg trúgvi nú ikki øllum, ið sagt verður. Tey deyðu munnu verða, har tey eru, og ganga ikki at bera okkum tíðindi. – – Og summi skulu nú altíð síggja og vita framman undan onkrum."

„Sig nú ikki ímóti hasum," helt Palli, ein eldri veðurbardur fiskimaður, sum hevði verið við skipinum í mong ár, var fullur av pátrúgv og áningum og gjørdist meira at kalla illførur, tá ið hann kom á tal við sovorðnar ivamenn, „eg havi so ofta havt slíkar royndir, og tær hava verið sannar.

Eg man hava sagt tykkum onkuntíð frá „Svaninum", og tá ið hann gekk burtur." (Tað hevði hann ivaleyst oftani, men vit vóru komnir í tað lagið at lurta eftir og vildu ikki forða honum at siga frá „Svaninum"). „Ja, tað var við „Svaninum", ein av teimum fyrstu sluppum, sum komu til Føroyar.

Har skuldi maður vera umborð; hann fylgdi við skipinum, tá ið tað kom úr Onglandi.

Eg veit ikki. Teir fortaldu, at bardagi hevði verið umborð, og ein var dripin. Tað var hann, ið gekk aftur.

Ofta kundi hann vera mannargiligur – helst tá ið tað var onkur, sum gjørdist ræddur. Kokkurin hevði ringan av honum. Hann, ólukku syndarin, kom manga ferðina

rennandi líkbleikur upp á dekkið og segði, at hann hevði sæð arm í oljutroyggju rætta seg fram úr proviantskápinum, ella eina bleika hond undan umhanginum í einari tómari koyggju. Men mangan var hann eisini hentur maður.

Eg minnist, eg hevði róðurtørn: ein myrk nátt vestur úr Oyggjunum. Tað var nú endiliga ikki av tí myrkasta, men eingin var til „útkigg“, sum oftani er á føroyskum skipum. – So beint, sum eg stýri, er ein hond á róðrinum og tekur tað hart upp í borðið, so skipið fall av fyri ein hálvan vind. Eg hvakk við. Men í tí sama rópti skiparin, sum var komin upp í kappan at standa, at skip var „forúti“. Tá fyrstani sá eg lanternuna, og var hon tá so nær, at fall ikki okkara skip av tá í løtuni, hevði samanbrestur verið. –

Jú, soleiðis var tað. Og „Svanurin“ legði beinini í Íslandi. Eg fór ikki við honum tað árið. Eg veit ikki. Tað var sum eitt segði mær, at eg skuldi ikki fara.

Og aftaná søgdu teir mær, at hesin góði maður leyp fyri borð, áðrenn skipið rendi á land. Teir sóu hann leypa út av hekkubrettinum og í havið. Hanus hjá Peri var ein, ið sá hann. Hanus var ein av teimum fýra, ið ikki sluppu livandi frá tí; teir druknaðu. – Eg veit ikki; kanska tað eisini hevur verið seg sjálvan, hann hevur sætt.“ – –

„Eg vil ikki siga, at tú sigur ósatt,“ royni eg veikliga at verja mín iva, „men tað kann eisini hava verið okkurt annað; ein kann oftani í myrkri síggja mangt – mangt, sum er natúrligt. – Eg trúgvi nú ikki uppá, at ein ónatúrligur maður skal vera við hvørjum skipi.“ –

Eg kundi tó havt spart míni ivandi orð, tí eg sá fullvæl, at her mundi fáur vera niðriundir, sum ikki trúði tí, ið Palli hevði sagt frá. Eg sá á andlitunum, at allir samlir vóru fullir av líknandi søgum.

Hetta lendi eisini, sum vit livdu og gingu í her norðuri

í víðum havi, skuldi heldur ikki vera hitt frægasta fyri eina hugsan, sum bert vildi líta upp á eftirfarandi royndir, køld prógv, ið ein kann síggja, meta um og kanska nerta við.

Í hesum øki, vit livdu í, kundi alt tað trívast, sum ikki verður tægað sundur ella køld prógv skulu til: ein illa lýsandi lampa sveiggjar og kastar hulisliga, káma glæmu um rúmið – ljóð av dekkinum frammanífrá og aftanífrá, sjógvurin, sum skolar og ongantíð tigur, og teir sovandi menninir, sum róta og tosa í ørviti…

Ein, sum mest hevði givið tosinum ans, var ein dimmhærdur ungur drongur, sum sitið hevði frammi við borðið. Hann hevði skarpligt, dimt andlit, í gulligt, og var so óføroyskur í útsjónd, at ein skuldi sagt, at hann hoyrdi ikki til flokkin, ið sat her niðuri. Hann fekk teg at hugsa um sagnirnar um fremmandar ránsmenn, sum í forðum vitjaðu Føroyar og ivaleyst løgdu slag eftir seg.

Hann var innisælur og lítið tosandi. Ikki fyrr enn hann kendi ein, kundi hann fara og vera tíðindafróður og opna seg. Hann dugdi at spæla og hevði harmoniku við sær. Tá ið hann fór at spæla uppá, flokkaðist manningin um hann; men tað var ikki altíð, at skiparanum dámdi tað, tí tað kundi draga menn frá fiskiskapinum.

Annars var hann væl lýddur av øllum umborð, hjálpsamur og raskur maður. Hann gav seg ikki burtur, tá ið ástóð, og var av bestu versgangarum. Var okkurt at gera í erva, heitti skiparin altíð á Bjarna – soleiðis æt hann – og tað tóktist at vera honum ein frøi, hóast einki var at gera har uppi, at sita og vagga úti á nokkanum sum ein skrápur, helst tá ið bólt var, og gaffilin slongdist borð úr borði. Hann var eisini góður fiskimaður. Tað tók væl í hjá honum, sum fiskimenninir málbera seg. – Men hann var ógvuliga ójavnur, og tað mundi oftast vera av tí, at hugur hansara

var so ójavnur. Viðhvørt veik hann ikki frá snørinum, og aðrar tíðir hekk tað, og hann sat niðurundir og spældi upp á harmonikuna.

Vit vistu, at hann var trúlovaður, og hóast hann einki hevði røtt um nakra gentu, so høvdu vit hoyrt, at hann skuldi giftast til heystar. „Tað er ikki pátrúgv og tápulig hugsan," svaraði Bjarni ivriga til, „at trúgva, at deyðir menn ganga aftur og bera boð, ella menn verða sæddir í hamferð. – Tað eru nógv sannsøgd fólk, sum vita at siga frá slíkum."

„Tú hevur kanska roynt tað?" spurdi eg. „Tað sigi eg ikki," svaraði hann. „Eg segði ikki, at eg hevði roynt tað, men eg trúgvi tí – tað er so mangt undarligt til, ein noyðist at trúgva."

„Trúgva tygum, Palli, at maður er her umborð?" spurdi ein.

„Tað man hann óivað vera," helt hin. „Tað er einki at ivast í, at maður er á øllum skipum, men tað eru ikki allir, ið síggja hann."

Tosið gjørdist heitt, allir vóru uppií, og allir gjørdust ágrýtnir at vita, um nakar maður mundi vera har umborð. Talan um mannin, sum eingin kundi festa til veruligar lutir, dró óunnileika á nógvar av teimum yngru.

Teir skeittu eisini móti teirri myrku forlastini og ganginum, har skuggarnir lógu, eins og skuldi hesin hamurin knappliga koma til sjóndar haðani.

Hvøkkur kom eisini á fleiri, tá ið stivlar sóust í leytaranum, og oljudansur kom undan. Men tað var ikki „maðurin umborð", tað var Óli, sum gekk á dekkinum og skuldi ansa eftir skipinum.

„Nú, eg meini, eingin hevur stundir at koma upp og loysa meg av; eg eri heilt frystur – eitt hundaveður –" hann

sló hendurnar saman og fór at rista kaffiketilin, sum stóð á kabússuni. „Eg meinti, ein kom upp, men so sá eg ongan. Hevur eingin verið á dekkinum av tykkum?“

„Á, nei,“ svaraði eg, „tú hevur gingið so leingi og væntað uppá, at onkur skal koma at loysa teg av, at tú hevur hildið teg sæð mann í kappanum.“

„Jú, sanniliga helt eg tað vera mann, men eg havi kanska sæð skeivt.“

„Nei, hiðani er eingin maður farin upp,“ helt Palli treystliga og fór at seta kaffiketilin útá. Tað sást og hoyrdist á honum, hvat hann hugsaði, og tað sást eisini, at hinir høvdu fest seg við tónalagið og fóru at hugsa tað sama sum Palli. Men eingin tók tosið uppaftur. Tað var bara, sum hetta hálvmyrka lugarið var vorðið meira ófýsisligt, og tað, sum røtt var um, var vorðið meira nærgingið – eins og ein vissur ótti var komin í rúmið um eina komandi hending ella vanlukku. Men tað kann vera so brátt, at sinnini skifta umborð í skipum. Palli segði, at hann skuldi fara á dekkið, og so fór Óli at hita sær kaffi. Hann var skemtingarsamur, og hann fekk hugsanina hjá hinum brátt at fara frá monnum, sum ganga aftur, og teirri verð, sum liggur uttan fyri henda heim.

Eg hevði koyggju í kahúttini. Og tá eg fór aftur at tørna inn, hittust Palli og eg á dekkinum.

„Hatta mundi ikki vera rættiligur maður, Óli sá,“ segði Palli.

„Hó, nú fekst tú hatta at hugsa um,“ læði eg. „Óli, sum blindur er, hvat skal hann hava sætt.“

„Eg leggi ikki lag í, hvat tú sigur. Eg havi mína hugsan. Tú fer nokk at síggja, at okkurt fer at henda, áðrenn vit eru heima aftur. Eg kenni meg sjálvan.“

„Á, góða nátt, og slepp tær nú í koyggjuna. Er maðurin so raskur, sum tú sigur, so liggja vit tryggir; so heldur hann

vakt. – Annars vænti eg, veðrið fer at verða frægari, og vit fáa fisk hesa vikuna.“ Eg sló Palla niður á økslina og skundaði mær at sleppa í bólið, tí hundavaktin hevði verið long. –

Eg fekk rætt. Veðrið batnaði, og fiskur var at fáa, og so vóru ongar stundir at flokkast í lugarinum og kjakast um deydningar og varsil framman undan ófrættum.

Vit fingu nógvan fisk í heilum, og tað var eitt av hesum kvøldunum, tá ið snørini vóru inndrigin, og skipið lá borðfult: fekst ikki gingið fyri fiski, og hvør maður gjørdi seg til at fara og gera reint. Myrkt var vorðið, og lanternurnar vóru uppsettar. Klæði hingu til turkingar uppi í vantrinum, tí veðrið hevði verið turrligt. Palli og eg stóðu afturi á hekkuni og tosaðu. Bjarni hevði brýnt sær flekingarknív; nú sóu vit, at hann fór upp í vantrið eftir klæðum.

„Hygg, misti hann ikki okkurt niður,“ sigur Palli. „Har fór eitt hvítt fyri borð.“

„Eg sá einki,“ svari eg. „Nú batar ikki at fara og hyggja eftir tí; tað er so myrkt, og tað man longu vera rikið afturvið.“

„Tað man tað,“ helt hann.

Eg helt, at Palli sá so hugsunarsamur út, og vit fóru fram at tosa við Bjarna, tá ið hann var komin niðuraftur.

„Misti tú ikki okkurt av klæðunum,“ spyr Palli. Bjarni fór at hyggja. „Tað trúgvi eg ikki,“ sigur hann „eg haldi, eg havi alt – nei, her er einki burturi.“

„So, tað var merkiligt. Sanniliga, helt eg, at eitt fór fyri borð. Tað var, sum tað fór nakað um leið av lanternubrettinum. Men tað var so myrkligt, at eg sá tað ikki skilliga,“ greiddi Palli og fór at hava hetta ivingarsama bragdið í andlitinum, sum vit kendu so væl.

„Á ja, tað kann vera, eg havi sæð skeivt,“ Palli gavst, og eg bað hann koma og hjálpa mær at brýna ein knív. Bjarni fór niðurundir við klæðunum.

„Nei, ikki mundi eg síggja skeivt,“ fór Palli aftur at tosa. „Fyri borð fór nú nakað – tað var ikki, sum tað skuldi vera… Eg havi ein gruna á mær, at okkurt fer at henda. Okkurt var tað, ið Óli sá hitt kvøldið á dekkinum, og nakað var tað, ið fór fyri borð har frammi, tað var nú nógv átøkt einum fólki… Eg veit, her er maður umborð; eg vildi einki siga,“ hann steðgaði á at vinda, og eg mátti lurta eftir honum. „Mestur var tað hann, ið fór fyri borð… Ella tað boðar okkurt frá Bjarna. Óli segði, at maðurin, sum kom upp úr lugarinum, líktist Bjarna. Óli er av slagi, sum sær, tað veit eg. Eg var saman við pápa hansara, og hann var framsíggin.“

„Á, nú manst tú gykla ov mikið fram fyri teg,“ haldi eg og hyggi at flekingarknívinum; ljósið skyggir upp úr kahúttini; og eg hoyri, hvussu teir drekka, og keksurnar knasa undir tonnunum. „Hevur tað ikki verið eitt klædnaplagg, ið fór fyri borð. Var tað ikki Bjarni, ið misti tað, so kundi tað vera hjá onkrum øðrum. Onnur klæði hingu uppi í vantrinum. Hví skal honum fara og bagga nakað. – Sjálvandi kann altíð okkurt henda á sjónum, tað vita vit. Men tað batar ikki at hugsa um tað. Tað, ið skal henda, tað hendir. Einki er at gera við tað. – Men eg líti einki upp á hesar „varingarnar“, sum tit siga, tit skulu altíð fáa.“

„Ja, tað veit eg, at tú trýrt ongum,“ helt Palli og fór aftur at vinda. „Men tú manst einaferð fara at royna tað, at varingar eru til, og mangt kann sýna seg fyri monnum… Eg vil ikki spáa vanlukkur, og ongantíð betur, um tær ikki henda… Men tað eri eg samdur við teg í, at tað, ið skal henda, tað hendir, – hóast eg gangi ikki frá tí, at vit kunna verða boðað aðrastaðnis frá og varað um vanlukkuna.“

Eg skundaði mær at brýna knívin, tí fiskurin var nógvur, og okkum longdist øllum eftir at sleppa í koyggjurnar, so tosið datt niðurfyri. Men tað man hava ligið mær í

huganum. Tí tá ið eg var inntørnaður og sovnaður, droymdi eg í heilum: eg droymdi, at maður fór fyri borð, og vit runnu við lissum og redningskransum aftur eftir dekkinum. Men hann fór sum ein boya aftur frá skipinum, og eg sá einki uttan eitt hvítt andlit upp úr sjónum…

Eg man hava rópt í svøvni, tí teir tóku í meg og spurdu, hvat mær feilti; um eg hevði marruna. –

Men alt hetta datt burtur aftur. Vit høvdu bara ikki stundir at festa okkum við slíkt. Vit skuldu fiska og vinna. Vit stóðu við snørini og drógu, og vit stóðu móðir og svøvntungir og gjørdu reint, og tá ið vit vóru lidnir, fingu vit okkum ein drekkamunn og skundaðu okkum í koyggjuna, sovnaðu sum steinurin, droymdu og slógu ella róptu í svøvni og høvdu mest altíð gloymt allan dreymin, tá ið vit vóru útpurraðir aftur og skuldu skunda okkum til snørið og fiskin.

Skipini lógu tøtt rundanum: sluppir, trolarar og fransaskonnartir. Tá ið klárt var í veðrinum, var sjógvurin um kvøldini sum ein heilur býur av ljósum. Við hvørt komu ljós, reyð og grøn, tætt fram við borðinum, „tey fóru fúkandi framvið", gløddu inn á dekkið og vóru á at líta sum stór risaeygu…

Okkurt av hesum yngra skuldi royna at bera framundir við Palla og spyrja hann, um hann hevði sætt nakað umborð: um hann hevði borið eyga við nakran mann. Men Palli var ikki í skørum at svara aftur. Hann var eldri maður og møddur av fiski og Suðurlandi. Tað var onkuntíð í bakkveðri, at hann kundi gerast tíðindafróður. – Eg hevði so lítið tosað við Bjarna, síðan hitt kvøldið, hann var uppi í vantrinum eftir klæðunum.

Mær tóktist, tað var so lítið um hann; hann sýntist at hava mist fiskihugin. Hann setti ofta fast og fór niður undir at spæla upp á harmonikuna.

# Kanska fara



**Óluva Johannessen**. Leir 2008, staklutur.

„Fiskur er á hjá tær!“ róptu síðumenninir. Men Bjarni legði ikki í. Hann bara spældi: dansiløg, kvæðir ella sálmar. Tað sang og tralladi upp ígjøgnum skeilettið, sum stóð opið. Og tá ið hann einaferð kom upp, hekk fiskurin steindeyður á húkinum. Ella eisini fór hann upp í erva, upp á „góðsið“ at standa og stara út á sjógvin.

„Sært tú nakað!“ róptu teir á dekkinum. „Eg síggi skip við breiðfokku fyri. Tað fer at sigla heim,“ svaraði hann aftur.

„Á, tvætl í teg, eingi skip sigla heim enn; eingin kann vera fullur longu,“ hildu hinir.

Eg fór onkuntíð fram og dró honum snørið upp.

„Tú ger ikki til brúdleyps við hetta lag,“ segði eg og tveitti fiskarnar innum.

„Tað man hava góðar vegir við tí,“ var aftursvarið. „Herr Peder lader brygge og blande vin – saa fager da falder den Rin – – eg havi onga gentu, hon hevur gjørt tað til einkis,“ hann smíltist.

„So, tá fylgdi hon tær umborð, tá ið vit fóru,“ eg skundaði mær aftur til snørið, tí eg hugsaði meir um fiskin enn um genturnar. – –

Tað var fríggjadagur. Vit høvdu havt eina sera góða viku: borðfullir so at siga hvønn dag, og fingu vit slíka viku afturat, so mundu vit vera fullir. Tað var nátt, og vit lógu við fokkuni mittskips og strembaðu at koma uppá aftur, tá ið lýsti.

Hon var farin at tyngjast og legði bøgirnar seigliga til, frískt gul og eitt lív í sjónum.

Hundavaktin kreyp seg móti endanum. Eg hevði dekstørn og hevði hoyrt, at eitt ringlaði við ketlinum.

„Nú man nakað fara at líða,“ hugsaði eg. „Hugnaligt at sleppa í koyggjuna eina løtu, hóast hon man ikki fara at verða long.“

Skiparin hevði verið uppi og kagað at kumpassini og flutt róðrið eitt sindur. Hann hugsaði um at fáa ein góðan leygardag. – –

Eg var beint gangandi fram eftir dekkinum og komin um fiskakassaleiðina, tá ið eg knappliga kendi eitt øgiligt rist í øllum skipinum. Tað kinkaði seg saman, eins og skuldi tað loysnað úr øllum bondum og legði kjálkan til, so tað hoyrdist, hvussu sjógvurin fløddi inn á bógvin. Ristingin var so ógvuslig, at eg fór fram eftir rommum.

Eg var um at missa skilið, men tað var, sum øll mín megi setti seg ímóti, og eg slapp mær uppaftur á føtur og vendi mær á. –

Eitt stórt, svart stevni – sum eitt høgt, myrkt berg, – hevði rent seg inn á „loringina“ á skipi okkara… Høgar mastrar dagaðust uppi í myrkrinum, og eg hoyrdi knappa ringjan frá einari klokku. Okkara skip fór at kennast so tungført, og ferðin tókst av tí – tað var sum eitt djór á gongd, ið fær eitt slag og stendur og vinglar, áðrenn tað svímar og dettur um koll. –

„Samanbrestur!“ rópti eg og skundaði mær fram móti lugarskappanum.

„Vakið frívaktina! Hon fer til botns alt fyri eitt!“

„Ein trolari!“ hoyrdi eg teir rópa aftan fyri meg, tá ið eg skundaði mær aftur. Kahútsmenn máttu eisini fáast upp. Tó at her mundi eingin sova aftan á ein slíkan brest, sum nakað lív var í…

Menn komu í skundi brótandi upp gjøgnum kapparnar – úr báðum endum. Eg kendi, hvussu hon fór at søkka í sjónum og liggja so deyð.

„Skundið tykkum upp, allir samlir!“ hoyrdi eg málið í skiparanum. „Vit mugu sleppa okkum umborð á trolaran, hon fer til botns beinanvegin!“

Her gjørdust ongar stundir at hyggja eftir nøkrum ella savna saman sínar ognarlutir.

Eg sá hálvnaknar menn koma rennandi móti bakborði, har trolarin kom glíðandi frameftir sum ein stór, ókunnug verð. Tær høgu mastrarnar hvurvu trølsliga uppi í myrkrinum, og lanternuglæmurnar skygdu inn á dekkið. Fram við borðstokkinum krøkti okkara manning seg, hoykti seg niður og leyp inn á dekkið á hesum farinum, sum hevði rent okkara góða skip í sor. Okkara skip við øllum farminum innanborða seyg seg meir og meir niður við afturendanum, har hon hevði fingið meinið. – Djóramyndin var mær í huga: sum ein deyðasærdur stórhvalur, ið tivar og blæsur at halda seg omaná, men tó søkkur so líðandi, og høvdið er hitt seinasta, ið stendur uppundan.

So, í allari hesari fløkju av tonkum, fleyg mær í minni: mannin umborð, og tá ið Palli hitt kvøldið helt seg vera vissan í, at tað var okkurt merkiligt, ið fór í havið. Mundi tað vera hann, ið tilhald hevði havt á skipinum – ein friðleys ond – og tá rýmdi av tí, tí tað var deyðsdømt? Og Bjarni, hvar mundi hann vera, hann hevði havt frívakt. Men Bjarni og allir máttu sæta sær. Eg kundi havt hug at farið niðurundir og hugt, hvussu vorðið var, men so kundi verða ov seint. Eg kleiv upp á stokkin, sum nú vóð í sjónum. Har stóð ein annar og mundaði sær at leypa. Vit lupu báðir í senn…

Trolarin fall yvir í hitt borðið í tí sama, og breitt glopp varð millum bæði skipini. Vit gripu í eina stálrøð og stóðu so á dekkinum á hesum fremminda farinum. Eg sá meg vera komnan millum fremmindar menn – útlendingar – hattleysir og summir við opnum skjúrtum, so loðin, kraftamikil bróst komu undan.

Teir runnu aftur og fram og róptu hvør á annan á einum tungumáli, sum eg ikki skilti.

Trolarin gleið fram og okkara gomlu fjalir hvurvu í myrkrinum.

„Ólukka í kroppin!“ hoyrdi eg ein av okkara monnum siga lágmæltur aftan fyri meg. „Nú rendi hann hana til botns við fiski og tí heila… Missa ein heilan túr fyri einki… Og tað dygdarskip hatta eisini var – – –.“

Skiparin stóð har.

„Munnu allir vera her?“ spurdi skiparin. „Tað er best, at manningin stendur saman, og eg rópi nøvnini upp.“

Allir svaraðu á navnakallið uttan ein – tað var Bjarni.

„Hevur eingin sætt Bjarna?“ spurdi skiparin.

Jú, tað vóru fleiri, sum søgdu seg hava sætt hann koma upp, tá ið samanbresturin var. Men eingin visti, um hann var komin upp á trolaran. Vit hugdu eftir honum, men eingin maður var at finna, og skip okkara var sokkið.

„Hann er farin í Harrans hendur,“ segði Palli við meg; vit vóru komnir saman har afturi á trolaranum. „Hann var friðarligur drongur og raskur eisini… soleiðis er. – – – Ein fer nú og annar tá. – – – Hann mundi vita tað á sær. Eg sá tað á honum, at hann var feigur… Og hitt kvøldið, tá ið Óli segði, hann sá mann koma upp úr lugarinum, sum líktist Bjarna. – – Hvør hevur tað verið uttan hann – – hann sá hann í hamferð, skal eg siga tær, og hann var ætlaður at doyggja. – Og tú var ímóti mær, tá eg segði, eitt fór fyri borð úr vantrinum… Eg legði ikki lag í tá at siga nakað meir. Men eg visti, hvat tað var, at tað var maðurin, sum verið hevur á hasum skipi, síðan tað kom úr Onglandi, og nú visti hann vanlukkuna og slapp sær avstað. – – – Vildi eisini siga okkum frá eins og maðurin á „Svaninum“. – – – Á ja, ein veit og ánar mangt, um hann ikki gongur og rópar tað upp í há.“

Eg hevði ongan hug at fara at kjakast við Palla undir

hesum umstøðum. Eg hugsaði um hesa hending og var tungur, at Bjarni, sum eg nú hevði verið saman við á sama skipi í so mong ár, skuldi ikki hava eydnu at bjarga sær… – Hann mundi ivaleyst vera farin niður ímillum trolaran og skipið, í tí hann skuldi leypa. – – –

Hvat ið so var í tí, sum Palli hevði at føra fram, so var tað merkiligt, at Bjarni, sum var av fimastu monnum, eingin fimari ella kvikari var har umborð, skuldi vera hin einasti, lopið skuldi miseydnast hjá. Og løgnan atburð hevði hann havt hesa seinastu tíðina. – Kundi ikki ein hava rættin at siga, at hann hevði verið feigur?

 Eg var ið hvussu so er ikki í teimum skørum at fara og andøva móti Palla og halda, at alt hevði verið sera natúrligt: tað var eitt klæði, ið farið var fyri borð. Bjarni hevði ikki verið øðrvísi enn aðrar tíðir. Róðursmaðurin á trolaranum hevði staðið og sovið, og tað kundi altíð henda, at maður fór niður ímillum, tá ið hann skuldi leypa av einum skipi og á annað úti í víðum havi.

Trolaramanningin royndi at vera blíð og vildi á tann hátt bøta um skaðan, teir høvdu volt okkum. Teir buðu okkum turr klæði og at koma niðurundir at fáa heitt drekka: gott te og fínt breyð. Vit fóru. Men tankar mínir støðaðust ikki av tí, og eg hevði lítlan hug at njóta nakað.

GUÐRIÐ HELMSDAL

## Mjørkanáttin

Mjørki, eg síggi teg koma
mær ímóti –
kínandi mjúkt
holdi mínum.
Eitt sindur syrgin
tú syngur,
men smíl títt, tað váta,
er so blítt so blítt!

Hví glógva gyltir steinar
í eygum tínum?
Hví er hond tín køld?
Hví er hon grá?
Um hjarta títt er sovnað,
um blóð títt er stirðnað,
sveima tá við mær,
tú rekandi tám.

Tak um meg, tá svalandi.
Kom – saman skulu vit
fylla náttina – ta svørtu –
til hon aftur tónar
á spentum streingjum
– og rodnar –
tá ið hon tveitir hamin.

GRØNLENDSK FRUMSØGN

# Sálin í hvalinum

Einaferð var ein býttur og erpin ravnur, sum fleyg langt, langt út til havs.

Hann fleyg og fleyg, til hann var útlúgvaður, tástani fór hann at skimast eftir landi; men tá var einki land at síggja. At enda var hann so móður, at tað var ikki meir, enn hann orkaði at halda sær á flogi tætt yvir vatnskorpuni, og tá ið alt í einum ein stórur hvalur kom upp tætt framman fyri hann, gjørdist hann so í ørviti, at hann fleyg beint inn í kjaftin á honum.

Eina løtu varð bøla niða uttan um hann, tað sjóðaði og skvatlaði, og júst sum hann helt, at hann fór at doyggja, bóltaði hann beint inn í eini hús, eini vøkur og hugnalig hús, har var ljóst og fjálgt inni. Á bríkini sat ung kona og putlaðist við eina tendraða lampu. Hon reistist og tók vinaliga ímóti ravninum og segði:

„Tú ert vælkomin at vera gestur mín, men eitt mást tú lova mær: Nem aldri lampu mína.“

Ravnurin var fegin at hava bjargað lívinum, hann skundaði sær at vissa hana um, at hann skuldi ongantíð nema lampuna, og so setti hann seg á bríkina og undraðist á, hvussu fínt og reint alt var. Húsini vóru gjørd úr hvalabeini, smíðað sum bústaðirnir hjá menniskjunum, og innrættað, sum menniskjuni eru von at gera tað. Men ein undarligur ófriður var á gentuni, hon støðaðist ikki inni, reistist javnan av bríkini og smoygdi sær út gjøgnum dyrnar. Lítla løtu

seinni kom hon inn aftur; men hon støðaðist hvørki inni ella úti.

„Hvat er tað, sum loypir sovorðnan ekka á teg?“ spurdi ravnurin.

„Lívið,“ svaraði unga gentan. „Lívið og andadrátturin.“

Men hetta svar skilti ravnurin als ikki.

Ravnurin var nú sissaður og hevði gloymt sína ræðslu; gjørdist forvitnari.

„Hvussu kann tað vera, at eg skal ikki nerta hasa lampuna?“ hugsaði hann, og hvørja ferð, gentan smoygdi sær útum, fekk hann betri og betri hug at svíkja sítt lyfti og fara og nerta við lampuna. Endin var, at hann fekk ikki rátt sær fyri forvitni, og tá ið gentan aftur fór út um dyrnar, sprakk hann upp og nam við veikin á lampuni. Í somu løtu bóltaði gentan eftir høvdinum inn um dyrnar og varð liggjandi, og lampan slóknaði.

Ov seint angraði ravnurin tað, hann hevði gjørt. Hann mól í klingur í kolsvørtum myrkri, og tey vøkru, ljósu húsini vóru ikki longur. Uttan um hann var bara spik og blóð, og so heitt varð inni, at fjaðrarnar skáldaðust av honum. Hálvkvaldur støplaði hann í kring í hvalakviðinum, og nústani skilti hann, hvat var hent.

Unga gentan var sálin í hvalinum, og hon smoygdi sær út fyri dyr, í fríska luft, hvørja ferð hvalurin kom upp at blása, hjarta hennara var ein lampa við stórum, stillum loga.

Ravnurin hevði av berum forvitni pilkað við hjartað í gentuni, og tí var hon deyð. Hann visti ikki, at tað fína og vakra eisini er skroypiligt og viðkvæmt, tí sjálvur var hann býttur og lívsseigur. Og nú bardist hann fyri lívinum í myrkri og blóði. Alt tað, sum áður var vakurt og reint, var nú ljótt og stinkaði.

Til endans eydnaðist honum at sleppa út aftur sama veg,

sum hann var innkomin, og har sat hann, ein hálvnakin ravnur, snykutur og dálkaður, á bakinum á einum deyðum hvali.

Har sat hann, helt sær á lívi av rænum, meðan vindur og aldur tveittu tað aftur og fram. Veingirnir vóru oyðilagdir av hita og blóði, so flogið fekk hann ikki longur.

Ein stormur rak hann inn at landi, og menniskjuni sóu hvalaræið og róðu út í konubátum at bjarga sær tvøst og spik. Tá ið ravnurin sá teir, skapaði hann seg í stundini um til mann, lítlan ljótan, døkkholdaðan og frísutan mann, sum stóð á hvalinum.

Hann segði einki um, at hann av berum forvitni hevði pilkað við hjartað og týnt nakað viðkvæmt og vakurt, hann gorraði bara í ansalæti: „Tað var eg, sum drap hvalin! Tað var eg, sum drap hvalin!“

Og hann gjørdist hávirdur maður millum manna.

*Ásmundur Johannesen týddi*

MIKKJAL DÁNJALSSON Á RYGGI

# Leggið út árar

Leggið út árar og reystliga rógvið!
Hart rópa formenn: „Nú halda vit til.“
Blámar frá bløðum og brýtur frá bógvi;
fremstur í ferðini hvør vera vil.
Dreingir, ið duga,
árarnar toga,
spengurnar knýta teir,
leysakøst grýta teir.
Hvessingar springa sum kátastu fyl.

Óð gjørdist grindin, hon østist við blakið.
Hvein ein, og hátt hann við sveivini sló;
fram rendi bólkur við sjógvi á baki,
gruggið hann upp ífrá grunninum gróv;
sprænurin hvítur
frá kúlunum brýtur;
guvandi, goysandi,
froðandi, froysandi
reisir seg bylgjan við buldrandi ljóð.

Melur hon á, hon vil út aftur halda.
„Kastið nú, kastið, vælsignaðir menn!“
Ógvulig gjørdist hin skúmandi alda,
bátarnir snúgva sær allir í senn;
rópini gella,

# Uppskorin hvalur



**Hans Pauli Olsen.** Jarn 1985, L 70 cm.

árarnar smella
títt inn í tollarnar.
Hvalirnir bollarnar
fjala og venda so eina ferð enn.

Gjørdu so landgongd, og nú er at stinga;
skjótt rykkja formenn sær váknið úr rong,
fermastu dreingir av bekkinum springa
hálvørir tríva teir hvør sína stong,
ansa ei nakað,
váknini blaka
títt móti bólkinum,
hirða at hólkinum
bløðini inn gjøgnum spik, gjøgnum spong.

Leikirnir gerast so villir og harðir,
regnar av váknum á rodnandi sjógv.
Handfast og langt stinga garparnir snarir
glitrandi stál inn í búk og í bógv,
drepa og særa,
einki teir spara,
vátir av sjóroki,
kátir í blóðroki
draga inn hvastið við kvikari klógv.

Seinførur eingin á sandi nú stendur.
Knívin úr slíðra, so vaða út menn,
brýtur um herðar; tær hegnigu hendur
grípa í bøkslið og blástrið í senn.
Hvalirnir froysa
berja og oysa;
skjótt teir av lívinum

takast við knívinum.
So eftir øðrum við stál millum tenn.

Høgdu vit ein, og so villur hann vasar.
„Fá hann at borði og halt honum nær,
sker hann nú skjótt, áðrenn bátin hann knasar,
áðrenn í spønir hann bakskutin slær.“
Kvikur eg skar hann;
mønubrest harðan,
áðrenn hann dovnaði,
sló hann; tá klovnaði
fláborð og lívflýggið, alt sum tað var.

Sjóleysur ein upp úr skúminum springur,
spruttið so høgt yvir mastrarnar stóð,
rasandi rennur hann, runt, runt í klingur,
kastar við kúluni, sprænir út blóð.
Svár er hans gøta;
hvøss honum møta
blankskygdu bløðini;
sterkur í øðini
hvølt hann í sjógvin sín hamarstjøl sló.

Fólkið og hvalir har berjast í droyra,
sveivirnar geva so munagóð sløg;
brakið av brotnandi við’ er at hoyra,
bankið av krókum á bognaðu bløð.
Borðini støkka,
bátarnir søkka,
garpar frá árunum
springa; í bárunum
svimja teir, inntil teir grynna á støð.

Drápið er endað. So stillar nú bróta
bylgjurnar aftur, men brotið er reytt;
droyri er vágurin, smildraðir flóta
hvalváknastakar og árabløð kvett.
Úti er spælið,
stilt er á vali.
Fongurin góður er,
hvør maður fróur er:
seks hundrað liggur á sandinum deytt.

LYDIA DIDRIKSEN

# Blóð

Boðini fóru um allan býin. Røringur kom í, fólk tveittu tað, tey stóðu við, og lupu avstað. Teir vóru komnir inn á fjørðin við grindini, varð rópt. Og tað var, sum lætti támið sær á og læt sólina sleppa framat hendan seinrapartin í august.

Tey komu rennandi úr øllum heraðshornum og tyrptust kring brúnna bíðandi eftir, at leikur skuldi fara fram. So hoyrdist tann eyðkendi larmurin frá motorunum og málageipanini, og undan molanum kom flokkurin brestandi við bátunum í hølunum. Tað gekk við rúkandi ferð, og skjótt blindaði sólin fjøldina í svartari hvølju.

Allastaðni rundan um brúnna vóru fólk, sitandi, standandi, hangandi uppi í steyrum og liggjandi út av vindeygum. Øll vendu tey andlitið sama veg, eygleiddu tað sama. Drápið. Róp kom í, øll rópaðu. Bátur sorlaðist, menn fóru á bláman og vórðu skundisliga syftir upp í aðrar bátar. Røddirnar sissaðust. Onkur toygdi seg, øll toygdu seg. Blóðsprænur huldist í sjónum. Fjøldin stunaði.

Hon sat dygst á hamrinum við beinunum dinglandi útav. Hinumegin vágna stóðu reyðmálaðar lonir við flagtekju og laðaðum grundum og drukku skuggadimmið í seg. Uppi yvir teimum hekk sólin á tí fagurbláa himmalinum og varpaði sínar eirindaleysu strálur yvir vágna.

Hon flutti seg ófriðarlig í sólarljósinum, meðan hon fylgdi tí, ið fór fram á teirri blóðdálkaðu vágni. Bleiktrandi

# Return to Paradise



**Rannvá Kunoy.** Oljumálningur 2002, 186 x 255 cm.

hvalvákn sprongdu blanka hvølju, blóðsprænur stóð úr gapandi sárum. Brestandi sveivar bardu sjógvin upp í skúm. Hoyrdi hvølju skúra móti bátssíðu. Sá vitleysar hvalir hevja seg steyrrættar upp úr sjónum, meðan smildrað træpettir regnaðu niður í reyðan. Sansaleysir royndu teir svørtu kropparnir at snúgva sær undan teimum blonku ørvunum, sum høgdu seg niður í spikið.

Hon varnaðist knø, sum bóru við ryggin, merkti skógvar stinga seg inn í lendarnar, føldi tað, sum royndi manngarðurin at stoyta hana frá sær. Hon hugdi niður í tað bløðandi heljardýpið, føldi ta blóðigu suppuna súgva hana til sín. Ræðslusligin krøkti hon hendurnar í grøsini og neyðhelt sær.

Hon vendi sær frá vágni og royndi at ota seg burtur frá eggini. Allastaðni vóru bein. Gummiskógvar, inniskógvar, lakkskógvar, leðurskógvar… Hon fann eitt op ímillum øll skógvabeinini og bardi sær veg á øllum fýra inn í ta tøttu rúgvuna, fekk fatur í ein sprøklutan kjóla, lesti seg uppeftir, kom á føtur og sá inn í tvey bilsin eygu. Fór víðari, trokaði seg út úr teirri tøttu fjøldini og kom at enda út á vegin.

Hon tveitti seg inn til tann fyrsta húsaveggin, hon kom til, turkaði sær við troyggjuermuni um ennið og bendi høvdið niðureftir. Tað øraði fyri henni. Svart. Reytt. Reytt. Svart. Knøini kreptust, og hon sakk saman. Hon varð burtur eitt bil, hoyrdi hvølt fuglalát í sortanum, stakk upp og sá eitt einsamalt tjaldur skjóta seg ígjøgnum tað hvassa ljósið. So reisti hon seg aftur og fór stetlandi til gongu.

Hon gekk heimeftir. Býurin var kvirrur og oyðin. Okkurt hundagoyggj hoyrdist, men hvørki menniskju ella bilar

sóust. Hon gekk spakuliga, inn og út úr húsaskuggunum, sum kastaðu sítt myrkur á tær tómu gøturnar.

Tá hon kom heim, fór hon eystur um húsini og blakaði seg í tað síða grøna grasið. Hon legði eyguni saman og lá og syvjaði. So við og við varnaðist hon surrið. Hon gloppaði eyguni og sá beint upp í ein mýggjabitahóp, sum sveimaði eina sponn yvir henni. Hon setti seg upp og veipaði við ørmunum fyri at spjaða hópin, men til fánýtis. Líka skjótt, hon tók armarnar til sín, trunkaði hann seg saman aftur. Ørg gavst hon og flutti seg, men hópurin elti hana. Hon suffaði, reisti seg og fór at leita eftir sýrum.

Náttúran kring hana var í fagrasta blóma. Alskyns urtir angaðu og blettaðu bøin. Forvitnar baldursbráir, køggutar smærur, lítillátnir summardáar og førligar sóljur. Hon rykti sýrurnar til sín, tók so nógvar, hon fekk borið. So setti hon seg. Aftur hópaðu mýggjabitarnir seg saman um hana. Hvørja ferð myndirnar frá vágni gingu fram fyri hana, stappaði hon grammliga í munnin, tugdi so tað sang eftirí, meðan hon kyk rendi eyguni eftir bønum og tí yðjandi lívinum. Rennandi torvatrøll, flákrandi grindalokkar, vaggandi klukkur, hurrandi flugur og spelandi eiturkoppar.

Brádliga merkti hon, at tað rann. Ein lítil løkur treiskaðist oman ímillum fjøll, strevaði seg ígjøgnum dalar og gil og endaði úti í ósanum. Hon legði seg niður á ryggin, men løkurin rann ótarnaður. Hon rullaði seg á búkin og reisti seg, rann inn og fór beina leið inn á vesið og læsti.

Hon stardi at blóðinum. Reytt á hvítum. Svartreytt á kritahvítum. So ógvusligt og loyndarfult. Hennara blóð. Hennara? Tað sama blóðið, sum rann í ættarliðunum undan henni, tað sama blóðið, sum rann í mammu hennara, í pápa hennara og øllum teirra forfedrum, og tað sama blóðið,

sum fór at renna í teimum komandi ættarliðunum, tað sama blóðið, sum fór at knýta hana við framtíðina. Hetta blóðið, sum eisini rann í teimum, sum drópu á vágni. So tølandi og ræðandi.

Hon gjørdi seg lidna og fór yvir til tann stóra spegilin. Vendi og snaraði sær, meðan hon hugdi eftir beinunum og lørunum, hálaði troyggjuna upp, andaði inn og rætti ryggin og kikaði eftir búkinum og afturpartinum. Síðani smoygdi hon troyggjuna upp um akslarnar og spenti bringuna fram. Sletti eitt sindur við høvdinun, so tað síða hárið datt aftur um akslarnar. Møtti eygunum inni í speglinum, og eitt hulið smíl breiddi seg um varrarnar.

Hon hoyrdi úthurðina ganga, hoyrdi harðmæltar mannfólkarøddir. Grindamenninir. Tung fótafet komu oman eftir gongini, nærkaðust, onkur skrykti í lásið. Hon leyp leys uppfrá, bíðaði eina løtu, skolaði so niður og fór út.

Hon luktaði kakuroyk úti í gongini. Pannukakur. Úti í durinum var ein rúgva av gummistivlum; summir stóðu paraðir, aðrir lógu í hvør síni ætt. Við eitt brast hurðin upp út í gongina, og eitt stórt skepilsi leyp á hana. Hann orsakaði seg miriliga, hevði ikki sæð hana, visti ikki av henni. Tey flentu og heilsaðust. Hon fór inn í køkin, hann inn á vesið.

Hon sat uppi á borðinum fram við vindeyganum. Teir sótu rundan um tað stóra borðið og fingu sær. Teir tóku dúgliga til sín við spengrutum hondum, meðan teir søgdu frá. Hon lurtaði eftir teirra søgum, hoyrdi láturin og sigursæluna, sá kætið og gleðina í teirra andlitum. Og myndirnar frá vágni livnaðu og komu undan kavi. Ørlig andlit, sum ýldu og geylaðu, smidligar hendur, sum særdu og drópu, sterkir kroppar, sum lamdu og bardu.

„Kom og set teg her og fá tær!“ hoyrdi hon onkran siga. Hon hugdi yvir á teir, og teir skóru í skellilátur. Hon var ørkymlað, visti ikki, hvør hevði tosað, ella hvønn tosað varð við. „Pínadoyð, tú sær út, sum hevur tú sæð trøll á alljósum degi!“ Mammubeiggin leyp upp og leikaði í, hugdi inn undir borðið og mól í klingur. „Hvar er tað? Hvar er tað?“ brølaði hann, og í einum lopi var hann yviri hjá henni. Hann rykti brýrnar saman, skeitti við eygunum, snerkti við nøsini, gjørdi kjaftin so skeivan, sum hann dugdi, og gálvaði beint inn í andlitið á henni. Hon hevði seg undan, meðan hon lyfti hondina fyri at geva honum ein dyggan ein undir vangan. Men hann var kvikari, og hansara sterka hond læsti seg um skøvningin. „Orsaka, orsaka… eg ætlaði ikki… kom og set teg og fá tær!“ Tað var vorðið kvirt í køkinum, og hann hugdi keddur at henni. Hon sissaðist og fór og setti seg undir liðina á honum. Prátið mentist aftur, og tá hon toygdi seg eftir breyði, legði hann tann stóra labban á hennara arm og endurtók: „Orsaka!“

Teir máttu oman aftur í býin at vita, nær seðlarnir komu út. Onkur teirra hevði eina pisu, sum varð send runt. Teir vóru avbygdarmenn, sum gleddu seg at hitta kenningar og vinir. Seinri skuldi skerast upp og berast í bát. Og meðan bíðað varð, fóru teir at dansa og kvøða so leingi, sum teir lúgvaðu kropparnir orkaðu at bera teir. Og út ímóti morgni fóru søkklaðin fremmandafør at stevna út eftir fjørðinum. Einans tey piðaðu ræini og tær karrandi likkurnar fóru at vera eftir. Og so við og við fór blóðið at skolast burtur úr vágni.

Tær fylgdu teimum úr vindeyganum oman eftir gøtuni. Gongulagið var vaggandi, sum vóru teir óvanir at hava fast undir fótunum. Teir góvu sær góðar stundir. Steðgaðu á

aðru hvørja løtu, stóðu og rópaðu við veipandi ørmum, so tað hoyrdist um alt grannalagið, og inn ímillum sukku teir niður í knøini av látri og ovfarakæti.

Út á kvøldið fór hon oman í býin. Nógv fólk vóru at síggja. So við og við, sum hon nærkaðist miðbýnum, varð sangurin týðiligari og týðiligari. Hon steðgaði. Ringurin breiddi seg um alt Vaglið.

Raske Drenge, Grind at dræbe
det er vor Lyst.

Tey kvóðu Grindavísuna hjá Pløyen. Dansurin var lívligur og andlitini kensluborin. Summir vóru í stívasta puss, og aðrir í grindaklæðum og tungum gummistivlum, men tað darvaði teimum einki. Teir lupu frá síðu til síðu við hellandi vangum, føturnir nurtu neyvan jørðina. Kropparnir stukku leysir uppfrá, sum ferðaðust teir í himmiríki.

Tá hon hevði staðið eina løtu, opnaðist ringurin. Tað var mammubeiggin, sum rætti henni hondina.

Roligt svømmed den hele Hær
saa længe den Landet ej kendte,
men da den i Sundet kom Kysten nær,
da blev den bange og vendte.

Dog for silde den Flugten tog,
ej længere Vej var aaben;
lystigt Mændene mod den tog
med skarpe, hærdede Vaaben.

Nogle stukke med lange Spyd,
og andre med Knive skare;
hver mand gjorde sin Dont med Fryd,
slet ingen ænsede Fare.

# Náttúrulýsing



**Tróndur Patursson.** Oljumálningur 1991, 195 x 146 cm.

RIKARD LONG

# Vætan

Og vætan kom. Út yvir alt, ið grør,
seg lýkkumjørkin fjálgt um landið smoygdi,
teir flógvu dropar brustu tungt á jørð,
hvørt strá, hvør urt seg móti teimum toygdi.

Og lógvin læt til lógv um fjallatrom,
og alt, ið livdi, skalv í hvørji lykkju
og heiður bar tí velduga, ið kom
á nátt til turru jørð við tostadrykki.

Tí náttin kom við veldi og við vekt
og alt á fold í frægd inn at sær kroysti,
hvørt krúp til jarðar neig í bøn og spekt,
himin brast, og regnið niður oysti.

Í fossi leki drap á dimmu nátt,
hvør á rann stór, og vætan dreiv í reynum,
og ørt kom gróðrartyngd á grasið vátt,
og toka reis úr brekkunum og heygnum.

Tá kendi eg so evurlítlan meg
og vildi burtur meg í smædni krógva,
øll vitska svann – tí fram við vátum veg’
á lýggju nátt eg hoyrdi grasið grógva.

Í ørsku gekk eg, gloymdi hoyrt og frætt,
mín sál var frægd, mín hugur einans sæla,
og dult eg kendi meg við teir í ætt,
ið fjart í stormi hoyrdu Harran tala.

- - -

Men undir ælaboga vætan svann,
og eftir vátu nátt kom fagur morgun,
og bjart í sólarglæmu døggin brann
sum tár, ið glógva eftir farnum sorgum.

Og sólin brendi heitt á vátan svørð,
hvør fuglur læt, øll foldin sang í kæti;
úr toku reis ein ný og føgur jørð
í tøkk til alt, á fold av himni latið.

## Blankans ríma

1. Tað torir eingin danimann so gera,
– gylt saðil á –
sína systur á heiðið land geva.
Tað vænasta vív, ið vinnast má.

2. Tað gjørdi meistarin Hildibrand,
hann gifti sína systur á heiðið land.

3. Sunnudagin brúður bald,
mánadagin í jarni so kald.

4. Hon sá seg aftur, hon sá seg fram,
hon sá sær ongan hjálparmann.

5. Hon sá seg upp til himmal,
har hon sá fuglar flúgva.

6. „Hoyr tað fuglurin brúni,
kanst tú bera boð til Dúnoy?“

7. „Eg kann bera boð í hvørt eitt land,
eg kenni tín bróður Hildibrand.“

8. Fuglurin fleyg so høgt í ský,
hann kom niður for Hildibrands bý.

9. Fuglurin fleyg so høgt frá træ,
hann kom niður for Hildibrands knæ.

10. „Hoyr tað Hildibrand, vinur mín:
Hjálp nú Maritu, systur tín!“

11. Hildibrand sínum borði skeyt,
tann brúni mjøður á gólvið fleyt.

12. „Tær loysið út hin blanka,
hann kann so víða vanka.

13. Tær heintið mær Blanka saðilgjørð!
Hann rennur á vatni sum grønari jørð.“

14. Tá ið hann kom har mitt á fjørð,
tá brast Blankans saðilgjørð.

15. Hildibrand sakk til sandar,
Blanki svam til landa.

16. Blanki skar so sára við,
tað hoyrdi Marita, í torni situr.

17. „Tað kenni eg á Blankans reyst:
nú eri eg vorðin bróðurleys!

18. Tað hoyri eg á Blankans mál,
at Harra Krist gleðir mín bróður sál!“

19. Blanki bæði beit og sló,
tretivu mann undir hóvum tróð.

20. Tað gjørdi Blanki við síni tonn,
hann loysti Maritu sterku jarnbond.

21. „Hoyr tað Blanki, eg tali til tín:
hvat vilt tú hava fyri ómak tín?“

22. „Tað vil eg hava fyri ómak mín,
at mynnast við tín munn so fín.“

23. Hon mynti hann við munni sín,
tá bleiv hann ein riddari fín.

24. Hann myntist við hennara munn so góð,
– gylt saðil á –
hann varð ein kongason, sum hann stóð.
Tað vænasta vív, ið vinnast má.

*V.U. Hammershaimb*

HEÐIN M. KLEIN

# Grasrót

Grasið eigur ikki at mótmæla
Grasið er grønt ella grátt ella okkurt
Grasið eigur at tiga
Og hann sum tegir samtykkir

Grasið er ikki eftirfarandi
Ábyrgdarleysur orðloysingur
Skiftir kápuna eftir veðrinum
Grasið er ikki trúgvandi

Grasið stendur neyvan úr rossa spori
Hann má lúta ið minni már

Grasið er dovin sutlandi svøvnur
Asosialur snultari
Breiðir um seg í samfelagnum
Tøðufrekur
Rótfestur tigandi meiriluti

Grasið skal bara tiga
Grasið skal halda kjaft
Grasið hevur einki at siga

Grasið er hættisligt
Má taðast við súrari mykju
Ella roytast upp við rót

Grasið mótmælir ikki
Grasið er grønt ella grátt ella okkurt

ÓLAVUR MICHELSEN

# Rossini á Skoradali

Í heita vesturskininum hevði allur rossaflotin ligið og durvað í sælum friði. Nú sólin fór undir, og døggin legðist á sevjumikla grasið á Skoradali, reististist ein prúður fýra ára gamal greðingur, rembdi sær og geispaði langan og inniliga, áðrenn hann legðist at ríva í seg hitt grøna grasið. Brátt var allur flotin á fótum.

Nakrar dagar frammanundan høvdu rossini ligið í Kaldbaksbotni, og hitt feita grasið á Kráartanga hevði fallið teimum væl. Men so var ein kaldbaksbóndi komin fram á tey og hevði beitt hundin á kroppin á teimum.

Ørt var fylgið farið niðan gjøgnum Tunguna – men hin reyði greðingurin hevði enn einaferð víst, at hann var oddahesturin í fylginum. Hann vendi aftur móti hundinum og gav honum eitt spark, sum ikki rakti nóg væl til at gera av við hann, men sum fekk hann at fara rínandi og hvínandi við halanum millum beinini oman aftur á Hólman, har bóndin á Bøgarði í Kaldbak stóð og hóreiggjaði sær, illur inn á rossini, sum ótu tað grasið, ið skuldi gera seyð hansara feitan um heystið – og bjarga fjallseyðinum næsta vár.

Ófriður var tó komin á rossini. Tey steðgaðu ikki ferðini norður undir Bláhomrum, um Skeiðskarð og Gjáarbotn, til tey vóru á Skoradali, ið lá sum ein mjúkur lógvi í vesturskininum. Hitt sevjumikla grasið fekk rossini at kenna, at tað er gott at vera ross ein summardag á Skoradali. Tað ráddi um at draga hold á seg, so nakað var at missa av, tá

# Elduvík



**Jack Kampmann.** Oljumálningur 1952, 70 x 85 cm.

teir grassvongu vetrar- og várdagarnir komu. Summarullin lýsti blonk, og einki sást longur til rivjabeinini, ið vóru so sjónsk í vár.

Meðan rossini lógu hugaliga á biti í Skoradali, sótu menn suðuri í Havn og tingaðust um rossaprís.

Ein rossakeypari var komin út Bretlandi at keypa føroysk ross til kolanámini. Føroysku rossini vóru so sera væl egnað til hetta endamálið, smá og kná. Nú vildi bretin hava so nógv ross, sum hann kundi fáa hendur á, og hann sat og prátaði við umboðsmann sín í Havn, sum var millummaður millum hann og bøndurnar, sum áttu rossini, ið meira at kalla vill reikaðu um hagarnar á sumri og skotraðust í bygdunum um veturin.

Stórbóndi norðarlaga av Streymoynni var eisini hjástaddur. Hann visti at siga, at hann átti ein fýra ára gamlan hest, sum ongantíð hevði verið í hond. Tað var so galið, at hann ikki hevði fingið so frægt sum markað hann. Hetta var eitt sera prútt og kimiligt ross, men tað var so vilt og óregerligt, at allar royndir at handtaka tað higartil høvdu miseydnast. Hetta hevði verið vorðið sum ross at selt, helt bóndin. Sterkt mundi tað vera sum ber ólukka, og var tað komið í hond og gelt, so mundi tað fara at sissast. Men Várharra skuldi vita, hvar rossið gekk nú — seinast, teir høvdu sæð tað, lá tað heilt norðuri í Sjeyndum.

Avrátt varð, at menn skuldu fara at rætta ross dagstevndan dag, tá skip skuldi koma úr Bretlandi eftir rossunum.

Reyði greðingurin, hvørs lagna var avgjørd á fundi suðuri í Havn, lyfti alt í einum høvdið. Nasagluggarnir stóðu á tambi, og oyruni vóru spílað út. So setti hann alt í einum í eitt gneggj og fór tvísporandi niðan brekkuna.

Breið var bringa hansara, og reystur var høvuðburðurin – summarmegin leikaði í kimiligum vøddum. Dósin seyður

lyfti høvdinum, undrandi og óttafullur. Í hølunum á Reyða fór allur riðilin niðan gjøgnum brekkuna og stóð brátt sum skorin í bláa loftið á Vatndalsegg.

Tá Reyði sá oman á vatnið oman Stígar, setti hann aftur í eitt gneggj, og svarað varð aftur har niðri. Hann kendi málið og setti enn meira ferð á – hann nam lívið við jørðina, og lívsfýsnið leikaði í hvørji æðr. Ryssan, ið svaraði aftur har niðri, hevði fylgt honum mangan summardagin, og bæði høvdu tey av Streymoyarfjøllum rætt høvur móti hini rísandi sól og gneggjað í alvaldandi girnd.

Rossaflotin hittist við kæti, sum kom til sjóndar í harðligum lótum.

Undir liðini á svørtu ryssuni var ein brúnur greðingur, spelkin og andbráður. Hann hevði verið oddahesturin hjá flotanum oman Stígar nú í fleiri vikur, eftir at hava bart av allar teir hestar, ið vágdu sær meira enn teir formáddu. Brúni visti, hvat nú leikaði á, og hann gjørdi seg til bardaga. Tá ið tey høvdu runnið í ring og bitið eftir hvørjum øðrum, brustu Reyði og Brúni saman, og tað vóru brestir, sum bóru aftur í Núgvuni, og sum fingu harurnar í botnunum at krúpa longur inn í holur sínar av ótta.

Rossini steðgaðu á og hugdu at hinum mikla leiki, bert svarta ryssan legðist at eta, sum um hon einki petti legði í tað, sum hendi. Grópanin var ófør, moldrokið stóð um greðingarnar báðar, sum bardust um ryssuna og um plássið sum oddahestur í hinum stóra rossaflotanum oman Stígar. Báðir vóru teir javnsterkir og kvikir, men í bardagafýsni vann hin Reyði. Eitt óført spark upp undir undirkjaftin á Brúna gjørdi enda á mesta bardaga, ið staðið hevur oman Stígar. Brúni stóð sum í ørviti og risti við høvdinum eina góða løtu, so fór hann smoykin oman undir ein stein, har hann stillaði seg at bína.

Tað er ryssulæti at fagna honum, ið sterkastur er, og eftir rossasiði løgdu Reyði og svarta ryssan hálsar sínar saman og fóru at lata tenninar strúka fram við faksarótini.

Tá ólavsvøkudimmið legði mjúku hvíldarhond sína um landið, lá svarta ryssan undir liðini á Reyða – hinum sterkasta hesti í Streymoynni.

Komandi dagarnar reikaði rossaflokkurin víða um. Hann hevði gjørt eitt rend suður í dalarnar, var eisini komin oman í Havnardal, men har hevur so nógv fólk verið burturi í torvi, at har fekst eingin friður, og hin Reyði hevði ongan hug at nærkast mannabygdum, tí maður var meinfýsin. Fylgið var so farið norðureftir, hevði ligið í Grønubrekku, í Mjørkadali og í Mannafelsdali, uttan at hava borið eyga við eitt menniskja. Síðan var fylgið farið oman í Kollfjarðardal, fram við vøtnunum og fram til Gjónna, har fylgið varð liggjandi í fleiri dagar, til Miðgerðarbóndin kom við levint og gang, soleiðis at øði kom í rossini, sum fóru í somu øði um Barmarnar, um Hvalvíksskarð og oman á Mýrarnar, har fylgið aftur legðist á bit.

Kátir vóru hesir summardagar. Tá mettan var fingin, leikaðu hinir spelknu folar um grønan vøll. Fóru strúkandi í kátum leiki um Loysingarfjall yvir á Fossadal, drukku hitt reina fjallavatnið úr Bjarnadalsá.

Náttúran beyð rossunum at njóta summarløturnar, tí tá veturin kom við kulda og kava, tá vóru glaðu løturnar av. Kulsin og rak fóru rossini tá at finna sær skjól undir einum steini ella einum garði, og har skuldu tey standa við lútandi høvdi og afturlatnum eygum – meðan tey innan eygnalokini sóu hin káta summarleikin um grøna hagan, Ørvitisfelli í gyltum sólarroða, meðan veturin so líðandi seyg megina úr teimum.

Við gyltari Postalakirkju kallaði vesturskinið og sólsetrið.

Upp Mosarøkur og oman í Dalar bar leiðin. Har niðri við Djúpadalsgjógv sóu rossini sólina seta og ganda landið alt í teir litir, sum hava gjørt fólk í vesturbygdum til eina serliga fólkaferð.

Her í Dølum var rossaflotin liggjandi. Her var nógv gras, her var friður, og her var gott at vera.

Ein dagin kom ein maður fram á rossaflotan, men hann hvarv aftur beinan vegin. Næturnar vóru nú longdar, men enn var summar.

So var friðurin úti, og tað í ólukkumáta.

Rossini lógu nú í einum gili, og áðrenn tey vistu av, vóru tey umgird av monnum við hundum. Menninir høvdu sníkt seg móti vindinum til rossaflotan. Rossaskipið var komið, og menn høvdu verið sendir at leita eftir rossunum. Ein av monnunum hevði sæð rossini í Dølum, og so gjørdu vestmenningar seg til at fara eftir rossum, meðan rossaskipið var komið á Vestmanna, har rossini skuldu verða tikin um borð.

Reyði skimaðist í allar ættir, men har var bert eitt lítið lið í manngarðinum, og tann vegin helt hann. Alt fylgið fór aftaná, men tað var alt í einum, at fylgið var komið í tronga, tað hevði runnið seg beint í rættina. Gríma varð løgd á aftastu rossini, sum ikki vóru komin longur enn í frágarðarnar. Onkur ross vórðu slept aftur, og okkurt ungrossið varð markað, áðrenn tað varð slept út aftur. Menn hugdu at oyrunum, so eingin ivi skuldi vera um, hvør rossini átti, so hann kundi fáa eingilskmannapengarnar afturfyri.

So við og við rúmkaðist í rættini. Hin Reyði innast á botni fekk rásarúm, hann mól í klingur, og so alt í einum gjørdi hann ferð á seg og leyp í leysum lofti yvir garðinum. Tá svóru vestmenningar við, at slíkt ross høvdu teir ikki sæð fyrr.

Leiðandi í bandi fóru vestmenningar við teimum rossunum, sum takast skuldu. Teir fóru við nógvum rossum, og tey rossini, sum eftir vóru, førkaðu seg spakuliga aftaná. Tá kvøldið kom, lógu tey við garðarnar í Vestmanna. Reyði gneggjaði oman í bygdina, men har hoyrdist einki aftursvar. Rossini vóru longu sundað um borð á rossaskipið og stóðu nú í kassum í lastini. Tá myrkrið kom boring snikjandi seg sunnaneftir inn gjøgnum Vestmannasund, løgdu rossini seg á ból.

Mettir og væl settir, í rossagildi, ómóðir aftur av nøkrum gløsum av brennivíni, sótu menninir, sum høvdu verið í Dølum, og reypaðu niðri í Hálvdansstovu, har millummaðurin sunnan úr Havn helt til. Hann hevði ein heilan kagga við sær, tá hann sum ein annar barónur varð fluttur í land av rossaskipinum. Bóndin, ið átti Reyða, sat eisini har, illbrýntur, tí hann ikki fekk teir dálarnar, ið Reyði hevði snýtt hann fyri, tá hann var lopin um rættargarðin.

Hann royndi fleiri ferðir at birta uppundir. „Rossini liggja beint oman fyri garðin, tað mátti borið til at blindað tey, so tey fingust í hond, ha?“ Eingin hevði ønt honum aftur, tí allir menn vistu, at tað vóru ikki fleiri ross at taka uttan Reyði, greðingurin, sum leyp um rættargarðin, eitt ólátað beist. Men tá møðin var runnin og reiðiliga tað, helt onkur av teimum ungu fyri, at tað var best at fara eftir honum. Tað ráddi um at fáa gelt hann beinan vegin. Grækaris á Rógvu var vanur at gelda. Jú, boð fóru eftir honum, og tá hann hevði tømt eitt peglaglas, var hann eisini til dystin fús.

Tá var lykt í hvørjum húsi í Vestmanna, og tað var, sum menninir vóru drignir á tráð, tá teir fóru niðan ígjøgnum bøin. Konurnar fóru út fyri dyr, tí so vakra sjón høvdu tær ikki sæð fyrr. Hini blaktrandi kertuljósini móti hinum svarta fjallinum hetta stilla heystarkvøldið. Konurnar søgdu frá

hesi vøkru sjón fyri ommubørnunum, og tey bóru søguna víðari, soleiðis at tilkomnir og trekir vestmenningar á hvørjum gamlaárskvøldi fara at festa í kertur heilt út á Gassadal.

Lyktirnar fóru vaggandi niðan gjøgnum bøin, og tað var alt í einum, at rossini vóru umgird av ljósum. Reyði var einasta rossið, sum fór á føtur. Øll hini lógu púra dølsk. Reyði stóð har so andbráður, men hann sá einki. Tey mongu ljósini blindaðu hann. Hann visti ikki til sín, fyrrenn tvær reipsbuktir vóru um beinini á sær, og hann var kollveltur. Beinini vóru fatlað, og meðan hann lá og bardi høvdið niður í vøllin, varð ein ræðuligur sviði, har eymast var. Í myrkrinum oman fyri garðarnar í Vestmanna hendi tað, at Reyði ikki longur var greðingur.

Tá hann varð loystur aftur, fekk hann ikki rørt seg fyri pínu. Hann varð drigin oman gjøgnum bøin við gleivandi afturbeinum, og síðan varð hann bundin í ein steyra uppi í Gørðum, har menninir settu seg inn aftur at reypa og drekka brennivín. Her stóð hann so og bíndi alla náttina, hann royndi viðhvørt at toga í bandið, men geldingavónloysið seig saman um hann – og hann setti múlan niður í svarta svørðin.

Tá teir snimma morgunin eftir skuldu leiða Reyða oman til strandar, beit hann eftir rossaumboðsmanninum, ið næstur stóð, og tá øtaðist mangur vestmenningur, tá Reyði stóð við einum parti av oyranum í kjaftinum. „Noy, noy, eitt sovorðið boyst skal temjast," søgdu teir við ein munn, og nú mátti Reyði bíta í grasið móti sterkum vestmenningum.

Blóðsprænurin stóð úr oyranum á rossaumboðsmanninum, og hann var markaður til sín doyggjandi dag. Tá hann seinri saman við øðrum umboðsmonnum fyri okkurt útlendskt sat í Havnar klubba uppafturá við feitari sigár, við

einum glasi á borðinum og kortblaði í hondini, plagdi hann at reypa av tí vanda, sum hann hevði verið í. „Tú, hin gamli, vit uppoffra okkum fyri landið, tá vit selja ross til Onglands. Bara skomm og skitna løn fært tú afturfyri, at tú skaffar pengar til landið. Pengar eru aftan fyri alt, tú hin gamli.“ Hann peikaði á markið – og var stoltur av tí.

Dósin og dølskur var Reyði fluttur um havið.

Viljugur læt hann seg leiða í land, men tá onkur vágdi at strúka hondina eftir snáðini á hesum vakra rossinum, tá beit hann frá sær.

Tað illa hevði Grækaris gelt.

Við jarnbreytarvagnum vórðu rossini av Skoradali flutt til kolanámini og í einum kassa lorað niður í hitt æviga myrkrið, har smáar karbidlampur lýstu so mikið, at kolasvartir hvítir menn fingu trilvað seg fram ígjøgnum myrkrið. Her skuldu tey liva restina av ævi síni saman við smádreingjum og monnum, sum livdu í somu trælakorum.

Tað tók sína tíð at venja rossini at draga vagnarnar, sum gingu á skinnarum, men tey flestu rossini vóru lagalig eftir fáum døgum. Tey gingu beint fram og hildu uppat at kløkkast, tá hitt lága námsloftið nam við herðarnar. Tey hoyktu seg bert niður undir hinum tunga lofti, soleiðis sum teir menn høvdu gjørt, ið høvdu markað tey í Føroyum, gingu bert beint fram í blindum og í myrkri.

Øðrvísi var við Reyða.

Hann leikaði í sum eitt ótt, hvørja ferð teir løgdu hond á hann, og tá týggini komu á hann, varð hann garvillur og brótaraross.

Eitt hím gekk har í náminum. Eitt 13 ára gamalt, ið valla rakk úr rossaspori. Ein faðir- og móðurloysingur, sum teir høvdu sent niður í myrkrið, har tað kundi stríðast við kol, so leingi tað orkaði, til tess tað útslitið doyði av elli. Hetta

# Kroppur



**Bárður Oskarsson.** Akryl 2005, 90 x 100 cm.

smáa var eisini so hent at senda inn í tær trongu holurnar, har tilkomin maður mátti grulva.

Soleiðis var mannalagnan tá í mongum bretlandsbygdum, meðan teir á kostskúlum aldu upp eitt mentað lið at leggja undir seg lond í øðrum heimspørtum, meðan háttvirdir havnarmenn og limir í Havnar klubba fingu føroysk ross til ensku kolanámini, har menn høvdu sæð, at føroyska rossið hevði tolt so nógva ómegd, var so illa viðfarið, at gavst tú tí ein kjaft av hoyggj av og á, so sleipaði hetta smáa og knáa rossið seg í hel, bert tað fekk búkfylluna.

Men Reyði var ikki so at temja.

Hvørja ferð ein av námsmonnunum nærkaðist honum, so sparkaði hann, sletti við høvdinum í hesum landi, har hann bert hevði møtt myrkri. Teir ræddust.

Tá allir høvdu roynt seg, so bóðu teir lítla John, hitt 13 ára gamla hímið, fara at royna seg, tað var so lítið í veiggi, at um tað varð sparkað til deyða, so var ikki stórvegis missur í tí. Arbeiðið í náminum fór ikki at verða tarnað so mikið, at námsstjórin fór at illkennast inn á teir av teirri orsøk.

Á honum, sum nakkahárini eru brýnd av undir lága loftinum, hjá honum, sum meginpartin av ævi síni hevur gingið og kropið, gevur tað ein feril av mannavirði, tá tú sært hann, ið andar eins og tú, hevur valt tað stóra og djarva, og teir rættu seg í rygginum við tí gjóstri í sálini, sum er øllum monnum lagað, tá lítli John nærkaðist Reyða.

Tá lítli John legði sína lítlu og svørtu hond á Reyða, tá mótmælti hann ikki. Hann stóð púra kvirrur. Lítli kláaði honum aftan fyri oyrað – og hann sissaðist so mikið nógv, at hann stóð púra stillur, tá lítli legði týggini á hann og spenti hann fyri vognin.

Soleiðis vórðu týggini løgd á Reyða.

Og tað var so skjótt, at hann dró kol móti fleiri rossum.

Teir góvu teimum rossadreingjunum, sum drógu mest kol, okkurt framíhjá. Lítli John og Reyði drógu so nógv kol, at báðir trivnaðust av øllum framíhjábitunum. Ikki vaks Djonnurin nógv, men hann trivnaðist og fekk búk, og Reyði gneggjaði av frøi hvørja ferð, hann nærkaðist. Teir drógu kol, og alt var gott.

Men ein dagin helt námsstjórin, tá hann frætti, hvussu nógv kol hann og Reyði høvdu drigið, at John mátti fáa eitt betri starv, og hann varð fluttur upp at sita á einum av dampspølunum, sum drógu kolið upp úr dýpinum.

Har sat hann so og vantrivnaðist uppi í luftini, sum var full av koladusti, og sum var øðrvísi enn luftin í neðra uttan tað, at her var gjóstur í erva.

Men Reyði varð aftur garvillur, tá Djonnurin var farin. Á ymiskan hátt royndu teir at temja hann, men har var einki við at gera. Hann var aftur brótaraross, bardi týggini av sær.

Tá nógvir mans vóru um hann, bar til at fáa hann spentan fyri ein vogn og fáa hann at draga, men so skjótt sum hann sá eitt karbidljós, kom øði í hann. Hann rann sum óður eftir ljósglæmuni.

Námstjórin fekk hetta at vita á einum av ferðum sínum niðri í dýpinum, og hann hevði beinan vegin ráðini: „Stingið eyguni úr honum!“

Og so var gjørt.

Nú hendi Reyða eitt rættiligt undur. Tá gløðandi jarnoddarnir brendu seg inn í eygu hansara, var tað, sum høvdið fór í sor, allur heimurin stóð í einum báli – men so sá hann sólsetrið av Skoradali! Roðin gylti Skæling og Oknadal, og vesturi í sundinum var eldur í. Reyði sá fyri sær Vatndalsegg,

vatnið oman Stígar, Kaldbaksbotn, Kollfjarðardal, Dalar og Sjeyndir – alt so livandi í øllum myrkrinum.

Teir undraðust allir á, hvussu róligur, ið Reyði var vorðin, nú hann hevði mist eyguni. Tolin dró hann hinar tungu vognarnar hagar, ið námsmenninir vildu, tolin læt hann teir leggja hini skitnu týggini á seg, og tolin bíðaði hann eftir hoynum og korninum, sum hann fekk tríggjar ferðir um dagin. Reyði var vorðin besta arbeiðsrossið í náminum, og námstjórin fekk nógv rós fyri síni klóku ráð.

Tað, ið hinir smáu menn í náminum ikki vistu um, var tað stórbæra lívið, sum Reyði livdi. Meðan teir gingu har og longdust heim til skitnu kroysur sínar, har ein tannleys kona full upp undir hendur við einum svongum og grátandi barnaflokki uttan um seg tók ímóti teimum, rann Reyði í kátum summarleiki um Streymoyarfjøllini við svørtu ryssuni undir lið. Hann, ið upplivað hevur so stóran vakurleika, so mikla summareydnu, hann verður ongantíð heilt fyri ongum, og tá teir tóku eyguni frá Reyða, fór hann at síggja inneftir – tað var hansara eydna her langt niðri undir jørðini í Svarta-Onglandi, har kolið var alt, og hann livdi annað lív enn at draga kolavagnar.

Sterkur var hann, og tað sóu menninir, teir spentu hann fyri tyngri og tyngri vognar; men tá Reyði varnaðist, at nú var í tyngra lagi, so steðgaði hann bert. Stóð púra stillur, og hóast teir bukaðu hann, so flutti hann seg ikki av fetinum. Tískil slapp hann aftur at draga vognar, sum hann fór lættliga við. Meðan koladustið setti seg sum ein skón um allan kroppin, so liturin ikki longur var reyður, men svartur, rann Reyði framvegis sum kátur greðingur um Vatndalsegg.

Og so kundi søga okkara um rossini av Skoradali endað, um ikki ein serlig hending varð, tá Reyði endaði sínar dagar.

Eitt fyri og annað eftir av rossunum høvdu verið dripin, tá tey ikki orkaðu meira, vóru útslitin. Hóast tey fingu nógv at eta, so vardi tað ikki nógv ár, fyrr enn hetta møðsama arbeiðið í náminum gjørdi rossini óarbeiðsfør.

Tað var veitslurómur í náminum, hvørja ferð eitt ross skuldi avlívast, ella sláast niður, sum teir søgdu tað har. Rossaslaktið týddi tað, at nú varð kjøtveitsla í myrkrinum. Við lýsandi eygum sótu námsmenninir og koyrdu í seg rossakjøt og rossaslambur, teir tugdu væl og leingi, áðrenn teir svølgdu, seigari var, tess betri, longur høvdu teir henda vælsignaða kjøtsmakkin í munninum – og best av øllum: Teir sluppu at hava ein bita heim við sær til tey svongu børnini, soleiðis at tað eisini varð veitsla í teimum smáu, skitnu kroysunum, tá rossaboð hevði verið í kolanáminum.

Reyði var ikki fallkomin, tá hann mátti lúta.

Ein dagin hendi tað, at loftið í teirri námsgongdini, har Reyði dró kol, rapaði, soleiðis at menninir vóru innistongdir. Har var róp og grátur, sjálvt Reyði, sum livdi í øðrum heimi, varnaðist, at okkurt óvanligt var áfatt. Hann var ófriðarligur, og Djonnurin, sum hevði vantrivnast so uppi í gjóstrinum, at hann var sendur niður aftur í námið, kláaði honum aftan fyri oyrað fyri at sissa hann. Hann var eitt hím, sum vanlukkan ikki rámaði. Hann skilti neyvan, at lívsvandi var á ferð. Og meðan menninir runnu aftur og fram, róptu og geylaðu, stóðu teir báðir, Reyði og John, og kendu samveruna.

So við og við sissaðust menninir. Teir vóru innistongdir. Teir fóru at grava burtur tað, sum lopið var niður, og so var bert at vóna, at teir gróvu frá hinari síðuni, so teir kundu bjargast út, áðrenn teir doyðu í hungri. Námið var turt, og tað var eingin vandi fyri, at tað skuldi fyllast við vatni, og víðar gongir vóru inneftir, so tað fór at taka langa tíð,

áðrenn luftin varð uppbrúkt. Teir kundu liva leingi, um bert var nóg mikið at eta.

Men óttin á monnunum var mikil, og teir arbeiddu óført fyri at grava burtur tað, sum lopið var niður úr loftinum. Tað hevði jú hent seg, at námstjórin gav boð um at gevast at grava eftir innistongdum námsmonnum, tí hann helt tað vera tíðarspell, sum einki kol gav, og eingin vón var jú at finna menninar á lívi.

Allir vistu at siga søgur um slíkt, og onkur av monnunum visti at siga, at seinri vóru teir komnir fram á námsgongdir, har ein hópur av upptornaðum líkum var at finna. Skemdir á summum líkum høvdu best sýnt, hvørji neyð, ið hesir menn høvdu verið í, áðrenn teir góvu upp ond. Hvussu stórt lopið var hesaferð, visti eingin.

Teir høvdu svøltað fleiri dagar, tá teir gjørdu av at drepa Reyða, sum allir vóru so góðir við, hann var so spakur og góður í sær, at teir allir høvdu snýtt seg til at geva honum ein kjaft framíhjá, teir høvdu kent seg sum uppreistrarmenn, tá ið teir gjørdu tað, og høvdu rætt ryggin undir lága loftinum.

Tá hinir svøltandi og innistongdu námsmenninir ótu Reyða, vóru teir kátir, sum teir høvdu drukkið brennivín. Mettir sótu teir har og ropaðu, sovnaðu sum teir sótu – og gloymdu eitt bil, at teir vóru innistongdir. Lítli John slapp at eta eygnamørin á Reyða, men um hann sá tær stoltu sjónir, ið Reyði hevði sæð, tað sigur søgan einki um.

TÓRODDUR POULSEN

# Fepurdreymur um blomstrini

hvat vilja tey við blomstrunum
hví draga tey innandura
hví kuta stelkin undir teimum og leggja tey í tyssir
og síðani verða tey til dømis borin til mín
hví ikki heldur koma við eini gággu
jákupsskel ella eini spann av sandi
tað er bæði vakrari minni harðligt og gevur størri ró

blomstrini anga og tú nýsur
um nøsin kemur teimum nóg nær
lat tey standa í frið úti á bønum
í havanum úti á villini heiði
og hvar tey annars veksa og vaksa
í tí málríku moldini og summi í sandi
og tá tey følna følna tey eins og vit

urtapottar hví gera tit ikki uppreistur
hví hýsa tit ikki bara kaktussinum
hann er ikki so tystur
og kann hóast alt verja seg
(ja ýlini kunnu vera so ræðulig
tá onkur stingur seg av einum slíkum
at vakstrarhús kunnu syndrast)
og tit vasar
tit eru vakrast tá tit eru tómir

# Mótasýning



**Jens Kristian Vang.** Ljósmynd 2008.

tað er kanska til at liva við
at verða skryktur upp við rót
og stappaður niður í ein leirpott við mold
at standa í einum stovuvindeyga
ofta hálvdeyður av tosta
men hvat høvdu vit sagt
um beinini vóru kvett undir okkum
og vit vóru løgd í tyssir og seld
tí onkur hevði føðingardag brúdleyp
var sjúkur ella skuldi til gravar

menniskjan angar kanska ikki so væl
men hon býr best inni á gólvum
og tá hon er úti
gongur hon og hyggur niðureftir
so ikki traðkað verður á okkurt
til dømis eitt blomstur
onkur vildi givið unnustuni ella lagt á kistulokið
í staðin fyri eina gággu ella jákupsskel
sum heima í túninum í fullfíggjaðum sniði
hevur ligið í sandinum ella skervinum
og hugsa nú ikki um gravsteinar
hesi tungu slípaðu skrímsl

og kemur tú fram á eitt blomstur í kavanum
skal tað heilt víst siga tær hvar himmalin er
og hvat rúmast har inni av bláari bláum
enn blomstrið sjálvt hýsir
umframt aðrar litir
um tú letur tað standa í frið
men eg kann ikki svara fyri
at tað fer at veksa inni í tær

so tú verður glas ið ikki kann brotna
uttan so at tú snoddar at tí
við sera nógvum hita

# Teir sjey svanirnir

Eina ferð var tað ein maður og ein kona, sum áttu átta børn; sjey dreingir og eina gentu. So doyði konan, og maðurin syrgdi hana; men sum flestir einkjumenn giftist hann aftur og fekk eina dóttur við teirri seinnu konuni. Men tá ið børnini vuksu upp, var stjúkmamman so ill við tey fyrru átta, at pápin kvíðaði fyri teimum og tordi ikki at lata tey vera í húsunum. Hann gróv tí eina jarðarstovu í einum heyggi og læt tey har inní. Til lás hevði hann bert eitt gullepli: stiklaði hann tað niðaneftir, fór heyggjurin upp, og stiklaði hann tað omaneftir, læstist heyggjurin aftur. Hvørja nátt vitjaði hann tey og bar teimum mat; men eplið læsti hann niður í eina kistu og bar altíð kistulykilin um hálsin. Konan fekk illgruna, av tí at maðurin var altíð burtur um næturnar, og matur saknaðist úr kovanum. Hon forvitnast um hetta, men frætti einki. So gandaði hon dóttur sína til eina fjøður – tí gandakelling var hon – og setti hana upp í hattin hjá manni sínum. Um náttina fór hann, sum hann var vanur, til heyggin, og fjøðurin ansaði væl eftir øllum. Tá ið maðurin var afturkomin, skapaði kellingin fjøðrina um aftur til dóttur sína, spurdi hana gjølla eftir, hvar ið pápin hevði verið, og dóttirin segði frá øllum. Tá ið maðurin var sovnaður, stjól kellingin kistulykilin av hálsi hansara, fór í kistuna og tók gulleplið uppúr. So fór hon til heyggin og hevði nógvan góðan mat við sær til børnini. Heyggjurin opnaðist, tá ið hon stiklaði gulleplið niðaneftir; hon fór inn,

# Nornurnar



**Edward Fugløø.** Akryl á lørifti 2006, 160 x 680 cm, partur.

gjørdi seg blíða við børnini og gav teimum mat. Dreingirnir settust at eta alt fyri eitt; men gentan vildi einki nema. Hin gamla gav dreingjunum hvørjum sína skjúrtu, og við tað sama at teir vóru komnir í tær, stóðu teir umskapaðir til svanir og flugu burt. Stjúkdóttrini vildi hon geva ein serk; men gentan segði nei: hon tók hvørki mat ella klæði frá henni og bað lata seg vera einsamalla. Ja, hon skuldi fáa lov til at vera einsamøll, longur enn hon hevði sinni til, segði tá kellingin við hana, fór út, læsti heyggin aftur og stiklaði gulleplið á sjógvin. Gentan var ring, ólukkudýrið, og settist at gráta; hon hugsaði um at sleppa út, men hirdi ikki stórt um at liva, nú ið tað var gingið brøðrunum so. Tá ið pápin skuldi fara aftur at vitja børnini í heyginum og sá, at eplið var burtur, var hann út av lagi harmur, tí nú mundu tey hungra inni, hugsaði hann: og ikki slapp hann til teirra; hann grunaði, sum var, at konan hevði tikið eplið og forkomið tí. Gentan í heyginum át av matinum, ið pápin hevði borið, til hann var uppi, og tók so at grava seg út við einum knívi, sum hon hevði hjá sær. Spakuliga gekk; men endin var, at hon slapp út. Hon tók at ganga, gekk langt og leingi og kom umsíðir til eitt hús, hvar ein maður og ein kona búðu, sum einki barn áttu. Tey fagnaðu henni væl, og hon kærdi seg fyri teimum um vanlukku sína, og hvussu syndarligt tað var, at brøður hennara vóru gandaðir um til svanir av stjúkmóðurini. Tey hildu, at hon skuldi vera vælkomin at vera hjá teimum, og varð hon verandi har; men eingin sá hana læa ella spæla. Ein dagin, sum hon gekk úti og spákaði, møtti hon einum presti og tók at kæra sína neyð fyri honum. Hann visti eini ráð til at fáa brøður hennara aftur til menniskjur, segði hann: men kvíðaði fyri, at hon kundi fylgja ráðunum til enda. Hon bønaði hann at siga sær tey: tí hon vildi royna alt. Tá segði

presturin, at hon skuldi seyma sjey skjúrtur, eina til hvønn bróðurin, av so fínum tráð sum kongurvág (spinnilvevur), og ikki mátti hon tala eittans orð, fyrr enn allar skjúrturnar vóru lidnar – men tað kom at vera ein long tíð. Hon settist at seyma, og eitt ár gekk til hvørja skjúrtu. Einsýna vøkur var gentan, og ikki trutu tí fríggjararnir; men eingin fekk nakað mál av henni, so teir vóru allir at fara krøktir heim aftur. Summi hildu hana vera dumba, av tí at hon talaði einki. Tá ið seks ár vóru umliðin, kom prinsurin sjálvur at fríggja til hennara; honum mundi hon fara at svara, hildu tey, um hon kundi tala. Men ikki kundi hann fáa nakað mál av henni, hann heldur. Tá hevði stjúkmamman frætt, hvar hon var, og hvat hon hevðist at; hon tók við tað sama at leggja ill ráð fyri henni og førdi út í orð, at hon var trylsk og full av gandi. Kongasonurin tosaði um at taka hana við valdi; men stjúkmamman helt, at verri átti at vera gjørt við hana enn so: hon átti at vera brend, tí hon vildi ikki svara honum – tað var ovgóð æra fyri hana, at slíkur maður skuldi hirða at fríggja til hennara. Prinsurin bar í bøtuflaka fyri gentuni í fyrstuni; men stjúkmamman var ágrýtin og beit hana í bak so leingi, at prinsurin til endan trúði, at gentan var trylsk, og beyð at kynda bál til at brenna hana á. Menn vóru sendir til at taka hana og føra hana til bálið; men í tí at hon setti fótin á bálsteinin, komu sjey svanir flúgvandi; hon tók skjúrturnar fram úr kistlinum og kastaði til teirra; tá vóru allar lidnar uttan tann síðsta, sum onnur erman vantaði í. Hvør svanur fór í sína skjúrtu, og allir vóru tá fólk aftur, uttan ein varð at hava vong fyri annan armin, av tí at onnur skjúrtuerma hansara ikki var liðug. Nú lysti seg at tala, segði gentan og greindi so frá øllum tí illa, sum stjúkmamman hevði lagt fyri hana og brøðurnar. Tá beyð prinsurin, at kellingin og dóttir hennara skuldu báðar vera

brendar á tí sama bálinum, og so varð. Men hin kom at vera prinsessa og síðan drotning.

*Jakob Jakobsen*

GUÐRIÐ HELMSDAL

# Í skýmingini

Angi av mold
í náttkendum vindi,
sovandi gras
við áarløk
– var alt ið hendi.

Enn rodnaði rósan
um fjallatind,
tó niðan fjaldi tess fót.

Nú tagnar alt lív,
tað líður móti nátt,
og frið skal eiga hvørt kykt.

Enn glógvar eitt hyljareyga
eitt bil,
so blundar tað við.

Náttin er tøgn.
Hon dvølir í veldi
og ber sín longsul í loynd.

# Fragmented Unison



**MARMAR (Marianna Mørkøre og Maria Arnell).** Ljósmynd 2006.

# Eg ikki eg



SIGRI M. GAÏNI

# Eg eri

Í dag eri
eg eg
Í gjár var
eg eg
í gjár
Í dag eri
eg ikki eg
í gjár
Hvønn dag eri
eg eg
tann dagin
Nú eri
eg eg
nú
Eg eri ongantíð
eg tá
Eg var eg
tá
Dreymurin broytti meg
Tað er altíð okkurt
ið broytir meg.

KARSTEN HOYDAL

# Barnið, bergið og blómurnar

Vilt tú finna blómurnar,
eingin annar eigur,
gakk so djarvur huga tíns
brøttu bjargaleiðir.

Sortugrøs og hjálpurót,
út av torvu hanga,
fagrast eru blómurnar,
har ringast er at ganga.

Inni djúpt í gjáarskýmd
har dagur valla røkkur,
standa og hótta í hálvalýsing
trøllakampabløðkur.

Óttast ikki deymin har
ið fúnað er og modnað,
óttast ikki tostan har,
ið hvør er keldan tornað.

Óttast ikki hæddina
har hálkaður er klettur,
lat ei ørast fyri tær
at tú oman dettur.

Klívur tú og klintrast tú
allar leiðir finnur
upp og niður inn og út
størri fong tú vinnur.

Kanska nøgd av blómum tá
fært tú saman strevað
nógvar ferðir fagrari
enn nakar kann tær geva.

Barn mítt, mangur undan tær
søkti sama lendið,
mangur, mangur undan tær
sum armur aftur vendi.

Men, mítt barn, um blómur tú
vilt vinna eingin eigur,
mást tú klúgva huga tíns
brøttu bjargaleiðir.

PETUR PÓLSON

# 1. (myrkur)

soleiðis

lat náttina
liggja

nú byrjar
dagurin við
eini ódroymdari
og kanska eisini
líkasælari

rørslu

lat eyguni upp
við fyrsta myrkrinum
og greið tær sjálvum frá
øllum tí tú ynskir
at sleppa at
síggja

áðrenn
tað ikki er har

nem skuggarnar
við trilvandi fingrum

inntil sólin aftur
fær sær eitt
andlit

ið dryppar

# Through the looking-glass



**Heiðrik á Heygum.** Vatnlitir 2007, 50 x 73 cm.

PETUR PÓLSON

# 2. (lýsi)

vitja støð
sum ikki eru til
uttan so at tú
biður tey vera

finn tey
altíð uttan
at spyrja

um vegleiðing

leita støð
sum eru til
men sum tú
ikki dugir
at finna

gev leitanini
nýggj nøvn

og lat spurningar
vera nóg mikið

einaferð

tú hevur rætt
til at avdúka
teg sjálvan
uttan at skula
rættvísgera
tað

REGIN DAHL

# Ikki komi eg til tín

Ikki komi eg til tín, Guð,
tí eg eri ræddur og móður,
og tí lívið man meg við ovbyrði knýggja –
ikki komi eg at krógva meg,
at leita mær skýli undan hóttum –

men eg komi til tín,
tí lívsfrøin spríkir í hvørji æðr,
tí sælan syngur í mær –
í fagnaðar takksemi komi eg,
av tí at eisini mær unnist
at støðast um stund
her við dagsins strond,
meðan seiður springur
og rakað verður saman
í brekkum fyri nátt.

CARL JÓHAN JENSEN

# the reverend dünn’s concept of God

Guð er Guð
tó at ýtan brestur
um dinglið í krúnuni
og ljósið yrkir klasarnar av lagi
kring lampustaðið aftur
Guð er Guð
um fjálgin í lakinum kalnar
og barnið spratt andleyst
úr reivi av illreyðum legdum.
Guð er Guð
um forrit øll skelva,
um fiskur talar,
um kvarterslagið svíkur í klokkuni,
um flugan missir flogið
og stovan ikki var.
Guð er Guð
um fívilin slær
og streingirnir
ørkymla veftin,
ið fer gjøgnum
upphavsins skil.
Guð er Guð
um einglarnir falla
og hvørva út í tóman
Guð er Guð

um stjørnurnar rúmdust í lógva
og samvitskan doyði
Guð er Guð
um lív alt var afturvend
og myrkrini ævig.
Guð er Guð

HANS A. DJURHUUS

# Hagin og kirkjan

Tú undrast, at eg ei sat í kirkjuni og bíndi,
meðan sólin í várgleði fjøllunum kíndi,
kennir tú meg rætt, so veitst tú væl, at eg
má leita mær burtur hagar, himinin er høgur,
hagar lotið og fuglurin eitt várkvæði kvøður;
tí er hagin nógv betri enn kirkjan fyri meg.

Tú veitst væl, at Harrin, sum valdar øllum londum,
býr ei í templum, bygdum av menniskjahondum,
hann nýtir ei, at menniskjan biður honum bøn.
Tú finnur hann í lotunum, sum svalliga anda,
tú finnur hann í blómunum, sum áarbakkan randa,
tí fari eg til fjals, tá ið mørkin gerst grøn.

Væl eri eg ei vorðin, eins og menn eru flestir,
væl veit eg, at eg ei eri góður eins og prestur,
men trína vit bæði inn um himmalsins grind,
so sigi eg við Guð uttan stúrandi iva,
at vit bæði, vit hava elskað og livað,
so veit eg væl, at Harrin kvittar okkara synd.

HANUS KAMBAN

# Undir tínum veingjabreiði

Oftast hendi tað, eftir at hann hevði ligið leingi sjúkur. Sum tey sótu við døgurðaborðið, kom ein undarlig kensla á hann, tað var, sum vóru øll hjá uttan hann, hann var langt burturi, hinumegin eina gjógv, alt tað gerandisliga, lundarnir, eplini, fyllan, knívarnir, ja, sjálvt hansara egnu hendur, sum piðaðu, fjaraðu burtur, og hann hvakk, hann viknaði í knøunum, hann viknaði allur sum hann var, eitt dýpi av ræðslu gapaði framman fyri honum, hann hevði hug at tríva eftir teimum, foreldrunum og systkjunum, hann hevði hug at skríggja, rópa hjálp, neyðarróp, men hann visti ta lítlu løtuna, tað vardi, hann *visti,* við eini óhugnaligari vissu, sum gjørdi hann til stein, har hann sat, at hann var handan alla hjálp og øll neyðarróp og allar trívandi hendur.

Men so var gerandisdagurin aftur har, og ræðslan var burtur, og tey vóru aftur saman. Men allan dagin vitjaði hon hann í stuttum, kyljandi løtum, til tveir-tríggir dagar vóru gingnir, og hann var komin fyri seg aftur og spældi sum ein frískur drongur millum frísk børn, og hon var heilt burtur.

Tað var í eini hugnaligari, lítlari bygd, ið lá væl skýld niðri við sjógvin, líkasum blakað afturundir í eini lítlari vík, við húsum í sterkum, føgrum litum og við urtagørðum, sum lógu í órøkt og tí kendust so trivaligir og blíðir. Og eina ferð um mánaðin kom presturin út og sáddi kærleikans og

# Varðin



**Bárður Eklund.** Ljósmynd 2008.

kristindómsins sáð niður í bygdarfólkið, og uppaftur oftari komu prædikumenn og missionerar frá landsins mongu sektum, meira rokmiklir og innblástir og spennandi enn tann vatndeyvi, eitt sindur syrgni presturin, og teir tosaðu mest um *syndina*, og tað, sum prestur ikki hevði gjørt, tað gjørdu teir, skrubbaðu sálirnar reinar, lúkaðu burtur hvønn farra av synd, og hesir Harrans lúkarar komu so ofta og vóru so grammir, at kundi nøkur synd finnast har um leiðir? Og lærarin lærdi børnini boðini, og tvær ferðir um vikuna var møti í missiónshúsinum, og eina ferð um vikuna var sunnudagsskúli, so mundi nøkur sál hava nakra neyð har á staðnum? Og ferðamenn, sum onkuntíð komu tann vegin, undraðust á, handan tey nýmálaðu húsini og tey nýsópaðu túnini hómaðu teir andans reinleika, einfaldar, snjóhvítar sálir, og longsil kom á teir, tey sótstroyddu og neurosuetnu býarmenniskjuni, og hugsaðu teir, her hevði verið gott at búð, í idylli og *reinleika*, langt av leið frá stressi og sálarfløkjum, langt av leið frá øllum rómi og gangi og klandri og ófriði, í sakloysi, eitt sindur grunt, lívið, og einfalt kanska, men hvør tók ikki tað við? Og mamma Kaisten helt eisini, at hetta var eitt gott stað at veksa til mans í, og Kaisten, mundi hann ikki bregða til abban, nøsin uppeftir, pannan breið og lág og høvuðburðurin eitt sindur framyvir? Og hvørja ferð tey sungu regluna „ein maður við røttum sinni…" í skúlanum, hugsaði Kaisten um abban, abban, sum hann æt eftir, abban, sum øll altíð tosaðu um, abban, sum hevði verið ein rættur maður, prúður, djarvur, fimur, rættiligur, álitismaður á sjógv og til bakka, sterkur, tó ikki stórur (tað gjørdi minni), men Kaisten fekk ongantíð tíð til at vera errin av abbanum, tí í hansara lítla, men longu fløkta og undarliga ivandi huga var nóg illa rúm fyri heilt øðrum, nógv veldugari spurningum, sum fingu hann

at ganga einsligar túrar niðri í fjøruni og viðhvørt varpaðu døkkar skuggar eftir andlitinum á honum: fór *hann* at blíva ein rættur maður, og *mundi* hann bregða til abba sín?

Og í dag var sunnudagur, og sum vant var hann í kirkju við pápa sínum og hinum systkjunum, og meðan presturin prædikaði og undir altargongdini sat hann og hugdi at teimum útskornu myndunum frammi við altarið, við mynstrum, ið mintu um ljósastakar ella kleyvarar ella krossfiskar, men mest sat hann og hugdi at skallunum á teimum gomlu monnunum á stólunum frammanfyri, stórir og smáir skallar, summir heilt berir, summir við tveimum vátum kleiggjutum hárum greiddum beint tvørturum, bøllutir og flatir skallar, blankir og turrir skallar, og beint framman fyri hann ein undarliga spískur og skropnaður og misháttur skalli, skallin á abbabeiggjanum, gamla Jóhan, sum sat har í einum koti, sum hevði ein eyðkendan lukt, ið minti um… ja, hann visti ikki, hvat tað var, tað var ikki nakar ringur luktur, men tað var heldur ikki nakar góður luktur, ein ramur roykur, stakin næstan, ein luktur, sum gjørdi hann ivasaman og bangnan, sáddi ófrið í sálina, sama ófrið, sum tá ið hann hugdi at hesum bygdarmonnunum, sum hesa løtuna høvdu feriu frá gerandisdegnum, feriu frá eiðum og forbannilsum, feriu frá sviða og sníkjandi spotti, sum nú líkasum vóru stirðnaðir eina løtu, fangaðir eitt bil av sunnudagsins tign, standmyndir av øllum, teir umboðaðu, standmyndir, sum hvørja løtu kundu rakna við og glepsa. Og Kaisten mintist, hvussu teir plagdu at koma yvir til hansara og klappa honum á herðarnar, so hann hoknaði niður og hevði ilt í økslini tað ið eftir var av degnum, og siga „*hessin* gamli", og hvussu teir plagdu at standa og hyggja at honum, meta hann, nakað sum tá teir mettu seyð á rættini, handla hann við eygunum (og

viðhvørt við hondunum við) og siga: – Hann bregðar til abban. Og eina ferð aftrat fekk hann at vita, at abbin hevði verið ein rættur maður. Men hann visti ongantíð, um hetta, at teir søgdu, at hann bregðaði til abban, var nakað ringt ella nakað gott. Tað var *tónalagið*. Meintu teir, at hann fór at blíva líka raskur sum abbin? Ella meintu teir, at hann *ikki* fór at blíva líka raskur sum abbin? Tað var ikki altíð so gott at vita, tað var ikki altíð so lætt at skilja teir, tað kravdi tev og týðarakynstur, men hann helt seg hoyra orð, ið ikki vóru søgd, ivasamar merkingar, ið sníktu seg inn við einum hábragdi ella einum eygnakasti, rós, ið ljóðaði sum spott, virðing, ið ljóðaði sum hatur, eggjan, ið var dráp, eitt mál handan málið, orð undir orðunum, tøgnina, sum skutlaði, blíðskapin, sum kyldi… – Tað var rætt, hasin gamli! søgdu teir, tá hann datt í fjøruni og skursladi sær knæið og fór grátandi heim. At duga at týða teir, at eiga tevið, tað kundi vera lagnutungt, tað var ein ivasom gáva, og um hann datt ein mansaldur seinni, so var tað kanska bara ein endurtøka av braki og sorli og meiðslan millum friðarligar, gudlýdnar, sakleysar og so vælsignað *hjartareinar* bygdarmenn í upphavsins heimi. Men sjálvandi, viðhvørt var alt lættari og greiðari, sum tá ið hann frá Sørini, sum nettup nú tók ímóti altarsins sakramenti og reis upp av nýggjum sum ein Tórs havur, fekk at vita, at hann kundi sleppa sær „niðan undir klovið á mammu síni“ ella „til heita helvitis“. Tað var so fitt og sámiligt, og til tað seinna kundi hann jú svara – eitt sindur hjálparleyst, sjálvandi – at hann hevði ikki lykilin. Tað var ein glotti.

Og aftan á kirkjutíð kom gamli Jóannes á Lag niðan, og mamman gav honum eina skál av budingi, og so fingu tey kaffi, og so sótu Jóannes og foreldrini og tosaðu um prædikuna, góvu sítt skotsmál, og tey blivu ivrig, veipaðu

og vóru ósamd, men til endans samdust tey altíð um, at tær *smáu* syndirnar vóru tær ringastu. Og Kaisten visti ikki rættiliga enn, hvat synd var, men hann hevði kortini longu nú ein illgruna um, at hann sjálvur var ein syndari, kanska ein herviligur syndari, hann hevði roykt tvær ferðir, og ofta blakaði hann bara skógvarnar inn undir trappuna, tá hann kom heim, setti teir ikki pent, sum mamman bað hann, og ofta gloymdi hann at lata hurðina aftur eftir sær. Mundu *tað* vera tær smáu syndirnar? Og Kaisten mintist missionerin, sum hevði verið har, og sum hevði spurt óvitarnar, hvat ið hendi, um man boygdi ein seym fleiri ferðir. Tey tagdu, smæðin ella tí tey ikki vistu, men so hevði ein gløggur drongur svarað, at hann *brotnar*. Akkurát, segði missionerurin, og soleiðis kom tað eisini at ganga við teimum smáu børnunum, um tey góvu eftir fyri freistingunum fleiri ferðir, og tað kundi vera so brátt, so var eingin vegur aftur, so vóru tey ævinliga fortapt. Og so hevði hann tosað um náðina, og hvat ið tað var, skilti Kaisten ikki, men eitt skilti hann, tað var nakað sjáldsamt, nakað fyri tey heilt fáu, og í hvussu var ikki nakað fyri hann, og helst mundi hann fara og brotna nakað skjótt, var kanska longu brotnaður.

Óvitarnir tosaðu eisini um syndina, vóru ósamdir, metaðust, samanbóru, klandraðust um, hvør ið syndaði lítið, hvør ið syndaði nógv, og hvør ið syndaði mest, men allir vóru samdir um, at Stalin var ein stórur syndari og somuleiðis mamma Kaisten, tí hon las ikki sunnudagsblaðið. Og so tosaðu teir um *illamann*. Teir høvdu so mangt á lofti, tíðina, ævinleikan, storkin, sum hevði blakað Magnus á takið hjá Elin Sofíu og slept Janusi í køstin hjá Antenisi, og altíð, tá ið fullmáni var og stjørnuklárt, og tey spældu „renna ímillum húsarnar" tey longu kavakvøldini, endaði tað við, at tey øll sótu og tosaðu í Teigatúninum, og friður kom

á tey, tey stóru førdu orðið, tey smærru lurtaðu eftir og spurdu viðhvørt okkurt, og sum frá leið blivu tey meira og meira lágmælt, og meðan norðlýsið førkaði seg yvir teimum og brá sær í nýggjum mynstrum og gekk kykt í darrandi litbrigdum sum eitt skakað kaleidoskop, kom ein øgn av ævinleika og ein farri av tign yvir hesi smáu, sum stóroygd og undrandi royndu at gera sær hugsanir um sólina og mánan og alheimin og møguligar rúmdarferðir og mintust snarflogførini, sum í hesum tíðum vóru farin at vísa seg og sum løgdu hvítar rípur eftir himmalinum, og skulvu, órógvað, hóast smá, av einum varhuga um mannaættar nemesis. Og knappliga brast burtur úr onkrum: – Men til himmiríki koma teir so ongantíð! Og tað hjálpti eitt sindur.

Men mest tosaðu børnini um illamann. Tað var altíð onkur, sum kom rokandi í skúla um morgunin, algoystur, tí hann hevði droymt um illamann, at hann hevði verið eftir sær, alloðin sjálvandi, kolasvartur, við hornum og hala og øllum óndskaparins grimu eyðkennum.

Kaisten ræddist ikki illamann. Kaisten droymdi ikki um illamann. Illimaður var sum trøllini, hann fekk seg ikki til at trúgva upp á hann. Illimaður var ein søga, vatndeyvur, karnevalskendur, láturligur.

Tá var Gud verri.

Gud, tað var lukturin av sápu og sunnudegi, svartar skikkjur og álvarsom andlit, smáir og undarliga snjallir missionerar, sum talaðu um náðina og Guds kærleika og gleðina í tí „harra Jesu Kristusi“, so at knyklar komu í óvitapannurnar, og gler legðist á tey smáu barnahjørtuni…

Kaisten droymdi ikki um illamann. Kaisten droymdi um Gud. Um Gud og um Jesus og um dómadag (sum hann ræddist dómadag! sum hann altíð gekk og hugdi upp í

luftina, bangin fyri dómadegi, dómadegi, sum kundi koma, nær tað skuldi vera, sum tjóvur á nátt, NÚ, og hvat var tá at gera hjá einum lítlum, men herviligum syndara?) og um ævinleikan. Einaferð droymdi hann, at børnini spældu gamlan mann uppi í Skortatrøð, og knappliga var tað, sum ein skuggi kom fyri sólina, tað sortnaði, tað var dómadagur, og knappliga stóð Jesus har, mitt ímillum børnini, og hann sá ikki blíður út, og hann begynti at døma børnini, og hann býtti tey sundur í tveir partar, tey, sum fóru til himmals, og tey, sum fóru til helvitis. Og tá ið hann kom til Kaisten, hugdi hann at honum og tað sást, at Jesus var illur, og tað sást, at dómurin *var* longu feldur, og har var einki at gera, har var eingin náði, *eingin,* og Jesus deildi hann leingi, reksaði allar syndirnar upp og dømdi hann til helvitis. Og tað ringasta var, at hann mátti skiljast frá Vígdis, hansara bestu vinkonu, sum hann var saman við altíð á degnum, sum hann spældi við seint og tíðliga. Hon slapp í himmiríki.

Sjálvandi var tað ikki stuttligt at fara til helvitis. Har logaði tann ævigi eldurin, og har skuldu børnini so kolast upp, meðan illimaður við øllum sínum riðili av smáum hjálparmonnum, djevlunum, legði aftrat í heilum. Og tað snilda við hesum eldinum var sjálvandi, at hvussu leingi tú brendi, og hvussu leingi hann logaði, so brendi tú ongantíð upp, so doyði tú ongantíð – í helviti skuldi tú brenna í allar ævir.

Men tað undarliga var, at tá ið hini børnini og missionerarnir og presturin tosaðu um ævinleikan og frelsuna sum tað stóra undrið og sum einastu bjarging undan hesi ræðuligu lagnu, so helt Kaisten ikki, at her var so nógv at velja í. Helviti var ófatiliga ræðuligt, men ævinleikin var óhugnaligur upp á ein annan máta, og sum Kaisten gekk og spældi niðri í fjøruni ella sigldi uppi á vøtnunum ella

leitaði eftir reka úti á hellu, sló tankin sum eitt snarljós niður í hann, tankin um endaloysið, endaloysið í tíð og endaloysið í rúmd, so tað fór ein bruni av angist gjøgnum heilan og kroppin á honum, so hann hvakk og hitnaði allur sum hann var, tí hann kendi seg einsamallan og avbyrgdan, einsamallan um at skilja tað ræðuliga í hesi sæluni, sum øll hini, børn og vaksin, prædikaðu um og sungu um og sýntust at gleða seg til.

Einaferð droymdi hann, at hann var deyður, og hesu ferð var hann komin í himmiríki, og himmiríki var eitt lítið, avlangt kamar, grátt og hvítt og undarliga tómt, sum ein hugmynd av endaloysisins og ævinleikans ræðuleika, og einastu íbúgvarnir í himmiríki vóru Gud og Jesus og Hin heilagi Andin og so Kaisten og beiggi hansara, og í hesum tronga rúminum flugu teir so aftur og fram, og har skuldu teir so flúgva aftur og fram í allar ævir. Eingin segði nakað, og eingin gjørdi nakað, og hesin endaleysi, *endaleysi*, livandi deyðin, hesin grái, tigandi, ævinligi tómleikin var tað óhugnaligasta, Kaisten nakrantíð hevði droymt um ella upplivað – vónloysi teirra, ið noyðast at vera til, uttan at liva, uttan at doyggja, í ævigar tíðir. Grátt, hvítt, tómt, endaleyst…

Og sum árini ganga, og hugin búnast, og heilin víðkast, koma andvekursnæturnar í iva og ræðslu, nætur, har eitt viðkvæmt sinni verður traðkað niður av ferføttum hampamonnum, nætur, har ein verjuleysur hugi verður skeljaður sundur av ramheidnum hugsanum um glatan og eld og skuld, nætur, har ein spurin heili verður togaður sundur av túsund royndum, sum hvør ganga mótvegis aðrari, at gita eina gátu, sum í sær sjálvum er heilaspuni hjá galnum missionerum.

…og hygg, nú legst náttin yvir ta lítlu bygdina, og tað

dimmist millum skotini, og eggjarnar hómast ikki meira, og nú hevur mamman signað hann og sagt góða nátt og sløkt petroleumslampuna. Og har liggur Kaisten í myrkrinum, tankarnir fara út at reika, tann sama vegin sum so mangan áður. Hann er uppi við eggjarnar, einsamallur, bølaniða, langt av leið frá fólki og fæi. Øðrumegin er bergið, eggin, beint niðurfyri, og hinumegin er myrkrið, kviðið, á tremur av øllum hugsandi og óhugsandi skapningum, sum hvørja løtu kunnu koma til sjóndar. Hann er rendur fastur á hesi smølu álini millum bláberg og myrkur, sleppur ongan veg…

…og mitt um náttina vaknar hann og roynir at hyggja rundan um seg, men tað er myrkt í kamarinum og kalt. Hvat man Gud vilja honum í nátt? Hann má upp. Gud trívur eftir honum, sum hann hevur gjørt so manga nátt, ja at kalla hvørja nátt í kanska tvey ár, Gud vil hava hann upp, Gud vil hava hann at gera eftir sínum boðum. Men tað er so ringt. Gud er ikki altíð so lættur at skilja. Og hvat man Gud vilja honum í nátt? Eru allar hurðar afturlatnar? Eru øll vindeygu fyri? Kanska ein krani dryppar í køkinum? Kanska høsnarhúslúkan er opin? Og hvussu við skónum og mottunum og skápshurðunum og náttborðunum? Hann fer upp, fer óílatin og skóleysur út á gongina. Tað er kalt, hann skelvur. Fyrst hurðarnar. Hann gongur spakuliga, roynir at gloyma tær myrku væðingarnar, sum gapa ímóti honum, órógvandi og óunniligar, sníkir seg berføttur yvir til hurðarnar, gloppar og letur aftur, viðhvørt tvær ferðir, so eingin ivi skal vera um, hurðar uppiá, hurðar niðriundir, skápshurðar. Man Gud vilja honum meira í nátt? Skógvarnir! Men tað er so kalt at ganga og renna nakin mitt á nátt, hann má fara at lata seg í, hann skal fara inn í kamarið, men steðgar á gáttini, ivast eitt lítið bil,

# Einglavakt



**Sigrun Gunnarsdóttir.** Oljumálningur 2001, 120 x 90 cm.

nei, Gud vildi, at hann skuldi fara niðurundir óílatin, bara í undirbuksum – einki at ivast í. Hann fer oman gjøgnum trappurnar, oman í gongina, drálar, torir ikki inn undir trappuna (hann hevur altíð verið bangin fyri myrkrinum undir trappuni, og hvaðna verri nú, eingin uppi), men nei, Gud krevur tað, hann tekur dik á seg, trilvar inn í myrkrið, finnur skógvarnar, sum liggja har í einum dunga, fer undir at skilja teir, roynir at føla seg fram til støddina og skapið, parar teir og setir teir upp á pláss, síð um síð. Soleiðis! Hann stendur eina løtu, tá hann er liðugur, skelvandi, gásahold, dunkandi hjarta av ótta. Hann fer at smáhoppa fyri at fáa varma í kroppin. Ófriður kemur aftur á hann. Vildi Gud í grundini hava tað soleiðis? Tað var ikki altíð so lætt at vita, hvat Gud vildi. Men samstundis hevði tað ófatiliga nógv at siga at vita tað. Eitt skeivt stig, og helviti gapar framman fyri honum, tankin er ov ræðuligur til at rúmast í einum lítlum barnahuga meira enn ein lítlan part av einum sekundi, einum sekundi, sum kylir hann heilt upp í hvirilin og skjýtur ein sting av markleysari ræðslu ígjøgnum heilan á honum. Hvør veit, kanska vil Gud hesu ferð *ikki*, at skógvarnir skulu standa pent, kanska vil Gud hesu ferð, at teir skulu liggja í einum dunga, sum teir lógu fyrr, hann stendur og ivast, dregur á bæði, ætlar eitt, ætlar so eitt annað, stígur nærri, stígur burturfrá, nærri aftur, so burturfrá aftur, darrar, sendist aftur og fram sum ein heilavillur termostatur…

…og soleiðis hevur so mong náttin gingið, og soleiðis fer so mong náttin at ganga…

Men enn var bara seinnapartur, og tað, sum var hent náttina fyri, og sum fór at henda komandi nátt, vitjaði hann bara í stuttum løtum saman við einum riðili av øðrum spurningum, sum bóru uppfyri, sum hann viltist í. Abbin,

Gud, Vígdis. Og bygdarmenninir. Hví fekk hann ongantíð frið fyri teimum? Hví skuldu teir altíð glósa hann við, at hann altíð spældi við Vígdis? Hvat meintu teir, tá ið teir spurdu hann, hvat hann gjørdi við Vígdis? Hvat vildi Einar, sum altíð skuldi hava tey upp á hoyggjhúsloftið hjá sær? Ein riðil av spurningum, sum troka meiri og meiri á, ein labyrintur, hann er borin inní, uttan at vita, at tað er ein labyrintur, eitt spæl, hann má spæla við í, men hvørs reglur og mannagongd hann ikki hómar.

Børnini høvdu verið uppi á vøtnunum og siglt við holabátum, og so høvdu tey verið ein túr úti á hellu, og nú gingu tey bara og mólu í túninum, har teir hálvvaksnu stóðu og tambaðu gummiskógvarnar ella diskuteraðu motorar ella flokkaðust uttan fyri húsini hjá Elspu, sum í góðum veðri plagdi at lata vindeygað upp og leggja onkra plátu við sjómansvísum á ta einastu grammofonina, sum var í bygdini, ein fornlut við veldugari trakt. Men so stakst tað upp á Kaisten, at hann vildi vera einsamallur, hevði ikki so frægt sum hug at spæla við Vígdis (tað var sjáldan), og sum altíð tá hann gekk og mól fyri seg sjálvan, kom Einar har sníkjandi undan onkrum horni. Einar var ikki sum hinir menninir, meira stillfarandi og róligur, argaði ongantíð, bannaði og blótaði ikki, men hann var heldur ikki fagurlátin og blíður, flenti aldrin og smíltist sjáldan, tað var nakað undarliga ivasamt við honum, sum um rot var komið í sálina hjá honum, og tá hann kom yvir til Kaisten, var tað altíð tað sama, hann vildi honum, um hann ikki hevði hug at fara upp á hoyggjhúsloftið hjá sær (Einar var bóndi og gamal drongur) við Vígdis. Hvat til? spurdi Kaisten. Jú at gera tað, svaraði Einar. Gera hvat? spurdi Kaisten. Tað, sum hann plagdi at gera við Vígdis, svaraði

Einar. Tey kundu bara fara upp á hoyggjhúsloftið hjá sær, tað var gaman í, hann skuldi nokk ansa eftir, at eingin kom. Og Einar sá so løgin út, turrar varrar, flusnaða húð, so *undarligur*. Og Kaisten skilti ikki, hvat hann meinti við (tað fór hann at skilja eitt ár ella tvey seinni), men kortini skilti hann, at tað var nakað undarligt og duldarfult, og nakað, sum hevði nógv at týða fyri Einar. Og hann segði ongantíð nakað fyri nøkrum um hetta. Og við Einar segði hann bara, at tað kundi bíða til eina aðru ferð, ella at hann skuldi okkurt akkurát tá, og hann føldi seg so undarliga sekan, sum um hann hevði gjørt honum fortreð. Og so slepti hann sær vekk.

Og nú var eisini tíð at fara í sunnudagsskúla, og har sungu tey sálmin „Undir tínum veingjabreiði“, og áðrenn tey begyntu at syngja, fortaldi sunnudagsskúlalærarin teimum um sangin, og Gud, segði hann, er sum ein bøga, ið breiðir sínar fløvandi veingir út yvir okkara oyggjar og fjálgar um hvørt kykt og verjir landið og vermir fólkið, og „undir tínum veingjabreiði“, hugsaði Kaisten, men hann sá ikki varman og verndina av veingjum Guds, hann sá gamla Jóannes, sum seyp buding, meðan hann tosaði um tær smáu syndirnar, og hann sá tey ivandi og mungandi og rotaðu eyguni á Einari og ta flusnaðu húðina, og hann sá missionerin, sum við síni klænmæltu, køldu rødd tosaði um seymin, ið brotnaði, og hann sá gudlýdnar hampamenn, sum framdu ófatiligar gerðir í myrkum neystum, og hann sá dómadag og helviti og endaloysið og ævinleikan, og hann sá óvitar snerkjast uttan íhald til tíðarinnar enda, og hann sá bálið, sum brann í allar ævir, og tó var tað bara ein hóming av tí, sum seinni fór at koma, tí brátt fór at bragda í honum, undarligar kenslur fóru at vakna, ein heilur heimur av trongdum fór at kykna í honum, og hann

fór at síggja himmalin allan sum Guds eyga, og Guds eyga fór at elta hann, hvar hann fór, og Guds fingur fór at peika eftir honum, hvar hann stóð, tí hetta vóru ikki longur tær smáu syndirnar, hetta var tann ræðuliga, botnleysa syndin, og Gud fór at jagstra hann, og Gud fór at finna hann, kanska í eini veit, skelvandi og sorlaðan av ófatiligari skuld um ófatiligar gerðir, kanska aftan fyri ein køst ella á einum nátthúsi ella undir einum bergkletti, og hann fór at renna seg fastan í eini gátu, sum aldrin kundi ráðast, og hann fór at villast í eini fløkju av óndari og ísakaldari gudstrúgv, ívovin ein deymandi skvøtt av bruknaðum bygdaerotikki, og av hesi fløkju fór hann hetta kvøldið at kenna ta fyrstu hómingina og smakka tann fyrsta fyrijáttandi munnbitan.

Tí um áttatíðina kom prestbáturin aftur, og øll børnini vóru niðri í fjøruni og forvitnaðust og róptu og hjálptu til at draga.

– Kom nú niðan við tær, segði pápin við Kaisten, tá teir høvdu drigið bátin. Tað var farið at skýma. Væl av vindi. Grátt í veðrinum. Tað mundi fara at regna.

– Kann eg ikki sleppa at spæla, bara eina lítla løtu afturat.

– Nei, tað er so seint nú. Mamma tín bað meg hava teg niðan við.

– Bara eina lítla løtu. Tey fara at spæla tví fyri meg. Bara ein tíma.

– Íðan, far so meðni. Men so *skalt* tú eisini vera haruppi um ein tíma.

So spældu tey tví fyri meg, og í fyrstuni vóru øll børnini við, eisini tey smáu, og tey beistaðust og runnu og sungu, og alt var spæl og gloymska, og eisini Kaisten, ja kanska mest hann, gloymdi seg í spælinum uttan tær fáu, stuttu løturnar, tá tað hann kendi og visti um og hevði roynt fyrr trokaði

á, og ein hóming av øllum tí dulda, sum hvørja løtu kundi geva seg til kennar, fór ígjøgnum hugan á honum, ein hóming av fjaldum murum, duldum trongdum, loyndum ynskjum, sum órógvaðu hann og varpaðu ein skugga av døkkum innhugsni eftir andlitinum, sum so hvarv, tá hann aftur gloymdi seg í spælinum. Men nú skýmdi meira og meira, mammurnar komu út á gáttina og róptu børnini inn, summi tímdu ikki meira og fóru heim av sær sjálvum, og skjótt vóru bara nakrir fáir dreingir eftir og so Kaisten.

– Kom upp á pakkhúsloftið og spæl, segði ein av dreingjunum, sum eftir vóru.

Teir fóru. Kaisten hevði ongantíð verið har fyrr, pakkhúsloftið var fyri honum ein av gátunum í bygdini, eitt mysterium, sum hann higartil hevði verið ov lítil og ov óroyndur til at sleppa at síggja nakað av, nakað sum Bakkahúsini, sum vóru so fín, at hann ræddist tey og føldi, at hann ongan *rætt* hevði til at síggja tey innan. Teir fóru upp ígjøgnum ein stiga og inn ígjøgnum eina hurð í skjøldrinum. Uppi á loftinum var heilt myrkt, men hann hómaði kortini inni undir væðingini boyur og snøri, tómar tekassar, húkar og súlur, og innast í øðrum endanum eitt desaskapilsi. Og nú bleiv Kaisten innvígdur í hesa gátuna og kom eitt stig uppeftir í óvitahierarkinum og var errin, men eisini eitt sindur bangin. Dreingirnir sótu og prátaðu og høvdu tað hugnaligt, fortaldu stuttligar søgur, og so fóru teir at beistast, og knappliga feldu teir Kaisten niður, og tað var jú bara í spølni, og ivaleyst bregðaði hann til abban, men teir vóru jú fimm, og hvat hjálpti tað, har var Karmal, longu grannvaksin, tó at hann ikki var meira enn ellivu ár, stórur og sterkur, umenn eitt sindur óskotligur, og Asbjørn, ið var elstur, herðasligin, lítil og klænur, eitt lítið óvargadýr, ikki bangin fyri at klípa og bíta, um neyðugt var,

og so var tað Olivar, sum hevði so undarliga bleika húð, og sum altíð var so stillur og sýntist so friðarligur, sum líkasum lá og bøldi oman á einum ræðuligum, duldum óflýggjaskapi, var óhugnaliga sterkur og kundi vera ein fani viðhvørt og plagdi at benda armin á teimum smáu úr lið, tá hann vildi hava tey at gera sær eftir vild, og so vóru tað Heini og Nils Jákup, og allir vóru teir eldri enn Kaisten. Tað var jú bara spæl, søgdu teir við hann, tá hann begynti at trútna í andlitinum, og harragud, tað *var* jú bara spæl, skemt, smádreingjalótir, men so kom Asbjørn (hann visti tað!) við einum meira álvarsomum uppskoti, og allir hinir tóku undir við honum og søgdu: – Ja, kom! Ja, kom! og nú var tað ikki stuttligt meira, hann royndi tað hann kundi at verja seg, spjálka, um ikki annað, sparka, men skjótt fingu teir um beinini, ein um hvørt beinið, tá beit hann ein av teimum í armin, og – Bítur tú, tín fani! søgdu teir, og nú var eingin náði, teir hildu honum, tveir framman, ein um hvørt beinið, meðan Asbjørn (sjálvandi) knappaði upp. Og so prátaðu teir, tingaðust, góvu skotsmál, hildu vera stuttligt. Men mitt í øllum kom eitt høvd upp ígjøgnum pakkhúslemmin, tað var keypmaðurin, Jákup, og so sleptu teir honum, og runnu avstað, og har lá Kaisten, víðopin á gólvinum, Kaisten, sum bregðaði til abban, hetjan hjá mammu síni, dygdin í ættini. Jákup, ein spakligur, eldri maður, dovin og seinførur, men kendur sum hampamaður og gudsmaður, og eitt álitisfólk, smílkaði fyrst eitt sindur, men so begynti andlitið at darra, hann læði upp á sín egna lata, spakliga máta, mestsum innantanna, ikki nógv, men tað sást, at hvør kjøtbiti gekk kykur, og meðan Kaisten royndi at koma upp á føtur í hoynum og fáa buksurnar upp um seg, kom umframt skommina aftur henda undarliga kenslan á hann, sum hann hevði havt við døgurðaborðið

# Segl



**Tita Vinther.** Vevmynd 2007.

um morgunin, gjógvin, múrurin, og eina ferð afturat fekk hann at vita, at líka mikið hvør ið hjálpti, og hvør ið ikki hjálpti, hjá teimum *vaksnu* var eingin hjálp at fáa og eingin fatan.

Hann fór upp sum ein flongdur hundur, knappaði buksurnar og skuldi royna at hampa seg, áðrenn hann fór avstað, men fekk ikki stundir til tað, tí allir dreingirnir vóru ikki farnir niður av skjøldrinum, Asbjørn og Nils Jákup vóru eftir, høvdu bara krógvað seg inni undir væðingini, og tá Jákup var horvin niður ígjøgnum lemmin, í kíki innantanna, sáttliga gvaggandi sum ein froskur, komu teir fram aftur úr myrkrinum, og so løgdu teir á hann eina ferð afturat, og nú kom Asbjørn við einum nýggjum uppskoti, ivaleyst einum betri uppskoti, og so feldu teir hann inn móti desini, og Nils Jákup helt honum, meðan Asbjørn loysti niðurum, og teir skiftust um at halda, og fyrst gjørdi annar tað, og so gjørdi hin tað, og eftir hetta fór hann altíð at minnast tivini og luktin av hári, ið hevði verið óvaskað í mánaðir, og luktin av sjógvi og gravskitnum troyggjum og so tann rama deymin, ið minti um fótasveitta ella graðar hundar.

Tá hann smoygdi sær heim tað kvøldið, var myrkt, og tey flestu høvdu tendrað. Tað hevði regnað, vegirnir vóru vátir, tað skygdi í onkrum hyli. Fólk vóru farin inn. Einastaðni ríkti ein hjalshurð, og nakað uppi í bygdini stóð ein gamal maður og royndi at fáa kúnna at stíga upp um fjósgáttina. – Far heim og legg teg stakkalin, nú er myrkt. Men Kaisten troystaði sær ikki at svara aftur, tey vaksnu, hugsaði hann, so býtt, so góðvarin, so sakleys, honum tykti synd í tí gamla manninum, sum tosaði við hann, Kaisten, sum um hann var eitt fólk, sum hini, nakað vert. So trúskyldig og full av áliti, tey vaksnu, neyðardýrini! Gráturin var stirðnaður, hann

royndi at fáa buksurnar longur upp og royndi sum frægast at skava mykju og tjøru burtur av knøunum, tær høvdu verið gullreinar um morgunin. Í missiónshúsinum var ljós, hann hoyrdi, tey sungu „Eg veit ein góðan seyðamann“, hann kveitti inn ígjøgnum ein rút, men skundaði sær víðari, hann kendi ein sting av ringari samvitsku, sangurin og ljósið og trygdin var ein pína og ein áminning um ævigan útirakstur. Tað var eisini tendrað, tá hann kom heim, primuslampan stóð á borðinum, og har luktaði av sápu og nýbakaðum bollum, og hann kom uttan úr myrkrinum og blakaði skógvarnar av sær, og ljósið var so bjart, at hann mátti krympa eyguni saman, í tí hann kom inn. Har sótu tey øll rundan um borðið, foreldur og systkin, ein onnur verð, ein fremmand verð, ein trygg verð. Mamman hugdi at honum, *hennara* drongur, sum hevði nøsina og pannuna og høvuðburðin á abbanum, nú so lítil, men kortini longu ein knassi, ein spíri til nakað stórt (eitt sindur skitin í kvøld, hann hevði beistast, men hvat so, tað gjørdu allir raskir dreingir), eina ferð ein rættur maður, tað besta í slagnum. – Nú ert tú nakað móður, stakkalin, segði hon. Og hann begynti at lata seg úr troyggjuni, einsamallur, uttanfyri, hinumegin eina gjógv av skomm, skitti og smildraðum stoltleika, óbøtiliga hesu ferð, og um allar ævir.

KRISTIAN OSVALD VIDERØ

# Himnafaðir, eg teg biði

Himnafaðir, eg teg biði,
eg hin útlægni, sum ligið
havi úti allan tíð,
slepp mær inn um tínar gáttir,
deyðakaldur eg og nátt er,
ei eg beri boð í bý.

Hóast alt eg barn títt eri,
krossmarkið eg á mær beri,
tó at kámt tað er at sjá,
illa skurslað til og skavað;
men svá djúpt tað í var gravað,
og tað sæst enn, hvør meg á.

Lát, o Drottin, kross tín lýsa
fyrir mær og vegin vísa,
tann, sum liggur heim til tín;
vegir manna her á foldum
enda allir undir moldum,
ver tí tú nú vegur mín.

Ei mun nakar, sum teg biður
tómhentur, eins og tú sigur,
fara tínum durum frá;
himnaríkið tú oss gevur,

har sum valdið alt tú hevur,
bæði jørð og himni á.

TÓRODDUR POULSEN

# Fjarskifti

telefonin við sínum ófrættakendu handilstónum
liggur sløkt í lummanum

vit liggja her sum partur
av einum rapaðum garði

sjónarringurin
er bara nakað vit síggja

sandspannin er aftur nakin innan
stendur kúrr og týðir grasið

ein firvaldur situr á mínum knæi
í hvussu er annar okkara
leingist eftir gudi
tað er so gott at vita
hvørjum eg skal takka fyri
at skapanarverkið angar sum tað ger

# Genta í rúmi



**Ingálvur av Reyni.** Oljumálningur 1992, 110 x 85 cm.

WILLIAM HEINESEN

# Brot úr „Móðir Sjeystjørna“

**Dópurin**

Barnið má doypast og fáa eitt navn. Tað hevur longu drigið ov mikið út, longur enn væl er, og nú má tað gerast. Trina fær hetta í lag við manandi ávaringum.

Ikki minst í tílíkari sjúkligari tíð sum hesari er vandi fyri, at barnið fer ódoypt í grøvina, so tann neyðars lítla sál verður dømd til at valtra uttan hvíld í ytsta myrkrinum millum heidningarnar og fær ikki syndanna fyrigeving og ævinligt lív.

Trina hevði ógvuliga nógv hættisligt at siga, hon mest sum veksur við hesum og verður øgilig, eyguni lýsa, vølvueyguni neista. Jú sjálvandi, drongurin má doypast, ikki fjakka í tí óvissa. Móðirin tekur barnið inn at sær við afturlatnum eygum og óttasomum, opnum munni, tykist at hennara óró ger Trinu nøgda, og hon glíður aftur í sítt vanliga hvønndagslag, lovar at fáa fyribúgvið alt sum krevst. Hon breiðir hita um seg og veruliga nyttu.

„Men nú er tað navnið. Hví skal hann eita Arildur, hvat er hetta fyri lótir, hvør var Arildur? Ja, tað veit eingin, kanska heidningur, ein gudnoktari ella drápsmaður, nei rópa hann Jákup, tað vita vit tá um at siga: Jákup var sterkastur av monnum gjøgnum allar tíðir, tí hann bardist við Gud og vann, noyddi hann til at vælsigna seg.“

Trina leggur virðiliga afturat og skeitir til Jákup Siff: „Men sjálvandi er tað ikki hvørs mans føri at bera navnið Jákup.“

Nú leggur lítli handilsmaðurin uppí: „Ikki tí, eg eri einki bíbliusterkur soleiðis, men eg veit tó um patriarkin Jákup, at hann snýtti beiggja sín, Esau, fyri faðirarvin.“

„Hann keypti faðirarvin,“ rættaði Trina, „Esau seldi síni rættindi, Jákup keypti tey rætt og ruddiliga.“

„Nú, ja ein keypmaður kann helst ikki hava stórvegis at siga til hetta – uttan tað, at keyp og søla kann vera so mangt.“

Jákup verður hann so at eita, eitt sterkt navn, sum kann vera honum at gagni í stríðnum fyri lívinum.

„Men er hann fyrst doyptur Jákup,“ sigur Trina spotsk, „kann tú rópa hann fyri mær hvat tú vil, Arild Snutt ella Tutt sum teg lystir.“

Tann unga móðirin skeitir særd og ótrygg: Hví hatar tú hann, Trina? hugsar hon við sær.

Og Trina fatar beinan vegin henda orðleysa spurna og hevur svar fyri sær: „Tí hann er grógvin av tíni synd, fruktin av tínum ólýdni!“

Men samstundis er í hennara eygum ein iðran, ein jamrandi bøn til Antoniu: „Fyrigev, fyrigev! Tí tú er jú mín at siga, ella hvat, dóttir mín, mítt neyðars, vilsta barn.“

Og Trina søkkur eina løtu inn í seg sjálva, verður fjar í eygunum og minnist á hesa lítlu, móðurleysu gentuna, sum var hennara lívsinnihald, hennara gleði og sorg, hennara roynd og skammiliga tap. „Men hvat annað skuldi tað vera – við tínum foreldrum við teirra úrsýndu byrðu av arvasynd.“

Tó enn eru allir leikir ikki leiktir, gev tol, gev tol, langmóðugur er hann, tann mikli, sum stendur og dunkar á hjartadyrnar.

Trina stílar fyri øllum.

Deknurin nevnir smittuvandan í hesi farsóttartíðini,

beinast at doypa barnið heima. Nei, slættis ikki, heldur Trina. Kirkjunnar halga hválv skal holva seg yvir hesa atgerð. Heimadópur hevði kanska sámt hjúnabarni, men leysingabarnið skuldi ikki doypast í duldum, og kirkjuklokkan mátti ringja yvir tí. – Jú, hetta var eitt knóligt barn, helt Trina, drúgvast toldi tað eitt sindur av kulda og smittuvanda. Eitt sindur fara vit eisini at líta á váran Harra og skapara…!

Sunnukvøldið klokkan sjey, ja takk. Verður so við kveiktum ljósum, so mikið betri.

Gummurnar verða Trina sjálv, sum skal halda, frú Nillegaard, sum heldur húgvuni, triðja er Urania Mireta, sum vildi so staðiliga sleppa við. Gubbarnir verða abbi barnið og Ekkehart, systursonur Trinu.

Nú verður hetta unga lív borið til dópin og á fyrsta sinni, síðan tað kom í heim, burtur frá henni, latið upp í hendurnar á øðrum, meðan hon sjálv situr einsamøll á einari brík í tí stóra kirkjurúminum. Tað fer ikki at vara leingi, so verður hann aftur hjá henni, og tó kennist tað, sum hesa fyrstu ferðina hendir okkurt lagnumikið, óbroytiligt, ein øgilig gjógv letur seg upp og eingin brúgv tvørturum.

Tann manntóma kirkjan er køld og hálvmyrk, altarljósini nøtra rødd framman fyri teirri stóru myndini av Kristusar jarðarferð, og frá teimum fáu munnunum og nasunum, ið inni eru, stendur hvítur andi út sum svørð og spjót.

Við vøggu syngja einglar tínir,
so geri teir til síðstu stund.
Tað sum tú krossar, við tú krýnir.
Tú tríni við í deyðans lund.

Løgin, torskild, bangin orð. Grøvin, deyðalundin! Tað er jú ein barnadópur, eingin gravarferð, hugsar hon.

Men nú fer hesin lítli skarin á gongd, træðar innar í kór, inn í skýma dalin undir gravarmyndini, har tann svarti presturin stendur við skírnarfuntin. Drongurin knarrar og eymkar seg í ørmunum á Trinu, hann verður meir og meira ólátaður og skríggjar so tað rungar um kirkjuna.

Men nú tekur Trina ta lítlu húgvuna av høvdinum á honum, og prestur ritar við hvítari hond krossmerkið yvir hann, vígir hann til tann krossfesta. Og gjøgnum tann óflættiliga fossin av barnagráti hoyrast tey sigursælu ja-orðini frá Trinu til allar prestsins løgnu spurnar, har Sátan og plágarin Pontius Pilatus, helheimur og tann ytsti dómurin var havt á lofti í nøtrandi álvara, men tøkk fái Gud, umsíðir eisini uppreisn likamsins og tað ævinliga lívið. Móðirin krøkir seg neyðstødd í tað ævinliga lívið, tað fjara várlandið, har tann náðuga sólin sær og hitar.

Tí hættisligur er gudur Trinu og hansara krossfesti sonur, uppskakandi. Av tungum huga tekur tú við honum, soleiðis sum milliónir av møðrum hava gjørt tað undan tær, men aldri kann tú koma til at ynda hesar gudafeðgar, tann ræðuliga sonarblótaran og hansara sakleysa offur.

Tann gamla altartalvan, í hennara skugga dópsfunturin, minnir um grimar hendingar í heiminum, til tær verða vit vígd í dópinum. Hon myndar tá deyðpíndi menniskjusonurin verður gravlagdur. Grøvin er ein hola tvørtur ígjøgnum ein grótrygg, undarliga ómátalig undir tí tyngjandi dagseturljósinum, og gjøgnum tann lága munnan hinumegin sæst eitt sútnívt kvøldlandslag, móti tí bleika undirgongu-himninum síggjast teir tríggir krossarnir á deyðamannaheygnum daga í veðrið, skeivir og avlagaðir, rópandi í hjálparleysum mótmæli.

Fremst í holuni standa fýra hálvnaknir menn, svarthærdir við koparbrúnum andlitum og ørmum, ið bukka seg yvir tann deyða, sum teir leggja til rættis á holugólvinum. Hann er nakin, bleikur og óhugnaligur, grønur og blæmutur í holdinum, sum hýggjað línklæði, og við eymfrómum deyðssmíri um innfalna munnin. Men við høvur hansara nigu tríggjar kvinnur í nívandi sorg. Ein teirra er móðir hansara, hon sum bar hann í heim, her situr hon hjá honum í teirri myrku holuni. So tungt tað er henni, so pínandi tungt.

Og í tí sama er alt so køvandi ræðuligt: Krossar, tornutir kvistar, drigin svørð, alheimsins ófatiligi óndskapur, neyð og pína, glíður í uppskakandi myndum gjøgnum hennara sál. Barnadrápini í Betlahem, angistróp frá smádreingjum og møðrum, ónyttug neyðarróp, blóðgaður kavi og svartir kroppar, sum ravnar flykkjast uppi yvir, knústar vónir, endaleys kríggj, eirindaleys kanóngoyggj, sníkjandi eiturgass, avoyddir býir og milliónir av ungum líkum, sum einaferð vóru vælskapt dreingjabørn og møðranna ljósu dreymar… Og allir verða teir sum hann, hildnir yvir ein skírnarfunt og vígdir tí krossfesta.

Tí tann bleiki maðurin á krossinum er ikki bert gudur teirra píndu og neyðstøddu, men eisini tann gudur teir vándu krígsmenninir og bøðlarnir kalla á, ein gudur fyri ófriðarmenn, sum plága fólkasløgini.

Men umsíðir er hetta halga tiltakið liðugt. Tann spraklandi drongurin fellur til ró við móður barm. Vørildin glíður aftur í legu. Prestur tekur í hondina á teirri ungu móðurini, sigur nøkur vanlig orð, og tað situr eitt sindur av tornaðum rakiskúmi øðrumegin í kinnskegginum. Ekkeharts góðu eygu við sínum hvítu eygnahárum hvíla á henni, lata friðar-

ligar gerandisdagar drepa grøðandi dropar í hennara sinni.

Hon fær sína dýru gávu til sín, alt er aftur í lagi, lívið er ríkt, nýtt og ómátaligt.

*Heðin Brú føroyskaði*

LYDIA DIDRIKSEN

# Frostrósan

Hon hugdi og hugdi og lurtaði og lurtaði. Men myrkrið svølgdi alt kring hana, hon sá bara tann velduga hávakjaftin, ið skolaði tvørtur um brimgarðin og hótti við at gloypa henni. Sjórokið brendi í eyguni á henni. Hon krepti tey saman, alt tað hon var ment, men einki hjálpti – tað gjørdi bara sviðan verri.

Gangurin frá briminum var so øgiligur, at hon kendi tað, sum fór hann at spreingja hana sundur í túsund pettir.

So, nú hoyrdi hon tað aftur. Hesa ferð ljóðaði tað sum ein eymkan langt, langt burturi. Onkur *mátti* vera har úti, sjálvt um hon einki sá.

Hon skimaðist heim eftir bryggjuni til at vita, um ikki onkur var í nánd, sum fekk hjálpt henni. Men nei, í nátt var hon einsamøll. Púra einsamøll. Umgird av ódnini og myrkrinum. Og ongantíð áður hevði hon havt so nógv brúk fyri hjálp.

Hon stóð inni undir pakkhúsinum úti á bryggjuni og megnaði so dánt at fóta sær. Hon helt við báðum hondum um eitt handtak á eini goymsluhurð, men hon visti, at skjótt orkaði hon ikki meira.

Sjálvt um húsaveggurin vardi hana, so fekk vindurin ferð eftir ferð í hana, og tveitti hann hana aftur og fram. Á, hevði hann bara kunnað tveitt hana heilt inn á goymsluna, so var sloppið.

# Latitude



**Svanhild Strøm.** Installatión 2004, H 50 cm.

Tá ið óløgini – hesir ræðuligu hávakjaftarnir – komu brestandi inn móti henni, var tað, sum um øll luftin bleiv trýst út úr henni. Hon hevði bestan hug at lata seg glíða inn í ein aldukjaft, so hon kundi fáa frið. Hon orkaði ikki henda ruðuleikan.

Hon var rennvát og útlúgvað. Hon visti ikki, hvussu leingi hon hevði staðið undir pakkhúsinum, men hon føldi tað, sum stóð tíðin still, sum fekk hetta ódnarveðrið ongan enda – og sum hevði tað onga byrjan heldur. Hon hevði ongantíð áður kent seg so hjálparleysa, so einsamalla og innigirda.

Ódnin var komin so óvart á hana. Hon hevði ikki varnast hana fyrr enn ov seint. Hon visti ikki um slíkt harðveður á várdegi. Ella kanska mintist hon tað bara ikki. Hon helt seg vita, at ódnin hoyrdi vetrinum til. Men kanska var tað ikki so, tí veturin og kavin hoyrdu saman. Tann reini, hvíti kavin, ið fjaldi alt tað gráa, og sum kundi fáa sólina at læa, so tárini skinu sum gimsteinar í kavanum.

Hon mátti fara út á molan, tí onkur var har úti. Hon hevði við millumbilum hoyrt róp og venan, onkur mátti vera har, onkur, sum bardist fyri lívinum, og sum hevði hennara hjálp fyri neyðini.

Hon hugdi yvir móti brimgarðinum, og hon sá bara ta østu skúmandi froðuna, sum stoyttist inn yvir molan. Hon kundi ikki megna at fóta sær í hasum vitleysu óløgunum. Eingin var at hjálpa henni. Kjafturin fór at læsa seg um hana og svimja av stað við henni. Tað var høpisleyst. Hon hevði einki at halda sær fast í, einki kundi verja hana úti á molanum. Hávakjaftarnir gleivaðu sum einki um tann himmalhøga brimgarðin. Og vindurin var so hvassur og harðrendur, at hann fór at syfta hana lúkst út á bládýpið. Nei, hon fekk einki gjørt. Hon mátti lúta.

Kanska var eingin har úti kortini. Kanska vóru tað bara aldukjaftarnir, sum gríslaðu soleiðis. Ella – kanska hoyrdi hon bara yvir seg av berari ræðslu – hon hevði jú einki sæð.

Vindurin linkaði eitt sindur, og hon eygleiddi tann hvíta broddin í náttini. Hon varnaðist ein ljósglotta, sum kom bóltandi undan fjallinum. Og nú sá hon eisini, hvussu skýggini róku við fullari ferð. Dimm og hóttandi ferðaðust tey algoyst eftir himmalinum.

Vónin kyknaði upp aftur innan í henni. Kanska var ódnin um at hæsa av. Kanska fór tað skjótt at daga. Ruðuleikin, sum myrkrið og hávakjaftarnir skapaðu innan í henni, tømdi hana fyri lívsmegi og køvdi allan hennara lívsvilja.

Nú føldi hon møðina av álvara. Eygnalokini duttu saman, og alt varð svart. Kroppurin kendist so undarliga tungur og deyður, sum var hann ikki til. Hon føldi onga brennandi pínu longur. Innan í henni var alt steðgað. Tað var bølamyrkt og kvirt.

Brádliga stakk hon upp. Eitt skerandi ýl fór tvørtur ígjøgnum hana. Og hon hoyrdi seg sjálva ýla afturímóti. Á Gud, onkur var har úti kortini. Og nú helt hon seg kenna røddina. Hon mátti fara hagar. Hon *mátti*.

Hon kikaði út í myrkrið, men hon sá ongan. Alt stóð í einum – óløgini vóru størri og øgiligari enn nakrantíð. Tað *var* vónleyst. Slepti hon handtakinum, var hon deyðadømd. Hevði bara onkur komið til hjálpar.

Ein hvirla kom og tók hana, og hon feyk um húsarhornið.

Hon hoyrdi orgultónleik. Hon leit rundan um seg. Hvar var hon – hvat var á vási? Hon sat inni í eini kirkju á aftasta beinki. Eingin sat henni við lið. Nú sá hon, at kirkjan var stúgvandi full av konum. Tær vóru allar í svørtum og vendu henni bakið.

So fekk hon eyga á kistuna. Hon stóð har frammi og sá so lítil út. Onkur mundi vera deyður, men hví var hon hjástødd? Hon hevði ongantíð verið til eina jarðarferð.

Brádliga varnaðist hon, at konurnar høvdu vent sær á og stardu at henni. Hon hugdi spyrjandi aftur, men fekk einki svar. Tær sóu so løgnar og fornar út. Eyguni vóru so tóm og glær. Hon fekk ikki gjørt av, um tær vóru deyðar ella livandi. Øll andlitini sóu steindeyð út, sum um tey bert vóru myndir ella skuggar. Tey vóru so bleik, og einki rørdist í teimum. Samstundis sóu tey óhugnaliga eins út, sum tey høvdu sama aldur og somu lagnu. Einki lív spegladist í teimum.

So sá hon, at eisini hon var klødd sum tær. Hon skilti einki. Men kanska kendi eisini hon hana, sum lá í kistuni. Hon mátti fara at hyggja. Hon vildi reisa seg, men kroppurin var eins og deyður, hann rørdist ikki. Hon hugdi niður á føturnar og royndi at flyta teir, men har var einki at gera. Hon hevði einki samband við teir – hon føldi teir ikki. So var einki annað at gera enn at heita á konurnar frammanfyri og spyrja, hvør tað var, ið lá í hasi kistuni. Hon *mátti* vita tað. Men einki ljóð kom frá henni. Hon varð ræðslusligin…

Og júst tá tagnaði orgultónleikurin, og presturin fór at tala. Við hátíðarligari rødd og strongum andlitsbrá lovprísaði hann Harranum, tí enn eitt barn hevði funnið vegin heim.

Tá hon kom heim, stóð mamman fyri henni. Hon ynskti so inniliga at tveita seg í føvningin á henni, kenna hitan frá henni og krógva seg í teimum bleytu djúpu dølunum. Bara blunda og kenna tryggleikan. Men okkurt forðaði henni. Hon fekk ikki.

Hon hugdi við undran inn í eyguni á móðurini, og hon sá okkurt, sum hon ikki fyrr hevði sæð. Nakað fremmant. Nakað nýtt. Nakað, sum minti hana um konurnar í kirkjuni.

Hon mátti sleppa sær burtur.

LINA SANDELL

# Ongum er so trygt

1. Ongum er so trygt at fara
sum Guðs lítla barnaskara,
fugli ei í leyvi fjøldum,
stjørnu ei í himnatjøldum.

2. Harrin er á Sions fjøllum
vernd og skjøldur fólki øllum,
vil teim miskunnsamur vera
og á faðirørmum bera.

3. Eingin eydna, eingin vandi
slíta av skal barnabandið.
Hann sum vinur ber av øðrum,
veit um alt í øllum førum.

4. Hann øll hár á høvdi telur,
hann hvørt tár úr eyga fjelur,
okkum føðir, okkum klæðir,
gleðir, um so sorgin bagir.

5. Hvat hann tekur, hvat hann gevur,
faðirs hjartalag hann hevur,
og hans vilji er hin sami:
barnsins sanna gagn og frami.

6. Væl tær veri, lítla skara,
Jákups Guð teg væl skal varða;
honum, sum fekk megi alla,
fíggindar til jarðar falla.

7. Og tá her er farin dagur,
neyð er lokin, tagna klagur,
børn øll síni rødd hans kallar
heim til gleði ævir allar.

*Jákup Dahl týddi*

# Sjálvsmynd



**Marius Olsen.** Radering 1989, 59 x 39,5 cm.

ALEXANDUR KRISTIANSEN

# Brot úr „Man guð vera nøgdur“

Man guð vera nøgdur við skapanarverkið
man hann einki hava at finnast at
hevur hann einki at brigsla sær sjálvum
ivast hann ongantíð í um gerðir hansara vóru rættvísar
man hann góðtaka seg sjálvan treytaleyst
man hann ongantíð hava havt hug at tendra tey ljós aftur
sum kristna siðmenningin í øldir hevur sløkt
man hann ikki sakna lívsgleðina í skapningum sínum
merkiligu og djúpu virðingina villu fólkasløgini høvdu fyri lívinum
man hann hava fyrigivið Innocens páva hansara inkvisitión
hevur hann grátið um krossferðirnar og jødajagstranina
man hann nakrantíð hava hugsað um at skapa seg av nýggjum
man hann nakrantíð hava fjalt andlitið í skomm?
eg spyrji bara
eg livi mítt lív sum eitt komma í tíðini
tíðin hevur ikki brúk fyri mær
tíðin hevur brúk fyri nýggjum orðum
nýggjum teknum
og tess høpisleysari alt sær út
tess meira líkjast tey einari bøn
til henda guð sum er ein eftirgerð
av sær sjálvum

# Hví stendur tú her



RÓI PATURSSON

# Býurin (og reklaman í glugganum)

Hin deyða myndin
í glugganum
gjørdist livandi
tá eg gekk framvið,
tí eyguni fylgdu.

Eg steðgaði
og hoyrdi teir gingu í kvøld
sum í gjár
og í morgin.
Túsund blindir menn
frá verksmiðjum og skrivstovum,
móðir og troyttir
rugga teir framvið myndini
í glugganum
sum dømir og lokkar.

Kroppurin
gjørdist til herðaslignan mann
tá húsini
við tómum eygum
toygdu seg yvir gøtuna,
tveittu ljóð frá leðurskóm
millum sín.

Tá bilar
og bilar og aftur bilar
úr køldum jarni
gresjaðu kvøldið
og trýstu kjálka mín
inn móti glugganum,
tá var eg bangin,
vilstur millum húsini,
eg var ein mynd,
ein bilur ella ein blindur.

Sum eitt einsamalt
blaktrandi kertuljós
á klótuni.

# Power



**Annika Hansen.** Oljumálningur 2008, 120 x 100 cm.

SÓLRÚN MICHELSEN

# Summi renna í stuttum brókum

Ein rennari spurdi meg ein morgun, eg var á veg til arbeiðis:

– Hey, tú. Kanst tú siga mær, hvussu nógv klokkan er?

Eg svaraði: – Tíggju minuttir í.

– Í hvat? spurdi hann.

Eg stardi eitt sindur at honum. – Í átta. *Sjálvandi,* legði eg lágmælt aftrat.

Var tað onkran annan tíma á degnum, hevði eg kanska ikki hildið tað verið so sjálvsagt. Men klokkan átta? Tá øll runnu fyri lívinum at náa til arbeiðis?

– Okey. Takk fyri. Eg veit hvørki dag ella tíma.

Hann risti við høvdinum og helt fram at renna.

Eg fór mína leið meira enn eitt sindur ørkymlað. Spurningar mólu sum vilstar vespur í knokkinum.

– Tað er eisini mikudagur 18. oktobur. Var tað meira, tú vildi vita?

Eg stríddist nú mínar átta tímar og hevði satt at siga gloymt alt um hetta, tá ið eg aftur kom fram við vøllinum og sá mannin renna við sama lag.

– Hey, tú. Kanst tú siga mær, hvussu nógv klokkan er?

– Tíggju minuttir yvir fimm, svaraði eg.

– Morgun ella kvøld?

Nú stardi eg aftur. – Kvøld, segði eg hvatliga.

– Takk fyri. Má renna.

Hann fór. Eg sá eina slóð í vøllinum, har hann hevði runnið allan dagin.

Eg fór heim, men eg hugsaði nógv um mannin. Ja, fyri at siga sum er, fekk eg hann ikki úr tonkunum.

Hvussu leingi mundi hann hava runnið, tá ið hann ikki kendi dagin ella tíman? Hevði hann runnið so leingi, at einki var eftir av skili? Ella var hann komin uttaneftir? Var hann kanska ein av hesum rúmdarverunum, sum ferðaðust, og hevði tikið mannaham á seg? Kanska var hann vilstur. Hvør veit? Endaður í Gundadali, tá ið hann skuldi verið við í onkrari maratonrenning millum stjørnur. Skeivt forritaður.

Eg hevði altíð ynskt mær ein slíkan tíðartúr. Men eg vildi sjálv sloppið at avgjørt, hvagar eg fór, og hvønn, eg skuldi vitjað.

Seinni sama kvøldið spákaði eg mær ein túr. Eg hevði ikki ætlað mær tann vegin, men uttan at varnast tað, var eg farin somu leið sum um morgunin. Nærri eg kom vøllinum, meira angraði eg, at eg var farin henda vegin. Eg hevði ikki hug at ganga framvið, men kagaði út undan horninum á áskoðaraskýlinum at vita, um tað mundi vera so galið, at hann rann enn.

Jú, eftir eini løtu sá eg ein skugga fara framvið har niðri. Hvat skuldi eg gera?

Ringja eftir løgregluni ella hvat? Maðurin sleit seg upp. Kundi hann ikki steðga sjálvur, mátti eg hjálpa honum. Men eg vildi treyðugt koma mær upp í hetta undarliga mál. Nú kom skuggin aftur framvið á endaleysu ringrás síni. Eg smoygdi mær heim.

 Eg var løgst, men fekk ikki sovið. Tankarnir mólu í klingur. Runnu aftan á manninum. Fylgdu honum runt vøllin. Eg gitti, hvar hann nú mundi vera: á norðaru ella

eystaru síðu. So rann tað mær til hugs, so at alt steðgaði. Hann rann skeivan veg. Øll, sum vanliga runnu har, runnu við sólini. Var tað *tí*, hann ikki fann út aftur? Kanska kundi eg onkursvegna brotið honum ringrásina.

Eg settist upp undir meg og tendraði seingjarlampuna. Eg kundi lagt eina fjøl ella báðar tvær soleiðis fyri, at hann varð lirkaður út, uttan at hann rættiliga visti av tí. Kanska skuldi eg gjørt okkurt nú beinanvegin. Hetta hevði skund. Eg helt meg minnast at hava sæð tvær fjalar, sum kundu verða nýttar, í bilskúrinum.

Eg sprakk upp úr seingini, læt meg skundisliga í einar cowboybuksur og stappaði ta stóru undirtroyggjuna, eg svav í, niður í tær. Rann síðan niður trappurnar og rykti mær tann brúna leðurjakkan av akslatrænum. Eg varð ørkymlað av hesum átrokandi kenslulagi, at hetta hevði miklan skund. Sum var tað nakað, ið kom mær sjálvari við. Sum galt hetta lív ella deyð.

Bølaniða var uttanfyri. Ljósið úr lyktarpelanum, sum eg nýtti til útiljós, var sløkt.

Eg trilvaði meg fram at hurðini í bilskúrinum, men fór at hugsa um, at vit høvdu fingið eina fjarstýring. Einki við at hála.

Eg trilvaði meg inn aftur eftir fjarstýringini. Nú bar til. Hurðin rullaði seg upp undir loftið. Tað larmaði so illa í náttarkvirruni, at eg gjørdist fjálturstungin. Um náttina, tá ið kvirt er, mást tú lurta. Hoyra alt, sum fer fram. Tað er einasta bjargingin.

Ljósið tendraði av sær sjálvum. Jú, har lógu tær. Eg flutti nøkur gomul málingablikk til viks, har penslarnir stóðu uppi heilt av sær sjálvum, og tók eina gamla avís at kveistra lokkanetið av fjalunum við.

Tær vóru so langar, fjalarnar, at tær bognaðu á miðjuni,

tá ið eg lyfti tær uppfrá. Eg ivaðist bara eitt lítið bil, so helt eg leiðina niðan móti fótbóltsvøllinum.

Eg kundi sjálvandi ikki vita, um maðurin rann enn. Men eg skuldi royna, um so var.

Eg hevði altíð verið bæði myrkablind og myrkarødd, so hetta varð ikki nøkur løtt uppgáva. Eg vónaði, at eg ikki møtti nøkrum, har eg gekk. Tey kundu hildið fjalarnar verið ein stigi.

Eg skundaði mær, til eg nærkaðist vøllinum. So gekk eg meira varisliga, men alt í einum rendi eg meg í eitt hegn, tað vil siga, eg rendi fjalarnar móti, so eg misti tær úr hondunum. Eg kendi sviðan av flísum, sum otaðu seg inn í lógvan. Svørjandi trilvaði eg meg fram at opinum. Síðan oman trappurnar, fram at girðingini og yvir hagar, eg visti, eitt hol var. Har skumpaði eg fjalarnar inn. So stóð eg pinnastill og lurtaði. Kvirran sjóðaði í niðuni. Nú hoyrdi eg okkurt. Ja. Sum her var myrkt. Eg hoyrdi andadrátt, áðrenn eg hoyrdi fótafet av einum, sum stunandi fór framvið. Eg kendi hárini reisa seg í nakkanum.

Rennarin datt um fjalarnar, gav seg illa, kom á føtur aftur og helt áfram at renna. Eg hveptist við av samkenslu, men hugsaði, at eg mátti geva tí ein kjans aftrat. Ein løta gekk. So hoyrdi eg aftur tivanina, og aftur datt hann um fjalarnar og fór fram eftir rommum. Hann gav seg so eymkandi, at eg í stundini dró fjalarnar til mín og fór heim aftur við teimum. Eg tveitti tær inn í bilskúrin og læt hurðina aftur við fjarstýringini. Ikki var hugsingur um at sovna hesa náttina, so eg kókaði mær ein kaffimunn og setti meg at hugsa. Eg var í døpurhuga. At enda var eg so móð, at eg sovnaði niður á borðið. Eg vaknaði av, at eg hevði fingið hald í nakkan, men fyrsti tankin var hvørki haldið ella tað, at eg nú var ov sein til arbeiðis.

Eg bað eftir, at hann var hildin uppat við hasum fjákalótunum.

Eg skundaði mær til arbeiðis. Kom framvið vøllinum. Maðurin rann við sama lag. Eg kendi magan knýta seg.

– Gevst við hasum. Gevst við hasum, rópti innan í mær. Hann hugdi upp, og eg kendi tað sum ein stoyt, tá ið eygu okkara møttust. Hesa ferð spurdi hann ikki, hvussu nógv klokkan var, hugdi bara biðjandi at mær. Eg fekk tár í eyguni. Ongantíð hevði eg kent meg so hjálparleysa.

Eg fór til arbeiðis, men har stóð alt fast. Tankarnir mólu. Vanliga hevði eg tamarhald á støðuni, men nú var einki fantilsi á. Eg hevði ikki bindindi at sita. Reikaði aftur og fram eftir gólvinum.

Endiliga var eg liðug. Men mintist ikki at hava upplivað ein so drúgvan dag. Vanliga var hann av, áðrenn eg visti av. Eg hevði bara eitt í høvdinum: at koma oman á vøllin sum skjótast.

Eftir tógvið stríð tók eg í nakkan á mær sjálvari og fór ístaðin øvugtan veg niðan móti bankanum. Har hekk ein listaframsýning, eg leingi hevði ætlað mær at sæð.

Tær flestu myndirnar vóru av tí sama: einum kámum manni og eini opnari hurð, har svart var innanfyri. Ein breyt frá. Har var bara ein hurð, sum var afturlatin.

Eg gjørdist ótrygg av myndunum.

Nú kundi eg ikki halda mær longur, men helt til beins oman móti vøllinum. Veðrið hevði verið gott um morgunin, men nú var vindur og vátaslettingur. Eftir lítlari løtu varð eg at kroppi. Men tað mátti vera harvið. Beinini skulvu undir mær, tá ið eg endiliga stóð har og tivaði.

Hjartað sakk til botns. Renningarlagið var broytt. Hann dró seg avstað sum ein gamal maður.

Eg mannaði meg upp og fór fram at girðingini.

– Vælsignaður gevst við hasum, bønaði eg, tá ið hann kom framvið.

– Eg fái ikki. Dugi ikki, stunaði hann, og tey bláu eyguni vóru fylt við tárum.

Eg stóð og kleimdi girðingina so fast, at knúgvarnir hvítnaðu.

Næstu ferð, hann kom framvið, hoyrdi eg hann siga:

– Summir renna í stuttum brókum, hóast teir eiga langar.

Hetta ljóðaði umberandi, sum visti hann, at hann gjørdi mær ónáðir. Eg fór heim, dragandi føturnar eftir mær.

Eg fekk mær okkurt at eta, men kendi tað, sum eg tugdi pappír.

– Gevst kona. Gevst! rópti eg og gjørdist kløkk av mær sjálvari.

Eg legði meg í sofuna og sovnaði. Tá ið eg vaknaði, var bølamyrkt. Eg hugdi at urinum. Hálvgum trý. Nú hevði eg sovið nóg mikið. Eg fór upp, legði eitt teppi um meg og tók eina fløgu og legði hana á. Eg setti meg upp afturá í stólin, blundaði og royndi at njóta tónleikin, men varð órógvað av nøkrum taktum, sum ikki áttu at vera har. Hjartað dukaði í bringuni, og blóðið brúsaði í oyrunum. Dunk. Dunk. Eg lurtaði. Hatta var ikki bara hjartað. Tað bankaði eisini á dyrnar.

Hvør ólukkan var hatta, sum órógvaði fólk á miðjari nátt. Eg lætst sum einki, men hetta gavst ikki so. Tað ljóðaði, sum bukaði tað við báðum nevum á úthurðina. Eg tendraði og fór á føtur. Eitt skapilsi hómaðist ígjøgnum rútin í úthurðini. Mær dámdi hetta einki. Kundi hugsað mær eitt av hasum kagholunum. Eg ballaði meg fastari inn í teppið.

Tá ið eg læsti upp, stóð hann har.

Eg kendi ein øgiligan lætta. Dró andan djúpt. Endiliga var hann givin. Eg hugdi eymliga at honum, og suffaði.

Hann sá deyðlúgvaður út. Gráur í andlitinum, við myrkum rondum undir eygunum og rennvátur av sveitta. Hann skalv. Skógvarnar hevði hann slitið upp, so at tærnar stungu út ígjøgnum. Nú sá eg, at hann rann á staðnum. Tað var ikki meira enn so, at hann fekk føturnar uppfrá, men hann rann. Aftan fyri hann sá eg, at tað var farið at kava.

Hann roysndi at siga eitthvørt, men fekk ikki orðið upp. So harkaði hann nakrar ferðir.

– Kanst tú læna mær tankar tínar, so eg sleppi burtur úr hesum? spurdi hann við hásari rødd og bønandi eygum.

– Ja. Skal ikki meira til, so vælsignaður tak tankar mínar.

Hann bráðsteðgaði, takkaði fyri og fór, og eg má viðganga, at síðani tá havi eg ikki hugsað ein tanka.

Men eg eri farin at renna.

# Uttan heiti



**Hanni Bjartalíð.** Olja 1999, 80 x 60 cm.

AGNAR ARTÚVERTIN

# Hundurin

Vit áttu ein hund, og hesin hevði løgnar lótir, tí hann hevði nevniliga til vana at fara at sparka fótbólt mitt um náttina, bara fyri seg sjálvan. Eg varnaðist henda vana hansara eina náttina, eg lá andvekraður, og hundurin helt, at eg svav. Eg fór so yvir til vindeygað at stilla meg at roykja eina sigarett, og tá var tað, eg sá hann, har hann rann so spelkin niðri á grasinum og sparkaði bólt við bóltinum, sum eg og konan høvdu givið soninum í jólagávu. „Skamm fái hundin!“ hugsaði eg við mær sjálvum, „at hann ikki liggur og svevur í bólinum, men at hann hevur sníkt seg út, og liggur nú og fesjar runt og sparkar fótbólt niðri á grasvøllinum.“ Eg gjørdist so argur inn á hundin, at eg ætlaði at berja hann av, tá ið hann kom innaftur (tí eg tímdi ikki út eftir honum). Men eina løtu seinni rann vreiðin av mær, og eg fór at hugsa. Eg hugsaði, at hetta í roynd og veru var ein undranarsom hending, at ein hundur dugdi at sparka fótbólt, og av hesum gleddist eg stórliga og gjørdist eisini heldur enn ikki sørt erpin av tí, at hundurin var mín. Men gleðin varð skjótt avloyst við illgrunasemi, tí at eg ikki dugdi at fáa greiði á, hví hundurin royndi at goyma hesar sjáldsomu gávur við at sníkja seg út um náttina í staðin fyri bara at sparka fótbólt í dagsljósi og lata okkum øll síggja, hvussu væl hann dugdi. Hendan hugsan elvdi til, at eg mátti tosa upp í lag við meg sjálvan fyri ikki at ætla at avlíva hundin alt fyri eitt við rifluni, sum hekk á vegginum niðri í

stovuni. Tá eg var sissaður eitt sindur og var komin til sættis við meg sjálvan, at tann lítli hundurin, sum eg hevði fingið, tá hann var hvølpur, og hevði verið sannførdur um var av allarvanligastu hundum, hevði henda rára menniskjansliga eginleika, stubbaði eg og fór niðurundir. Í gongini hvakk eg við, tí úthurðin var latin upp heilt spakuliga, og hundurin kom inn og læt hurðina aftur. So læt hann seg úr skónum og kom inn í gongina – eg hevði goymt meg aftan fyri klædnatræið – fór inn í køkin og læt hurðina spakuliga aftur. Eg hoyrdi, at hann fór í skápið, fekk sær okkurt og læt aftur. Síðan fór hann í køliskápið, og eg helt meg hoyra, at hann stoytti mjólk niður í hundaskálina. So hoyrdi eg eitt annað skáp fara upp og ein borðisk verða settan á køksborðið – síðan fór ein skuffa upp, og eg hoyrdi eisini knívar og gaflar verða lagdar á borðið. Eg helt hetta vera ovboðið, og tá eg hoyrdi mikroovnin tendra, tá leyp eg til, rykti køkshurðina upp, steig innar og sá beint á hundin, har hann sat við borðið og góðgaði sær við tí, sum var eftir av tí fína døgurðanum, sum vit høvdu etið. Hann hevði enntá sett á eina dýra vínfløsku, sum eg og konan ætlaðu at goyma til okkurt serligt høvi. Eg spurdi, hvat hann billaði sær inn at ganga og eta matin og drekka vínið hjá okkum, meðan vit lógu og svóvu. Um hann ikki hevði tað nóg gott? Um vit høvdu vanrøkt hann? So mátti hann siga tað, fortelja okkum tað, so vit kundu gera tað betri! Hann turkaði sær um kjaftin við serviettinum og svaraði, at hann ikki sjálvur hevði gjørt av, at hann skuldi tíggja sær so, men tað var samanrenningin millum hansara sjáldsomu, men tó natúrligu, hundanatúr og líka so sjáldsama, tó natúrliga, huglagið heima hjá okkum, sum hevði elvt til hetta undrunarsama úrslit. Allir hundar gerast jú svangir við jøvnum millumbilum, og spurningurin er, um teir eta úr

hundaskálini, ella um teir sjálvir gera sær ein fínan nátturða. Hann hevði so, við umstøðunum og møguleikunum í huga, valt hetta seinna, og hetta val kundi hann neyvan lastast fyri, helt hann. Hann var offur fyri umstøðunum, og hann peikaði yvir á hundaskálina, sum var full av mjólk, og segði, at fyrst ætlaði hann bara at leppa úr skálini og síðani fara at leggja seg, men samanrenningin millum hann og hetta húskið hevði tilelvt, at hann nú sat her sum eitt fólk og drakk vín. Og við støði í hesum grundgav hann víðari fyri, hví hann noyddist at sova í mínari song og eg í hundabólinum tað, ið eftir var av náttini. So væl dugdi hann at grundgeva, at eg kundi ikki annað enn geva honum rætt. Og soleiðis hevur tað verið síðani – hann liggur hjá konu míni hvørja nátt, og eg liggi í kurvini niðri í køkinum og bíti av vreiði og vónloysi í plastdjórini og sløði tey út eftir gólvinum. Hvønn morgun, tá ið kona mín kemur oman í køkin, fari eg skammfuktaður grulvandi yvir til hana og gníggi andlitið móti skinnabeininum á henni, og tá bendir hon seg niður móti mær, kínir mær um oyrað og gevur mær eina hundakeks. So fer hurðin upp, og hundurin kemur inn, og hann er vaksin heilt nógv og gongur enntá nú á tveimum beinum. Og eg má liggja og hyggja, meðan hann nærkast konu míni aftanífrá, tekur um hana og mussar hana á hálsin – og hasari teysini dámar tað! Hon flennir so hjartaliga, og eg veit – eg síggi! – at hon hyggur niður á meg og brosar skaðafró og loyndarfull!

FIROUZ GAÏNI

# Prógvið

Eg ætli mær at lesa stødd- og alisfrøði á lærda háskúlanum, svaraði hon ensklæraranum uttan at himprast, tá hann varin hevði spurt um framtíðina, nú prógvini skjótt skuldu handast. Hóast hon hevði hægsta miðaltal í flokkinum og ongantíð var burturi frá skúlanum, so høvdu lærararnir ógvuliga smáar vónir til hennara. Hvat sigur familjan til tað? spurdi lærarin síðan, hugdi ørkymlaður upp úr tjúkkari lærubók og tók tær rundu brillurnar niður av síni longu skeivu nøs. Sólin skein, og øll hini vóru farin út í garðin, men hon sat í stovuni og fyrireikaði seg til næsta tíma. Nei, tað kemur ikki mær við, segði ensklærarin, pakkaði sína tasku og fór út uttan at taka hattin við sær. Hon fór at hugsa um familjuna, og teir fimm minuttirnir til lívfrøðitímin skuldi byrja vardu fleiri tímar.

Eg skal venja fótbólt, svaraði hon blíðu reyðhærdu gentuni, ið sat undir liðini á henni í skúlanum, tá floksfelagin hevði spurt, um tær skuldu fara oman í býin aftan á skúlatíð. Skjótt var summar, og tá fór hon at hava meira tíð at vera saman við familju og vinum, tí nú fór øll frítíðin til uppgávur, floytuspæl og fótbólt. Brøður hennara flentu at henni, tí hon ongantíð var heima, uttan tá hon sat og stríddist við at loysa uppgávur og skriva stílar til langt út á náttina uttan nakra hjálp frá foreldrunum, men innast inni var hon teirra stóra fyrimynd. Hóast brøðurnir vóru nógv eldri enn hon, fýra

teirra høvdu konu og børn, so vóru teir ólærdir og gingu fyri tað mesta arbeiðsleysir.

Hon var vónin hjá allari familjuni, tí hon var gávað og hevði fingið møguleikar, sum brøðurnir ikki høvdu, tá teir vóru í skúlaaldri. Brøðurnir vóru javnan til heimadystirnar, tá hon sum kvikur vandamikil álopsleikari mangan skeyt mál fyri sítt lið, ið lá á næstovasta plássi í bestu fótbóltskvinnudeildini. Teir dansaðu og sungu, hvørja ferð hon fekk bóltin í netið, so hon bleiv heilt illa við av at síggja teir. Verri var at fáa teir til konsertirnar, sum hon hevði saman við symfoniorkestrinum í býnum, og tað var kanska líka frægt, tí teir orkaðu ikki at sita í andakt í tímar og lurta eftir klassiskum tónleiki. Tá ið hon spældi floytu heima, vóru teir oftast skjótir at fara út ella tendra veldiga sjónvarpið.

Tá ið prógvini vórðu handað tíðliga í juni, komu nógvir lærarar at ynskja henni tillukku við tí frálíka úrslitinum, ið ongin hevði væntað sær – uttan hon sjálv. Øll tosaðu um tað sera forvitnisliga úrslitið, og rektarin nevndi hana við navni í stuttari hátíðarligari røðu fyri studentunum. Úrslitið er ikki eitt mistak í protokollini, segði rektarin beinanvegin fyri at sissa nøkur foreldur, ið meintu at talan var um eina misskiljing, har tvey nøvn vóru býtt um. Hon spælir eisini floytu, teskaði ein lærari til tey misnøgdu foreldrini, ið høvdu vónað at hoyrt navnið á teirra soni í rektararøðuni.

Løtu seinni, heimkomin við próvnum, fór hon at hvíla seg á sofuni í stovuni, meðan tríggir brøður sótu á aðrari sofu og hugdu at MTV. Rektarin nevndi eina somaliska gentu, ið er flóttafólk, í sínari røðu í dag, segði hon, komandi alisfrøðingur, fyri kæru brøðrum sínum. Men teir hoyrdu hana neyvan fyri sjónvarpslarminum.

HANUS KAMBAN

# Sangur um flyting

tað skýmir mín vinur hví stendur tú her
norðanættin um húsini fer
tín hugur er tómur av møði tað er
ryggur tín bogin av sliti
ein finna tú ert í talvinum
har pengarnir fólkið flyta

tú húsini átti har norðri í líð
bátin og trøðna og børnini trý
men tíðirnar skiftu úr bygd og í bý
neyðin teg noyddi at flyta
tí ein finna tú ert í talvinum
har pengarnir fólkið flyta

í býnum tú flutti í trongliga lon
teg sjálvan tú seldi til pihl og son
til skatt og til leigu varð tikin tín løn
til børnini valla ein biti
ein finna tú ert í talvinum
har pengarnir fólkið flyta

tú húsini seldi tað hungurin beyð
onkur tey keypti sum nú eigur tvey
men tú eigur onki nóg illa til breyð
og vilt tú grundina vita

# Æti



**Astrid Andreasen.** Akryl 2008, 40 x 40 cm.

ein finna tú ert í talvinum
har pengarnir fólkið flyta

teir siga teir elska teg yvir alt
teir sum sita í veitslum og gera sær dælt
tú slítur teg upp og teir tøma tín hjall
leiva tær valla ein bita
teir liva so væl av at styðja tað spæl
har pengarnir fólkið flyta

um trogið tú fyllir teir flokkast hvønn dag
teir reiðarar stjórar og læknar á rað
sig mær gjalda teir skatt og hví skuldu teir tað
teir sum á køkuni sita
og ein finna tú ert í talvinum
har pengarnir fólkið flyta

í húsunum tínum nú halda teir frí
okkurt akademiskt kommandittkompaní
so gott er at sleppa sær burtur úr bý
at hvíla og hvessa sær vitið
til næsta leikin í talvinum
har pengarnir fólkið flyta

ODDVØR JOHANSEN

# Brot úr „Tá ið eg havi málað summarhúsið“

**Jólaódnin**

Skýggini reka í fleiri løgum í dag. Ymsastaðni millum tey sært tú tey bláu holini, har ævinleikin býr, og beint niðri undir anda tey hvítu og nossligu himmallondini, sum reka í friði og náðum móti vestri og hava góðar stundir.

Longri niðri – beint uppi yvir tær – rúsa grá og tung vetrarskýggj mótsettan veg. Tey fúka við snarsintum rørslum av vestri og kennast køvislig við teirra gráu skvettum.

Men tá ið útvarpið hetta kvøldið hevur lisið veðurvánirnar upp og fer yvir til andlátini, hevur eingin givið sær far um nakað serligt. Gamaní – barometrið stendur lágt, men eingin stormávaring ljóðar.

Men niðri á havsins botni er ein herskari farin til gongu. Og í Suðuroy liggur tann sjálvlærdi vísindamaðurin Jørgen friðarliga á fjørðinum, sum hann so mangan hevur gjørt og hyggur við sínum slitna seiðakikara eftir botninum. Hann er skjótt ov gamal til hesar køldu kanningarferðirnar, men – nú sær hann fyribrigdið eina ferð enn.

Tað verður illveður. Hann er vísur í síni søk, hóast eingi tekin eru í sól og mána.

Og hetta kvirra kvøldið undan jólum, meðan fólk samlast til jólaborðhald og ball, órar eingin nakran vanda. Tað verður sungið um Føroyar mítt land við heimsins raskastu fiskimonnum og einum skipaflota, ið ikki hevur sín líka.

Her verður skálað og kvøðið, og niðri á Vaglinum stendur tað strálandi træið á vøllinum, meðan eg sjálvur og øll míni vinfólk eru í barnadansi í Dallas undir litføgrum lampum.

Tað verður ódn. Hann sær tað í kikaranum. Hann sær havsins meingi av skeljadýrum fara til gongu – burtur frá landi – har vandi er fyri, at tey um nakrar dagar verða sligin í skeljasor móti klettunum.

Við allar strendur, úr urðum og gjáum, av fjørusandi og víkum flýggjar alt livandi við skel.

Teir sólskinslitaðu hummararnir ganga á odda sum brynjuklæddir herførarar, og í hølunum á teimum krabbar og igulker.

Rækjurnar eru sum altíð nervøsar. Tær førka seg aftur eftir hæli við sundbløðkuni fram undir afturkroppin, og tær skorpulitaðu gággurnar sleppa súgvitakinum og snodda illgrunasamar við síni andingarpípu. Hon plagar at vera pálítilig. Sjógvurin rýkur av vanda og illveðri.

Tann sætti sansurin, sum hesin havsins herskari av smádýrum hevur fingið sum eitt eyka talent í lívsins lottospæli, hesin sansurin sendir nú ávaringarljóð aftur og aftur við vaksandi megi: rýmið til havs mínir vinir. Til havs sigi eg, annars fara tit í sor.

Tað er ein óró á hvørjum kykti, sum fjalir seg millum tang og fjørutara.

– Farið tit bara, sigur langskelin dovin og borar seg niður í sandin, – nú fáa vit at síggja.

Men tá ið hon sær teir reydligu krossfiskarnar damla úteftir í hølunum á sjónotum og hvalspýggjum, broytir hon meining.

Tað er stjørnufjøld og stilli, men lat teg ikki lumpa. Hesin herur av smáum flóttum føla við hvørji poru í kroppinum, at trýstið veksur, og at undirgrundin spælir við

vøddunum. Tað er ein djúpur tóni, ið skelvur, tann gamli undirgrundstónin, sum bara havsins smádýr lofta.

Rípuskelin angrar nú, at hon hevur grivið seg niður, og fer til stroks saman við kræklinginum.

Knappliga hoyra tey sangin. Tað er ein sorgblíður vetrarsálmur um sólstøður á norðurhøvum. Tað er hørpuskelin, sum syngur. Hon slær á sína jólahørpu og syngur um gamlar sagnir úr havsins fjøllum.

Og hini taka undir. Tey syngja og skrambla við sínum skeljum sum í vápnaleiki, men tey skrambla fyri deyvum mannaoyrum. Tey kvøða og spæla á jólahørpu, men tey spæla fyri mettum mannabúkum og svøvntungum eygum.

Ein dag. Tveir dagar. Í tríggjar dagar flýggjar alt við skel út á hav, út á djúpt vatn, og tey hyggja ikki afturum seg.

Av vestri blæsur byrur yvir báru.

*

Eitt nos og tvey. Eftir einum tíma er vindmegin uppi á fimmogtjúgu, brimið brýtur longu hvítt og ógvusliga vestanfyri, og monnum dámar ikki alduna.

Fólk spenna allar krampar fyri og snara gamlar knarvar upp á pláss. Tað knarrar í teimum nýreistu sperrunum í teimum hálvlidnu býlingunum, og menn fara út at seta fleiri skrástívarar upp.

Hjalshurðin hjá okkum brestur upp, men tá ið vit hava latið hana trygt aftur í lás, halda vit fram við at pakka jólagávur inn við tendraðum jólaljósum.

Hvat var tað, sum fleyg framvið vindeyganum? Plátur úr rukkujarni, sum skrambladu sum toran.

– Tað er øgiligt, sum tað leikar í, sigur mamman.

– Ja, men tað kann man rokna við hesa ársins tíð. Vit eru bara blivin so forvand í alt heyst.

– Mær dámar einki hesar hvirlurnar.

– Vit liggja í le fyri vestanættini.

– Tað man vera ringt í Mykinesi í kvøld, sigur hon.

*

Aftan á midnátt vakni eg av storminum. Tað plagdi eg aldrin. Mamma og babba eru farin upp og ganga við ljósi í hondini, tí streymurin er farin.

Okkara nýggju og deiligu hús geva seg. Tað brakar í tekjuni, tað er eins og húsini suffa og vena seg.

– Tit skulu bara vera rólig, sigur babba, – hesi húsini fara ongan veg, eg havi smíðað tey sjálvur.

So hoyra vit brandbilin fara drønandi eftir Ringvegnum, og lítla løtu aftaná sjúkrabilin.

– Tað veit Gud, at vil eg ikki hopa, at eldur er í nakrastaðna, sigur mamma, – tí so fer alt upp í royk.

Nú tendra gøtuljósini á onkran undrunarverdan hátt aftur, og vit síggja fólk frá Bjargingarfelagnum fara framvið í appilsingulum termodraktum.

Hvat hendir og hvar?

Lutir koma singlandi gjøgnum náttina, byggitilfar og spælihús hjá børnum. Ælið stendur vatnrætt í glæmuni frá ljóssteyrunum, og vit síggja, at fólk eru uppi í øllum grannalagnum.

Men vit vita einki. Vit vita ikki, at allir nábúgvarnir hava mist sínar skorsteinar, og at niðasta húsið á vegnum hevur fingið skrykt alla yvirtromina omanav. Hon fer í heilum líki sendandi sum eitt rúmdarskip oman í dalin, har hon knúsast til pinnabrenni, og tey skelkaðu fólkini

standa í berum náttklæðum og gløa beint upp í ta svørtu illveðursnáttina.

Hann er blivin útsynningur, og veðrið kemur sum eitt brølandi ódjór gjøgnum skørðini vestanfyri á fjøllunum.

Vit vita ikki, at í hesi løtu slóknar jólatræið á Vaglinum og fer á flog, og at tey hundraðára gomlu trøini í Lützensgarði verða kvett av og liggja og berja móti moldini sum særdir hvalir.

Eina ferð var ein viðarlund. Okkara lítli skógur, sum vit elskaðu og vóru stolt av. Tað var her, fólk trillaðu sín fyrsta barnavogn. Tað var her, eg sat og lurtaði eftir hornmusikki, tá ið Janus fekk ta hvítu studentarhúgvuna, tað var her, eg saman við míni fyrstu kerligheit hoyrdi svanarnar syngja millum grøna leyvið.

Her sótu skøldini á onkrum bonki og blakaðu breyðmolar út til dunnurnar, meðan tey filosoferaðu og kanska funnu eina nýggja yrking.

Enn vita vit tað ikki. At viðarlundin nú bara er ein skuggi av sær sjálvari. At tey gomlu furutrøini liggja fløt við teimum frísutu rótunum ovast. At okkara lítli skógur nú bara er ein leivd av spøkilsum.

Tá ið tann grái tollaksmessudagurin kemur, er stormurin linkaður, og fólk fara útum.

Áirnar standa beint upp í loft, og útvarpið veit at siga, at vindmálarin á Norðaraskarði brotnaði, tá ið hann kom upp á 55.

Tekjur eru rivnar, øll jólatrø um landið eru burtur, bilar eru slongdir gjøgnum luftina og endaðir uppi á onkrum taki. Fólk fáa kreppuhjálp.

Og nú gekk alt annars so væl.

– Hetta landið er bara fyri kóp og hval, sigur ein eldri maður við babba.

Katastrofa! Fyri fjølmiðlarnar er dagurin bjargaður. Skermarnir bleiktra við myndum úr Norðuroyggjum. Grátandi konufólk og bangin børn. Í Degi og Viku halda tryggingarfólk, at ódnin fer at geva teimum yvirarbeiði í mánar.

Tá kvøldið kemur, øtlar hann aftur. Og øll tey komandi kvøldini. Tað er, sum hava himmalsins kreftir svorið seg saman. Tað lítla landið mitt úti í havinum skal ikki fáa grið, tað skal onkursvegna bukast. Landið fær sína royndarstund allan veturin. Myrkrið fjalir oyggjarnar, sum gyrdar í brimgangi verða avbardar og spulaðar av stormi, regni og kavaroki í dagar og vikur, ja, í mánavís. Lágtrýst oman á lágtrýst.

Vit fáa ganir av hesum. Vit verða veðursjúk og troyttast av at berja okkum fram móti vindi og veðri, og hjá summum ganga nervarnar fyri.

Haraftrat verður ein pessimistiskur stemningur pískaður upp í vørpunum, so at summi fólk ikki longur tora at lurta eftir veðurvánunum. Summi flýggja inn í dreymaverðina.

Tey yvirliva við at minnast tað góða. Tað vakra grøna landið, tey búðu í í fjør, har trø vórðu plantað og hús málað. Tulipanir og páskaliljur, summardáar og sóljur. Tey hava fyri tíð og ævir fingið nóg mikið av illveðri, nú treingja tey til sólskin og summargardinur, altankaffi og havagrill.

Men menniskjað er ein undurfullur Guds skapningur. Menniskjað er ótroyttiligt. Tað gloymir tað ringa. Tað vísa tær mongu katastrofurnar úti í heimi okkum. Menniskjað verður sligið til jarðar. Tað liggur í evjuni, í vatnflóðini, í jarðskjálvtanum, í sundurskotnu bygdunum. Svangt og tyst, hálvdeytt av umfarssjúkum og alskyns plágum. So grulvar tað upp aftur og reisist.

Hvat er beint nú tað týdningarmesta í lívinum? Vit vita

tað øll. Tað er altíð tað týdningarmesta. Eisini her hjá okkum: tað týdningarmesta er matur. Síðan eitt sindur av hita og kærleika.

Og hygg. Nú verða hús takt av nýggjum. Skorsteinar verða settir upp aftur, og ruddingardagar taka seg upp. Umhvørvið má hampast aftur, og viðarlundir plantast av nýggjum, tí menniskjað elskar vakurleika.

Eg ruddaði eisini. Saman við hinum børnunum og teimum vaksnu. Tað vóru góðir dagar, positivir dagar við samanhaldi, fløvaðum bollum og kakao inni í býlingshúsinum.

Teir stóru plastikkposarnir blivu fyltir og bingjurnar líkaleiðis, grannalagið fór so smátt at líkjast sær sjálvum, og hagin grønkaðist.

Eg, Hans og Haraldur bygdu okkum eina smáttu. Hon skuldi vera okkara loyniborg mitt úti í natúrini.

Ein fossur súsaði einastaðni. Einki er vakrari enn tað fjara fossasuðið í berjalynginum. Haraldur spældi gittara og yrkti sangir á enskum. Ódnin var tagnað. Várið var komið.

Men nú siga tey knappliga, at teir fáa ongan fisk. Bíða nú. Gevið tol, góðu menn.

Men tað er ringt at hava tol, tá tú førir skip í heimsins fagrasta flota. Heimsins dýrasta flota. Og hesin flotin kagar og leitar um havsins djúpu fjøll og fláir. Hvar er yngulin?

Gev tol. Hetta er hent fyrr í Føroya søgu, og øll vita, at skip okkara eru sera, sera effektiv.

Yngul og fiskur. Havsins silvurlitaða gull, sum elskast og nørist og gevur øðrum lív. Hendan ørgrynnan, sum fjølgast í ørandi mongdum millum dalar og djúp í sjónum. Er hon rýmd? Saman við havsins brynjuklæddu fjørudýrum? Flýggjað burtur í mildari lond, ella er tað tað áhaldandi illveðrið, sum hevur gjørt enda á henni?

Men mínir góðu menn, vit skula og vit mugu hava fisk. Um tað so skal kosta okkum teir seinastu stertarnar í havinum, so skula vit hava teir. Vit skylda milliónir og aftur milliónir av krónum. Tó – pengar eru nú einaferð ikki bara nakað, sum er. Pengar kunnu keypast – fyri pengar. Pengar eru nakað, vit skapa, pengar eru vørur, sum vit býta um við aðrar vørur.

Hví siti eg her í geglinum? Innistongdur sum ein svartur fuglur í búri?

Eg vildi skapa mær virðir, býta vørur um við aðrar vørur, sum góvu mær gleði. Men eg kom samstundis at bróta landsins lógir. Tí siti eg her.

**Nýggjárssól**

Longu á nýggjárinum 1990 fóru tey at tosa um, at øldin var farin at halla. Sjónvarpið gjørdi nógv burturúr. Har vóru panelsendingar av mongum sløgum. Panelsendingar um fiskin, sum treiskaðist í sjónum, panelsendingar um havumhvørvið, panelsendingar um ta skjótt farnu blóðigu øldina og um Føroyar á einum vegamóti.

Eg gekk og festi í mínar fínu nýggjárssólir við míni fyrstu sigarett. Alt var *fyrsta* hettar ella hattar.

Tann fyrsti mussurin uppi við suðandi fossin í berjalynginum – tætt við loyniborgina. Tann fyrsta fjallasúkklan, sum kundi føra meg uttan at eg bleiv pøstur heilt niðan í tann nýggja býlingin. Og so royndi eg nakað annað eisini. Tann fyrsta guvin av hash. Ein seytjanára gamal drongur í 10. flokki gav mær hann.

Nú aftaná dugi eg at síggja, at her hendi nakað heilt kollveltandi við mær.

Hvussu mundi lívið havt lagað seg, um eg aldrin hevði roynt hetta? Tað nyttar einki at spyrja so. Fakta er, at eg

# Barnaminni



**Beinta av Reyni.** Oljumálningur 2001, 150 x 125 cm.

royndi tað, og at tað var við til at beina mína kós ein annan veg, enn eg hevði ætlað. Og eg má viðganga, at eg havi havt tað øgiliga stuttligt. Eg havi verið ein turbulentur villkattur – bummilummilumm, og eg helt sanniliga, at mamma og babba livdu eitt keðiligt lív. Alt ov friðarligt. Soleiðis ætlaði eg mær ikki at liva. Og eg fann útav, at allir mínir vinir hildu nakað tað sama um síni foreldur. Vóru vit allir í veruleikanum bara nakrir ússaligir medrennarar, sum ikki tordu at vera øðrvísi enn hinir?

Men rentur og avdráttir, telefonrokningar, oljurokningar, SEV – er tað nakað stuttligt?

Tað er fyrstani nú, ið eg búgvi í summarhúsinum, at eg dugi á at skyna, hvussu nógva gleði eg hevði av teirra goldnu rokningum, av teirra stríði og strevi, og av at tey vóru góð við hvønnannan mitt í øllum hesum skyldunum.

Hash! Eftir fáum sekundum var eg blivin vaksin, og tilveran hevði víðkað seg út til endamørk jarðarinnar, um eg nú skal siga tað poetiskt.

Eyguni sóu týðuligari, oyruni hoyrdu betur, og eg upplivdi alt sterkari, sansaði alt rundan um meg betur. Sat inni í mínum nýggja vakra kamari og helt, at himmiríki var í nánd.

Um hesa tíðina var tað, at mamma fekk ein knykil. Og um hesa tíðina var tað, at hon fór undir tað stóra takið at blíva frísk aftur. Tríogtretivu stráluviðgerðir skuldu til, einki minni. Bít tað í teg kona og kempa teg ígjøgnum bálið.

Og hon kempaði. Sum ein leyva bardist hon og vildi ikki lúta. Fyri babbasa skyld, fyri meg og tær smáu kýtti hon seg, tí hon visti, at hon var alneyðug. Hon visti, at vit hvørki kensluliga ella fíggjarliga kundu vera hana fyri uttan.

Men fjúsið í henni styttist fyri hvørja viðgerð, og eg bleiv

størri og størri. Tey grenjaðu bara. Eg kom heim við einum 11-tali í stíli, og hvat søgdu tey?

– Hví ert tú so bleikur og sløvur?

– Bleikur og sløvur? Hvat fanin forlanga tit? Her kemur man heim við einum ellivutali … hallo, sum tað stinkar … tað sumpar totalt! Sløvur! Tað sokkar. Lat meg sleppa vekk.

Lívið skal livast. Eg hevði ikki tíð at stúra og ynskti allar stráluviðgerðir av fananum til. Náttarravnar, harður tónleikur og fótbóltur, tað var sakin.

Nú føli eg meg sum ein gamlan mann. Ein ævinleiki er farin.

Í fyrstani ert tú ávirkaður av tínum barnalærdómi og morali. Tú biður Faðirvár hvørt kvøld, sum babba hevur lært teg, og tú veitst sera væl, hvat ið er rangt, og hvat ið er rætt.

So tú hevur ringa samvitsku. Ringa samvisku tá ið tú stjelur ella selur nakað ólógligt. Tá ið tú skapar tær virðir, meðan tú brýtur landsins lógir.

Samvitskan situr sum ein vøkur tríkantað nýggjárssól inni í hjartanum. Men festir tú í hana við tíni sigarett, fer hon at snurra runt, og nú merkir tú, hvussu teir spísku oddarnir skøva og prika inni í bringuni, so tú fært ilt.

Pínan minnir teg á, at nakað er galið. Tín lítla nýggjárssól sendir ávaringarljóð, so tað svíður í hjartanum, men tú bítur pínuna í teg, og so við og við herdast tú og verður kaldari og kaldari.

Og við tíðini slítist tín lítla nýggjárssól. Hon verður avrundað og sløtt, so tú følir minni og minni, tá ið hon snurrar. Til endans ert tú førur fyri uttan nakað at leggja tína nýggjárssól niður í skuffuna og gloyma hana fullkomiliga, tá ið tú hevur brúk fyri tí.

*

Knappliga var eg leiddur av øllum skúlagangi. Eg var ikki so lættur á fótum um morgnarnar, og mamma skeldaði, tí at eg var blivin ein náttarravnur.

Men eg lovaði at gera tíggjundaflokk lidnan. Aftan á tað vildi eg í øllum førum út at arbeiða. So skuldi eg tjena mínar egnu pengar. Sum ein vaksin maður, so mamma og babba sluppu eitt sindur lættari.

Hans ætlaði sær í studentaskúla. Pápi hansara vildi so fegin, at hann fór at læra til verkfrøðing, eins og hann sjálvur.

Og Harald! Hann visti ikki. Hann visti einki. Foreldur hansara áttu tað stóra nýggja handilsvirkið, sum tey nú vóru í holtur við at víðka. Haraldur hevði altíð nokk av pengum. Og klæðum. Og hann átti nógvar musikkgreiðir, forsterkara, pedalir og hátalarar.

Handilsvirkið! Foreldrini vónaðu tað. Vónaðu at Haraldur skuldi koma uppí her og kanska einaferð taka yvir. Best mundi vera at koyra hann í handilsskúlan. Tað var ein góð barlast, um tú skuldi vera handilsmaður, ein barlast sum kundi víðkast og útbyggjast mangar vegir.

Harald segði einki. Hann hevði nakað heilt annað í tonkunum, men tað var bara so luftugt. Hann vildi vera listarmálari, tað visti eg. Men hvør torir at siga tað við ein pápa í brøðrasamkomuni, sum byggir stórt handilsvirki og væntar, at tú hevur áhuga fyri tí.

Hann sat uppi á sínum ferskenlitaða kamari og teknaði.

Hetta kamarið var ein dreymur. Stereo, sjónvarp, video og leðursofa.

Men mamma segði: soleiðis er lívið, Pedda. Tú fert at

læra, at øll eru ikki eins. Og tað er kanska heldur ikki tað býttasta. Eg eri ið hvussu so er lukkulig fyri alt hjá okkum.

Og so legði hon aftrat – eitt sindur prædikandi: Bara man hevur heilsuna, Pedda, hon er tað dýrabarasta á foldum.

– Ja, ja, ja. Tað var so leiðiligt altíð at vera mintur á heilsuna.

Eg visti við mær sjálvum, at eg var troyttur av at ganga í skúla, og at eg skuldi út at arbeiða og tjena pengar. Pengar við stórum P. Koyrikort skuldi eg fáa mær skjótast møguligt, kanska eitt gamal vrak av einum bili at biksa við.

Innast inni gekk eg og fyrigyklaði mær, at eg eina ferð skuldi *skriva*. Ja, eg veit, tað er nakað ógvuliga – ógvuliga – luftugt nakað, men kanska kundi eg eina ferð skriva eina bók. Ella kanska fara at læra til journalist, tað var jú eisini nakað við at skriva.

– Tú hevur góða tíð, segði babba, – og tú hevur góð evnir, far tú bara út og arbeið. Tað er sunt og gott fyri øll. Øll ung skuldu verið noydd til at arbeitt minst eitt ár úti í vinnulívinum, tað er mín meining. Tað er ein góð barlast at hava gjøgnum lívið, tað kann eg siga tær.

**6. oktober**

Minnast tit 6. oktober 1992? Eg fylti sekstan ár tann dagin. Á talvuni høvdu hini skrivað: Góði Pedda! Tillukku við teimum sekstan árunum, og so sungu tey føðingardagssangin fyri mær. Hesin dagurin er sum brendur inn í heilan á mær, og tí má eg skriva um hann.

Teir stongdu bankan og kunngjørdu álvarsamir, at alt tað vit vóru errin av, skipini, virkini og húsini vóru lítið og einki verd longur. Nøkur ting vóru enntá 0 krónur verd.

– Hvat fanin er hetta fyri tvætl, spurdi babba, – eru øll húsini, eg havi smíðað og húsini her einki verd longur?

Bergholini vóru láturlig. Donsk bløð skrivaðu, at tað bara vóru botnleys hol og einki annað.

Oyðsl! Alt sum føroyingar høvdu bygt upp var oyðsl. Inni á lærarastovuni vóru tey heilt í koma og gloymdu at taka okkum inn aftur í tíman.

Babba var skuffaður. Hann hevði stórt álit á løgmanni og var hansara maður hundrað prosent. Hevði hann ikki sjálvur hoyrt hann siga, at tað stóð hampiliga væl til?

– Hví kundu teir ikki bara lata bankan vera opnan, spurdi babba, – so kundi hann bløtt burtur við æru.

Nú endaði alt í vanæru, men tað vistu vit einki um enn.

Tað danska fíggjareftirlitið, sum var í Føroyum, hevði tikið sína støðu og var ikki til at vika.

Teir kendu seg tryggar. Eg sá teir ganga í Gongugøtuni og spáka í nálastrípum og italienskum leðurskóm og við sjarmutaskum úr slanguskinni … kanska var tað krokodilla.

Alt tað, teir kravdu, var longu konfirmerað í Keypmannahavn av einum bólki, hvørs spesiali var landið Føroyar.

Fíggjareftirlitið fekk boð um, at føroyingar skuldu steðgast.

Uppgávan var einføld og skjótt avgreidd.

Á hotellinum ótu teir heimsins bestu rávøru frá heimsins fagrasta flota: jákupsskel í dressing, heilan hummara og búrfisk í fati.

Landsstýrið sýndi teimum vanligan føroyskan blíðskap. Útferð til Kirkjubøar, har teir vóru hjartaliga móttiknir, hoyrdu kingosang og fingu sakkøna frágreiðing um restaureringsætlanina við múrinum.

Múrinum?

Ja, múrinum har yviri. Tí gotisku dómkirkjuni, okkara

størsta fornminni. Í áravís hava áhugabólkar savnað midlar og søkt um stuðul.

Stuðul!

Tað bleiv kvirt sum í grøvini. Formaðurin var líka við at traðka í eitt seyðasparl á rómverskkatólsku bispatoftini, men náddi at bjarga teimum italiensku, hann gekk í.

Ógvuliga áhugavert. Interessant. Og hygg har yviri, helt ein fyri sum hevði verið ofta í Føroyum, føroyingar eru ógvuliga kreativir. Hann peikaði á teir vøkru glasmálningarnar og træskurðararbeiðini.

Forrestin! Ber tað til at keypa listarverk frá onkrum av føroysku listarfólkunum? Í dag kanska? Vit hava skund.

Jú, tað ber til. Í Føroyum ber alt til.

Hetta var bara byrjanin, tað vita vit nú. Tann stóra loyniliga ætlanin hjá „Føroyabólkinum".

Er tað eg, sum havi fingið forfylgingarørsku av øllum lortinum, eg havi brúkt? Tað sigur babba. Men eg meini heilt vist, at veruleikin er, at ongantíð fyrr í Føroya søgu hevur politiski ruðuleikin verið størri. Babba er samdur við mær í hesum.

Føroyingar vórðu tjóðraðir sum neyt, og í sjey ár royndu heili fimm ymisk landsstýri við fimm ymiskum løgmonnum at venda tí sundursorlaðu skútuni.

*

Tað kann ikki passa, róptu vit í tíggjunda flokki. Vit eru sekstan nú, summi eru seytjan, skilja tit ikki? Vit skulu byrja upp á nakað nú. Vit ætla at gera nakað fyri landið. Arbeiða og fáa okkum útbúgving.

– Eg ætli mær so at blíva verkfrøðingur, segði Hans. Hann mundi vera tann einasti, sum visti, hvat hann ætlaði.

– Eg ætli mær út at arbeiða, segði eg.

– Hann er tann mest sexuti, segði Jonna við Lailu.

– Hvør?

– Atli Dam.

Jonna metir allar løgmenn eftir, hvussu sexutir teir eru.

Haraldur sá hugsunarsamur út: Landið, segði hann, – landið er jú ongan veg farið. Tað liggur her líka vakurt sum tað altíð hevur ligið. Við fugli og fiski, mjólk og grindahvalum.

Á Haraldur góði. Hvíl tú í friði. Skald vart tú. Tú sang tínar vøkru sangir. Sangir um landið, sangir um okkum. Hví skuldi tín rødd tagna so syndarliga.

Og tey skiftast at stýra landinum. Best lærda fólkið í Føroyum stýrir øll míni tanár. Grannskoðarar og verkfrøðingar, juristar og læknar, lærarar, psykologar og búskaparfrøðingar skiftast um at snara róðrinum á hesi nullskútuni. Tó letur tað seg illa gera. Róðrið er surrað fast, og skipari og bestimaður eru settir undir eftirlit. Teir verða tvingaðir til at leggja seg á knæ, meðan eftirlitsmaðurin flongir teir við koyrlinum og gevur teimum spanking upp á skift.

Stýr so!

Ein av teimum sigur í sjónvarpinum, at jú, tað er bara gott, um tey ungu fara av landinum. Føroyar hava ikki ráð til teirra beint nú.

Eg kann altso bara skrubba av.

Bullshit! Tí tú sagar ta greinina av, sum tú situr á.

– Einir hálvtrýss føroyingar hava spekulerað landið út á sjógv, sigur babba.

– Hálvtrýss? spurdi Haraldur. – Men so hevur onkur givið teimum hálvtrýss loyvi at spekulera, so einfalt er tað.

Fleiri av okkum fara at yrkja, taka penn í hond og skriva svartar yrkingar og fosturlandssangir. Tónleikabólkar verða føddir og spæla sína sorg út í loftið. Teir gráta um standin og geva bassinum og gittaranum svakliga elektriska ovurmegi.

Og Haraldur byrjar upp á nakað nýtt: at mála. Tað eru døkkir málningar av skrínum fullum av følskum pengaseðlum og deydningum. Pápi hansara heingir teir upp í handilsvirkinum til sølu, men eingin keypir málningarnar. Teir eru ov tristir. Haraldur sendir teir inn til Várframsýningina hetta árið. Teir verða vrakaðir. Teir hava onga sál.

Og tey tysja niðan í Hoydalar. Hesin gamli heiðurskrýndi skúlin verður yvirfyltur av panikkslignum ungdómi, sum má finna sær eitt parkeringsøki, meðan landið fer á húsagang. Rektarin bjóðar vælkomin. Hetta er besta tilboðið, landið kann geva í løtuni, sigur hann og leggur afturat, at vón og útbúgving er svarið upp á tað, sum nú fer fram.

„My Pencil Is My Gun“ syngur ein ungur tónleikari har uppi í fríkorterinum og slær hart á sínar streingir.

*

# Sjálvband og samstýri



**William Heinesen.** Oljukrit 1952, 74,5 x 54,5 cm.

GUNNAR HOYDAL

# Bræv til Marionnu

Havn 8/10 92

Góða Marianna

Tú ringdi at frætta um støðuna í landinum, og eg má siga, at 6. oktober 1992 var ein dagur av serligum slag; ein sum setur mark í huganum og kanska eisini í lívinum.

Tað hevur verið lýtt og slavið nú í longri tíð, gott maðkaveður til mikkjalsmessu og slaktið. Men henda morgunin var kuldi í luftini og klárt, úr kamarsvindeyganum sást sólin koma reyð upp úr bygdini í Nólsoy, og eg hugsaði, at hetta mundi vera seinastu ferð í ár, sólin bar við meg nývaknaðan ein gerandisdag.

Tað var gott at ganga til arbeiðis, rútarnir skygdu í vesturbýnum og niðri á Tinghúsvegnum stóðu trø og runnar í gulum og reyðum litum, sum vildu tey vísa seg og erpa sær eina seinastu ferð, áðrenn tey tveita alt frá sær. So merkiliga kvirt, bara ljóðið av mínum egnu fótum niður á vegin, og har ringir skúlaklokkan og nú kirkjan og sum altíð lúðurin á skipasmiðjuni beint aftaná. Yvir um Bøkjarabrekku, men eingin bilur hvørki hendanvegin ella handanvegin, tað er gangandi tvørturum, sum er tað ikki týsdagur, men tíðliga sunnumorgun.

Longri niðri við Tinghúsið er kortini meira lív í, handverkarar og arbeiðsmenn gera seg til at fara undir dagin og hyggja upp á nýggja klubban, sum nú verður klæddur

uttan. Rútir eru komnir í, og hvítar plátur lýsa móti reyðum sprossum, kanska er hetta ikki so galið, í øllum førum stuttligari enn bæði tað høga húsið omanfyri og tann blindi skjøldurin á gamla Havnar Bio.

Inni í býráðnum er alt, sum tað plagar at vera, fólk leita í lummum og taskum eftir plastkortinum og stempla inn, tey á byggideildini eru sum vant seinni á veg enn hini. Tann stóri skermurin við teldukortunum verður settur frá og tekniborð verða ruddað. Men einki lag hevur verið á fólki, tey vita um stóru sparingarnar, sum standa fyri, og tey hava hoyrt um fundirnar í fíggjarnevndini, tað slepst neyvan undan at fólk verða søgd úr starvi, og hvør verður tað, tá ið boðini koma. Her er eisini nógv minni at gera, planleggingin er næstan heilt steðgað, onkur vil skunda sær at byggja, áðrenn meirvirðisgjaldið kemur, men tað er lítið afturímóti fyrr, tí eingir pengar eru at fáa til at byggja fyri. Bankarnir eru farnir at siga nei til alt, og tað ljóðar, at teir eru illa fyri.

Kortini grunar eingin nakað, tá ið býráðsformaðurin biður sínar næstu menn koma til sín. Hann situr við sigarett, sum er heilt óvanligt, og biður okkum lata hurðina aftur. Hann hevur beint nú frætt, at bæði Føroya Banki og Sjóvinnubankin eru steðgaðir upp, danska bankaeftirlitið hevur mett, at trygdirnar í skipum og virkjum eru einki verdar og mugu avskrivast sum tap, partapeningurin er burturi, har er einki eftir. Hvat fer at henda, veit eingin, men ein almenn frágreiðing er á veg, og útvarpið fer at koma við sersending kl. 1. Vit tosa um møguligar avleiðingar fyri kommununa, um innistandandi bæði av skuld og uppsparingum, alt verður bara gitingar, og vit fara frá honum við boðum um ikki at siga nakað við nakran. Men á skrivstovunum er longu eldur í, fólk hava lagt arbeiði frá

sær, summi ringja heim, onnur eru longu farin til hús, ein rópar um sínar sparipengar, har renna stór tøl, tey eru bleik, tey sum eiga, meðan tey, sum skylda, eru kinnareyð og hava betri mót.

Her verður einki arbeitt meir, fólk fara út á trappurnar og út á vegin, og har eru komin onnur úr øðrum húsum og skrivstovum, nú standa tey í bólkum og tosa saman. Summi ganga ímillum og bera tíðindi úr einum bólki í annan, tey standa mitt í gongugøtuni og bilarnir eru givnir at koyra.

Eg fari heim, gangi niðaneftir og royni at lurta. Eitt sjónvarp stendur við Føroya Banka og fólk vilja vita, hvat tey hava frætt, men tað er bara upptøkufólk, sum eru send at taka myndir av teimum, ið ganga út og inn gjøgnum dyrnar, tey vita einki meira enn hini. Uppi við Fossbankan er meira friðarligt, fólk skeita upp í vindeyguni, men kvika sær framvið, og tað skilst, at tey eru á veg niðan í Sjóvinnubankan. Og har á tí reyða torginum eru allir fjølmiðlarnir komnir, fotografar og tíðindafólk royna at fáa orð á tey mongu, sum trokast við høvuðsdyrnar, tað eru fólk, sum vilja inn, og onnur, sum koma út og kunnu greiða frá, at tey hava verið eftir pengunum hjá sær, men hava fingið nei, millum tvey og trý túsund krónur, tað er alt, tey kunnu fáa, og einki, eru pengarnir settir á bók við uppsagnartíð.

Ein maður við svørtum skeggi er ikki nøgdur við hesa viðferð og ætlar at ganga inn og út, til bókin er tóm, hann hevur longu verið fleiri ferðir inni og hevur fylt upp í ein bláan posa. Hann ger um seg, men tey flestu eru friðarlig, siga einki og lata sær lynda.

Gangi niðan gjøgnum bøin, sum er óvanliga grønur í sólini niðan móti húsunum; í tí klára ljósinum eru litirnir sterkir og blomstrini á potentillarunnunum lýsa. Sólin er

lág, men tað er stilt, og tað ber til at sita í krókinum; fari inn eftir bløðunum og einari øl, men hon smakkar einki, og tíðindini eru gomul sum frá aðrari verð. Tað er eingin friður fyrr enn tey veruligu tíðindini koma.

Og nú eru tey har. Fyrst í útvarpinum, so í sjónvarpinum. Eingin grund er hjá fólki at óttast fyri sínum pengum, verður sagt, bankarnir hava fingið nýggjan kapital úr Danmark, teir eru betur fyri í dag, enn teir vóru í gjár, tað er at sissa seg og geva tol. Og so kemur søgan um loyniligu samráðingarnar við donsku stjórnina og tjóðbankan, leiðslan í Sjóvinnubankanum, sum varð boðsend at koma niður í stundini, síðani boð eftir landsins leiðslu, náttarfundir og avtala klokkan trý týsnáttina um at bankin er ikki longur Okkara Banki men Teirra Banki – ella teirrara, sum nevndarformaðurin sigur. Samstundis er landið niðurbundið við treytum, so at tað nú ikki longur eru landsstýrið og løgtingið, ið avgera fíggjarlógina, men fremmandir menn.

Nú koma nevndarformaðurin og stjórin aftur úr Danmark, teir skulu í føðingardag hjá sær sjálvum, tí bankin fyllir 60 ár sama dag, sum hann dettur niðurfyri. Sjónvarpið fær í teir, og teir verða avtiknir úr erva og úr neðra, við bankabygninginum aftan fyri seg, har sæst eisini niðan í bøin og á húsini hjá okkum, og høvdu teir skrúvað linsuna rætt, høvdu teir kanska sæð meg í stovuvindeyganum við kikara kikandi oman á teir sjálvar har niðri á torginum. Teir nógvu menninir kýta seg, síggi í nakkan á teimum, men hoyri teir siga í sjónvarpinum, at bankin hevur einki kunnað gjørt, hann er ein spegilsmynd av samfelagnum, og tá ið samfelagið verður illa stýrt, so rakar tað eisini bankarnar. Og so fara teir inn til sherry og kransakaku, men lagið er einki serligt á starvsfólkinum og á teimum, ið eru komin at ynskja tillukku.

Samrøður eru eisini í telefonini úr Keypmannahavn við løgmann og landstýrismannin í fíggjarmálum. Teir verða spurdir, um teir hava selt landið fyri at bjarga bankanum, teir svara, at har var einki at velja í, og hvat er frægari: pest ella kolera? Og landið hevur so fingið nakrar hundrað milliónir afturat, sum tað ikki hevði frammanundan, so sjálvandi er støðan álvarslig, men hetta var kanska tað, sum skuldi til, fyri at vit skuldu skilja álvaran.

Er landið selt ella ikki? Hetta er tað, fólk tosa um, tá ið eg fari oman aftur í býin og til arbeiðis. Tey hava skilt, at pengarnir standa á bankabókunum enn, nú er tað landið, tey hugsa um, og skommina. Hvussu kundi alt hetta henda, hví hava politikararnir ikki fyri fleiri árum síðan dugað at sæð, at einki samsvar var millum forbrúkið og framleiðsluna í landinum, og at lán einaferð skulu gjaldast aftur? Tann stóri skipapakkin í 1985 verður nevndur, tá ið landsstýrið gav loyvi til at byggja nýggj skip fyri upp ímóti tveimum milliardum við landskassaveðhaldi til at fiska burtur av fiskastovnum, sum teir flestu longu vóru í neyð. Alt farið á heysin, og tað vanliga fólkið situr eftir við rokningunum, skuldin nú einar 175.000 kr. upp á fólkið. Og ringast av øllum: Nú er eingin fiskur eftir, í ár kemur ikki meira enn helvtin av tí, sum kom upp á land fyri fimm árum síðani, og skuldin er bara vaksin. Hvussu í himmalsins navni skulu vit kunna betala tað aftur, tá ið tað er nóg ringt at hugsa sær tað bera til, sjálvt um eingin skuld var.

Soleiðis tosa fólk, tey sita ikki sum vanligar dagar, men standa uttan um útvarpstól. Býráðsformaðurin eigur eitt lítið sjónvarp, tað er sett inn í fundarrúmið, og har standa eisini fólk uttanum. Øll skilja, at sjálvt um bankarnir eru bjargaðir, so verða tað nógv, sum missa arbeiðið, her verða nógvar tómar hendur.

Býráðslimir eru kallaðir saman at viðgera sparingarnar aftur, men kommunan er næstan gloymd og tað verður lítið annað tosað enn um bankarnar og teir fremmandu úr IMF, sum skulu koma og leggja annað lag á. Her verður einki trætað, sum ofta er, og eingin stýrir við strangari hond, tað er meira sum ein skúlaflokkur við eldri næmingum í fríkorteri.

Býráðsskrivarin er ikki á fundi, og onkur annar situr undir liðini á formanninum við gerðabókini framman fyri sær. Tann rætti skrivarin er nevndarlimur í Sjóvinnubankanum, hann hevur verið niðri til tær lagnutungu samráðingarnar, og tað vil so merkiliga til, at eisini hann hevur føðingardag henda sama dag, hann fyllir 65. So tá býráðsfundurin er av, fara vit til gongu út til hansara í vesturbýnum. Eftir vegnum eru fleiri, sum vilja vita, hvat hesir menn halda um støðuna, so tað tekur tíð at vinna fram. Men har stendur býráðsskrivarin í durinum og tekur ímóti, fyrikomandi sum altíð, og hann hevur einki ímóti at siga frá um samráðingarnar, nú tær eru av. Tað ljóðar næstan, sum tá ið Sovjett gjørdi innrás í Tjekkoslovakia í 1968 og tók alla leiðsluna við sær til Moskva. So nakrar rættiligar samráðingar var ikki talan um, har vóru treytir settar og einki meir, sjálvir søgdu teir næstan ikki eitt orð og kundu ikki mótmæla, tí so var bankin fallitt, so snøgt var tað. Tað skuldi alt vera loyniligt, og eingin mátti vita nakað, so teir gingu í smágøtum, tá ið teir skuldu til og frá ella koyrdu í bili, so at teir ikki skuldu hitta nakran føring. Men gakk, komnir á eina matstovu hitta teir fremstu ein kendan føroyskan politikara, og har mátti ein bakka út og ávara hinar, sum vóru skjótir at sláa frakkakragarnar upp og kvika sær víðari, meðan tann eini var eftir og tosaði hugnaprát við politikaran.

Onkur vildi vita, hvussu nógv hann sjálvur hevði mist,

og tað var ikki smávegis: Hann átti nógv partabrøv. Dagin fyri høvdu tey havt kurs 430. Men nú var kursurin fallin til 15, so nú var missurin 415 kr. fyri hvørt partabrævið. Kortini segði hann seg hava sovið væl og hugsaði meira um framtíðina hjá børnum og abbabørnum. Hann helt ikki, at bankin var uttan skyld í støðuni, og hevði tað verið í tíðini hjá gamla stjóra, so hevði hetta ikki hent, tí hann dugdi altíð at siga nei.

Føðingardagurin verður stuttur hjá okkum. Hetta er ikki dagur til stóra veitslu, og nú kemur sonur hansara, fiskasølustjórin, sum hevur mist nakrar hundrað milliónir krónur í partapeningi, og versonurin kemur eisini við konu og børnum, hann er umsitingarstjóri í bankanum, og kanska missir hann sítt starv fyrsta dagin. Nei, her er ikki stemningur at sita, og nú gangi eg heimeftir í skýmingini. Luftin er lýsandi vestanfyri, men reynini eru blivin svørt, nú er tað eysturbýurin, sum skyggir við tí seinasta ljósinum, og har er ein bygningur, sum lýsir meira enn hinir. Tað er tann stóri bankin, sum nú er heilt umskiftur innan, men uttan sæst einki á honum, og skiparin stendur enn á skjøldrinum í oljuklæðum, sum stýrir hann gjøgnum brotasjógv við fastari hond.

Eisini hesin, sum gongur heim, kennir á sær, at nógv er umskift innan. Sum er hetta ein dagur, ið markar ímillum farandi og komandi. Tað verður øðrvísi nú, hvussu verður nú við okkum, og hvussu verður við okkara góðu børnum, verður nakrantíð nakað hjá teimum at koma aftur til?

Hetta er týsdagur 6. oktober 1992, hugsar hann og tekur í úthurðina. Gott at koma heim til sítt egna.

Heilsanir til tykkum bæði,
pápin.

# Eminem aka Slim Shady



**Beinta av Reyni.** Oljumálningur 2006, 270 x 200 cm.

HEINE HESTOY

# Taskan

Óli Johann Johannesen, Óli hjá Hanna, vanliga nevndur Ollaba, var hampiligur og siðiligur maður, ið ikki gjørdi nógv hóvasták burtur úr sær sjálvum. Hann hevði upplivað mangt og hvat, men henda dagin var hann so at siga kroystur bæði á ein og annan hátt.

Ollaba hevði flogið einar tríggjar ferðir, men ongantíð fyrsta floks, ella „Business Class", sum tey róptu tað.

Í føroyaflogfarinum kendu tey ikki hetta fyribrigdið, tí har skuldu øll eitast at vera líka; har drógu tey ikki gardinur ímillum tey ríku og tey fátæku; men Ollaba hevði hoyrt um „Business Class", so hann visti, at har vóru setrini ein áttanda part breiðari og prísurin dupult so høgur sum vant.

Nú sat hann mitt í rokinum.

Hann hevði sitið í aðrari verð og mundi fingið ein skelk, tá ið flogternan kom til hansara og bað hann gera so væl at fara fram á fyrsta flokk, tí flogfarið var alt ov laðið har afturi, so tey noyddust at flyta nøkur fólk fram.

– Kostar tað nakað? spurdi Ollaba stúrin á enskum. Tað var týdningarmikið at ferðin hjá honum gjørdist so bílig sum til bar. Stjórin heima í Føroyum hevði sálast, um hann kom heim við eykarokning frá „Business Class".

– Alt er frítt, smílkaðist ternan, – tygum fáa fyrsta floks mat, – og drinks, legði hon afturat, sum fyri at lokka Ollaba.

– Drinks! hugsaði hann, tað hevði ikki verið tað versta.

Hann stakk á føtur.

– Minst til taskuna, segði ternan blídliga.

– Taskan, hugsaði Ollaba, henda dekans svarta taskan, sum hann noyddist at dragsa við sær alla staðni. Hann var vanur at ferðast við klædnasekki og plastposum og onkuntíð við gomlu skúlataskuni hjá soninum, so hann kendi seg illa við av hesi stívu svørtu taskuni, sum felagið í Føroyum hevði keypt honum til ferðina.

– Hvat skal eg gera við hetta, hevði Ollaba spurt.

– Til pappír og tílíkt, hevði stjórin sagt, – eg havi sjálvur eina, og hana hevði eg ikki viljað verið fyriuttan á uttanlandsferðum. Hygg, hon kann eisini steingjast, og bert tú kanst lata hana upp, um tú kennir tey røttu tølini.

– Pappír, hugsaði Ollaba, hvørji pappír? Og hvussu skuldi hann minnast øll hesi tølini, tað var nóg ringt at minnast føðingardagin hjá konuni. Men hetta var kortini ein gáva frá stjóranum, so hann tordi ikki annað enn at taka hana við sær.

Konan hevði lagt honum tvey pulsupør í taskuna, tí tað kundi gerast kalt á ferðini, sjálvur hevði hann koyrt tvey pør av undirbuksum í, eitt langt og eitt stutt, og seinni eina hálva ginn, sum hann javnan smakkaði sær á.

– Gerið so væl og setið tygum her, segði ternan og peikaði á eitt tómt setur. Ollaba takkaði fyri seg og settist. Hetta var avbera gott, setrini vóru breið, og har var ov mikið av plássi til beinini.

Hann rembdi sær og hevði góðan hug at taka ginnfløskuna fram og smakka sær á.

Tað var sum flogternan hevði lisið tankar hansara.

– Something to drink, Sir?

Ollaba takkaði fyri seg og bað um ein stívan ginn við sitrónvatni.

– Føroyingur, ha? læt knappliga í síðumanninum hjá honum.

Hann hvakk við, føroyskt hevði hann ikki roknað við at hoyra í flogfarinum úr London til Keypmannahavnar, men tað var kortini so hugnaligt.

Hann skeitti til viks. Síðumaðurin var ógvuliga bulmikil; vombin hekk út yvir beltið, og slipsaknúturin darlaði á barkakýlinum millum tvær ella tríggjar undirhøkur.

Hann var sum skrúvaður niður í setrið. – Hann verður ringur at fáa úr flogfarinum, hugsaði Ollaba, men líkamikið, hann tosaði føroyskt, og tað er nakað serligt, tá ið føroyingar hittast í útheiminum.

– Hvussu visti tú, at eg var føroyingur, spurdi Ollaba og rætti hondina fram.

– Eg gitti tað, flenti hin, og tók í hondina á honum, – tí tú blandaði sitrón í ginnið; nei tvass, eg hoyrdi tað á málinum.

Ollaba kleimdi hart um hondina, sum hann var vanur við, tá ið hann heilsaði fyri at vita, um knotur vóru í, men slepti skjótt aftur, tí hondin var so bleyt og heit, at hon nærum sprikti út millum fingrarnar.

– Eg eiti Ollaba, nei, eg meini Óli Johann Johannesen, heilsaði Ollaba blídliga. Eg eri smiður, eg havi verið á skeiði í Onglandi, teir hava keypt eitt nýtt rennitól. Tað skuldi eg læra at brúka, legði hann afturat, heldur erpin.

– Smiður, flenti hin, so høkurnar dansaðu, – tað merkti eg skilliga á hondini. Hann fann sær lummadúkin við navni fram og turkaði sær um báðar hendur og ennið.

– Nei, hendurnar havi eg aldri nýtt, men heilan. Hann peikaði á høvdið, – her er dugur í!

– Kevin Maccanyon, sakførari. Navnið er kanska ikki so rótføroyskt, men hvør kann eita Napoleon við Gjógv og

forvinna sær eitt einasta oyra í útheiminum. Eg noyddist at broyta tað, teskaði hann, sum var hetta ein stórur loynidómur.

– Tú, sig mær, hvat forvinnur ein smiður um mánaðin? Tað kann ikki vera tað stóra.

– Nú eri eg ikki vanligur smiður. Ollaba bretti sær á, eg eri formaður, so eg fái tvey túsund meira enn hinir. Eg eri langt síðan farin upp um tjúgu túsund.

– Tjúgu túsund, murraði Napoleon, og tók ein lummaroknara úr bringulummanum. Hóast fingrarnir vóru tjúkkir, gingu teir fimir við rúkandi ferð eftir knøttunum.

– Hevur tú einki at trekkja frá, eigur tú at gjalda ellivu túsund fimm hundrað og seksti krónur í skatti. Restini kann eingin kjaftur liva av. Her er deyðin í durunum og hungursneyð framman stavn. Tað sigur seg sjálvt. Hann helt roknimaskinuna fyri nøsina á Ollaba, so hann kundi síggja tølini.

– Hvat hevur tú at trekkja frá, Óli Johann, ella kann eg rópa teg Ollaba.

Ollaba varð illa við og eitt sindur snoypin, hann hevði ongantíð lagt í at trekkja nakað frá.

– Nei, eg veit ikki rættiliga, lítið og einki fyri at siga púrt einki. Eg fiskaði í fimm ár, so húsini havi eg goldið kontant, eg keypti mær eisini bil fyri tíggju árum síðani. Hann havi eg enn, legði hann erpin afturat. Volvo er gott slag, motorurin gongur sum klokkan bæði summar og vetur.

Nú flenti Napoleon, so bæði ístur og undirhøka dansaðu hvørt móti øðrum. Slipsaknúturin hvarv og kom bert undan, tá ið hann andaði.

– Sama bil í tíggju ár og húsini kontant. Nei, nei, tann síðsti býttlingurin er enn ikki borin í heim. Hetta krevur

ein lítlan, áðrenn eg fái tosað. Hann rópti eftir flogternuni og bað um tveir dupultar Glen Fiddich.

Ollaba var um at verða firtin, men skálaði kortini við Napoleon.

– Skál Maccanyon, segði hann eitt sindur speiskliga, men Napoleon læt ikki við seg koma.

Hann tømdi glasið í tveimum og turkaði sær um tær slevjutu varrarnar.

Rentuspekulatión! læt í honum.

– Hvat? spurdi Ollaba.

– Rentuspekulatión, tók Napoleon uppaftur eitt sindur ótolin, tú hevur væl ikki livað alt títt lív í Føroyum óvitandi um rentuspekulatión.

Tú veitst, lán í Jyske Bank inn í føroyskan banka. Skattafríur, rentur og skattalætta alt í einum. Bankabók sum trygd, bumbumbum, hevur tú lánt, – lat meg síggja, fingrarnir gingu uppaftur títtari eftir knøttunum, – fimm milliónir, so hevði tú ikki goldið eitt oyra í skatti, og tú kundi keypt tær ein nýggjan bil ístaðin fyri at koyra runt í traktori. Men nú er ov seint, hin gamli, nú fara teir við hvørjum oyra.

– Líka veit eg; Ollaba hevði í so máta ongantíð havt nakað ímóti at gjalda skatt. Tá ið hann fiskaði, vóru fleiri, sum reypaðu av at vera stórir skattgjaldarar.

– Reypaðu av at gjalda skatt, froysti Napoleon, hetta verður hvaðna verri. Tað eru bert landasvíkjarar, ið gjalda skatt. Eg havi ikki goldið skatt í tjúgu ár og heldur ikki tey, sum arbeiddu fyri meg. Fimm fyritøkur havi eg havt, allar fóru á reyvina, men eg eri líka væl fyri.

Napoleon var noyddur at loysa sær slipsið. Tað eydnaðist við miklum strevi, og tá ið knúturin glapp av barkakýlinum gjørdust tvær undirhøkur knappliga til eina. Sveittin lak av

honum, so uppøstur sum hann var. Ollaba varð bangin um, at hann fór at rúka í luftina.

– Nú skal eg siga tær eitt, tað er ikki ov seint at taka annað skinn um bak. Lat meg fáa teg undir hond í ein tíma, so skal eg broyta lív títt.

Eg havi 25 ára gamla konu úr Thailandi, tveir Mercedes og ein BMW. Villa í Sveits og smáttu í Skotlandi.

Hann tók svørtu tasku sína og legði hana á knøini, sum vildi hann vísa hana fram. Hann hevði sjálvandi eina av sama slag sum Ollaba, tað høvdu allir teir, sum ferðaðust á Business.

– Konu úr Thailandi, hugsaði Ollaba. Hvussu mundi tað vera? Hann hevði konu úr Bø, men hon mundi vera líka góð fyri tað. Mundi handa thailendska duga at kóka grind ella ræstan fisk? Nei, har mundi vera lítil nytta í.

Og hvør kundi koyra tríggjar bilar í senn.

– Nei, vinurin, Napoleon klappaði á lokið, eg skal siga tær eitt, erligur maður verður aldri ríkur. Hetta skalt tú leggja tær í geyma, og áðrenn ferðin er av, skal eg læra teg bæði eitt og annað, eg havi ovmikið av pappíri við.

Hevur tú nakrantíð sæð fimm hundrað túsund krónur, legði hann afturat.

Ollaba hevði einaferð havt fimm hundrað túsund í bankanum, men tær vóru langt síðani farnar í húsini, men hann hevði einaferð sæð hundrað túsund, tá ið ein vinmaður hevði keypt sær ein bil kontant til stuttleika.

Nú orkaði Napoleon ikki at bíða longur. Hann legði hondina yvir lásið og finglaðist eina løtu. So gloppaði hann taskuna, so Ollaba slapp at hyggja í hana.

– Hygg so, hin gamli. Fimm hundrað túsund í nýggjum seðlum, kølasvart hvørt oyra. Er hetta ikki betri enn at rena teir í skattaholið í Føroyum ella onkra aðrastaðni?

– Isle of Man er ein veldig oyggj, tað skal eg siga tær. Verðins besta; eg ferðaðist hagar tvær reisur um árið. Hygg nú! Hesa sjónina sært tú ikki hastiliga aftur. Og minst so til, hvat eg segði tær.

Ollaba var so skelkaður, at hann visti einki at siga, nú var tað hann, sum bað um tveir dupultar ginn.

Teir vóru meira enn hálvfullir, tá ið teir fóru úr flogfarinum í Keypmannahavn, Ollaba um at vera ørur í høvdinum av sussinum hjá Napoleon. Lummarnir hjá honum vóru stúvstappaðir av pappírum við útrokningum, ið skuldu ríka hann upp, tá ið hann kom heim aftur á klettarnar.

Teir fóru yvir í barrina at fáa sær tann síðsta, áðrenn teir skiltust, tá samanum kom hevði tað verið ein hugnalig løta.

Teir skálaðu. Napoleon rætti hondina fram og bað so hjartaliga farvæl. Hóast hann helt lítið um peningakunnleikan hjá Ollaba, so hevði hann kortini verið góður at drekka saman við.

Ollaba kleimdi enn einaferð ta lítlu heitu hondina, hesaferð var hann varnari enn síðst.

Napoleon hugdi at Rolex-urinum. – Dekans, flogfarið fer skjótt til Geneve. Tú fært ikki adressuna hjá mær, tað er best, at eingin veit, hvar eg búgvi. Minst til, hvat eg segði, tók hann uppaftur enn eina ferð.

Hann tók taskuna og skundaði sær avstað.

Ollaba hevði keypt sær tríggjar sitrónvatn, og á tí lítla kamarinum á hotellinum setti hann seg uppafturá. Nú skuldi tað vera gott at fáa sær ein ginnara við sitrónvatni.

Hann tók taskuna og sat eina góða løtu og finglaðist við lásið. Hvussu var tað nú, 6-4-8-? Hann royndi einar tríggjar ferðir, men einki batti.

Hann bannaði taskur og lás bæði niður og norður. Nú skuldi røkka ella støkka, um tað var gáva frá stjóranum. Ein ginnara vildi hann hava.

Sum góður smiður hevði hann sjálvandi skrúvublað við sær.

POUL F. JOENSEN

# Samfelagið

Várt samfelag er eitt dráma
við eitrandi háð og spott.
Har frekastu feitastan bitan
fáa, men aldri nokk.

Og alt er samanvovið
av sjálvgóðsku, svik og sorg
og pátrúgv, og heilagir skálkar
valda í hvørjari borg.

# Á G!



**Høgni Magnussen.** Ljósmynd 2007.

# Eg fann teg



# Máltræ




**Sendistovan.** Grafiskt snið 2009.

JÓANNES PATURSSON

# Eg veit ein kvist

1. Eg veit ein kvist, sum blómar enn
– er sprottin av góðum runni –
tó eyrvikukynt og gaddajørð
hann leingi hevur undir sær funnið.
Enn livir tann kvistur,
sum her rann av norrønum runni.

2. Staðið hevur hann í túsund ár
her vesturi á Føroya steini:
untu honum allir smáfuglar,
men gorpar vóru honum at meini.

3. Tóku teir av honum grasagarðin,
skuggaðu fyri sól,
so tveittu teir hann á oyðimørk,
har hann hevði einki skjól.

4. Har sleit hann vetrar hundrað trý
– nú skríður hann oman av fjøllum;
førkið tykkum, gorpar, eitt lítið dik,
sum gæta á grasagarðs vøllum.

5. Styðið nú, allir smáfuglar,
tit styðið nú kvistin so,

at hann sleppur aftur í grasagarð,
har hann eigur fyrsta boð.
    Tá nørist tann kvistur,
    her útrann av norrønum runni.

RASMUS EFFERSØE

# Úr øllum ættum

1. Úr øllum ættum koma vindar,
   tó ættin ein mær dámar best,
   hon fór ímillum fjallatindar,
   har sum eg havi vinfólk flest.

2. Kom, sveima, mjúki vestanvindur,
   út yvir akrar, gjøgnum skógv!
   Tú svalir hjarta mítt eitt sindur,
   tú minnir meg á bláan sjógv.

3. Tú bert mær heilsu yvir bylgju
   úr Føroyum og frá fólki har;
   góð ynskir hevur tú í fylgi
   frá teimum, sum væl unna mær.

4. Lat vesturætt ta skjútsond vera,
   sum altíð meg kann minna á,
   at Føroyum eg ei skomm skal gera,
   men tær í æru halda má.

CHRISTIAN MATRAS

## Móðurmálið

*(Yrkingin vígd føroyskum studentum)*

Eg fann teg í kvæðum, sum fólksins varrar
lyftu úr øld í øld,
eg fann teg í søgum og sagnatali,
har fólksins brøgd vóru tøld,
eg fann teg í mjúkum barnaljóði,
sum sungið varð vetrarkvøld.

Eg fann teg í orðum, sum møður mæltu
stákandi inni við eld,
eg fann teg í teimum hyggjuráðum,
í orðatøk vóru telgd,
eg fann teg í teimum føgru nøvnum
á fjøllum, áum og deld.

Eg fann teg hjá einsligum stórmennum,
ið festu teg fyrst á blað,
eg fann teg í tí væna ljóði,
sum skaldið um oyggjarnar kvað
– eg fann teg nú aftur, nú andi tín
teg loysa úr fjøtrum bað.

## Eg elski mína mús




**Petur & Petur.** Lýsing 2005.

HALDUR SUNI

# Eg'ið

kroppur mín
kenslur mínar
vreiði mín
sorg mín
gleði mín

upprunin
og grundarlagið
fyri eg'ið
– í mær

móðurmál

AGNAR ARTÚVERTIN

## Message 5



## Message 28


Message 28
Ekko. Eg leiti innani men finni
einki bert eitt
ekko av ti id
einaferd var
From: +298270314
5:11pm 1-MAY-06
Back
Reply

# Message 18


Message 18
Rædsluslígin
vatn fossar inn
livid ferdast framvid
ylandi bla ljos
ein kjans afturat
From: +298220674
12:20pm 28-APR-06
Back
Reply

# Kona



**Heðin Kambsdal.** Olja 2004, 80 x 65 cm.

PETUR PÓLSON

# Loynimálið – Bábel revisited

*Er fartelefonin okkara Bábelstorn?*

**Bábelstornið revisited**

Søgan um Bábelstornið hevur onkursvegna altíð sagt mær serliga nógv. Ikki endiliga so nógv, tí at tað er bíbilsøga (tí at tað skapar í sær sjálvum spjaðing millum fólk ofta), men sjálvur kjarnin í søguni, at fólk gjørdust stórlætin og royndu at byggja sær eitt torn inn í himmalin, við tí úrsliti, at Gud setti sær fyri at spjaða tey, ikki bara geografiskt, men eisini málsliga.

Tey (vit) fingu óteljandi ymisk tungumál, so at vit ikki skuldu skilja hvør annan nóg væl til aftur at fara í holt við slíkt óðamannaverk.

**Rullupizza**

Vit kunnu sita leingi og kjakast um mál. Hvussu vit á besta hátt varðveita tað, menna tað, fjøltátta tað og verja tað frá fremmandari spillu, ávirkan og íblástri. Vit hava estetisk mát, sum vit seta okkum sum fyrimyndir fyri, hvat eitt vakurt mál er.

Sum hasin har tosar vakurt føroyskt, kann hoyrast. Vit hava málprofessarar og profetar, sum halda okkum í nakkanum, gera okkum orð at siga og syrgja fyri, at vit hava eitt livandi mál, sum er borðbært og flott. Alla tíðina. Hetta er alt umráðandi, spyr tú meg. Men hetta er ikki alt. Spyr tú meg.

Vit hava eisini máldogmur og polemikk, sum gera málið til ein eksklusivan klubba, har bert tey, sum tosa reint og estetiskt rætt mál sleppa við. „Hatta er føroyskt, soleiðis tosar tú tað“. Eitt sindur sum at siga, at rullupylsa er meiri matur, enn hvat eitt nú pizza er tað. Tó at pizzain kanska er fleiri harrans ár eldri og hevur eina longri søgu enn rullupylsan.

**Omma**

Fólk eru ymisk, og tað er ymiskt, hvussu fólk eru fyri málsliga. Fólk, sum arbeiða innan skúla og aðrar útbúgvingarstovnar, vita hetta. Vit læra tey føroyskt, danskt, enskt, týskt, og hvat veit eg. Gera hetta til kriterium fyri, hvat tey kunnu sleppa at gera í framtíðini. Í skúlanum velja næmingarnir eftir

áhuga ella tí, sum teim verður sagt, at tey eiga og noyðast og mugu og skula hava, skulu tey víðari í útbúgvingarskipanini. Og hetta er so.

Tíverri, spyr tú meg. Onkur, sum kanska er eitt sindur málsliga tarnaður, og tískil ikki hevur eins brennandi áhuga fyri tí, enn „gott er“, noyðist at sita gjøgnum alskyns týskt-, danskt-, og enskttímar, tí at tað má og skal viðkomandi, ætlar hann sær „víðari“.

Soleiðis er útbúgvingarsamfelagið háttað og skipað. Og tað sigur seg sjálvt, at so er. Tað hevði verið tápuligt at farið og lisið heimsbókmentir, um tað einasta tú hevur í skjáttuni er seðlar við matvørum, sum skulu keypast fyri eina ommu. Vit eiga altso at fylla skjáttuna við tí, sum onkur hevur sagt okkum, skal vera í henni.

**Skift sam**

Men vit mugu heldur ikki gloyma tað, sum kanska er mest umráðandi og grundliggjandi, tá tað snýr seg um at hava eitt mál: samskifti. Vit noyðast at samskifta við onnur menniskju. Gera vit ikki tað, verður galin endi. Avskeplað sosialt, menningarliga avbyrgd og gloymd.

Til hetta samskifti krevjast nakrir eginleikar: At tú hevur eitt mál, sum er nóg sterkt til, at tú kanst byggja nakrar samanhangandi setningar á tað. At tú ert førur fyri at seta tað saman, soleiðis at tann, sum er á hinum endanum, kann skilja tað, tú sigur.

**Essemess**

Eitt rættiliga nýtt málsligt fyribrigdi, sum hugtekur meg, er tað, sum verður skrivað í sms boðum og á kjattum.

Hetta er eitt áhugavert mál, tí at tað er ein umskriving av okkara verandi máli. Summi vilja vera við, at hetta er ein forbronglað og vanskeplað útgáva av „tí ordiliga“ málinum, meðan onnur halda, at hetta er tað besta, sum er hent.

Hetta er í øllum førum ein effektivisering av almenna málinum, um tað ber til at siga tað soleiðis. Umstøður gera, at fólk ikki vilja nýta so nógvan pening uppá at senda sms’ini, samstundis sum hetta at senda sms boð er vorðið týdningarmesti grundarsteinurin í allari tilveruni, tykist. Fartelefonin er kanska okkara Bábelstorn.

**33**

Hvussu er og ikki, finst hetta málið, og verður tað tosað (ella helst skrivað) hvønn dag.

Ikki hevur klokkan ringt til fríkorter, so er fartelefonin frammi, og boð verða lisin, skrivað og send: „k… ql…“, „voytjse, gussjer ikk í da…“ „e fari ik í dans, ong peng…“ og so framvegis.

Tað áhugaverda, spyr tú meg, við hesum máli er, at tað á onkran hátt er fullkomiliga anarkistiskt, men allíkavæl ikki. Tað krevur, at tú hevur álit á móttakaranum, at viðkomandi er innlimaður í koturnar tú skrivar. Tað eru ikki bert styttingar, men

eisini blandmál. Enskt, danskt og føroyskt vellist alt í einum greyti.

Ein av trupulleikunum, sum kanska eisini ger, at hetta málið hevur so mikla andstøðu, er, at tað fyri fólk oman fyri 33 ár er fullkomiliga óskilligt, tí at tey fáa ikki verið við.

Tað er eitt annað mál enn tað, tey eru von við at tosa, og tí eru tey ímóti tí. Vit ræðast tað, vit ikki skilja, og tí verður hetta nýggja loynimálið eitt, vit antin noyðast at læra okkum, ella bara royna at fortrongja. Trupulleikin er bara, at fer ein gamal (33 ár ella eldri) at royna at tosa hetta málið, tykist tað ónatúrligt og „hann roynir ov nógv av spæla ungur og við upp á tað".

**Ski so fren**

Eitt, sum eisini er hugvekjandi við hesum, er, at fólk sum heild tykjast at vera rættiliga skisofren, tá tey skulu taka støðu til hetta fyribrigdi. Tey gera tað sjálv, men tá tey verða spurd, um vit ikki skuldu góðtikið hetta, sum verandi ein týdningarmiklan part av okkara máli, siga tey avgjørd, at tað hevði spilt okkara mál.

Altso, tað er í lagi at skriva tað til ein vinmann, sjeik, vinkonu ella dámu, men tað skal ikki skrivast í greinum í bløðunum, í skúlabókum.

Sá onkran lufta hugsanini um at skriva bíbliuna í kjattmáli. Kundi ikki halda mær at fegnast innantanna, samstundis sum eg sá fyri mær allar andaleyparnar, sum fóru at fyllast við hjartasuffum frá málelskarum.

Men, hugsaði eg, hví ikki. Hetta mál er ótrúliga áhugavert, tí at tað – samstundis sum at tað er anarkistiskt og estetiskt undarligt – byggir á sama grundarlag sum almenna og „ordiliga" málið.

Altso, tú noyðist at hava málsligan kunnleika, til tess at gera eina aðra útgávu av málinum. „Tann 9 maðurin eitur 8ar".

**Connect, disconnect (konn ektaður)**

Málsligar dogmur og polemikkur vilja altíð varðveitast. Onkursvegna finst ein málslig fundamentalisma, og tað stuttliga við hesum er, at við tíðini gerast hesir persónar dinosaurar og afturhaldskreftir. Hesir somu, sum hava brotið upp úr 9um og gomlum til tess at byggja okkum eitt mál. Og fólk flest hava eisini fullkomiliga liðugt handverkaðar hugsanir, tá tað snýr seg um mál, og hvat tað skal nýtast til. Yrkingar og poetikkur verða máld eftir einum ávísum málsligum estetikki.

Yrkingar á loynimáli fara ikki at vinna fram við tað fyrsta (tori eg at halda uppá), men tað er spennandi. Yrkingar, meiningar, hugsanir og samskifti á loynimáli. Er tað kanska bara ein spurningur um tíð?

Eg veit ikki, men eitt veit eg, og tað er, at tey, sum í dag eru ung (undir 33 ár) tosa hetta loynimálið flótandi, og tó at tey sjálv kanska ikki vilja hava tað at

verða alment (tí at tað er kanska meiri spennandi í loyndum, sum so mangt annað), so er tað ein inngrógvin og natúrligur partur av tí máli, sum verður tosað í Føroyum í dag. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst alnótin og fartelefonin.

**Avbjóðing**

Biður tú ein persón sløkkja sína fartelefon, tykist tað, sum kundi tú eins væl biðið viðkomandi kvett pulsæðrina.

Tað kemur fyri (systir mín er øgilig, hon er 26 ár), at fólk koma á vitjan, har tey sita og hyggja niður á sína fartelefon hvørt 54. sekund. Hetta halda summi vera serstakliga ófólkaligt, og tað er tað kanska eisini (tó at eg veit, at eg altíð havi eina super góða umbering, tá eg geri tað).

Tað er eitt sindur løgið, skal eg viðganga, at fara út at vitja onkran, og so sita og hyggja í sína fartelefon fyri at vita, um onkur – sum tú ikki ert og vitjar – hevur sent tær eini boð. Ella 2.

Tað er næstan, sum eru vit farin at elska fjarstøðuna, tí hon ger okkum so tætt knýtt at okkara fartelefon. At vitja hvør annan, tosa saman, flenna og drekka kaffi er als ikki nóg mikið.

Royn og ímynda tær (eg bjóði tær av her); far út og vitja onkran nú skjótt, og lat fartelefonina liggja eftir. Ikki bara sløkta, nei, lat hana liggja eftir heima. Eg lovi tær, at tú fert at kenna tað, sum manglar okkurt, sum ert tú ikki heilt menniskja.

Tí noyðast vit, treyðugt ella ei, at liva við ásannanini um, at fartelefonin og loynimálið eru tað, sum halda okkum uppi og á lívi.

**Ndi.**

Dóttir mín er 1 1/2 ára gomul í dag. Altso soleiðis umleið. Hennara mál er sera loynt, men hon tosar tað alla tíðina. Eg elski hana yvir alt. Eg royni at samskifta við hana, og tað gongur, spyr tú meg, rættiliga væl. Vit koma aloftast fram til eina semju av einum ella øðrum slag. Eg gleði meg, til hon verður eitt sindur eldri. Hvussu heimurin sær út, tá hon verður størri. Hvat mál tey tá tosa. Eg vóni, at eg fari at duga at vera við. Sum er, megni eg so dánt at fylgja við mínum næmingum og fleiri av mínum vinum, men tá dóttirin verður stór, noyðist eg helst at kýta meg av álvara. Mn, da man fara at ganga, helsjetæ?

# Málfúti



**Óli Petersen.** Tekning 2006.

STEFAN Í SKORINI

# Málslig intoleransa skeiklar almenna kjakið

*Føroyska málið eigur ikki at nýtast sum eitt ekskluderandi vápn, men heldur sum ein amboðskassi í konstruktivum kjaki*

Petur Pólson hevur undan páskum eina áhugaverda grein, sum millum annað snúði seg um loynimálið, ið verður nýtt á fartelefonum. Hann hevði nakrar áhugaverdar eygleiðingar, ið eg fari at gera viðmerkingar til. Hetta er ikki eitt beinleiðis aftursvar til Petur, men skal heldur lesast sum nakrir supplerandi tankar um hetta evnið.

Petur skrivar, at „vit hava eisini máldogmur og polemikk, sum gera málið til ein eksklusivan klubba, har bert tey, sum tosa reint og estetiskt rætt mál, sleppa við.“

Hetta er eitt sera vælkent og útbreitt fyribrigdi, at málið (kanska serliga tað føroyska) verður mangan nýtt sum eitt torturinstrument heldur enn eitt konstruktivt amboð. Nógv vilja nýta málið sum ein hamara og smíða sær eini hús. Onnur taka hamaran í hond og bróta skallan á teimum, ið ikki duga at stava ella at málbera seg. So kunnu tey vakna hvønn morgun og takka Gudi fyri, at tey duga at stava og seta orð saman í vakrar og meiningarfullar setningar.

Málið gerst tá eitt endamál í sær sjálvum heldur enn eitt amboð, ið skal nýtast at røkka einum øðrum endamáli. Samskifti eigur altíð at vera endamálið, og málið er tað týdningarmiklasta amboðið, sum vit nýta í samskifti millum menniskju.

**Mál er vald**

Tað er ein sannroynd, at tað eru tey fæstu, ið duga at stava og málbera seg á góðum, røttum føroyskum. Hetta hevur við sær, at fleiri gløgg høvd eru útihýst úr tí „eksklusiva klubbanum“, sum nøkur málkøn hava sett á stovn. Tað eru so nógv klók og intelligent fólk, sum ikki hava eginleikan at stava og skriva, og tey eru tí útihýst úr tí føroyska kjakinum.

Málið verður nýtt at lýsa veruleikan, sum vit uppliva hann.

Trupulleikarnir standast, tá tað góðkenda skriftmálið ikki reflekterar tað tosaða málið á mannamunni. Tá fáa vit nevniliga

trupult við at formulera veruleikan, sum vit uppliva hann. Og so hava vit í veruleikanum mist meira, enn vit hava vunnið.

Hetta hevur við sær, at ein stórur skattur av vitan og hugmyndum ongantíð verður varpaður út til tann breiða skaran av fólki, ið møguliga kundi havt áhuga fyri tí. Vit fáa við øðrum orðum ongantíð gagnnýtt eitt stórt tilfeingi, sum einstaklingar liggja inni við. Vit fara ongantíð at kenna ágóðan av hesi vitan, av tí at hon liggur undir lási og ongantíð sleppur at ríka gerandisdag okkara. Tað, at man ikki dugir at stava, merkir ikki, at man ikki dugir at hugsa, og at man ikki hevur visiónir eins og tey „skriftlærdu".

Vit hava í dag eina elitu, sum í veruleikanum hevur patent uppá at definera veruleikan á skrift. Ein bólkur av fólki hevur vald til at definera veruleikan í kraft av málinum. Um tú dugir málið til fulnar, hevur tú eisini eina rættiliga sterka positión í tí almenna kjakinum, og hendan valdspositión kann skeikla valdsjavnvágina í bardaganum millum meiningar og hugsanir.

**Mastodonturin**

Petur Pólson skrivar víðari, at „onkursvegna finst ein málslig fundamentalisma, og tað stuttliga við hesum er, at við tíðini gerast hesir persónar dinosaurar og afturhaldskreftir."

Her hugsi eg, at tann toppstýrda menningin og tann puritanski fornnorrøni hugburðurin við tíðini er blivin eitt haft um beinið hjá tí føroyska málinum, sum liggur í eini spennitroyggju á einum sinnissjúkrahúsi. Tað sleppur bert at virka innan fyri nakrar ávísar karmar, ið eru defineraðir av onkrum, sum hevur eina hugsjón um eitt „reint" føroyskt mál.

Fortreytin fyri einum livandi og dynamiskum máli er, at tað allatíðina sleppur at mennast á einum liberalum grundarlagi. Tað føroyska málið er komið fyri at vera, og tað hvørvur ikki sum døgg fyri sól orsakað av einum liberalum málpolitikki, sum onkur kanska óttast.

Tað er í grundini løgið, at orð, sum verða nýtt um alt Norðurevropa, ikki kunnu skrivast á føroyskum. Tey eru ikki at finna í nakrari føroyskari orðabók, men tey verða nýtt hvønn tann einasta dag, tá føroyingar samskifta sínamillum. Avleiðingin er, at tað føroyska málið verður fátækari og at enda turrgelt. Vit hava fingið ein mastodont, ið ikki er til at vika.

Eg havi stóra virðing fyri okkara málkønu, sum royna at menna og hjúkla um tað føroyska málið. Tað er nøkrum eldsálum fyri at takka, at tað føroyska málið yvirhøvur er á lívi, og at vit í dag kunnu samskifta á okkara egna máli.

Tó eiga vit ikki í dag at fella í hina grøvina, har tað bert ræður um at tosa málið rætt, men har vit gloyma innihaldið, ið altíð eigur

at koma í fremstu røð. Eg haldi ikki, at málið missir nakað, um vit loyva fleiri at fáa lut í okkara vælsignilsi.

Eg fari ikki at proklamera meg sum militantan málrelativist, men eg haldi, at tað er syrgiligt, at fólk uttan bókligar førleikar hart og brutalt verða útihýst úr tí almenna kjakinum orsakað av einum hugburði, ið sigur, at dugir tú ikki at stava ella at formulera teg nóg væl, skalt tú ikki deila tínar hugsanir við onnur menniskju gjøgnum tann skrivaða miðilin.

EIVØR PÁLSDÓTTIR

# Mín móðir

Mín móðir hon er sum ein drotning. Hon er sum tað vakrasta lag
Mín móðir hon er sum ein blóma. Hon er sum eitt livandi træ
Mín móðir er heim mítt kæra. Mín móðir mítt tryggasta stað
Mín móðir er bjartasta glæman. Hon lýsir mær døkkan veg
Mín móðir er sterkasta hondin. Trygt heim aftur leiðir hon meg
Mín móðir hjá tær eg standi. Í hjartanum goymi eg teg

SIGRI M. GAÏNI

# Minst til

Minst til at ansa eftir
Minst til vit eru úr Føroyum
Minst til ikki at provokera
Minst til at gleða øll
Minst til at lúgva og látast
Minst til ikki at gera sjálvmorð

Nú ert tú í Føroyum
Ansa eftir at fólk ikki
halda at tú heldur at
tú ert betri enn tey
Ansa eftir at fólk ikki
halda at tú heldur at
tú ert

HANS A. DJURHUUS

# Høsnatos

Tað var mánalýsi og blikastilli, og tað leið at miðjunátt.

Børnini svóvu; hini vaksnu vóru farin at lata seg úr. – Og í høsnarhúsinum durvaðu høsnini, summi á vaglinum, summi á gólvinum.

Hanin, ið var amerikanari, sat undir glugganum og hálvblundaði. Hann var ein rættur høvuðkambur, – hartil bonskur og ólátaður, men so spelkin, at allar hønurnar vóru óðar eftir honum. „Hann er so amerikanskur," søgdu tær. Og krepti hann høgra bein upp undir seg og fór at blunda við vinstra eyga, so var eingin teirra so óvand, at hon skrukkaði ella skavaði. „Nú hugsar hann um Amerika, nú má vera kvirt."

Ein lítil hvít høna hevði sett seg tætt undir liðina á honum. Hon var innan av Skála, og fyri henni var Skáli hitt besta og vakrasta í verðini. Fingu høsnini nakað reiðiliga forkunnugt, segði hon altíð: „Lukka, hetta er einki aftur ímóti tí, vit vóru von at finna í Skálakøsti."

Mánin lýsti gjøgnum gluggan. Hann legði eina breiða ljósrípu tvørtur um gólvið og upp eftir bróstinum, hann skygdi á hvítar, svartar og sprøklutar høsnabringur, á blóðreyðar reykir, ið stóðu summir beint upp og niður, meðan aðrir næstan lógu á liðini. Og hann rak myrkrið undan sær, heilt inn í hin myrkasta krókin.

Hanin sat og hugsaði um Amerika, mánalýsið gjørdi, at honum longdist, og hann kom at minnast á hinar stóru

skógirnar, hinar breiðu áirnar og hinar víðu akrarnar fyri handan hav. Men fyri at doyva henda longsilin mátti hann fáa sær onkran at skrukka við; hann vendi sær móti hini hvítu hønuni og spurdi:

„Svevur tú, armingin?"

„Nei, tygum, eg sovi ikki,"

„Latum okkum so skrukka saman!" segði hanin. „Kanst tú til dømis ikki siga okkurt um ætt tína; tí tað er eins gott at kenna hana og hava kjósina fulla av korni."

„Tað er sum tygum siga, lukka," segði hønan, hon skalv á málinum, so rørd var hon. „Ætt mín er av Skála, eg havi skavað í Skálakøsti, tað er ikki eiti av køsti tað, fullur av møðkum og sildahøvdum."

Hanin krepti høgra bein upp undir seg, blundaði við vinstra eyga og kipti høvdið niður í bringuna: „Eg eri úr Amerika," segði hann, „úr tí landinum, hvar ein pikkar hveiti frá sólarrisi til sólseturs. Ja, tú skalt trúgva mær, at ikki er betri land undir sólini enn Amerika, og eg skrøggi ikki," legði hann afturat; tí honum tókti, hønan var nakað tortrúgvin á at líta.

„So, so, lukka, tygum eru haðani. Ja, eg havi ikki verið har, men at døma eftir tí, tygum siga, so er tað næstan so liviligt har sum inni á Skála," segði hønan. „Er tað stórur munur á Amerika og Skála."

„Tað man tað vera," helt hanin, „tó vist kann eg ikki siga tað; eg havi ikki verið á Skála."

„Síggja tygum tað, síggja tygum tað, lukka; tygum hava ikki verið inni á Skála, tygum hava ikki sæð Skálakøst. Ja, so kann eg siga tygum, at tygum hava nógv eftir at síggja; tí alt tað, sum kann gleða høsnahjarta, finst á Skálakøsti. Á ja, á ja, tað er ikki eiti av køsti tað."

# Nes




**Ruth Smith.** Oljumálningur 1955, 45 x 51 cm.

„Hví vart tú so ikki verandi inni á Skála?“ spurdi hanin heldur speiskliga.

„Á, Harrin hjálpi tygum, lukka! Stóð tað til mín, so sat eg ikki her í kvøld, men eg varð tikin, sum eg gekk og spákaði í túninum, ballað inn í eina roðstúku og førd higar. – Men hví fóru tygum úr Amerika?“

„Eg vildi síggja verðina,“ segði hanin, „eg vildi fáa at vita, hvussu høsn vóru aðrastaðni. Eg fleyg upp á ein vogn, ið fór við rúkandi ferð, har varð eg sitandi eina økt; haðani fleyg eg umborð á eitt skip, og so sigldi eg við tí yvir havið. Tað var ringt veður við hvørt og gott veður við hvørt; og fram kom eg, og nú siti eg her.“

Hanin skeitti niður at hønuni. „Og eg var ikki ballaður í nakra roðstúku,“ legði hann við.

„Tað mátti ikki loyst seg at ferðast so langan veg eftir so lítlum; høsn eru høsn, og tey munnu øll vera nakað eins,“ segði hønan og kláaði sær undir búkinum.

„Nei, tað valdast høsn.“ Hanin toygdi seg yvir at hønuni, so hon skuldi hoyra hvørt skrukk. „Tað eru smá høsn og stór høsn, býtt høsn og klók høsn, spelknir amerikanarar sum eg og undansleppingar av Skála sum tú.“ Og so skilaði hann til: „Tað eru høsn, ið verpa stór egg, og høsn, ið verpa neyðaregg, so her er stórur munur.“

Hønan gjørdist firtin. „Ikki er altíð farandi eftir støddini,“ segði hon.

„Heldur ikki eftir vitinum?“ spurdi hanin, ið meir og meir legði dent á at arga hønuna.

„Á jú, eitt sindur,“ svaraði hønan. „Men mest er farandi eftir nyttu og fínleika.“ – – –

Hon varp smá egg; men tey vóru so rund og fín, at tey vóru tiltikin. Húsfrúin var altíð von at siga: „Hetta eggið er so fínt og fitt, hetta man mestur Skálahvíta hava

vorpið,“ ella: „Sjálv Skálahvíta verpur ikki betur.“ Hetta hevði hønan hoyrt; tí segði hon, at mest var farandi eftir nyttu og fínleika.

„Ja, ja, fínleiki er góður, hann er næstan betri enn vit,“ segði hanin. „Men ikki trúgvi eg, at tú hevur lært miklan fínleika á Skálakøsti,“ hann flenti háðandi og vendi sær frá hønuni.

Hon rodnaði í reykinum. „Hvat vita tygum um fínleikan í Skálakøsti,“ segði hon, „tygum hava jú ikki verið inni á Skála.“

Hanin sat og tagdi eina løtu, so segði hann: „Á, sum tú ert býtt, neyðardýrið – aldri havi eg tosað við býttari hønu, segði tú ikki í áðni, at har var yvirflóð av møðkum og sildahøvdum? Tað fer væl ikki at rópast fínt, líka so lítið, sum tað er fínt at verða ballað inn í eina roðstúku. – Nei, nei, legg tú ikki í at tosa um fínleika.“

„Hvat kunnu tygum prógva um fínleika og býttleika?“ Hønan gjørdist ill, hon var snarsint, sum alt ið lítið er. „Tygum munnu ikki vera so vitugur, at tað ger nakað; men óvandur og erpin, tað eru tygum.“

„Eri eg erpin, eri eg erpin?“ tók hanin upp í saman. „Well, tað kann væl vera, at eg eri tað; men so havi eg eisini nakað at vera erpin av; minst til, at eg eri komin úr hveitilandinum, úr sóllandinum, úr hinum ríka og stóra Amerika.“

„Eru allir amerikanarar sum tygum, so leingist mær ikki eftir at kenna fleiri,“ segði hønan og førkaði seg eitt sindur frá hananum. „Eg veit ikki, hvat eg skal til siga, at eitt sovorðið rekavætti skal vága sær at speireka skikkilig høsn.“

Men nú gjørdist hanin illur. „Segði tú rekavætti?“ spurdi hann.

„Ja, lukka, júst tað var orðið,“ svaraði hønan. „Og eg kann væl siga tað einaferð afturat, um tú ynskir tað – Rekavætti, re-e-kavætti.“

„Hatta skalt tú ikki hava sagt fyri einki,“ segði hanin, hann sletti aftur og fram við silpunum. „Tað er nógv fyri, at ein undansleppingur innan av Skála skal kalla nakran rekavætti – ein sovorðin roðstúkujomfrú.“

„Rekavætti!“

„Halt nev, tín krympirumpa,“ segði hanin; hann leyp á hønuna, hann sló hana við vongknúgvunum og skotraði hana niður av vaglinum. „Ligg har, tín maðkakjós!“ segði hann.

Hønan eymkaði seg illa, tí hon hevði fingið ógvuliga ilt. „Hetta skal vera afturlønt, bíða tú bara!“ læt í henni.

„Vilt tú hava meir, so sig bert frá, eg kann gera tær tað dyggari enn,“ segði hanin og gjørdi seg til at flúgva niður á gólvið.

Men hønan helt seg hava fingið nóg mikið, hon slapp sær í tann myrkasta krókin, har settist hon; tó leingi var, áður enn hon sovnaði, hon pipraði sum eitt bókarblað av øði og bangilsi.

Hanin sat birgur eftir á vaglinum, hann var erpin, tí hann hevði vunnið sigur. Longsilin eftir Amerika var sum blástur av honum nú; hann snaraði sær í ymsar ættir, líkasum hann vildi sagt við høsnini:

„Síggja tit ikki meg – meg, sum havi vunnið sigur –;“ tí tað er altíð stórt at vinna sigur, um tað so bert er yvir einari lítlari hønu innan av Skála.

Men eingin sá hann, øll høsnini svóvu.

— — —

Morgunin eftir gekk hanin, erpin og andbráður, og spákaði í túninum; hønurnar fjeppaðust uppi í honum,

men hann læt, sum hann ikki sá tær. Hin hvíta innan av Skála gekk fyri seg sjálva; hon royndi at halda seg so langt burtur frá hananum sum møguligt.

Stund um stund steðgaði hanin, leit í kring við hánskum eygnabrá og gól, so tað hoyrdist um allar geilar.

„Sum hann er reystmæltur, hann sjálvur," søgdu hønurnar. „Tað kann væl hoyrast á røddini, at hann hevur lært meira enn vit."

„Tað kann hoyrast, at hann er erpin," segði Skálahønan og flenti upp á kvamsvís.

„Tú ert ikki væl hýrd í morgun, mestur hevur tú havt andvekur í nátt," søgdu hønurnar; tær vistu ikki av tí, at hon og hanin høvdu barst um náttina.

„Eg eri eggsjúk," segði Skálahønan.

„So, so," søgdu tær, „tað fær ein yvirgang, slepp tær á reiðrið, so ert tú frísk um eitt lítið bil."

Skálahønan svaraði ikki, men slapp sær burtur frá hinum, hon vildi helst vera fyri seg sjálva.

Nú gól hanin aftur: „Kokk-kokk-kokkularakó!" segði hann.

Á, sum hon hataði handan hanan, hann hevði bæði kallað hana roðstúkujomfrú, krympirumpu og maðkakjós. – Á, hevði hon kunnað dripið hann, við gleði skuldi hon gjørt tað – men hvat kundi hon gera. –

Húsfrúin – hon var rund og feit – kom ruggandi gjøgnum túnið. „Á, har gongur Skálahvíta," segði hon. „Kom higar, so skalt tú fáa ein neva av korni framíhjá, hjúka mín." Hon fór eftir einari tægu, sum stóð inni í fjósinum, og nú fekk Skálahønan so nógv sum henni lysti av korni. –

„Neyðardýrið, tú ert tann fittasta og nyttugasta høna, eg eigi," segði hon. „Et nú so dúgliga, hin rádna hjá mær."

Húsfrúin stóð eina løtu og hugdi at hønuni, so rópaði hon: „Marin, í dag skulu vit hava hanan til døgurða.“

Marin, tað var arbeiðskonan, kom út í køksdyrnar, hon var rund og feit sum húsfrúin.

„Skal eg drepa hann alt fyri eitt,“ spurdi hon.

„Sjálvandi tað,“ segði húsfrúin. „Hann man vera feitur nú.“

„Ivist ikki í tí,“ segði Marin. Og so fór hon eftir hananum.

Hann rann undan, tað dýrasta hann orkaði.

„Eg eri úr Amerika, eg eri úr Amerika, tú nemur ikki við meg, hoyrir tú,“ rópaði hann.

Men Marin skilti ikki høsnamál, og tað var skjótt, at hon hevði fastatøkur á honum.

Skálahønan stóð við fjósdyrnar og flenti so hjartaliga. „Nú fært tú tað, hin gamli,“ segði hon. „Og tað skalt tú vita, at væl unni eg tær lagnu tína; tú veitst, at tann dettur aloftast niður, sum vil flúgva høgt.“

Marin kipti hanan; hann flagsaði eitt sindur við veingjunum, spjálkaði eitt sindur við beinunum – og so kvøtti ikki úr honum.

„Hann er feitur sum ein ólukka,“ segði Marin og tveitti hann í ein stamp, sum stóð har í túninum. „Ligg har fyri fyrst!“

Høsnini stóðu øll sum kánus, bilsin og ovfarin; men Marin gekk so stoltsliga sum ein sigrandi herhøvdingi móti køksdurunum, og húsfrúin elti hana.

Høsnini flyktust rundan um stampin; tey kundu ikki reiðiliga fata tað, at hanin so dáttliga var vorðin tigandi; hann lá har so stillur í stampinum og rørdi ikki eina fjøður. „Hann man mestur vera sovnaður,“ helt ein grá høna, sum

leingi hevði verið yndishøna hjá honum. „Tó, tað er løgið, at hann soleiðis sovnar um morgunin.“

„Á nei – einki svevur hann,“ segði Skálahønan. „Síggja tit ikki, at hann hugsar um Amerika?“ – hon sletti við nakkanum. – „Tí má vera kvirt.“

JÓANES NIELSEN

# Fyri tvær fløskur av konjakki

– Í kvøld hevði ein ráki av konjakki komið væl við. Birgir stóð sjálvur annar við lúnningina, og smyrjarin svaraði.

– Jú. Spurningurin er bara, um sjefurin, hann kveitti upp á brúnna, letur okkum fáa pengar.

– Hví ikki tað. Hetta er jú seinasta bunkringin, og menn hava eisini hug at keypa okkurt tinganestið heim við.

– Eg hoyri teg, smílti smyrjarin treiskur. Men vit fáa at síggja.

So var tøgn. Báðir festu sær í. Í bakborð sást eitt fuglavað. Á einum skeri stóðu nakrir skarvar og slotaðu.

– Eg skilji ikki mannin, tók Birgir afturíaftur. Gamal drongur. Pengar sum gras. Eigur skipið frá kjøli í mastur. Hoyrdi tú ikki, at kokkurin gramdi seg um, at kjøtið frá seinasta túri var komið umborð aftur, uttan at tað so mikið sum var tilskilað á proviantlistanum.

Nú komu ljósini frá Føroyingahavnini undan. Fleiri skip sóust við bryggjuna. Fyrri stýrimaður og tveir dekkarar stóðu uppi á bakkanum og gjørdu endarnar klárar. Teir flestu vóru eisini komnir út á dekkið. Stóðu væl hýrdir og eygleiddu ljósini. Summir høvdu latið seg í betri klæðir, ruku av sápu og barberspritti.

– Hatta er ein portugisari, glapp úr einum ungum egnara. Hann tók um akslarnar á síðumanninum. – Kenningin er bjargað.

Men tað vóru ikki bara menninir, ið gleddu seg. Afturi

# Føroysk delikatessa



**Anna Katrina Højgaard.** Ljósmynd 2007.

á bátadekkinum stóð tíkin hjá skiparanum, ein loðin pesja, og goyði. Halin upp í loft. Feittið undir búkinum skalv, sum hon rokaðist.

Í øllum hugnanum hoyrdu teir knappliga røddina á skiparanum. Hann hevði drigið brúgvarrútin niður. Av dekkinum sóust bara nasagluggarnir í honum.

– Fáa vit salt í kvøld, verður beinanvegin farið yvir á oljukaiina.

Men einki salt fekst fyrr enn næsta morgunin. Um náttúrðatíð bórust tíðindini, og menn skóru í róp.

– At hugsa sær, helt Birgir, skínandi sum ein sól. Í kvøld eina góða kenning. Sova til døgurðan og postin heimanífrá.

Eitt deiliga barnsligt kæti kom á menninar. Hetta var fyrsta fríløtan í fimm vikur. Í kvøld skuldi agn verða agn, og stamparnir stóðu rankaðir til viks í skúrinum. Lidnir at skaffa gingu teir í smáum bólkum í land. Summir fóru niðan á Sjómansheimið. Millum teir, ið gingu yvir á portugisaran, vóru Birgir og smyrjarin við. So mikið høvdu teir av pengum, at nakrar bíligar fløskur av konjakki fingu teir altíð bjargað sær.

Skiparin var einsamallur á brúnni. Í enskari troyggju, terylenbuksum og fjøðurhatti líktist hann einum sílafiskara. Bara miðjan gav honum eitt brá av aldri.

Afturi í skorsteinsrúminum hevði hann havt eina bátsmanstroyggju hangandi. Hesa ætlaði hann at lata onkrum portugisara fyri brennivín. Ullarkloddin, sum bara kundi brúkast sum madrassa hjá hundinum, fór at vera eitt gott agn. Ongantíð hevði hann kunnað tolað hasar vánaklæddu lúrandi menn. Fyri hann vóru nekarar, grønlendingar og lúrandi suðurlendingar eitt slag av apu, sum

vælgerðarfelagsskapir høvdu pyntað við vøkrum orðum. Eitt skittført fólkaslag uttan moral og reiðiligheit. Komu teir í havn, stjólu teir alt, ið lá leyst.

Ímeðan gekk ballið lystiliga á fremsta kamari. Birgir hevði drigið harmonikuna fram, sangurin tambaði fullsetta kamarið. Teir sótu á beinkjunum fram við undirkoyggjunum, og mitt fyri stóð borðið pyntað við trístjørnaðum konjakkfløskum. Ein gamal porkerningur hevði skorað seg frammi í skarp. Eyguni blunkaðu kát og argandi. Ofta tá á stóð, plagdi smyrjarin at geva honum eina hond við agnskeringini, og tá bleiv prikað. Aftur í kvøld byrjaðu teir.

– Sig mær Danjal. Ætlar tú at keypa tær gravstað?

– Tað havi eg sum kristin. Bæði til mín og konuna.

– Og børnini?

– Lat tey ganga í egnum hosum. Fjúrtan ára gamal streyk eg til sjós. Eingir beristólar hava ført meg. Men hvussu við tær?

– Eg havi keypt mær ein gyllin uttangarðs. Ætlaði at gravast millum fuglar og seyð.

– Ikki í vígda jørð?

– Til hvat? Hóast prestur hevur rist kross yvir nakrar bøkkar, skuldi tað verið ein kvittan til himmals?

– Spottari, ávaraði Danjal. Men smyrjarin brast útúr.

– Kom, lat okkum skála.

– Ja, skál títt bartrog, svaraði Danjal og hevði fløskuna á lofti.

Hetta var eitt vakurt kvøld. Himmalin tendraður við eini kvirru, sum bara nemist í oydnum landsløgum. Tað var liðið so mikið út á árið, at útróðurin var av. Stóra flakavirkið lá í myrkri við læstum hurðum.

Skiparin hevði gingið eina løtu fram við hesum fremm-

anda trolara, tá hann hoyrdi eitt bríksl, sá ein portugisara veittra til sín. Tá hann vísti honum plaggið, gjørdi hin beinanvegin tekin til at fylgja sær.

– Satans, hugsaði skiparin, tá hann stóð niðri á dekkinum. Hann hevði ætlað sær, at býtið skuldi fara fram millum skipið og bryggjuna. Og nú var hann á veg fram eftir einari langari gongd við fleiri afturlatnum hurðum. Træleytarin ríkti undir fótunum, og nú komu teir fram í eitt lítið kamar. Har reyk av fremmandum sigarettum, luktum, hann ongantíð fyrr hevði kent. Tað var skýmligt, eingin av teimum inniverandi gretti orðið.

– Um hann nú fer at kanna troyggjuna, hugsaði skiparin og ornaði um hárrøturnar.

– Nei, lat meg gera skjótt av. Hann visti, at prísurin fyri at svika móti fátækum monnum var høgur. Og líka løgdu teir í, um hann var skipari.

Maðurin, sum hevði ført hann fram á kamarið, dró smílandi tvær fløskur av konjakki fram, peikaði á stásiligu etikettirnar og segði – good, very good. Skiparin nikkaði. Royndi at vera róligur. Legði ullarkloddarnar frá sær. Okkurt, ið kundi tulkast sum eitt smíl, rykti í annan munnvikan. Síðani rætti portugisarin honum fløskurnar. Sveittur um lógvarnar tók hann tær, eina í hvørja hond og gjørdi tekin til at fara. Tá støðgaði portugisarin honum og risti við høvdinum. Skiparin kendi sveittan spríkja úr pannuni, men hin peikaði bara á fløskurnar og gjørdi tekin til hann at stinga tær upp á seg.

– Si, si. Hann smílti og klappaði skiparanum á økslina.

Kvikliga var hann úti av kamarinum og helt niðan gjøgnum trappurnar. Men tá kom róp í. Hann kendi hjartað sláa harðari og merkti, hvussu pulsurin dukaði í tinningunum. Hann var byrjaður at renna, men hoyrdi samstundis renn-

andi fet. Ikki bara av einum, men av fleiri monnum. Nú tók hann rættiliga dik á seg, og í skundinum misti hann fjøðurhattin. Var næstan komin yvir til hurðina, tá hann merkti okkurt um beinini á sær, og í fullari longd brast hann í dúrkið. Bleiv í ørviti av brestinuum, og tá hann kom eitt sindur til sín aftur, vóru armarnir snaraðir upp á ryggin. Tann fyrsti, hann sá, var ein lágvaksin maður, og síðani tann, hann hevði snýtt. Eyguni skinu av hatri. Tveir aftrat teimum hildu ørmunum. Hann kendi menninar aftur. Skuldi siga okkurt, men orðini tornaðu í hálsinum.

Komnir til hurðina støðgaðu teir, og hin lágvaksni leyp avstað. Men bara nøkur fá sekund. So sást hann aftur og gjørdi tekin til hinar at koma.

– Hvar fara teir við mær. Hvat ætla teir? Og svarið kom, tá teir førdu hann niður í maskinrúmið. Skundisliga tóku teir hann yvir til eitt arbeiðsborð, har tvær opnar skrúvustikkur stóðu. Og tá kom panikkur í skiparan. Hann sló og bardi frá sær og kláraði eisini at sleppa leysur. Men bara nøkur fá sekund. Sum høggormar vóru teir um hann. Toygdu armarnar útaftur, og tað næsta, hann føldi, var ein skerandi pína, tá kjaftarnir á skrúvustikkunum læstust um tumlarnar. Hann kendi knøini linka, seig niður móti dúrkinum, men bardi seg uppaftur í so ræðuligari pínu, at eitt hvølt skríggj glapp úr honum.

Hann hugdi rundan um seg, sá bara hesar hatsku fremmandu stara at sær. Áðrenn hann veruliga sansaði, hvat gekk fyri seg, bleiv reimin kvett av. Buksurnar skræddar niðurum, og hendur tóku niður á nakkan og trýstu høvdið niður móti borðinum.

– Tykkara reyvarhol. Devlayngul. Apur. Pakk, ýldi skiparin, meðan tann lágvaksni knappaði sær buksurnar upp.

Umborð gekk alt sum vant. Posturin var komin, og menn

sótu glaðir við ørkunum, teirra konur, børn, gentur ella foreldur høvdu skrivað. Í galluni stákaðist kokkurin, og messurin gekk floytandi og gjørdi borðini klár til skaffingar.

Tað var bara fyrsti stýrimaður, sum var eitt sindur óróligur. Tá klokkan gekk til ellivu, fór hann fyri triðju ferð upp á brúnna og bankaði varisliga upp á hurðina til skiparakamarið. Men einki svar kom. Heldur onki hoyrdist til hundin, hvørs goyggj annars vóru gitin um allan Fylla Bank. Bankaði so aðru ferð og hoyrdi skiparan koma skavandi yvir móti hurðini. Eina løtu finglaðist hann við lykilin, og tá hurðin gloppaðist, møtti stýrimaðurin tveimum blóðsprongdum eygum.

– Eg ætlaði bara at minna tygum á saltið, stamaði hann. Klokkan er skjótt ellivu.

– Javel. Fá tú menninar at taka saltið, eg eri ikki so væl fyri í dag. Og tá oljan er komin umborð, set tá kósina út á Fylla Bank.

Og soleiðis gingu tær tvær vikurnar, sum vóru eftir av túrinum. Skiparin sást sjáldan á brúnni, og til skaffitíðirnar kom hann slett ikki. Messurin bar honum matin upp á kamarið. Bara undir seting tók hann yvir, og so teir tímarnar, stýrimaðurin hevði frívakt.

Umborð gekk prátið. Menn hildu tað vera løgið, at stýrimaðurin nú var vorðin skipari. Og ikki minst stýrimaðurin undraðist sjálvur yvir hesa margháttligu vend. Og hví skiparin gekk við báðum tumlunum í bindi, var teimum av góðum grundum ein gáta. Men ikki minst. Hvar var hundurin blivin av.

Men allir spurningarnir vóru til fánýtis. Og hann, ið kendi svarið, hevði sínar orsøkir at tiga.

Fyrstu frívaktina var skiparin farin út á bátadekkið.

Undir arminum, vavdan inn í gomul bløð, bar hann deyða skipshundin. Beinini darlaðu leys báðumegin armin. Høvdið hekk við einum skallabroti niður eftir síðuni. Skundisliga tveitti hann tíkina fyri borð, og einastu vitnini, nakrir másar og havhestar, sóu avísirnar flotna, breiða seg út, fara aftur í kjalarvørrin sum smáir ísflakar.

TÓRODDUR POULSEN

## dulnevni

onkur vil vera við
at eg eri norðmaður
sjálvur kenni eg meg
sum írskan munk ella træl
uttan trælalyndi
men sannleikin er helst tann
at eg eri dani
hóast íslendingar
eru míni systkin
og kona mín er svensk
við finskum blóði
og vit hava bæði ikki enn
verið á álandi
ella í grønlandi
og við tess strendur
har pápi mín fiskaði
tá eg gekk í barnaskúla
har morgunsálmar vórðu sungnir
sum eg í dag hoyri inni í mær
tá sámarnir joika

# Søgan um floksmenninar

Í Hattarvík í Fugloy livdu einaferð í gomlum døgum tríggir menn, ið kallaðir vóru Hálvdan Úlvsson, Høgni Nev og Rógvi Skel. Hálvdan Úlvsson var sterkastur av teimum, tí hann orkaði at lyfta ein stein, sum enn sæst í haganum har og er kallaður „Hálvdans Úlvssonar hav“; steinurin er átta alin ummáls eftir tjúktini og tíggju alin ummáls eftir longdini.

Hesir tríggir, ið nú eru nevndir, vóru eitt heystið á fjalli við øðrum fugloyingum. Sum venja er til, hevði hvør maður seyðbond við sær; seyðbondini vóru ikki samlitt og heldur ikki javngóð, og kom tí til ilnar millum rakstrarmenn, at hvør ognaði sær tey bestu. Men av tí at hesir tríggir menninir, ið áður eru nevndir, hildu saman, tordu hinir ikki at forða teimum at taka bestu seyðbondini. Hesir tríggir sóu nú, at teir bóru yvirluta yvir hinar, og tað datt teimum tá í hug, at høvdu teir vilja til tess, tá stóð tað í teirra valdi at leggja undir seg fyrst Fugloy og síðani, um teir fingu nakrar í lið við sær, allar Føroyar, og ikki var leingi eftir at bíða, at teir løgdu ráð saman at fremja tað í verki, ið fyrr bert hevði verið umhugsað. Men tað sóu teir, at skuldi tað alt væl ganga, ið teir høvdu í hyggju, so máttu teir vera vápnaðir, og tí sendu teir bræv til kongs og bóðu um svørð. Haðani kom tað svar aftur, at føroyingar vóru friðardýr, og tí nýtti eingin svørð í Føroyum. Men teir vóru treiskir og vildu ikki gevast; teir skrivaðu kongi aftur og greindu so frá, at ikki var friður í Føroyum fyri útlendskum ránsmonnum, sum

kundu herja á fólk og drepa, áðrenn nakran vardi. So er at vera treiskur – tá fingu teir svørð.

Nú skal nevna við navni fjórða mannin í Hattarvík; hann æt Sjúrður við Gellingará. Hann var sum hinir tríggir stórur og sterkur; men í tí var hann ólíkur hinum, at hann var spakligari og stillisligari enn teir, og sjáldan var hann ráðaleysur; hann var ríkur bóndi. Sjúrð hendan vildu hinir tríggir fáa í fylgi við sær; men tá ið teir høvdu tosað við hann um tað, hevði hann altíð ført undan og sligið tað upp í glens. Hann hevði tvær orsakir til at gera so; onnur var, at honum líkaði ikki tað, sum teir ætlaðu sær, men hin orsøkin var, at hann stutt fyri tað í Gøtu hevði sæð eina gentu, dóttur ríka bóndans niðri við Hús. Honum leitst væl á gentuna, so væl, at tá ið hann var heimafturkomin til Fugloyar, lá hjartað eftir í Gøtu; hann var tí farin til Gøtu aðru ferð og hevði borið upp bønarorð. Gentan hevði tá svarað honum so aftur: „Kemur tú at ári í so vorðnum báti, sum tú komst við nú, so skal verða, sum tú vilt.“ Av tí at hann nú hugsaði um brúdleyp sítt, var hann ófúsur at fara slíka váðaferð. Men nú høvdu hinir tríggir sett tað í seg, at Sjúrður skuldi fara við teimum, og tá ið hann nú ikki vildi við góðum, gingu teir ein páskamorgun snimma inn í stovu, har sum hann lá og svav, drógu hann fram úr rekkju og lovaðu, at hann skuldi láta lív, um hann ikki vildi fallast á tað, sum teir høvdu í ráði, og ganga í felag við teimum. Tá læt hann sær eftirlíka.

So gingu allir fýra út fyri dyr, tóku sær av blóði og lótu saman renna til at vita, um allir vóru samsintir í tí, sum nú var fyri hondum. Men blóð Sjúrðar vildi ikki renna saman við blóðið úr hinum, og tí kom ilt í teir, og teir søgdu: „Nú skulu vit drepa teg, tí tú vilt ikki halda við okkum.“ Men Sjúrður svaraði: „Ikki er tað so, sum tit halda; er so lítið

skil í tykkum, at tit ikki síggja, at tí vil mítt blóð ikki renna saman við tykkara, at tykkara blóð er heitt, men mítt er kalt?“ Teimum skildist tá hetta satt at vera. Á tí staðnum, har sum teir blandaðu blóð, vuksu høgar túgvur úr jørðini, og hava tær sæst higar til dags.

Um ólavsøkuna fóru hesir fýra ránsmenn ella floksmenn, sum teir nú skjótt vóru kallaðir, til Havnar til tess at tosa við aðrar føroyingar um ætlan sína at leggja undir seg allar Føroyar, sum tá stóðu undir útlendskum harradømi. Teir fingu tá 50 aftrat í flokk við sær; flestir av teimum vóru úr Suðuroy. So var avgjørt, at teir skuldu møtast á Gøtueiði, og skuldu hvørjir kenna aðrar av tí, at bátar teirra skuldu vera bræddir í annað borð og hvítir í hitt. Men tað var ikki floksmonnum til gagns, at teir fingu aðrar í lið við sær, tí tá barst ætlan teirra út og frættist skjótt um allar Føroyar, so at fólk á flestum støðum hildu vakt fyri floksmonnunum.

Tá ið floksmenninir fýra komu heim aftur úr Havn, royndu teir at leggja undir seg alla Fugloy. Í Fugloy eru ikki meir enn tvær bygdir: Hattarvík, har sum floksmenninir búðu, og Kirkja, sum so var kallað, av tí kirkja var bygd har. Teir fóru tá alvápnaðir til Kirkju; men har hildu tey vakt, og tá ið tey sóu floksmenninar, flýddu øll sum skjótast inn í kirkjuna, tí kirkjan var vígdur halgidómur, so at ikki hin versti ránsmaður tordi at bróta frið har. Tá ið floksmenninir sóu fólkið flýggja í kirkjuna, søgdu teir við Sjúrð: „Tú ert skjótastur, Sjúrður, skunda tær oman og drep hvønn, ið tú fært fatur á.“ Sjúrður rann tá tað, ið hann var mentur, og tá ið hann kom at húsunum, sá hann eitt smábarn, sum tey í ræðsluni høvdu gloymt at taka við sær í kirkjuna. Sjúrður vildi helst koma barninum undan; men hann vildi eisini, at hinir floksmenninir skuldu halda hann vera dúgligan og illan í sær, so at teir ikki aftur skuldu illgruna hann.

Hann rendi tí spjótið í klæðini á barninum og floygdi tað yvir eina húslon til at koma tí burtur av vegnum, tí hinir høvdu ivaleyst dripið barnið, høvdu teir funnið tað. Men av tí at fjáltur var á honum, so kastaði hann so hart, at barnið steindoyði, tá tað datt niður aftur á jørðina. Fótasporið, sum Sjúrður stóð í, tá hann floygdi barnið yvir lonina, sæst enn, tí har hevur ikki síðani vaksið grasstrá. Av tí at annars alt fólkið í bygdini var flýtt í kirkjuna, so at teimum einki kundi gerast, máttu floksmenninir fara nakkalangir aftur til Hattarvíkar.

Teir ætlaðu sær so at royna á bóndan í Árnafirði og drógu tí bát sín, bræddan í annað borð, hvítan í hitt. Tá ið teir vóru komnir nakað frá landi, hevði Sjúrður fyri munni á sær: „Frítt er Eystfelli frá at fara.“ Hálvdan Úlvsson svaraði aftur: „Ómenni títt, fríðari eru allar Føroyar.“ – „Tá ið tú hevur tær,“ svaraði Sjúrður. – Teir komu nú inn til bóndans í Árnafirði. Hann var bæði stórur og sterkur, og hann helt ímóti Hálvdani; teir bardust leingi á gólvinum, og tað sýndist at standa á jøvnum føti. Tá ið húskallur bóndans sá hetta, legði hann seg fyri føtur bóndans, so hann fall um hann. Hálvdan Úlvsson høgdi tá høvdið av honum við svørði sínum. Tá ið hann var deyður, vendi húskallurin sær at kroppinum høvuðleysum og mælti: „Nú fekst tú løn fyri fleytagjaldið.“

Haðani fóru teir gjøgnum Hvannasund, síðani hildu teir fyri Kunoyarnakk, tí teir ætlaðu sær til Kunoyar. Tá ið teir komu fyri nakkin, var ein bátur har í útiróðrum; tá ið menninir á útiróðrarbátinum sóu, hvussu hin báturin var littur, vistu teir við tað sama, at tað vóru floksmenninir, og teir skundaðu sær tí at leggja inn á eina gjógv. Eingin av floksmonnunum uttan Sjúrður hevði sætt bátin. Tá ið floksmenninir komu áraka gjónna, varð einum gomlum

manni á hinum bátinum á at hosta; bæði Sjúrður og Hálvdan Úlvsson hoyrdu tað. Hálvdan segði: „Her er bátur inni.“ Men Sjúrður svaraði: „Altíð er illgruni á tær; hoyrir tú ikki, at tað er sjógvurin, sum runar inni á gjónni?“ – „Tað kann vera, at so er, sum tú sigur,“ svaraði Hálvdan, og teir róðu sína leið.

So vildi til, at sonur bóndans í Kunoy henda sama dag var burtur í haga. Hann hevði lagt stóran kava av landnyrðingi. Tá ið Árni – so æt sonur bóndans – hevði gingið hagan at enda, var hann móður, tí nógvur hevði kavin verið fyri fótunum á honum. Hann hevði ikki meir enn sett seg niður at hvíla seg, tá ið hann sá bát, sum helt inn undir land. Hann rópti á teir og spurdi, hvar teir ætlaðu sær; teir svaraðu, til Kunoyar. Hann var glaður við at sleppa frá at vaða gjøgnum kava heim aftur og bað teir lova sær í bátin; tað var gaman í, søgdu teir. Tá ið hann var komin í bátin, sá hann ein hóp av vápnum har; aftur í bakskutinum lógu fýra svørð, eitt til hvønn floksmannin; so høvdu teir eisini bæði øksir og spjót. Hann fór tá at hava illgruna á, at tað mundi vera floksmenninir, sum hann var í báti hjá; ræðsla kom, sum vera man, á hann, men ikki læt hann teir síggja tað á sær. „Vilt tú vera við okkum?“ spurdi Rógvi Skel Árna. „Til hvørs?“ svaraði Árni. „Til at vinna Føroyar,“ svaraði Rógvi. „Ja, tað vil eg,“ svaraði Árni. Tá segði Rógvi: „Nú skalt tú fyrst vera formaður hjá okkum til Kunoyar, tí vit eru ikki væl kunnugir.“ „Tað skal eg vera,“ svaraði Árni, „hagar fáa tit ongan betri formann enn meg; eg vil nú skifta vegin í fýra: fyrsta fjórðingin skal Rógvi Skel stýra, annan Høgni Nev, triðja Hálvdan Úlvsson, og tann fjórða Sjúrður.“ Síðani sat hann stillur og var sum millum heims og heljar, tí hann væntaði sær vissan deyða.

Tá fór Sjúrður at tosa við hann, tó spakuliga, so hinir

ikki skuldu hoyra, og segði: „Nú er deyðin tær vísur, tí floksmenninir høgga høvdið av tær, áðrenn teir leggja at landi; eg veit tær ikki annað ráð, enn at tú loypur upp á flata skerið undir Kunoy og roynir at leypa haðani á land; vilt tú royna tað, so skal eg stýra bátinum tætt inn at skerinum.“ Árni helt seg til at kunna leypa av skerinum á land.

Hálvdan Úlvsson tók eftir, at teir í loyndum tosaðu saman; hann rópti tí snøggliga á Sjúrð og segði: „Um hvat er tað, tit sita og lýðast á, Sjúrður; hví mugu vit ikki hoyra tað?“ Sjúrður svaraði stillisliga aftur: „Eg spyrji hann, um veðrarnir í Kunoy eru líka feitir enn, sum teir vóru fyrr í tíðini, og hann sigur so vera.“ Síðani vendi Sjúrður sær aftur til Árna og segði spakuliga, so hinir ikki skuldu hoyra: „Sig við fólkið, sum enn man vera í kirkjuni, at tey ikki mugu fara úr henni, tí ongastaðnis eru tey í frið fyri floksmonnunum uttan í vígdari kirkju. Minst nú væl til, hvat eg havi sagt tær.“ – „Tað skal eg,“ svaraði Árni. Hálvdan Úlvsson tók nú aðru ferð til orða, var illur og segði: „Hvat loyndarmál er tað, sum tú hevur at tosa við hann um? Sit ikki og lýð og lýð, men tosa hart, so vit kunnu hoyra, hvat tú sigur.“ Sjúrður svaraði: „Eg spurdi hann, um kýrnar eru líka feitar í Kunoy enn, sum tær vóru í gamlar dagar, og hann sigur so vera.“

Tá ið teir nærkaðust at lendingini í Kunoy, stýrdi Sjúrður tætt inn móti skerinum, og tá ið teir vóru áraka tað, leyp Árni úr bátinum á skerið og haðani á land; men skerið liggur hálvasættu alin frá landi, so at áttamannafar kann rógva innan fyri tað. Sjúrður tók øksina og kastaði eftir Árna, men við vilja rakti hann ikki. Hálvdan Úlvsson leyp skundiliga upp á skerið til at elta Árna, men hann tordi ikki at leypa inn á land, har sum Árni leyp, og mátti tí fara ein óhøgligari veg. Kunoyingurin, sum var lættur upp á fót,

# Fjallaoyggjar í kava



**Jacob Olsen.** Oljumálningur 1925, 43 x 60 cm.

slapp soleiðis nakað undan honum; men tá ið Hálvdan sá, at hann ikki kundi fáa hann aftur, kastaði hann øksina eftir honum. Hon feyk átta favnar á lofti og rendi so í klettin í seinasta fótasporið, sum Árni hevði stigið. Holið eftir øksina sæst skilliga í klettinum enn í dag. Árni rópti inn í kirkjuna og bað ongan ganga út haðani, tí floksmenninir vóru komnir at landi; síðani helt hann til fjals og fjaldi seg har.

Tá ið floksmenn komu at húsum, sóu teir, at allir kunoyingar vóru í kirkjuni. Teir fóru tá at hugsa um tað, at best mundi vera at royna at vinna sær vinskap hjá kunoyingum; teir fjaldu tí vápn síni, játtaðu, at teir vóru floksmenn, men lovaðu at teir ikki skuldu gera kunoyingum nakað ilt, og so vóru teir har fridligir og vinaligir. Einaferð, tá ið tosað var um, at vígdar kirkjur vardu móti ránsmonnum, spurdu teir kunoyingar: „Hvar er tann kirkjan í Føroyum, ið okkum kann verja?“ Kunoyingar svaraðu: „Tað er Svínoyar kirkja, tí hon er vígd seinast.“ Men tað var lygn, tí Svínoyar kirkja var einasta kirkjan í Føroyum, sum óvígd var.

Floksmenninir søgdu, at tað var ætlan teirra at fara á Trøllanes, og spurdu kunoyingar, nær best mundi bera til at fara hagar. Kunoyingar svaraðu: „Landnyrðingur norðan er besta ætt, og mysing sjóvað er besta sjóvarfall.“ Teir dvaldu enn nakrar dagar í Kunoy, men so sýndist at vera góð líkindi at fara á Trøllanes. Tá ið teir vóru komnir nakað frá landi, var so ringt í sjónum, at teir vóru nær við at ganga burtur; teir tordu tí ikki at halda longur fram á vegin, men vendu aftur til Kunoyar. Kunoyingar spurdu tá: „Hví koma tit so skjótt aftur?“ – „Vit sluppu ikki longur fyri sjóvarilsku,“ svaraðu teir. Men kunoyingar søgdu tá: „Høvdu tit hildið longri, so høvdu tit verið úr øllum vanda.“ Tá ið floksmenn hoyrdu hetta, erraðu teir seg upp og fóru aðru ferð av stað til Trøllanes. Tó at sjógvurin var verri nú enn

fyrru ferðina, vildu teir ikki venda aftur, men róðu líka tætt at lendingini á Trøllanesi. Men har stóð brimið uppi í grasinum, yvir hundrað føtur stóð tað upp við berginum, so har var ikki at hugsa um at lenda; ódn var í sjónum og ein stormur í vindi, so at teir hugsaðu ikki um nakað lív. Teir stýrdu tí aftur til Kunoyar, og tað var ikki meir, enn teir bóru boðini fram. Teir søgdu tá við kunoyingar: „Vit sleppa aldri á Trøllanes; vit vóru tætt við lendingina, men ikki var hugsandi um at komast á land," og so svóru teir ein dýran eið uppá, at teir skuldu ikki aftur royna at koma á Trøllanes, fyrr enn teir høvdu lagt undir seg allar Føroyar. Tá svaraðu kunoyingar: „Høvdu tit komið tykkum um tangan, sum er við lendingina, so var sloppið." Men tað var lygn sum alt annað, sum kunoyingar høvdu sagt floksmonnum; høvdu teir farið longur, so høvdu teir sjólátist.

Floksmenn sótu nú kvirrir í Kunoy, til tíðin nærkaðist, tá ið teir, sum avgjørt var, skuldu møta á Gøtueiði. Teir fóru tá eitt kvøldið av stað og stýrdu fyri Gøtunes. Sama kvøldið vóru vágsmenn á útiróðrum; teir sóu bátin hjá floksmonnum og kendu á litinum, tí mánalýsi var, og flýddu tí sum skjótast inn í eina gjógv á vestursíðuni á Borðoynni. Sjúrður hevði sætt bátin skilliga, og í tí hann fór inn um gjáarkjaftin, bar Hálvdan Úlvsson eyga við hann. „Har fór ein bátur inn á gjónna," segði hann. Men Sjúrður svaraði: „Tú sært altíð so nógv; sært tú ikki, at hatta er mánin, sum glampar á brimaldurnar við landið?" – „Tað kann so at vera," hugsaði Hálvdan við sær, og róðu teir sín veg fram. Síðani hevur gjógvin verið kallað „Mánagjógv".

Nú er frá tí at siga, at teir, ið embætisvald høvdu í Føroyum, høvdu hoyrt um møtið tað, ið vera skuldi á Gøtueiði; og teir 50, sum floksmenn høvdu fingið í lið við sær á tinginum í Havn, vóru tiknir fastir og kundu tí ikki møta. Tann dagin,

møtið skuldi vera, vóru samankomnir í Gøtu føroyingar úr øllum ættum, mong hundrað, til at taka hesar fýra floksmenn úr Norðoyum. Tá ið teir nú komu at landi á báti sínum, ið bræddur var í annað borð og hvítur í hitt, og sóu alla hesa mannamúgvu og sóu, at teir vóru allir óvinir teirra, men sóu ongan vin, ongan av sínum monnum, tá vendu teir sum skjótast bátinum og róðu burt úr Gøtu. Teimum datt í hug tað, sum kunoyingar høvdu sagt, at Svínoyar kirkja var seinast vígd, og tí tóku teir til at fara til Svínoyar. Teir løgdu at landi norðan fyri eiðið, drógu bátin, gingu um eiðið og oman á bøin, og so væl vóru teir tá hýrdir, at teir fóru at spæla sum smádreingir og blaka til máls við gróti.

Men føroyingar mannaðu seg upp, vápnaðu seg sum best og fóru við nógvum bátum til Svínoyar at taka floksmenninar fastar. So er sagt, at um 70 bátar fylgdust hagar. Tá ið teir løgdu at landi undir Svínoyareiði, sóu teir bátin hjá floksmonnunum standa har og fingu so at vita, at teir vóru í Svínoy. Teir skiftust í flokkar, fóru um eiðið oman á bøin, og tá sóu teir, hvar floksmenninir gingu og spældu. Teir steðgaðu tá og sendu fyrsta flokkin oman til at taka teir fýra menninar; men teir hildu tá uppat at spæla, tóku vápn síni og vardu seg manniliga. Tá ið føroyingar sóu tað, sendu teir straks annan flokkin ímóti teimum; men floksmenn tóku reystliga ímóti, og óvist er, um teir ikki høvdu vunnið, høvdu ikki so nógvir verið ímóti teimum. Føroyingar sendu tá triðja flokkin oman, og í honum vóru nógvir sterkir og væl vápnaðir menn. Tá ið floksmenn sóu teir koma, mistu teir mótið og rýmdu undan at kirkjuni. Har løgdu teir vápn síni uttan fyri kirkjudyrnar, gingu síðani inn í kirkjuna og hildu seg nú vera úr øllum vanda. Men føroyingar vistu, at Svínoyar kirkja var óvígd; teir valdu tí sterkastu menninar

burturúr til at fara fyrst inn í kirkjuna og leggja hendur á floksmenn; teir vóru so tiknir fastir og bakbundnir.

So var dómur fallin longu áður, at hesir fýra floksmenn úr Norðoyum skuldu vera omanstoyttir av hægstum Valaknúki í Skálabotni. Teir vóru tá fyrst førdir til Gøtu og vóru leiddir inn hjá bóndanum niðri við Hús.

Tá ið dóttir bóndans sá Sjúrð bakbundnan og dømdan til deyða, græt hon og segði: „Eg síggi, tú kemur øðrvísi vorðin í dag, enn tú komst í dag ár síðani, tá ið tú bart upp bønarorð til mín.“ Hetta var júst dagurin, sum hon árið fyri hevði nevnt Sjúrði, tá ið hann bað um hana. Sjúrður græt og fekk valla talað fyri sorg og sút.

Fangarnir fingu nakra tíð at búgva seg til deyða. Hálvdan Úlvsson, Høgni Nev og Rógvi Skel settu seg tá til borðs og gjørdu sær til góðar við skerpikjøti og alskyns góðum mati og drekka, men Sjúrður tók bønarbókina at lesa í og bað Guð um at tilgeva sær sínar syndir. Tá ið føroyingar sóu tað, fingu teir enn meiri vælvild til Sjúrðar; teir hugsaðu um tað, at hann hevði móti sínum vilja verið noyddur til at vera floksmaður, og at hann hevði roynt at hindrað so nógv ilt, sum í hansara valdi stóð, og tí vildu teir geva honum lív og grið. Men Sjúrður kravdi at láta lív. „Eg havi samtykt í tí illa, sum hinir hava gjørt,“ segði hann, „tí vil eg fáa sama gjald sum teir, og um eg hevði sloppið leysur hesu ferð, so kundi eg komið til at gjørt ilt eina aðru ferð.“

Floksmenninir vóru síðani førdir upp á hægstan Valaknúk, omanstoyttir haðani og grivnir niðriundir. Leiðir teirra síggjast enn í dag; leiðini hjá teimum trimum eru svørt og ljót, eyrur og grót, men leiðið, sum Sjúrður hvílir undir, tað er vakurt; altíð er tað prýtt við grønum grasi.

*Fríðrikur Petersen*

# Kvinna við vesikummu



**Erla Marita Askham.** Oljumálningur 2007, 240 x 240 cm.

KÁRI P.

# Meirilutin ræður

nú bløðini skriva várt land fer um koll
hví hjálpir oss nú eingin nólsoyar páll
øll klípast og klandrast at tryggja sær sess
hygg – annarhvør ungi nú føðist við stress

alt veksur í virði nú uttan tín løn
tí fólkið skal spara er vísmanna bøn
títt kekkhefti klænkar og svárt svíður sár
tá bilar og video broytast hvørt ár

er títt typuhús norskt og títt sjónvarp japanskt
tað tú hoyrir og sært har er danskt amerikanskt
hvat er tað sum bagir, hvørjum endar tað við
sig mær fáa vit føroyingar ongantíð frið

men ovasti dómstólur dóm hevur felt
tú skalt eta tey epli tú sjálv hevur velt
tí meirlutin ræður og tað er so rætt
at alt verður júst so sum hann hevur sagt

men – gerast fólk klók av at fylkjast í flokk
so vóru vit bæði vísmenn um vit vóru nokk
tó málfrøðin mest hevur fávit mítt fest
um flest merkir best ella barasta flest

HEINE HESTOY

# Óboðin ferðamaður

**Lagos september 1986**

Tosa sjómenn um Lagos, snýr tað seg mest um tey árini, tá ið vágin var avtaglað við fraktbátum úr nærum øllum heimspørtum.

Tá tey vóru flest, lógu fleiri enn 400 skip til akkers og nógvar vóru ræðusøgurnar um vápnað álop á náttartíð, dráp, neyðtøkur og stuldur.

Skipari á donskum fraktbáti skeyt meistaran; alvápnaðir indarar og russarar á stórum fraktbátum skutu sjórænarar og tveittu teir fyri borð. Eydnaðist tað løgregluni at handtaka brotsmenninar, vórðu teir avrættaðir inni á strondini beint uttan fyri Lagos.

Allar hesar søgurnar runnu fram fyri meg, fyrstu ferð eg stevndi inn á vágna við fraktbátinum Arrebo av Marstal. Skipið var lítið, bert 700 tons, og vit vóru fýra fólk um borð, skipari, stýrimaður og tvey ungfólk á dekkinum, men tað sum ørkymlaði meg mest var, at annað var eitt konufólk, Hanna, sum samstundis var kokkagenta hjá okkum.

Men tíbetur, skilið var ikki so ringt, sum tað hevði verið. Bert nøkur fá skip lógu til akkers, og vit sluppu at kei í øllum góðum.

Tá ið tollarar, havnameistari og aðrir knossaðu í land við mati og øli og øðrum, sum teir høvdu kannað sær, var friður eina løtu at tosa við umboðsmannin hjá okkum; hann var dani og hevði búð í Lagos í nógv Harrans ár.

Hann greiddi okkum frá, at neyðugt var við trimum vaktarmonnum, einum í messuni og tveimum á dekkinum, annars hvarv alt, ið leyst var. Alt kundi stjalast, og alt kundi nýtast. Ein bandstubbi, tómar fløskur og blikk, og úr skrellinum var kanska møguleiki at finna sær eplaflus ella ein breyðbita.

At vera vaktarmaður var gott arbeiði. Lønin hjá teimum var kanska einki at reypa av, men teir fingu væl at eta, teir dagarnar teir vóru um borð, og ansaðu sostatt væl eftir skipinum.

Næsta morgun komu lastbilarnir hvør eldri enn annar á tremur við kakaobønum í sekkjum. Vit skuldu ferma um fimm hundrað tons, og tað var ætlað at taka einar fýra dagar.

Har var ein øgiligur gangur av teim tjúgu arbeiðsmonnum, ið skuldu stúva lastina. Allir veipaðu við ørmunum og róptu og skemtaðust. Dekkarin Hanna vakti miklan ans, og allir vildu tosa við hana, tað var ikki vanligt at síggja konufólk á dekkinum.

Tað gekk væl at koyra tey fimm hundrað tonsini um borð, tað vóru fáir trupulleikar og bert onkur steðgur, tá ið tað regnaði.

Umboðsmaðurin og myndugleikarnir høvdu ávarað okkum fleiri ferðir um at ansa væl eftir, at eingin sníkti seg um borð. Teir søgdu, at einki skip fór úr Nigeria, uttan at onkur royndi at sleppa sær við at rýma undan neyðini og fátækradøminum. Kom onkur um borð við ongum passi ella pappírum, kundi tað elva til stórar trupulleikar fyri skipið, tí hesir vóru statsleysir, og einki land vildi hava teir inn.

Eitt annað skip í okkara felagi hevði havt ein mann umborð í tvey ár, tí eingin vildi vita av honum.

Tí var tað umráðandi at leita væl. Hetta gjørdu vit fýra saman við vaktarmonnunum, og alt varð kannað gjølla; frammi undir bakkanum, í bjargingarbátinum og uppi í skorsteininum, hvørt skot og hvørt skáp, har hugsingur var, at ein maður kundi goyma seg.

Tá ið vit høvdu leitað í ein tíma, vóru vit viss í, at har var eingin óboðin ferðamaður um borð.

Hetta var um tíggjutíðina fyrrapartin, og ætlanin var at sigla klokkan tólv. Stýrimaðurin helt fyri, at nú vóru góðar stundir at hugna okkum eina løtu, so hann ætlaði sær í kabússina at baka, so meðan hann fór at knoða, fór eg í maskinrúmið at gera til reiðar at fara.

Eg fór við hondini undir dúrkið at skrúva frá kølivatninum, men fekk sovorðnan skelk, tá ið eg fekk hendur á okkurt bleytt, loðið. – Ein slanga, hugsaði eg, ella kanska ein stórur eiturkoppur.

Eg leyp á føtur, leitaði mær lyktina fram.

Nei, tað var hvørki slanga ella eiturkoppur. Ljósið skygdi í eygunum á einum ungum svørtum manni, ið var minst líka so skelkaður sum eg. Og knappliga so var hann horvin.

Eg reyk upp í kabússina til stýrimannin. – Skunda tær, Knút, vit hava fingið ein ferðamann við. Hann var skjótur; so skjótur, at hann gloymdi alt um deiggið. Við hálvknoðaðum fransbreyði í hondini rann hann oman gjøgnum leytaran. – Hvar er hann? Hann bannaði við, tá ið hann knappliga var varur við fransbreyðið. Men nú mátti breyð vera breyð, maðurin skuldi finnast.

Vit noyddust at taka dúrkpláturnar upp, annars var ógjørligt at finna hann; ótrúligt, at nakar kundi snúgva sær ímillum rørini í so lítlum maskinrúmi. Nú bar til. Tá ið vit høvdu tikið einar tvær plátur upp, sóu vit beint í snýðið á honum, og hann kom so snópin upp; saman við honum

kom ein annar drongur, ið eisini hevði leitað sær niður undir dúrkið; ætlandi vóru teir báðir saman.

Tað var ein lætti hjá okkum, tá ið teir fóru rennandi eftir keiini, og hjá teimum, tá ið teir kluvu upp um eitt stik og sluppu sær undan hermonnunum á keiini, tí vóru teir tiknir, høvdu teir fragd í at buka teir sundur og saman.

Nú varð leitað enn einaferð, og til endans vóru vit vísir í, at nú var eingin óboðin ferðamaður um borð.

Endiliga. Loðsurin var farin, og vit vóru leys av brimgarðinum. Veðrið var av tí besta, og ferðin var góð í undanvindi og viðstreymi.

Aftan á døgurða fór stýrimaðurin á vakt, og eg legði meg inn á koyggjuna at fáa mær ein slang.

Eg vaknaði nakrar tímar seinni, tá ið hurðin brast upp og kokkagentan kom nístandi inn á kamarið ballað inn í eitt handklæði. – Hvat nú? Eg leyp av koyggjuni í skundi.

Har liggur ein svartur maður niðri í gongini! Kølasvartur!

Hon fekk næstan ikki orðið upp, – eg kom úr baðirúminum og mundi traðkað á hann.

Jú, svartur var hann og meiri enn tað, tí hann var smurdur inn í skitna smyrjiolju. Hann var so pøstur, at hann orkaði ikki at lyfta høvdið, men royndi at veipa við einum illa farnum passi, ið hann helt í aðrari hondini. – Passport – annað orkaði hann ikki at siga.

Vit hjálptu honum upp á dekkið og fingu honum okkurt kalt at drekka; meðan vit fregnaðust um, hvussu hann hevði fjalt seg í maskinrúminum, har vit høvdu leitað, steytað og lýst allastaðni.

Jú, hann hevði ligið næstan undir motorinum í tí skitnu oljuni og vatninum í kjølinum. Har hevði hann ætlað sær at verða til á náttartíð, tá ið hann var vissur í, at vit vendu

ikki aftur við honum. Men tað gjørdist so heitt, kanska eini 60-70 hitastig, so hann orkaði ikki at vera har. Um at doyggja av hita og tosta hevði hann knossað seg upp úr maskinrúminum og smokkaði saman í gongini, beint tá ið kokkagentan kom úr baðirúminum.

Hann var bangin, men sissaðist eitt sindur, tá hann fekk vissu fyri, at eingin ætlaði at leggja hond á hann ella tveita hann fyri borð. Hann hevði kanska hoyrt søgur um, hvussu endin kundi verða fyri ferðamenn av hansara slag. Aftur til Lagos vildi hann ikki, og hann bønaði um at sleppa við okkum. Hann skuldi arbeiða hart, og passið, tað hevði hann.

Vit tosaðu aftur og fram eina løtu. Vit vóru ikki sinnað at taka hann við og høvdu heldur ongan hug at venda aftur til Lagos. Fekk løgreglan hendur á honum, visti eingin, hvønn enda hann mundi fáa.

Til endans gjørdu vit av at smíða ein flaka og fara so nær landi, sum vit tordu at lata hann rógva inn.

Sum sagt so gjørt. Eftir einum tíma var flakin klárur, tveir plattar og nakrar tómar oljutunnur, og vit hildu inn móti landi.

Vit royndu at greiða honum frá ætlan okkara, men tað dámdi honum lítið, og hann var púra skelkaður, tá ið vit lótu hann í bjargingarvest og funnu árarnar fram.

Tá ið vit nærkaðust landi, var eyðsæð, at tað var ógjørligt at rógva inn, brimbart var, og streymurin rak hart fram við landi.

Kanska kundu vit taka hann við okkum til Kanariuoyggjarnar og lata hann rýma har. Eg ivaðist eina góða løtu, tá eg knappliga sá trý høvd koma undan aldukambinum úti um stýriborð. Tað var ein kano, stórur úrholaður viðarbulur við páhangara í reyvini og trimum fiskimonnum um borð.

Vit vendu skipinum, og stýrimaðurin skundaði sær fram á bakkan at veittra við fløsku í einari hond og sigarettum í hinari.

Tað var skjótt, at gørnini vóru drigin, og teir komu at borði. Jú, gaman í, teir kundu saktans taka ferðamann okkara við sær til lands, um teir fingu okkurt afturfyri.

Glað vóru vit, tá ið hann fór niður í bátin. Hann heilsaði blídliga, hóast tað ikki eydnaðist honum at koma til útheimin á hesum sinni.

Tað seinasta, eg hoyrdi, var rødd hansara, tá ið hann bardist fyri at fáa sín part av sigarettunum og fløskunum.

CHRISTIAN MATRAS

# Hitt blinda liðið

Ganga fram í myrkri
øll tey blindu.
Ganga ymsar leiðir
eftir lyndi.
Eingi hóma miðið,
fram bert ganga –
so fer blinda liðið
vegin langa.

Summi lúgvast tíðliga
og leggjast fyri,
onnur halda ferðin
er uttan virði,
fylgja so við streymi
uttan vilja –
ganga øll í dreymi
og einki skilja.

So í sælum stundum
hendir lívsins undur,
blindir fáa megi
at lata eygu sundur,
liva ríkar løtur,
ið leingi minnast,

# Babyboom



**Astrid Andreasen.** Ull 1997, 258 x 159 cm.

síggja allar gøtur
saman finnast.

Ganga so aftur
øll í blindum,
ganga ymsar leiðir
eftir lyndum,
eingi hóma miðið,
fram bert ganga –
so fer blinda liðið
vegin langa.

# Regnið og lívið



## Hávamál

76. Deyr fé,
deyja frændur,
deyr sjálfur ið sama.
En orðstír
deyr aldregi
hveim er sér góðan getur.

77. Deyr fé,
deyja frændur,
deyr sjálfur ið sama.
Eg veit einn
að aldrei deyr:
dómur um dauðan hvern.

# Uttan heiti



**Tummas Jákup Thomsen**. Steinprent 1998, 35 x 35 cm.

# Hávamál

76. Doyr fæ,
doyggja frændur,
doyggi eg sjálvur samur;
men ámæli
doyr aldri
honum, tað fræga fær.

77. Doyr fæ,
doyggja frændur,
doyggi eg sjálvur samur;
eitt eg veit,
sum aldri doyr,
dómur um deyðan mann.

*Regin í Líð føroyskaði*

NORDAHL GRIEG

# Til ungdommen

Kringsatt av Fiender,
gå inn i din tid!
Under en blodig storm –
vi deg til strid!

Kanskje du spør i angst,
udekket, åpen:
hva skal jeg kjempe med,
hva er mitt våpen?

Her er ditt vern mot vold,
her er ditt sverd:
troen på livet vårt,
menneskets verd.

For all vår fremtids skyld,
søk det og dyrk det,
dø om du må – men:
øk det og styrk det!

Stilt går granatenes
glidende bånd.
Stans deres drift mot død,
stans dem med ånd!

Krig er forakt for liv.
Fred er å skape.
Kast dine krefter inn:
døden skal tape!

Elsk og berik med drøm
alt stort som var!
Gå mod det ukjente,
fravrist det svar.

Ubygde kraftverk,
ukjente stjerner.
Skap dem, med skånet livs
dristige hjerner!

Edelt er mennesket,
jorden er rik!
Finnes her nød og sult,
skyldes det svik.

Knus det! I livets navn
skal urett falle.
Solskinn og brød og ånd
eies av alle.

Da synker våpnene
maktesløs ned!
Skaper vi menneskeverd,
skaper vi fred.

Den som med høyre arm
bærer en byrde,

dyr og umistelig,
kan ikke myrde.

Dette er løftet vårt
fra bror til bror:
vi vil bli gode mot
menskenes jord.

Vi vil ta vare på
skjønnheten, varmen,
som om vi bar et barn
varsomt på armen!

# Mynd við flaggstong



**Marius Olsen.** Silkiprent 1994, 63 x 77 cm.

KARL BRUCKNER

# Brot úr „Sadako vil liva“

Tibbets oberstur, kommandanturin á B-29 flogfarinum „Enola Gay“, stýrdi í 8.000 metra hædd inn yvir miðbýin í Hiroshima. Í lastini trýsti bumbuskjúttarin Ferebee majorur á teir knappar, sum skuldu lata bumbuslokuna upp.

Nú siktaði Ferebee beint á málið.

Bumban fall.

Við helvitis-hvini sturtnaðist ódjórið niður í djúpið.

Manningin á „Enola Gay“ skundaði sær, sum teir høvdu fingið boð um, at seta svartar verjubrillur fyri gløsini í súr-evnis-skortinum. Eingin av manningini visti, hvat endamálið var við hesum brillum. Eingin visti, hvat fór at henda teir næstu minuttirnar. Teir gjørdu bara, sum teir høvdu fingið strong boð um.

Og teir sótu allir eins og lamdir og bíðaðu. Og teir lurtaðu og hildu seg hoyra hvinið frá bumbuni, ið fór gjøgnum luftina. Tó, tað var ikki hvinið frá bumbuni, men sjóðið av blóðstreyminum, sum teirra uppøst bankandi hjørtu sendu gjøgnum æðrarnar. Og teir stardu allir við steinrunnum andlitum tómoygdir fram fyri seg, rúnabundnir og lamdir av einum veikum varhuga av eini stórvanlukku, hvørs líka eingin hevði kunnað hugsað sær.

Urið á skøvningi Tibbets obersti varð ikki órógvað av tí harða hjartasláttinum. Tey smáu hjólini í tí gingu runt. Og við hesum rundferðum varð eitt sekund fyri og annað eftir

til tátíð. Vísararnir stóðu á 14 minuttum og 35 sekundum yvir átta.

Á bumbuni breiddi ein fallskíggi seg út, stýrdur av snildisliga evnaðum tóli.

Bumban dalaði í fallskíggja niður móti jørðini.

Urvísararnir stóðu á 14 minuttum og 50 sekundum yvir átta.

Bumban var nú 600 metrar uppfrá.

Og tá hon 15 minuttir yvir átta var dalað 100 metrar afturat, festu tól, uppfunnin av vísindamonnum, inni í bumbuni í eina tendring: neutronir kloyvdu atomkjarnan í tungmetalinum uran 235. Og henda kloyving endurtók seg í einum ófatiliga skjótum ketu-árini.

Í einum milliónta parti av einum sekundi birtist ein nýggj sól upp at loga í einum gyklandi hvítum ljósi.

Hundrað ferðir bjartari enn sólin á luftini.

Og úr hesi eldkúlu geisladu milliónir av hitastigum út yvir Hiroshima.

Í hesum sekundi brendust 86.100 menniskjur upp.

Í hesum sekundi vórðu 72.000 menniskju illa skadd.

Í hesum sekundi vórðu 6.820 hús knúst sundur og sogin sum dustfon fleiri kilometrar upp í loft.

Í hesum sekundi rapladu 3.750 aðrir bygningar, og eldur kom í leivdirnar.

Í hesum sekundi varð vanlukkuøkið upp til hálvanannan kilometur burturfrá díkt undir í deyðameinum neutron- og gammageislum.

*Í hesum sekundi hevði samlíki Guds, hjálptur av vísindini, gjørt sína fyrstu roynd at týna seg sjálvan.*

Royndin eydnaðist væl.

Tá atombumban brast uppi yvir miðbýnum, var Shigeo úti

í hylinum. Eitt óvanliga bjart snarljós blindaði hann. Beint aftaná hoyrdi hann buldur og brak, sum túsund toruslættir. So kom ódnarstormur, sum østi vatnið upp í fossarok, tók Shigeo við sær og slongdi hann upp á land. Aldagomul trø fullu, brotin av um rótina, tjúkkar greinar fuku gjøgnum luftina. Bambussev boygdu seg til jarðar. Einans seigi viðurin í syrgipílinum, sum Sadako lá og svav undir, stóð ímóti trýstbylgjuni. Bulurin boygdi seg undan ódnini, og øll bløð vórðu skrødd av teimum klønu greinunum, men træið fall ikki. Sadako feyk harafturímóti sum ein pappírskúla undan lufttrýstinunm.

Shigeo stríddi seg á føtur. Hann fekk ikki hugsað. Við eygunum uppspílaðum av ræðslu mól hann aftur og fram á sama stað, har sum tað var eydnast honum at koma á føtur. Hann stardi heilavillur at eini trækrúnu, sum so løgið lá har beint framman fyri honum. Heldur ikki skilti hann, hvussu tað bar til, at hann vassaði upp um øklar í rennandi vatni. Og tey óteljandi bløð rundan um hann, greinarnar og kvistarnir – vóru tey dottin niður av himli?

So við og við var tað honum greitt, hvat hent var. Vøddar hansara spentust. Hann rætti seg upp og royndi at hugsa: Fyrst hevði eitt snarljós skygt aftan fyri hann, so var stormurin komin og hevði slongt hann upp úr hylinum. Aftaná hevði jørðin ridlað undir honum. Jarðskjálvti!

Samstundis við hesum hugsanum kom hann at minnast til Sadako. Óttafullur leitaði hann allastaðni nærhendis. Hann rann uttan mið og mál og í bráðræsi, snávaði um træsprek, traðkaði greinar niður, sum lógu í vegin, og rópti: „Sadako! Sadako!“

Hann rann longri inn í lundina, skrálaði stúrin: „Sadako! Sadako!“

Hann vendi við, leyp um træbular, skræddi kjarrvøkstur

til síðis, stakk seg av træflísum. Og har lá systirin. Kjólin rivin og skræddur. Blóðigar skeinur um allan kroppin. Hon gav seg. Hon livdi!

- - -

Á Mitsubishi-skipasmiðjuni, fýra kilometrar burtur frá spreingingarmiðdeplinum, arbeiddi Yasuko Sasaki við eina holimaskinu. Í minuttunum áðrenn atombumban brast, hugsaði hon um børn síni Shigeo og Sadako; – – nú mundu tey standa uttan fyri matvøruskrivstovuna… vónandi fór tað ikki at vara leingi – – altíð standa so nógv fólk og bíða har… Sadako er helst longu ógvuliga svong – man Shigeo taka lítlusystrina á bakið, tá hon ikki orkar at standa longur? Kanska er hann so klókur og letur hana bíða uttan fyri raðið – – tað ger hann vist – hann er ein skilagóður drongur… Meira fekk Yasuko Sasaki ikki hugsað. Eitt ófatiliga bjart ljós skygdi og blindaði hana. Eins og øll hini í fabrikshøllini stóð hon ræðslusligin og málleys. Maskinurnar gingu, sum einki var hent. Eina løtu køvdi óljóðið frá maskinunum øll róp. So kvaldist gangurin, dukini, skramblið og metaliska hvinið frá maskinunum í einum ýli, ið ljóðaði, sum tað skuldi komið úr gosopinum á einum nýuppkomnum eldgosi. Við eini samanstúgvaðari megi sum av hundrað orkanum fór ein lufttrýstbylgja gjøgnum skipamiðjubygningarnar. Hon skakaði betongveggir, boygdi stálbjálkar, uttan fyri smiðjuhallirnar hvirlaði hon tonsatungar jarnplátur upp í loft, sum vóru tær pappírspettir. Glassplintur, træsprek og jarnlutir hurraðu sum kanónkúlur gjøgnum øll rúm á skipasmiðjuni. Alt tað, sum gekk við maskinmegi, steðgaði – hjólini við einum knappligum rykki, mondulstengur ella drívásir eftir stuttan skjálvta. Soleiðis sum eitt deyðsært dýr doyr.

Ein metallutur, kanska ein skinnari, sum var skræddur leysur úr einari jarnvindeygarammu, bar við vinstru øksl á arbeiðskvinnuni Yasuko Sasaki og skar húðina upp. Blóð rann niður eftir arminum. Hon hugdi at tí, uttan at fata og tómoygd. Hon føldi einki. Hon sá – og fann heldur ikki nakra frágreiðing til tað – at arbeiðsklæðir hennara vóru skrødd. Hon sá á høgra tumli eitt glassplintur, sum sat fast í holdinum. Hon dró tað út, og undraðist á, at hetta splintur var komið út, uttan at hon føldi tað. Við eitt hoyrdi hon eymkan og róp um hjálp, og tað varð henni greitt, at hon hevði hoyrt hesi ljóð eina góða løtu. Hon varð bilsnari og bilsnari um hetta, sum hent var, og samstundis skilti hon: Okkurt ræðuligt var hent. Og nú klárnaði alt endiliga fyri henni: Særdir arbeiðsfelagar lógu á gólvinum. Fólk í andaleypi. Illa særd ringdu seg saman. Og øll vóru blóðdálkað.

Eygu Yasuko fóru higar og hagar. Allastaðni sá hon somu sjón: kvinnur, sum vríggjaðu seg í pínu. Hon venaði seg og trýsti so hondina fyri munnin fyri at kvala hetta nú so skilaleysa róp. Hon mátti vinna á sínum ótta, síni ræðslu. Hon mátti hjálpa og átti ikki at gremja seg.

Uttanfyri bylgjaðu roykskýggj. Eldglæmur skygdu ígjøgnum roykin. Eldur var í skipasmiðjuni! Kanska var eldur í øllum býnum?

„Børnini!“ rópti Yasuko og leyp avstað. Hon rendi seg í maskinur. Hon traðkaði í dungar av glassplintrum og leyp uppum mannakroppar. Hon rann seg í menn, sum vóru í verjuhjálmum og vildu halda henni aftur. Særd menniskju rættu hendurnar eftir henni at fáa hjálp. Hon skræddi seg leysa frá øllum hesum við tí megi, sum óttin um børnini gav henni. Tá hon endiliga slapp útum gjøgnum einar av dyrnum, fór hon aftur eftir hæli. Yvir miðbýnum reis ein

skýstólpi til himmals. Ein skýstólpi, sum tað logaði í. Sum høgt uppi tók seg saman í eina veldiga kúlu. Sum tað skygdi sum snarljós úr. Sum viðhvørt lýsti reytt, viðhvørt reyðgult, og eisini logaði grønt og ljósareytt í.

Tá Sasako sá hetta ræðuliga brennandi skýggið, fall hon á knæ. Hon stardi ræðslusligin at hesum avreksverki andanna. Tí bara teir kundu havt tendrað henda forniska risakyndil, til at revsa menniskjuni. Men fyri hvat? Hvat høvdu tey gjørt? Og børnini?

Tá hon hugsaði um børn síni, Shigeo og Sadako, rætti hon armarnar móti kyndlinum, sum hon helt, at andarnir høvdu kveikt, og græt: „Tey hava einki gjørt! Lat børn míni vera! Ger teimum einki!“ Hon skuldi reisa seg upp og fara at hjálpa børnum sínum. Tá datt hon umkoll svímað.

„Enola Gay“ var flogin í ein hálvrunding í útsynning. Manningin hevði, stutt eftir at bumban var slept, sæð eina eldglæmu kykna upp, sum, hóast svartar verjubrillur, blindaði teir eina løtu. Í hølunum á hesum óvæntaða bjarta snarljósi kom ein torusláttur, sum enntá doyvdi motorljóðið. Beint aftaná ristist flogfarið, sum var tað knappliga komið í ódnarveður. Í fyrstuni vildi flogmanningin ikki trúgva, at øll hesi fyribrigdi kundu vera eftirfylgjur av bumbubrestinum. Eina so øðiliga avleiðing høvdu teir hvørki væntað ella nakrantíð vitað um. Teir hildu fyrst, at bumban mundi hava rakt eina stóra lóðurgoymslu; men nú sóu teir, hvussu eitt ovurstórt roykhundaland steig kilometur høgt upp frá útblakingarstaðnum. Og teir sóu, at høvdið á hesum ræðuliga hundalandi var av samantrýstum eldi, sum bar av allari menniskjaligari hugmynd um ein helvitiseld. So óhugnaligur var hesin frumveraldar eldur, at áskoðararnir sótu sum lamdir.

Tibbets oberstur stardi ørkymlaður at hesum ræðuliga hundalandi úr royki og eldi. Hann hevði eina hóming av tí ræðuligastu vanlukku, sum nakrantíð hevði rakt eitt bústaðarøki hjá menniskjum, og hann tók sum hin fyrsti verjubrillurnar frá eygunum og hugdi niður í dýpið. Í staðin fyri húsini í Hiroshima sá hann bara bylgjandi brúnan royk. Hann royndi at greiða fyri sær sjálvum, hvat hent var: „Enola Gay" hevði havt eina bumbu. Bara eina! Hann hevði sæð hana. Hon var neyvan størri enn ein av teimum mongu fimmhundraðkilobumbunum, sum vórðu sleptar á teimum atsóknarferðum, sum teir høvdu gjørt inn yvir fíggindaland. Henda hevði bara havt øðrvísi skapilsi. Og at hon var borin av einum fallskíggja, í staðin fyri at detta leys niður? Var tað møguligt, at ein miðalstór bumba kundi havt oytt ein heilan bý? Nei! Tað var ómøguligt. Tað kundi ikki bera til! Tí tað var ómenniskjaligt. Og tí ein slík djevulsk uppfinning ikki kundi vera klakt av rættsiktaðum menniskjum. Ja, tað var tað rætta svarið.

Men tað, sum eygu hansara sóu, var ikki nakar heilaspuni: Býurin Hiroshima var næstan heilt fjaldur í royki frá spreingingini – – –

Hann flenti vitleyst og fjáltrandi. Hann flenti sum ein maður, ið helt, at hann hevur dripið, og nú sær, at hansara falna offur fer á føtur aftur, tí tað hevur ikki fingið nakað mein. Hann var komin eftir tí: Bumban var ein snild uppfinning at ræða fíggindan við. Hon brast høgt uppi yvir málinum, soleiðis at øgiligar nøgdir av royki fóru niður eftir, meðan hin ræðuligi eldurin varð slongdur upp í loft.

Soleiðis mátti tað vera!

Ein ótrúlig uppfinning!

Ein undurbumba!

Hon skuldi ræða japanarar, geva teimum eina hóming

# Tár



**Annika á Lofti.** Tár og akrylglas 2008, D 20 mm x H 15 mm.

av tí ringa, ið fór at henda, um teirra ábyrgdarmenn ikki innan stutta tíð góvu seg yvir. Hann kundi vera stoltur av, at teir høvdu sent hann á hesa hernaðarflogferð. Hansara yvirmenn fóru at vera nøgdir. Við hann, Parsons kapteyn, og við Ferebee major. Og við tað góðu „Enola Gay“. Hon hevði klárað hesa ógvisligu trýstbylgju óskadd. Himmal og helviti, tað hevði rullað illa. Sum var flogfarið komið mitt í eina ódn.

Obersturin skalv knappliga. Ikki fyrr enn nú føldi hann, at undirklæðir hansara klistraðu føst í kroppin av sveitta. Hann smíltist spotskliga. Í áðni, tá hann sá eldhundalandið, var hann ornaður við. Men nú sveik tað elektriska hitaapparatið, sum skuldi verma flúgvaradrakt hansara. Hann kannaði kvikliga nøkur instrument, og aftur fór skjálvti ígjøgnum hann. Hann hugsaði: Hesin gandaeldur hevur gjørt meg reiðiliga sjúkan – tað er ikki at undrast á, tá ein upplivir slíkt – – Gud viti, hvussu tað gongst Ferebee majori – Parsons rørir seg heldur ikki.

Hann hugdi at øðrum-flogskipara, Parsons kapteyni, og tosaði við hann gjøgnum barkakýlismikrofonina: „Halló, kapteynur! Tygum sita jú har sum ein steinrunnin dreygur. Hvat bagir tygum? Hví taka tygum ikki hasar svørtu verjubrillurnar av? Óttast tygum fyri, at eitt nýtt snarljós skyggir? Tað kemur einki afturat. Vit eru undanslopnir!“

Rødd Parsons ljóðaði hvøll, sum hevði hann kavarahjálm á høvdinum. „Ja, vit eru undanslopnir, oberstur. Vit liva. Men menniskjuni í býnum niðri undir okkum, tey eru deyð!“

„Sigið ikki sovorðið tvætl, kapteynur! Tey eru fjald í roykinum frá einari roykbumbu. Ein frálík uppfinning. Í luftini ein øgiligur eldur, so at knøini skelva undir tær av ótta, og niðri á jørðini eitt roykskýggj, sum við vissu fær alt at flýggja, sum flýggja kann. Eitt betri vápn finst

ikki. Eg varð sjálvur ræddur, tí eg visti einki um alt hetta frammanundan.“

„Tygum mistaka tygum, oberstur. Eg tosaði við Ferebee major í áðni. Hann segði, at hann sá eitt eldhav, tá vit flugu haðani. Hann heldur, at tað, sum er eftir av Hiroshima, stendur í ljósum loga.“

„Hvat meina tygum við: er eftir? Er nakað oyðilagt?“

Nú rópti Parsons uppøstur:

„Oberstur! Tygum trúgva ikki í álvara á tygara roykbumbu? Vit hava eftir øllum at døma lagt ein heilan bý í oyði. Haðani tygum sita, hava tygum ikki kunnað sæð nóg mikið. Ferebee sýnist, eftir tí sum eg kann døma av talu hansara, at vera hálvørur. Hann man hava sæð okkurt ræðuligt.“

Leingi segði obersturin einki. Endiliga spurdi hann: „Hava tygum sent fjarrit til Tinian?“

„Jú, tað havi eg longu gjørt,“ ljóðaði røddin sum í einum menniskja, ið rennur undan onkrum og knappliga sær eina avgrund framman fyri sær. Henda røddin helt fram sum fyri seg sjálva: „Eg havi fjarritað – *Atsóknin væleydnað – úrslitið gott!*“

Tibbets oberstur hoyrdi taluna hjá øðrum-flogskipara sum eitt veikt mutl. Meiningina skilti hann ikki, fyrr enn hann hevði noytt eygu síni úr tí bláu himmalrúmdini – aftur til tey nógvu instrumentini framman fyri sær. Til hesi sálleysu tólini, sum hjálptu honum at stýra flogfarinum. Hetta forbannaða ódjórið. Sum hann var bundin til við trygdarbeltum. Sum hann hataði, tí tað hevði goymt ein túsundfaldan deyða. Atsóknin væleydnað, úrslitið gott – hevði Parsons fjarritað. Tað var, sum tað átti. Hermálsliga stutt. Tað vildi siga: bumban hevur staðið sína roynd. Vit hava javnað ein bý við jørðina.

Obersturin andaði tungt. Nasagluggar hansara livdu.

Hann hugdi aftur út í ta bláu rúmdina, og tað sissaði hann. Samvitskubardagin var av. Hann hugsaði nú: Eg havi onga skuld. Eg havi gjørt eftir boðum. Eg noyddist at gera tað, tí eg eri eiðsvorin at gera eftir øllum boðum. Eg skal ikki døma, um hesi boð vórðu givin av ørum monnum ella av monnum, sum kendu sína ábyrgd. Harafturat visti eg einki um, hvat fór at henda, tá bumban brast. Eg veit heldur ikki, hvør hevur skapt hana. Eg havi ikki gjørt tað. Tað veit gud. Og tí havi eg onga skuld í vanlukkuni. Eingin kann ákæra meg. Eg eri soldátur. Mamma mín má fyrigeva mær, at eg havi givið hesum bumbuflogfarinum navn hennara. Hon má fyrigeva mær! Hon er ein vitug kona. Hon var mær ein góð mamma. Hon fer ikki at siga við meg: Tú ert samsekur. Tað fer hon avgjørt ikki at siga.

Spenta andlit hansara losnaði. Hann kendi tað, sum var hann sloppin undan eini ótolandi byrði. Umaftur og gjøllari enn í áðni kannaði hann tólini. Motorarnir gingu væl. Oljutrýstið var í lagi. Bensintilførslan var, sum hon átti. Hæddarmátarin vísti 7.300 metrar yvir havinum. Bara eina smávegis broyting í kósini at rætta.

Og tá hann hevði gjørt tað, rann honum í hug, at ovastin í loftstríðsmegini í Kyrrahavinum, Spaatz generalur, fór ikki at vera nøgdur við fjarritið „Atsóknin væleydnað – úrslitið gott".

„Parsons kapteynur," segði hann við annan flogskiparan, „sendið tygum hetta fjarrit til okkara flogstøð: *Alt eftir skránni – vanlig viðurskifti umborð, eftir at bumban var slept – flúgva aftur til støðina."*

*Erla Olsen týddi*

POUL F. JOENSEN

# Heimspolitikkur

Teir hava millionir í deyðan sent,
sum talvleikur teimum tað var, –
mettir og vælsettir óttaleyst
teir væl kundu sæta sær. –
Men viðvent er í holuni nú, –
atombumban gevur ei grið,
í vága er nú teirra egna skinn,
tí kapptosa allir um frið.

# Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi

*1. grein*

Øll menniskju eru fødd við somu rættindum. Tey skulu altíð verða væl viðfarin, so at tey læra at fara væl við øðrum og virða tey.

*2. grein*

Øll hava krav um rættindi og frælsi, sum eru nevnd í hesi yvirlýsing, hvør uppruni teirra so er, húðarlitur, kyn ella hvat mál tey tosa, hvørji sjónarmið ella hvørja trúgv tey hava, um tey eru rík ella fátæk, ella í hvørjum landi tey búgva.

*3. grein*

Øll hava rætt at liva og at liva í frælsi og tryggleika.

*4. grein*

Eingin hevur rætt til at gera tey til træl, og tú kanst ikki gera nakran til træl tín.

*5. grein*

Eingin skal verða píndur ella viðfarin ómenniskjaliga.

*6. grein*

Hvar tú enn ert, skal lógin virða teg sum menniskja og ikki sum lut.

# Móðir og barn



**Fridtjof Joensen.** Fura 1987, H 55 cm.

*7. grein*

Øll eru líka fyri lógini, og lógin skal verða nýtt á sama hátt fyri øll. Lógir mugu ongantíð gera mun á fólki eftir ætt, húðarliti ella livihátti.

*8. grein*

Øll hava rætt til, at dómsvaldið verjir tey, tá ið tey fáa viðferð, sum er ímóti teimum rættindum, sum landsins lógir tryggja teimum.

*9. grein*

Eingin hevur rætt til at seta teg í fongsul ella halda teg í varðhaldi ella senda teg burtur úr tínum landi órættvíst ella grundarleyst.

*10. grein*

Skalt tú fyri rættin, skalt tú fyri rættin alment. Tey, sum viðgera sak tína, skulu vera óheft og ikki lata seg ávirka av øðrum.

*11. grein*

Tú eigur at verða mettur ósekur, til tað er prógvað, at tú ert sekur, og tú hevur rætt til at verja teg ímóti øllum ákærum við almennari rættargongd. Tú eigur ikki at verða revsaður fyri nakað, tú gjørdi, áðrenn tað bleiv bannað við lóg.

*12. grein*

Eingin hevur rætt til at noyða teg ella leggja seg útí, hvat tú og húsfólk tíni hugsa og skriva. Eingin hevur loyvi at fara inn hjá tær grundarleyst. Eingin hevur loyvi at lúgva upp á teg og skaða teg. Øll hava rætt til at verða vard ímóti slíkari uppílegging ella ágangi.

*13. grein*

Øll hava rætt til frítt at fara í sínum landi. Eisini hava øll rætt til at fara av landinum og koma aftur.

*14. grein*

Verður tú forfylgdur, hevur tú rætt til at fara í annað land at biðja um friðskjól. Henda rætt missir tú, hevur tú brotið lógina og ikki virt tað, sum stendur í hesari yvirlýsing.

*15. grein*

Øll hava rætt til at vera borgari í einum landi, og eingin kann taka rættin frá tær ella forða tær í at skifta tjóðskap, biður tú um tað.

*16. grein*

Øll hava rætt til at giftast og fáa sær familju, tá ið tey eru vaksin. Einki eigur at forða tær í at gifta teg við einum við øðrum húðarliti, úr einum øðrum landi, ella við aðrari trúgv, enn tú hevur. Maður og kona hava javnstøðu í hjúnalagi. Eingin kann noyða teg at giftast. Stjórnin í landinum eigur at verja familjuna.

*17. grein*

Øll hava rætt til at eiga nakað sjálv ella saman við øðrum. Eingin kann ógrundað taka tað frá tær.

*18. grein*

Øll hava rætt til at taka avgerðir sjálv, at fylgja samvitsku síni og frítt at velja sína trúgv. Tú kanst skifta trúgv, læra onnur hana, og tú kanst útinna trúgv tína, sum tú vilt, einsamallur ella saman við øðrum.

*19. grein*

Øll hava rætt til at hugsa, sum tey vilja, og bera fram sína hugsan. Eingin eigur at forða tær í at hava tínar egnu áskoðanir ella bera tær fram. Tú hevur rætt til at søkja tær vitan og læra um hugsanir allastaðni í heiminum, úr bókum, tíðindabløðum, útvarpi, sjónvarpi ella á annan hátt.

*20. grein*

Øll hava rætt til á friðarligan hátt at skipa fyri og vera á fundum ella vera limir í felagskapi. Eingin kann noyða teg at vera limur í einum felagi.

*21. grein*

Øll hava rætt at vera við til at stýra landi sínum, annaðhvørt vera beinleiðis í stjórnini ella frítt at velja síni egnu umboð. Øll eiga at hava sama rætt til at fáa almenn størv. Val skal verða hildið regluliga, og allar atkvøður eru líka.

*22. grein*

Øll hava sum samfelagsborgarar rætt til almenna trygd: tak yvir høvdið, nóg nógvan pening til lívsins uppihald og læknahjálp, tá ið neyðugt er. Eisini eiga øll at hava møguleika at spæla og njóta tónleik, list, ítrótt og alt, sum kann menna tey sum menniskjur.

*23. grein*

Øll hava rætt til arbeiði, til frítt at velja starv og fáa løn, sum gevur teimum og teirra møguleika at liva sámiliga. Øll eiga at hava somu løn fyri sama arbeiði. Øll hava rætt

til arbeiðsloysisstuðul ella almenna trygging, um tað gerst neyðugt. Øll hava rætt til at vera limir í einum fakfelagi.

*24. grein*

Øll hava rætt til hvíld og frítíð, rímiligar arbeiðstíðir og regluliga frítíð við løn.

*25. grein*

Øll hava rætt til sámilig livikor og at fáa hjálp, hava tey ikki møguleika ella eru ikki før fyri at arbeiða og vinna pening til lívsins uppihald. Møður og børn hava rætt til serliga umsorgan. Øll børn hava somu rættindi, um foreldrini eru gift ella ikki.

*26. grein*

Øll hava rætt at læra. Barnaskúlagongd eigur at vera kravd og ókeypis. Tað skal vera møguligt at læra eitt yrki ella at halda fram við hægri lesnaði. Skúlin skal læra teg at menna teg sjálva og at skilja og virða onnur, uttan mun til trúgv, ætt ella tjóðskap. Undirvísingin eigur at fremja arbeiði Sameindu Tjóða fyri at skapa frið í heiminum. Foreldur hava rætt til at velja tann skúlan, børn teirra skulu ganga í.

*27. grein*

Øll hava rætt til frítt at vera uppi í mentanarlívinum, og framstig, sum vísindi og gransking hava við sær, eiga at koma øllum til góða. Alt, sum tú finnur uppá, skrivar ella ger, eigur at verða vart, og tú eigur at fáa ágóðan av tí.

*28. grein*

Fyri at frælsi títt og rættindi tíni skulu verða vird í tínum landi

og í øllum heiminum, eigur at vera ein samfelagsskipan, sum kann verja teg heilt og fult.

*29. grein*

Øll hava eisini skyldur fyri samfelagnum. Tíni rættindi og títt frælsi eiga bert at verða avmarkað í tann mun, sum tað er neyðugt at verja rættindi og frælsi hjá øðrum.

*30. grein*

Eingin stjórn, eingin felagsskapur og einki menniskja hevur loyvi at beina fyri mannarættindum, sum eru nevnd í hesari yvirlýsing.

*1. flokkur í Hoydølum hevur týtt úr enskum til undirvísingarendamáls*

WOLF BIERMANN

# Eggjan

Tú lat teg ikki herða
í hesi hørðu tíð.
Tey hørðu sundur støkka,
tey hvøssu undan røkka
og vinna einki stríð.

Tú ver ei beiskur, vinur,
í hesi beisku øld.
Beiskleikin eitrar sinnið,
ger tínar kreftir minni,
men ikki teirra vald.

Tú lat teg ikki ræða
í hesi ræðslutíð.
Tað er júst tað tey vilja,
at vit frá vápnum skiljast
straks, áðrenn byrjar stríð.

Tú lat teg ikki brúka,
tú nýt væl hvørja stund.
Tú kanst ei flýggja, hvørva,
tín vilja okkum tørvar
og tína ljósu lund.

Tigast skal ei um hetta
í hesi tagnartíð.
Grøsini grønu spretta,
tað skal alt fólkið frætta,
so vita tey av tí.

*Turið Sigurðardóttir týddi*

JAN MÜLLER OG JÓANNES DALSGAARD

# Mandela – hugtak og ímynd

*Mandela er vorðin hugtak og ímynd. Hann hevur fingið eina einastandandi støðu í heimlandinum eins væl og í heiminum sum heild. Mandela er vorðin ímyndin um demokrati, tolsemi, fyrigeving, humanismu og víðskygni – ein fyrimynd hjá ungum sum eldri.*

Í dag tann 18. juli verður heimsins mætasti núlivandi statsmaður, mannarættindastríðsmaður, humanistur og frælsishetja, Nelson Rolihlalha Mandela, níti ár. Mandela er av høvdingakyni úr Xhosamæltu Tembu ættini í Transkei í Suðurafrika. Hann er útbúgvin løgfrøðingur og fór sum ungur undir at stríðast ímóti apartheidstýrinum í Suðurafrika.

Sum advokatur hjá teimum mongu, sum vóru kúgað ella illa viðfarin av harðrendu apartheidyvirvøldini, gjørdist hann alt meira politiskt tilvitandi og fór í 1944 upp í frælsisrørsluna, African National Congress, ANC, og í 1949 gjørdist hann ein av oddamonnunum í rørsluni.

Tey fyrstu mongu árini var Mandela hugtikin av politisku heimspeki Gandhis og var sostatt ímóti at nýta vald og harðskap í stríðnum móti apartheid. Men so í 1960 hendi nakað, sum avgerandi broytti politisku hugsjón hansara. Hetta árið hevði apartheidstýrið framt eina lóg, sum álegði øllum littum og svørtum suðurafrikanum at bera pass. Henda avgerð kendist eins eyðmýkjandi og hon gjørdi mannamun, og hon elvdi til ein stóran men friðarligan mótmælisfund í býnum Sharpeville, har fundarfólkið brendi passini. Løgreglan, sum var á staðnum, fór knappliga at skjóta við skørpum eftir mannamúgvuni, og fólk í hundrað tali, herímillum kvinnur og børn, lógu eftirá – tey flestu skotin í bakið.

Henda ræðuliga hending, sum skelkaði heimin, sannførdi Mandela um, at tann friðarliga leiðin ikki longur var gongd leið til tess at beina burtur apartheidstýrið í Suðurafrika. Henda hending gekk ongantíð frá Mandela. Sorgarleikurin merkti hann fyri lívið og hevði so stóran týdning fyri hann, at tá hann mong ár seinni sum forseti skuldi undirrita fyrstu frælsu grundlóg Suðurafrikas, gjørdi av at gera hetta á staðnum í Sharpeville, har sorgarleikurin var farin fram.



*Tað er fyrst og fremst Mandela fyri at takka, at skiftið frá apartheid til fólkaræði í Suðurafrika gekk so friðarliga.*

**Bakstøðið**

Bakstøðið fyri politiska virksemi Mandelas var eitt samfelag við rasuskilnaði av serstakliga grovum slag, nevnt apartheid. Tað hevur altíð verið skilnaður millum svørt og hvít í Suðurafrika, men hesin skilnaður var ikki so tilvitandi skipaður, fyrr enn Tjóðskaparflokkurin hjá Dr. Malan kom til valdið í 1948. Hesin flokkur, ið hevði sínar røtur í hollendsku koloniseringini, fór alt fyri eitt undir at fyrireika apartheid, t.v.s. skipaðan og lógásettan skilnað millum svørt, litt og hvít.

Í fimmti- og sekstiárunum var sett í gildi ein víðfevnd apartheidlóggáva við endamálinum at skipa samfelagið soleiðis, at als einki samband var millum tey hvítu øðrumegin og

fólk av asiatiskum og afrikanskum uppruna hinumegin. Tó skuldu hesi nýtast sum arbeiðsmegi, og varð útbúgvingarskipanin sostatt løgd til rættis soleiðis, at tað var torført hjá svørtum at fáa hægri útbúgvingar. Tey skuldu, uttan politisk rættindi, útbúgvast til arbeiðsmegi hjá hvíta samfelagnum. Hendan skipan var ikki fullførd, tá Mandela tók løgfrøðiligt embætisprógv á Witwaterstrand universitetinum, ið enn virkaði við støði í bretskari liberalari siðmenning.

Apartheidpolitikkurin og apartheidlóggávan vóru grundað á fýra meginreglur: hvítt valdsmonopol, rasuskilnað, socialt eftirlit og politiska kúgan. Eftir at afrikanski tjóðskaparflokkurin var komin til valdið, myndaðu hesar fýra meginreglurnar ideologiska støðið undir suðurafrikansku stjórnini at kalla heilt fram til Mandela varð latin leysur 11. februar í 1990. Tá var vorðið greitt fyri de Klerck, forsætisráðharra, at nú stóð valið millum at strika allar apartheidlógirnar og lata Mandela leysan ella borgarkríggj, kaos í landinum og totala altjóða avbyrging.

Tann samtíðarmynd, sum Mandela soleiðis sá fyri sær, tá hann ungur fór undir sítt advokatvirksemi saman við sínum ungdómsvini, Oliver Tambo, var eitt samfelag, grundað á lógfest skipað órættvísi og ranglæti, har tann stóri meirilutin av fólkinum, fólk av asiatiskum ella afrikanskum uppruna, vanliga nevnd litt og svørt, vóru uttan tey mest grundleggjandi borgararættindini. Hann sá eitt samfelag, har ein ómetaliga stórur órættur var skipaður við lóg, har eingin leið var burtur úr órættvísinum, og har sosiala flytiførið við apartheidlógunum varð blokerað fyri litt og svørt. Fólk hansara var niðurbundið politiskt, sosialt og mentanarliga. Ikki nóg mikið við tí – tað stóð Mandela og hansara partamonnum greitt, at apartheidstjórnin stútt og støðugt virkaði fyri uppaftur størri skilnaði, og at endamálið var fullkomiliga at býta Suðurafrika upp í eitt hvítt og eitt svart samfelag, har tey hvítu høvdu alt, meðan tey svørtu vóru heilt uttan grundleggjandi mannarættindi. Henda sannkenning og henda samfelagsliga og politiska støðan elvdu til eitt nógv meira stríðshugað og eitt væl betri skipað ANC, ið, sum nevnt, eftir Sharpeville gjørdist meira radikalt.

Í 1962 varð Mandela dømdur at sita í fimm ár fyri at hava eggjað til verkfall og fyri brot á passlóggávuna. Hann varð settur í fongsul á Robben Island, men longu í 1963 varð Mandela saman við fleiri partamonnum aftur ákærdur. Í tí illa gitna Rivionia rættarmálinum varð hann tann 12. juni 1964 dømdur lívlangt fongsul fyri sítt politiska virksemi, ið var mett sum landasvik.

Ætlanin var at døma hann til deyða og at taka hann av døgum, men stjórnin bakkaði fyri altjóða trýsti og aftraði seg tí við hesum. Undir sakarmálinum legði

Mandela øll kortini á borðið, samstundis sum hann helt fast um og prógvaði, at ANC ongantíð hevði framt tiltøk við tí endamáli at drepa nakran, hvørki sivilfólk ella umboð fyri apartheidstýrið. Hann prógvaði, at ANC var ikki ein yvirgangsfelagsskapur, og at ANC bert hevði hildið seg til sabotasju móti útbúnaði og bygningum.

**Robben Island 1964**

Mandela varð aftur settur í varðhald á illa gitnu fongsulsoynni, Robben Island, og ætlaði stjórnin honum at sita har, so leingi hann livdi. Har skuldu Mandela og felagar hansara verða verandi, avbyrgdir frá politiskum virksemi og gloymdir av heiminum. Men stríðið ímóti apartheid helt fram og Mandela var framvegis fyrimyndin og tann ímyndaligi oddamaðurin í frælsisstríðnum, sum nú varð rikið undir leiðslu av vinmanninum Oliver Tambo, sum var í útlegd.

Mandela varð ikki gloymdur hvørki av landsmonnum ella umheiminum. Norðurlond gjørdu støðugt vart við órættvísu samfelagsskipanina og løgdu diplomatiskt trýst á stórveldini til tess at fáa tey í sínum lagi at leggja trýst á Suðurafrika. Heimurin fór so smátt at gerast varugur við versnandi støðuna í Suðurafrika og Mandela var vorðin víðagitna ímyndin uppá mótstøðuna. Hann var vorðin moralsk og politisk fyrimynd hjá stórum pørtum av mannaættini. Krøv vórðu frá ymsum síðum sett apartheidstjórnini um at broyta politikk og sleppa Mandela úr fongsli. Suðurafrika og Mandela vóru ofta á dagsskrá hjá ST, og handils- og samstarvsboykott ímóti Suðurafrika varð samtykt í ST til tess at noyða apartheidstjórnina at broyta politikk. Men hetta var sum at sletta vatn á gás. Hvíta nationalistiska stjórnin, sum bert umboðaði ein minniluta av fólkinum í Suðurafrika, tvíhelt um apartheid. Landið gjørdist alt meira avbyrgt, og sosialur og politiskur ófriður gjørdist alt meiri vanligur og elvdi til stórar trupulleikar hjá apartheidstjórnini.

Á Robben Island komu dámligu og sermerktu lyndiseyðkenni Mandelas av álvara til sjóndar. Hann læt seg ikki kúga, hann fall ikki í fátt. Hann legði stóran dent á at vera likamliga og sálarliga væl fyri. Hann styrkivandi tí hvønn dag, gjørdist góður boksari og var tikin úr leikum sum fimleikari. Hann helt mótinum uppi hjá sínum medfangum, hann undirvísti sínum medfangum, skúlaði teir politiskt, kendi teimum løgfrøði *og skaldamál og søgu*, hóast útlitini til, at teir nakrantíð komu út aftur í samfelagið, vóru smá.

**Politiskt umskifti**

Árini meðan Mandela sat í varðhaldi á Robben Island, broyttist politiska støðan í Suðurafrika. ST tiltøkini elvdu til stórar búskaparligar trupulleikar, nýggir politiskir felagsskapir komu fram, og partar av ANC fóru sínar egnu leiðir, og blóðugur ófriður eyðkendi

gerandisdagin í Suðurafrika. Teir partar av ANC, sum gingu egnar leiðir, fóru harðliga fram ikki minst móti sínum egnu, um hesi vóru undir illgruna fyri svik ella fyri at ganga ørindi fyri apartheidstjórnina.

Støðan versnaði alsamt í Suðurafrika. Ófriður og undantakstøða, búskaparboykott hjá ST, stóru altjóða fyritøkurnar fluttu virksemið til onnur lond, og útlendsku íløgurnar minkaðu støðugt. Demokratiski umheimurin øtaðist yvir støðuna, og suðurafrikanska stjórnin fór so smátt at ásanna, at broytingar vóru neyðugar, og stjórnin ásannaði, at skuldi hon bjarga tí, sum bjargast kundi, so var neyðugt at koma á tal við ANC og við Mandela.

Stjórnin flutti Mandela til fongslið Pollsmoor inni á meginlandinum og læt hann skilja, at hon var sinnað at samráðast. Stjórnin vildi sleppa Mandela úr Pollsmoor fongslinum, har hann nú sat, um hann vildi medvirka til einahvørja politiska loysn í ófriðarliga og kreppurakta landinum. Hann skuldi geva lyfti um, at ANC gavst við mótstøðuni og skuldi lova at gera sítt til at skapa frið í landinum.

Men Mandela var óvikiligur. Hann kravdi allar eftirverandi apartheidlógir avtiknar, og fangarnar á Robben Island og í øðrum fongslum leysar, og ANC skuldi gerast lógligt, áðrenn hann so mikið sum vildi umhugsa samráðingar. Hetta sigst hann hava gjørt við orðunum:

„Bert frælsur maður kann geva lyfti, og bert frælsur maður kann samráðast. Eg seti frælsið hjá fólki mínum hægri enn mítt egna persónliga frælsi.“

Hann metti seg eins ófrælsan, so leingi partar av apartheid vóru í gildi, og ANC var forboðið.

Tað var eingin ivi um, at Mandela meinti tað, hann segði, og F.W. de Klerck stjórnin hevði tí einki val. Hon noyddist um enn treyðug at ásanna, at tíðin hjá apartheid var úti, og Nelson Mandela kundi sum frælsur og fríur maður undir miklum fagnaði ganga út úr fangahúsinum tann 11. februar 1990.

**Ein nýggj tíð**

Eftir hetta byrjaðu samráðingarnar um eina nýggja politiska skipan fyri Suðurafrika.

Fyrsta frælsa valið í Suðurafrika var tann 27. apríl 1994, og stóri vinnarin var ANC við 62% av atkvøðunum. Mandela varð valdur til forseta og myndaði eina tjóðskaparliga savningarstjórn við ANC, Tjóðskaparflokkinum og Inkhatha.

Eftir eitt forsetaskeið fór Mandela úr politikki. Hann varð kosin forseti 77 ára gamal og boðaði frá, at hann nú fór at taka sær av familjuni:

„Míni børn vuksu upp uttan faðir orsakað av mínum politiska arbeiði, og tá eg so endiliga kom úr fongsli, gjørdist eg faðir at heilari tjóð.“

Nú var sostatt *tíð til frið at venda*, men hvussu var og ikki, áðrenn langt um leingi var Mandela farin

undir eitt miðvíst arbeiði at útvega fíggjarligan stuðul til stríð móti AIDS og fátækradømi. Í hesum virki er hann ofta á ferð uttanlands, og hann sparir seg ikki nú heldur enn áður, tá hann gongur inn fyri einari søk.

**Mandela – menniskja og týdningur**

Mandela er vorðin hugtak og ímynd. Hann hevur fingið eina einastandandi støðu í heimlandinum eins væl og í heiminum sum heild. Mandela er vorðin ímyndin um demokrati, tolsemi, fyrigeving, humanismu og víðskygni – ein fyrimynd hjá ungum sum eldri. Mandela er framúr karismatiskur, ein sera klókur politikari og eitt menniskja við sera høgum persónligum morali og einum persónligum og politiskum dirvi, sum neyvan hevur sín líka millum heimsins statsmenn. Hóast Mandela langt síðan er vorðin ikon og kult, er hann enn sum áður lítillátin og eins við øll.

Tað er fyrst og fremst Mandela fyri at takka, at skiftið frá apartheid til fólkaræði í Suðurafrika gekk so friðarliga. Mandela hugsaði øll árini á Robben Island um, hvussu skiftið skuldi greiðast á friðarligan hátt, og hvussu samfelagið skuldi skipast, eftir at apartheidskipanin ein dag var burtur. Hann kom til ta niðurstøðu, at ein ælabogatjóð umboðandi allar rasur og ættarbólkar, ymisk politisk sjónarmið og ymsar átrúnaðir átti at mynda suðurafrikansku tjóðina. Fortíðin skuldi liggja, og her skuldi eingin hevnd vera. Her skuldu øll kenna seg heima – talvan skuldi turkast rein. Henda hugsjón leiddi eitt nú til Truth and Reconciliation Commission (TRC), Sannleika- og sáttarnevndina, sum hevði til endamáls at lekja sárini frá fortíðini, nakað, sum Mandela metti avgerandi neyðugt, um tjóðarbyggingin skuldi eydnast.

Mandela hevur havt og hevur framvegis ómetaliga stóran týdning fyri fólk um allan heim, eisini her í Føroyum. Vit fegnast eins og øll onnur um, at honum untist at røkka tey níti árini, og vit gleðast saman við mongum yvir, at hann framvegis nýtir sína sjarmu, sína orku, síni framúrskarandi evni, sítt politiska gløggskygni, sína karismu og sítt heimsfevnandi netverk til gagns fyri mannaættina.

JÓANNES DALSGAARD

# Framtíðin

Framtíðin er børnini
sum skáka sær fram
millum blindar fyrilitsleysar bilar
fresandi eftir myrkabláum asfalti
regnið á asfaltinum
fiskurin í havinum
taraskógvurin sum veittrar
blídliga til okkara á fjøru.

Framtíðin er Nelson Mandela
í Pollsmoor
øll tey gloymdu
framtíðin er Daniel Ortega
sum fer til arbeiðis í Managua.

Framtíðin er ein spurningur
um tú heldur við tí sterka
ella tí veika
ein spurningur um hvørjar kreftir
nú skulu loysast úr teymum
eitt val millum svarta regnið
og lívið.

Framtíðini kunnu vit ikki bíða eftir
í tað óendaliga.

Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari
hon má skapast
hon má takast
frá teimum sum hava tikið sær einarætt
til hennara.

MALAN POULSEN

# Vón

Sjálvt í gráastu skúrbýum
veksa blómur í blikkdósum

MARGRETHA NÓNKLETT

# Mannarættindadagurin 2006

Í dag eru 58 ár, síðan Heimsyvirlýsingin hjá Sameindu Tjóðum um mannarættindi varð samtykt. Eins og undanfarin ár vilja vit í Amnesty International brúka dagin til at gera vart við, at mannarættindi er mál, sum eisini vit í Føroyum eiga og skulu brúka orku uppá at kjakast um, taka støðu til og gera nakað munagott við fyri at koma enn longri.

Tað eru hend nógv framstig á mannarættindaøkinum í 20. øld, men 21. øld hevur nýggjar avbjóðingar við sær, sum krevja reiðiliga, virkna og álítandi leiðslu.

Heimurin broytist støðugt, í nøkrum førum til tað betra og í øðrum førum til tað verra. Vit liva í eini tíð, har fólk í túsundatali verða neyðtikin og dripin í Sudan, har flóttafólk drukna í evropeisku høvunum, har stjórnir avrætta og pína fólk, og har heimsfarsóttin HIV er við at týna heil ættarlið. Hesi viðurskifti verða ikki loyst av sær sjálvum, og tí er alneyðugt, at heimsins leiðarar sýna veruligan vilja og leiðsluevni at loysa hesar trupulleikar.

Tá heimsins leiðarar savnaðust 10. desember 1948 at samtykkja Heimsyvirlýsingina um Mannarættindi, sýndu teir stóran vilja og sanna leiðslu. Ræðuleikarnir undir seinna heimsbardaga vóru beinleiðis orsøk til Heimsyvirlýsingina

um mannarættindi, sum skal tryggja øllum menniskjum grundleggjandi og eyðsædd mannarættindi.

Síðani hava onnur eisini tikið stór tøk til tess at verja og menna mannarættindi í altjóða høpi. Men hóast hetta verða vit hvønn dag mint á, at ásetingarnar í heimsyvirlýsingini ikki eru veruleiki fyri stóran part av heimsins kvinnum, monnum og børnum.

Mannarættindi verða mangan handfarin við líkasælu ella stórliga misnýtt.

Amnesty International talar søk teirra, sum hava verju fyri neyðini. Men leikluturin hjá Amnesty International er eisini at minna heimsins leiðarar á at liva upp til teirra altjóða ábyrgd.

Okkara leiðarar í Føroyum hava eisini ábyrgdir at liva upp til, bæði her heima og í altjóða rúminum. Amnesty International Føroya Deild hevur seinastu tíðina vent sær til føroysku myndugleikarnar við áheitanum, spurningum og kunning um fleiri ymisk mál, sum vit halda, at myndugleikarnir eiga at geva størri gætur ella eiga at umhugsa sína støðu til. Av hesum kunnu nevnast tørvurin hjá samkyndum til verju í mannamunsgreinini í revsilógini, átøk til tess at steðga harðskapi móti kvinnum, málið um loyniligan fangaflutning og kravið um at fáa altjóða sáttmála um vápnaeftirlit.

Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða varð samtykt fyri 58 árum síðani. Tíðin er komin hjá heimsins leiðarum at útinna tey lyfti, sum teirra undangongumenn viðtóku.

Amnesty International heitir í hesum sambandi á heimsins

leiðarar, eisini okkara egnu leiðarar, um at vísa veruliga leiðslu og taka neyðugu stigini at tryggja, at hvør menniskja fær øll mannarættindi, sum eru staðfest í Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða.

STEINTÓR RASMUSSEN

# Tey dansa eins og skuggar

Tey dansa eins og skuggar ímóti køldum múrum,
tey syngja eins og fuglar, fjøtraðir í búrum,
tey rópa út í myrkrið um rættindi og grið,
tey bøna hesar veggir um lív og amnesti.

Tí tykkar' sangir liva, í børnum og í einkjum,
og tykkar' sterku vónir, í sveitta og í leinkjum.
Frítt at kunna tala, frítt at taka lut,
frítt at kunna skapa og velja sær sín Gud.

Og døtur skulu dansa sorgina til gleði,
synir skula syngja – máttloysi til megi.
Hvat annað kann eg gera, enn krevja amnesti?
:,: Tú ert ein alheims fangi, og tær eg fylgi við. :,:

JAN GUILLOU

# Brot úr „Óndskapurin“

*Hetta er ein einmansleikur, ið byggir á skaldsøgu við sama heiti. Hetta er fyrsta brotið í leikinum.*
*(Ein maður í tretivunum á einum tómum palli)*

MAÐURIN:
Ladies and gentlemen, this film is based on a true story!

Øll, sum onkuntíð hava leigað ein videofilm, vita, at tað, sum kemur nú, er bygt á eina sanna søgu.

Og eg ætli mær eisini at fortelja eina sanna søgu fyri tykkum. Eg veit, at hon er sonn, tí hon handlar um meg…

Tað byrjaði eitt kvøld í september. Eg hevði akkurát fylt trettan og sat saman við foreldrunum hjá mær rundan um køksborðið og át døgurða, tá eg knappliga fekk ein undir vangan. Slagið rakti meg mitt á kjálkan. Eg vildi, at tað skuldi raka meg mitt á kjálkan. Tað var tí, eg vendi høvdinum, beint tá ið pápi sló. Pápi helt seg duga at sláa meg so skjótt og knappliga, at eg einki legði merki til. Men eg kendi øll sløgini og finturnar hjá gamla, so tað var lætt hjá mær at uppdaga tað lítla rykkið undir høgra eyga, sum segði frá, at nú kom tað. Sjálvandi kundi eg havt bukkað meg undan, so at hann slett ikki hevði rakt. Men so var altíð ein møguleiki fyri, at hann bleiv frá sær sjálvum og hevði kastað seg fram yvir borðið og givið mær ein beint upp á kjaftin. So hevði eg fingið skyldina, og tað kundi forlongt døgurðabukingina upp í ein hálvan tíma.

– Ja, segði pápi. Í dag taka vit bustina og fimmogtjúgu sløg.

Fimmogtjúgu sløg við klædnabustini, tað var einki! So slapp eg undan at gráta. Eg vildi ikki gráta, tá pápi bukaði meg, tað vildi eg ikki. Og tað gekk at lata vera, so leingi man kundi halda andanum…

Mamma fór út í køkin sum vanligt at gera kaffi, og so skuldi eg fara við gamla inn í kamarið…

– Buksurnar niður, og bukka teg framav.

Samstundis sum gamli lyfti armin til tað fyrsta slagið, andaði eg djúpt inn, blundaði og knýtti nevarnar.

Og so var bara eyðmýkingin eftir!

Gamli rætti mær hondina, og viss eg ikki tók hana, so fekk eg allan umgangin eina ferð afturat.

– Vinir aftur, pápi.

Eg dró buksurnar upp, fór inn á mítt kamar og legði meg á songina.

Tað hevði verið ein perfektur dagur.

Eg hevði sligið Fýrtornið niður. Hann bleiv kallaður Fýrtornið, tí hann var nógv størri enn allir hinir. Eg var noyddur til at sláa Fýrtornið niður. Hevði eg ikki gjørt tað, so hevði eg ikki havt bandan meir. Bandin aktaði bara, so leingi sum man vann. Soleiðis var tað bara!

Og heilt erligt, so hevði eg vitað í meira enn eitt hálvt ár, at ein dagin fór Fýrtornið at bjóða mær av. Tað var annars hann, sum samlaði pengarnar inn. Øll í skúlanum kundu læna pengar frá bandanum. Treytirnar vóru einklar: Hundrað prosent í rentu upp á tann útlænta kapitalin, og afturgjald innan tveir dagar. Fýrtornið eftir teimum, sum ikki betaltu…

Í døgurðatímanum býtti eg inntøkurnar frá dagsins okurvirksemi, gav Fýrtorninum eina fimmkrónu og bað

hann fara oman til bakaran á horninum at keypa eina hálva wienarbreyðslongd.

– Nei, segði Fýrtornið. Tú kanst for helviti renna tíni ørindi sjálvur.

Hann lyfti spakuliga hendurnar, og eg sló hann alt sum eg orkaði í búkin. Hann bukkaði seg framav. Eg sló hann í andlitið, so hann fór at bløða nasablóð. Nasablóðið var viktugt, øgiliga viktugt. Hann datt niður á knøini, og so var tað yvirstaðið. So visti eg, at hann fór ongantíð at bjóða mær av aftur.

Tað hevði verið ein perfektur dagur.

Nakrar vikur seinni, í skúlanum, vísti eg bandanum, at eg kundi taka bank eisini. Tað var í evningstímanum. Lærarin var ein professari, sum var vikarur, og øll hansara undirvísing bygdi á peikipinnin Julius.

– Hetta er Julius, segði professarin. Julius er mín besti vinur her á skúlanum. Tann, sum ger ónáðir, sleppur at smakka Julius. Er tað skilt? Tann, sum ger ónáðir, sleppur fram her at bukka seg niður, og so… Skilt?? Ella skal eg demonstrera? Er tað kanska nakar, sum bjóðar seg fram?

– Ja, tygum, gjarna!

Hann hevði einki val. Hann stillaði meg upp móti talvuni, læt pinnin hvína ígjøgnum luftina og steðgaði, beint áðrenn hann nart við. Eg rørdi meg ikki. Hann sló, alt sum hann orkaði. Eg helt andanum, konsentreraði meg um myndina av pápa og rørdi ikki ein muskul.

– Nú, hvussu kendist Julius?

– Bíða nú! Nú má eg spyrja, hava tygum longu sligið?

Hann bleiv frá sær sjálvum og sló einar fimm seks ferðir, áðrenn hann sissaðist aftur. Hárið hekk niður yvir andlitið, og hann var knallreyður í høvdinum.

So hevði flokkurin sæð, at eg eisini kundi taka bank,

men tey skiltu einki, tí tey vistu einki um pápa. Pápi, ja, hann bukaði ikki bara meg, hann bukaði Romulus og Remus eisini. Tað vóru tveir svartir Doberman Pinchar'ir, sum vit áttu. Eg elskaði teir báðar hundarnar. Teir blivu avlívaðir, tá eg var tólv. Pápi hevði pískað teir so nógv, at teir blivu púra svakir til síðst.

Tað var heilt ótrúligt, at teir bara tóku ímóti, tá pápi fór oman og pískaði teir sundur og saman, har sum teir stóðu, bundnir í hvør sína ketu, fullkomiliga ótrúligt.

Ein dagin viltist ein spælisjúkur Collie inn í garðin. Hann stóð eitt sindur burturfrá og goyði eftir Romulus og Remus, sum ýlandi og slevandi hingu í ketunum.

Eg sat uppi í einum træ og sá alt, sum hendi. Pápi kom út, hugdi seg um, so fór hann við skundi yvir til hundarnar, og loysti teir…

Tað tók bara nøkur sekund – so var tað yvirstaðið!

Við døgurðaborðið nakrar tímar seinni fekk eg skyldina. Gamli segði, at eg hevði spælt við hundarnar og gloymt at bundið teir aftur. Men um eg viðgekk alt og stóð sum ein maður við tað, sum eg hevði gjørt, so skuldi hann bara geva mær ein lættan umgang. Annars kundi tað blíva verri, nógv verri…

Mamma fór út í køkin sum vanligt at gera kaffi, og so skuldi eg fara við gamla inn í kamarið…

Eg veit ikki, hvar eg fekk styrkina frá, men eg hugdi beint inn í eyguni á gamla og segði, at eg hevði sæð, at tað var hann, at eg hevði sæð hann loysa hundarnar, og eg hevði sæð hann staðið og flent, tá ið hann beitti teir eftir tí neyðars Collie'inum…

Pápi segði ikki eitt orð. Hann fór eftir hundapískinum, læt hurðina aftur, stongdi og koyrdi lykilin í lumman. Hann bað meg koyra buksurnar niður og leggja meg á songina.

# Maybe: a Battle




**Bárður Dal Christiansen.** Akryl, spray enamel og indian ink 2008, 130 x 180 cm.

Eg royndi at hugsa meg burtur, eg konsentreraði meg um eina mynd av einum báli, einum gløðandi bláum hatursbáli.

– Pápi, góði ikki sláa meg í andlitið, eg skal í skúla í morgin…

Eg slapp ikki í skúla í eina viku. Influensa, skrivaði pápi á ein seðil til flokslæraran.

Langt aftaná, tá tað var vár og ljóst inni í kamarinum, sá eg, at á tí hvíta tapetinum við hestum, seglbátum og spælandi hundum vóru smáir reyðir prikkar allan vegin upp undir loftið…

Okurvirksemið loysti seg ikki so væl longur. Tað vóru fá, sum vildu risikera eitt blátt eyga fyri hundrað prosent í rentu. Tjúkki Johan fann upp á nakað annað: Plátusøla!

Tað gekk soleiðis fyri seg, at tríggir teir nærmastu plátuhandlarnir blivu vitjaðir eftir einum skema, sum Johan hevði gjørt. Tað var øgiliga einfalt: Nummar eitt kom inn í handilin:

– Ja, góðandag, eg vil gjarna hava… Ja, tað er typiskt, at man gloymir, hvussu plátan eitur, men hon er okkurt sovorðið, Ti ti ti ti, Ta ta ta ta, við hasum har Beethoven. Hava tit hana?

Vit vistu, at Beethoven stóð á aftastu hillini, longst uppi, aftan fyri hornið. So meðan maðurin leitaði á hillunum, komu nummar tvey og nummar trý inn og tóku so nógvar plátur, sum teir orkaðu at bera. Prísurin í skúlagarðinum var helvtina av handilsprísinum. Sjálvandi gekk forrætningin strúkandi!

Og sjálvandi fór alt beint til helvitis. Fýrtornið og Göran fóru inn í sama handil tríggjar dagar á rað, triðja dagin stóð politiið har, og so var tað ferdugt.

So kom ein endaleys røð av forhoyri, við sosialráðgevar, politiið, skúlastjóran. Tað segðist, at tey høvdu sprongt ein

ísakaldan, samvitskuleysan ungdómsbanda, við sambandi til mafiuna í Europa…

Avgerðin fall hjá skúlastjóranum. Vit sótu allir í bíðirúminum hjá honum, hugdu djúpt inn í eyguni á hvørjum øðrum og lovaðu, at vit skuldu nokta alt. Heilt sikkurt!

Vit blivu róptir inn ein og ein. Eg sat einsamallur eftir, og knappliga visti eg, at eg fór ongantíð at síggja kammeratarnar aftur.

Skúlastjórin rópti meg inn. Hann segði, at skúlin og myndugleikarnir vóru komnir til botns við øllum.

– Tú, ungi maður hevur terroriserað allan skúlan í nógv ár. Píning av skúlafelagum, stuldur, okur, helarí hava hoyrt til dagsins ordan. Nei, tað hjálpir ikki at nokta, allir hinir dreingirnir, uttan ein, hava verið fornuftigir nokk til at viðganga alt. Neyðars Göran næstan græt, tá hann fortaldi mær, hvussu bangin hann hevur verið alla tíðina, og hvussu tú hevur noytt og rætt hann at halda fram við hesum svínarínum…

Göran, sum hevði verið ein av teimum ídnastu í plátustuldrinum.

– Hvussu ber tað til, at tú ert blivin soleiðis? Tað er allarhelst, tí tú aldrin hevur fingið ein ordiligan umgang. Tú ert óndskapurin sjálvur, og sovorðin sum tú skulu oyðileggjast…

Eg bleiv koyrdur úr skúlanum sama dag. Eg skuldi fáa 0 í atburði, og skúlastjórin skuldi persónliga ávara allar aðrar skúlar í býnum, um eg ætlaði mær at sleppa inn nakra aðrastaðni.

Knappliga stóð eg í skúlagarðinum. Niðri við kastanjutrøini spældu teir fótbólt sum vanligt. Tað var tann fyrsti heiti várdagurin.

Orðini hjá skúlastjóranum mólu í høvdinum á mær: Tú ert óndskapurin sjálvur. Sovorðin sum tú skulu oyðileggjast…

Göran hevði viðgingið alt og hevði skyldað upp á meg. Teir høvdu allir, uttan ein, logið og skyldað upp á meg. Teir, sum einaferð vóru mínir vinir.

Líka gott at fara heim og fáa avbukingina frá hondini. Og tað skuldi nokk eisini blíva ein fantastiskur umgangur nú, tá tað vóru so hátíðarligar grundir. Eg skalv, tá eg setti lykilin í úthurðina.

Gamli var ikki inni…

Tað hoyrdist longu á tónunum. Mamma sat við klaverið og spældi, og tað var ein drúgv kensla í spælinum, tá pápi ikki var heima, okkurt hvílandi og róligt. Hevði tað bara altíð verið so!

Í staðin fyri hesa ævigu døgurðabukingina, ta ævigu pískingina, tað æviga svikið frá vinum, sum ikki vóru nakrir vinir, ta ævigu ræðsluna fyri, at onkur kundi koma inn hvørja løtu og sláa ein hamara í klaverið við allari kraft.

Mamma gavst at spæla.

– Eg veit, segði hon. Eg veit alt longu. Tað er so nógv, sum eg átti at havt gjørt fyri teg, og eg veit ikki, um tú nakrantíð fert at fyrigeva mær. Men hesi bæði árini, áðrenn tú skalt á studentaskúla, tey skulu vit klára. Tú skalt við einum toki, sum fer um tveir tímar, at byrja í einum nýggjum skúla. Tað skal nokk ganga. Alt skal nokk ganga…

Tveir tímar seinni stóð eg í einum toki suðureftir og sá sólina glitra á fjørðinum.

Eg skuldi ongantíð aftur noyðast at berjast! Í tí nýggja skúlanum vistu tey einki um meg, eingin fór at bjóða mær av. Eg skuldi ongantíð aftur noyðast at berjast. Ongantíð aftur…

Tíggju míl og ein taxatúr seinni stóð eg framman fyri tí útsenda frá næmingaráðnum á kostskúlanum Stjärnsberg. Hann æt Bernhard von Schrantz. Bernhard var prefektur.

Tað merkti, at hann var formaður í næmingaráðnum og næmingadómstólinum, og hetta hoyrdi til hansara embætisskyldur – tað segði hann sjálvur:

– Tað er partur av míni embætisskyldu at vísa nýggjum næmingum skúlan.

Tað fyrsta húsið, vit komu til, var tað ljótasta.

– Hvør heldur tú býr her?

– Jaaa, hvør man tað vera…

– Her búgva teir yngstu sjálvandi. Jú hægri flokki, tú gongur í, tess betri næmingaheim. Tað er prinsippið.

Skjótt segði Bernhard, at rundvísingin var liðug, men at hann stóð til tænastu við hjálp og upplýsing til teir nýggju.

– Her á Stjärnsberg hava næmingarnir ábyrgdina av at uppfostra hvønn annan. Soleiðis sleppa vit frá at draga lærararnar inn í trupulleikar viðvíkjandi atburði og líknandi…

Tað ljóðaði næstan ov gott til at vera satt!

Eg fann mítt kamar á næmingaheiminum. Eg búði saman við einum, sum æt Pierre Tanguy. Hann lá og las í songini. Vit heilsaðust, og eg fór at pakka upp.

– Ná, ert tú ein sovorðin sportsidiot, segði Pierre, tá hann sá svimjibuksurnar og fótbóltsskógvarnar hjá mær.

Tað var ikki neyðugt at spyrja, hvat hann var. Pierre var tjúkkur og brúkti brillur, hann var ein lesihestur…

Pierre segði, at honum dámdi ikki at sveitta, at hann helt tað vera býtt at renna eftir einum lítlum bólti, og tað var eitt hundans roks, altíð tá árið byrjaði, tá tær stóru ítróttarkappingarnar skuldu haldast, har man skuldi vera við. Longu dagin eftir skuldi tað vera frælsur ítróttur.

Eg legði beint í vaðið. Eg fortaldi Pierre, at Tjúkki Johan var ein av mínum bestu vinum í tí gamla skúlanum, og at

hann var feitur og bleiv argaður, tí hann altíð var síðstur, og tí helt hann ítrótt vera keðiligan. Eg segði tað, so at Pierre skuldi vita, hvar hann hevði meg, og at eg ikki sá niður upp á nakran, sum var vánaligur ítróttarmaður.

Og so legði eg afturat, at eg ikki var rasistur. Pierre forkláraði beinanvegin, kanska eitt sindur ov skjótt, at hann heldur ikki var rasistur, at hann ikki hevði nakað ímóti sportsidiotum, og at hann kundi hjálpa mær í øllum teimum bókligu fakunum, fyri pengar og við fullum garantii. Garantiið var, at man fekk pengarnar aftur, um úrslitið ikki bleiv nóg gott. Er tað ikki einfalt og rættvíst?

– Jú, eg haldi hatta ljóðar fínt!

Mær dámdi beinanvegin Pierre. Hann minti nokkso nógv um Tjúkka Johan, tann einasti, sum ikki hevði slatrað um meg hjá skúlastjóranum, tann einasti, sum ikki var ein ræðuskítur.

Eg stríddist sum eitt beist í ítróttarkappingunum. Eg skuldi vísa mær sjálvum og hinum, at eg var ein góður ítróttarmaður. Eg vildi, at teir skuldu síggja meg soleiðis og ikki sum ein hálvkriminellan slagsbróður úr Stockholm. Tað gekk bara væl. Eg vann ikki í nakrari grein, men tað hevði eisini verið so at siga ómøguligt, eftirsum allir kappaðust í somu deild. Og hvussu skuldi ein trettanáragamal vinna ein nítjanáragamlan?

– Allir kappast í somu deild, tí at vit, sum eru yngri, eiga at fáa bank. Og eg meini ikki bara í ítrótti, men yvirhøvur. Tað er tað, sum teir kalla kammeratuppfostran…

*Leikgerð: Benny Haag/Hans Tórgarð týddi*

ODDVØR JOHANSEN

# Við eygum so stórum sum tekoppar

Tann stóra floghavnin er sum ein kókandi ketil av óró og gangi. Vognar við ferðagóðsi og kuffertum, taskur og soviposar verður drigið ella skumpað fram. Her eru barnagrátur og børn, sum ikki vilja.

Eg lati eyguni aftur. Soleiðis er tað at vera blindur. Øll ljóðini sláa saman um meg – tilvildarligir setningar, sum í grundini hoyra privatlívinum til. Fólk, sum tosa í fartelefon, eru kortini tey ringastu. „…blóðsukrið var so lágt, at hon dinglaði sum ein fullur maður," sigur ein, „…hann hevur smittað hana við klamydia, hatta reyvarholið," sigur ein onnur, „…eg vil ikki síggja gronina í tær aftur," sigur ein triðja.

Fartelefonirnar toga meg móti mínum vilja inn í privatsferuna hjá púra fremmandum menniskjum. Tey rópa sum menn á fjalli og skíta á, um onnur hoyra tað.

So njórar hátalarin aftur. Um gloymda bagasju ella løgnar posar. Tey elektrisku transportbondini rulla og sjóða sum áir. Hvat geri eg her? Millum túsundtals kuffert og líka so nógv fólk í eini floghavn við verkfalli og kaosi? Eg ferðist. Tað skal vera so gott.

Bimm, bamm! Røddin í hátalaranum ávarar okkum enn eina ferð. Eftir langa bíðirøð eri eg komin til tað elektriska portrið. Perluportrið inn í tað lovaða landið – transitthøllina – sum er himmiríkið fyri summi.

Hevur tú nakað í lummunum?

Jú, eg havi alt møguligt.

Upp við tí. Og legg ryggsekkin her – far so ígjøgnum portrið, so vit kunnu kanna, um tú ert o.k.

Jú, eg eri o.k. og luttaki uttan at mukka í hesum paranoida leikinum, sum í seinasta enda skal gagna mær sjálvari.

Í fimm ár havi eg hoyrt øll hesi nýggju samansettu orðini: devilsins ríki, óndskaparins ásur, sjálvmorðsbumbur, yvirgangsmenn, heilavaskaður ungdómur, sum ikki eru o.k., tí at tey binda hylki við krúti um miðjuna á sær og spreingja seg sjálv í luftina, so at tey á henda hátt kunnu taka onnur við sær í deyðan.

Vit skulu kenna okkum hótt. Av yvirgangsmonnum við knívi í lummanum. Vit skulu óttast alt millum himmal og jørð, til dømis fólk í kalotti og við svørtum skeggi, ella fólk, sum biðja til Gud upp á ein annan máta enn vit sjálv.

Í fimm ár havi eg, uttan at mukka, luttikið í hesum vitloysisdansinum og latið meg heilavaskað.

Tað byrjar á flogvøllinum í Vágum.

Bibb, bibb, letur í perluportrinum. Maður mín er ikki o.k., nú hann fer innum. Okkurt er galið. Kanska stáltráðurin inni í bringuni. Nú verður hann kropsvisiteraður – eisini violinin – uha – hvat kann ikki fjala seg í einum sovorðnum morreyðum violinkassa… kanska ein bumba, kanska ein skammbyrsa.

Hvat er tað, sum bagir okkara gomlu jørð? Hesi stóru bláu kúluni, sum eg elski.

Vit skulu kontrollerast fyri okkara egnu skyld, so vit verða rólig og kenna okkum trygg, men spurningurin er, um hetta ikki ger okkum líka so ótrygg, sum vóru Føroyar í kríggi.

Óbeinleiðis eru vit jú drigin inn í eitt langt og blóðugt

stríð, hesa Bush-komediuna, sum fer fram langt, langt burturi frá sjálvum Bush – við áirnar í Bábel. Kvøldarlandið í vestri vil kontrollera øll heimsins lond og kroysta síni „vesturlendsku virði“ – matsiðir, moral, krígspropaganda – oman yvir allar tjóðir, eisini ta føroysku. Slík aggressiv lond hava ongantíð havt langt lív lagað, søgan vísir tað.

Islas Canaria, Kanarisku Oyggjarnar, liggja 1000 km sunnan fyri Gibraltar, men eru spanskar, og fólkið tosar spanskt. Ein leggur beinanvegin merki til allar vindmyllurnar og sólfangararnar. Vindurin nøktar einsamallur 12% av allari elorkuni, men málið er 20%.

Oyggin er rund sum ein pannukøka, tó við høgum øskulitaðum fjøllum, sum koma upp móti 2000 m. Fólk hevur sett seg niður á útnyrðings- og landnyrðingssíðuni, tí her er vatn. Annars sigst, at á oynni eru heili fýra ymisk veðurløg.

Vit eru komin upp á pláss í Puerto Rico sunnast á oynni, har veðurlagið er sum í Vestursahara.

Kvøldið er vakurt. Vestanlotið kølir ta vøkru terrassuna, her vit búgva sum greivar uppi í fjallalíðini, og veðrið er fantastiskt. Allur býurin er sum eitt yvirvaksið hotell, ið spjaðir seg á øllum fjallasíðunum við kritahvítum íbúðarhotellum, sum fullsett hýsa 400.000 fólkum.

Mánin stendur lágur og reyðgulur yvir vágni. Arkitekturin í býnum er ein blandingur av Miami Beach og Saudi Arabia. Fjøllini eru avsviðin av tí endaleysa turkinum, og dagin eftir spyrji eg ferðaleiðaran, nær tað regnar her.

Ongantíð! svarar hon.

Tann stóra áin við laðaðum áarbakkum, ið einaferð rann gjøgnum býin, meðan landið var skógarvaksið, er nú ein skróvturr stinkandi kloakk.

Ongantíð regn! Fyri ein, ið kemur úr einum landi, har yrkjararnir skriva um regn í allari verðini og regn í dag og regn í gjár, og har tað oysir niður meginpartin av árinum, er tað næstan sum ein óndur dreymur. Eg eri komin til eitt regnleyst land. Her er eingin brunnur, eingin kelda, eingin løkja, eingin vatndropi, einki sirm (og eg kundi hildið fram at nevnt hundraðtals orð fyri vatn á føroyskum), og tað vatnið, vit vaska okkum í, er sjógvur, gjørdur til vatn.

Ikki leska hetta vatnið, lesi eg, ikki busta tenn í tí. Tað vil so aftur siga, at drekkivatnið verður keypt í stórum fimmpottafløskum.

Við áirnar í Bábel, har búsettu menniskjuni seg í fyrstani, tí har var vatn. Í Puerto Rico hevur einki menniskja sett seg niður fyrr enn í 1956, tá ið Spies og Tjæreborg settu skjøtul á ferðavinnuna. Her er og hevur verið oyðimørk í fleiri hundrað ár.

Einir tíggju føroyingar eru á hotellinum, ímillum teirra seks dreingir úr Vági – ungir fittir fýrar, sum føroyskum ungdómi líkt sova um dagin og eru úti um náttina.

Longu í 1100 fyri Kristi føðing komu fønikiararnir framvið her á sínum longu sjóferðum. Í 300 eftir Kristi føðing kom fólk rekandi á flakum yvir havið úr Norðurafrika. Hetta fólkið var av berbaraætt við ljósari húð og kallaðist guanchararnir. Teir dugdu ikki bátasmíð, men hildu seyð og geitir og stóðu á seiðabergi. Teir bygdu sær ikki hús, men búðu í teimum mongu rúmligu fjallaholunum, sum er gamli kanariski bústaðarhátturin, og onkur býr soleiðis enn.

Tað sigst, at tað fyrsta, hesi fólk bóru eyga við á oynni, vóru grannvaksnir hundar, harav navnið Gran Canaria. Altso hevur navnið einki sum helst við mín lítla, gula dreyma-

# Microstate Hiker



**Edward Fuglø.** Akryl á lørifti 2008, 210 x 260 cm.

kanariufugl at gera, og eg fái nú at vita, at kanariufuglurin er ein heldur misháttur, stórur gráur fuglur…

Í 1478 koma spaniólarnir og bera seg at á sama hátt, sum teir fá ár seinri gera í Amerika. Teir berjast við báðar høvdingarnar á oynni, annan drepa teir, og søgnin sigur, at tá ið hann var fallin, stoyttu øll viðhaldsfólk hansara seg út av berginum Sancta Lucia. Hin høvdingin fanga teir og tvinga at lata seg doypa! Síðani høgga teir skógirnar niður, og tað er her, at ólag kemur í natúrina á sunnaru helvt, sum tornar upp og verður oyðimørk. Her syngur eingin fuglur í haga, urð og lund, eingin seyður, eingi neyt – ikki so mikið sum ein fluga livir í hesum umhvørvinum – kanska okkurt smávegis skordýr.

Føroyingum líkt háli eg gardinurnar frá hvønn morgun at vita, hvussu veðrið er. Blátt, heitt Atlantshav, gulur sandur, 35-40 hitastig og sól. Hvønn dag árið á tamb.

Ein morgun haldi eg meg síggja strondina í Afrika 150 km burturi, men maður mín ristir við høvdinum og sigur: Fata morgana!

Her á suðursíðuni eru skaptir nakrir pseudobýir. Býir við ongari søgu, ongari mentan, ongum upprunaligum. Kanariararnir liva av at varta upp meg og øll hini túsund, og tað gera teir av einslistum. Her er eingin tjóðskaparromantikkur, eingir føðilandssangir, eingin kirkja og eingin bókahandil, men her er ein skuggaleysur modernitetur.

Við mær havi eg bókina hjá Bergi Rønne Moberg „Tá ið søgan byrjar á staðnum“. Tittulin er heldur speisamur her á staðnum. Uppi í tí kálkaðu stovuni við rútaleysu vindeygunum róti eg onkrar gamlar bøkur fram: Dea Trier

Mørch: „Skibet i flasken“, sum er um uppruna hennara, og Rémarque: „Først elske – siden dø“ um ræðuleikarnar í Týsklandi og á eysturhermótinum í 1943.

Í barrini hanga nøkur fólk, hvørs størsta áhugamál tykist vera ølin, og fyri at yvirliva hava tey keypt danskt rugbreyð, speygipylsu og livurpostei.

Á tí skínandi reinu terrassuni siti eg so sum eitt luksusdýr og skrivi og dugi illa at lata hasa ungu vøkru konuna vaska míni gólv og tøma mína ruskspann.

Slappa av, sigur maðurin, hetta fær eisini ein enda.

Munnu kanariubúgvar fáa nakað slag av útbúgving? Handverkarar eru teir góðir, serliga at laða grót og leggja flísar á. Teir arbeiða í tí steikjandi hitanum við at laða garðar av hagagróti ella malargróti, og for niðan ígjøgnum eru veldigir múrar laðaðir á sama hátt sum Kirkjubømúrurin við vatnrøttum og fløtum klípum ímillum.

Við at spræna destilleraða vatnið á markirnar, dyrkar kanariska fólkið í milliónatali av tomatum og alskyns frukt-um til útflutnings. Kanariska bananin smakkar betur enn so mangar aðrar, men ES-londini halda hana vera ov lítla. ES vil hava „potens“.

Afrika! Mítt fata morgana spøkir í huganum, og fyri fyrstu ferð í lívinum kenni eg meg innistongda á eini oydnari oyggj langt burturi frá sivilisatiónini, og undri meg á tað.

Um vit samanbera Føroyar við Gran Canaria, er munurin tann, at Føroyar hava nakrar stabilar og væl skipaðar grannar: Ísland, Noreg og Skotland. Gran Canaria harafturímóti hevur eitt stórt kreppurakt meginland sum nærmasta granna. Eitt meginland, har korruptiónin blomstrar, og neyðturviligar funktiónir so sum reint vatn, matur og heili-vágur mangla. Ein heimspartur, har eitt heilt ættarlið av

foreldrum í løtuni sjúklast burtur av AIDS og doyr frá sínum børnum.

Dag og dagliga vága fátækraflóttafólk lívið á flakum og søkkladnum dangum í teirri vón at náa hesa oynna, sum eg ferðist á, fyri umvegis hana at koma til „paradísið“ Europa.

Hendan dagin varð ein sovorðin danga við 50 svongum, tystum og sólskáldaðum menniskjum sleipað út aftur á havið, haðani tey komu. Tankin ger meg melankolska, her eg siti sum ein luksuslomviga á eini luksusrók og gløi út á hetta sama hav og oman yvir henda pseudobýin, har ungdómurin ikki lærir nakað nevnivert, og har ríkir týskarar, amerikumenn og danir húsast á sínum altanum ein stóran part av árinum, nú tey njóta sítt otium. Fólk keypa sum í ørsku: plastikputl úr Kina, cowboyhattar úr Suðuramerika, ektað træskurðararbeiði av Fílabeinsstrondini og yndisligar blondur, hekklaðar uppi í onkrari bygd har uppi í Fjallafonn – alt fyri dumpingprís.

Eitt sindur av kanariskum tjóðskaparromantikki hevði ikki verið so galið. Hvar er listin? Lýrikkurin og klassiski tónleikurin? Hvar eru útróðrarmenninir og tær gomlu konurnar, børnini, alt tað, sum byggir ein bý og eina tjóð?

Við eitt gerst tað mær greitt: Eg sakni Europu hóast øll hennara brek.

Fregnist eftir lønarlagnum í hesum modernaða skattaparadísinum við 5% í skatti. Ferðaleiðarin, ein bussførari sum hesin, arbeiðir tíggju tímar um dagin. Tað fær hann 1000 evrur = 7000 krónur fyri um mánaðin. Tað fáa øll onnur í ferðavinnuni eisini.

Í Las Palmas, størsta býnum, ið er norðanfyri, haldi eg meg síggja, at tey gomlu skjøtta seg sjálv við at bidda í

gongugøtunum. Her kosta klæðini tað sama sum í Føroyum. Býurin er ein ruðuleiki av betongi í 8-10 hæddum, og á gøtuni spáka alfonsarnir aftur og fram og bjóða sínar gentur til keyps.

So standa vit við Casa De Colon, húsini hjá sjálvum Columbusi, sum er í kubanskum kolonistíli eins og gamli býarparturin her. Her búði Columbus tær tríggjar ferðirnar, hann dvaldist á oynni á veg til Amerika. Søgan um hann er fløkjalig á tann hátt, at bæði spaniólar og italiumenn kanna sær hann. Tað síðsta nýggja og skemtiliga er, at norðmenn nú siga, at Columbus var norðmaður…

Vit standa uttan fyri Sankta Annu kirkju, har tú mást gjalda, um tú ætlar tær inn.

Eftir at spaniólarnir lendu her í 1478, skundaðu teir sær at byggja eina kirkju, vígd Sankta Annu, móðir Mariu moy.

Tá ið hollendingarnir síðani komu framvið, varð kirkjan sorlað sundur. Spaniólar bygdu upp aftur, men í samfull 500 ár skiftust teir at byggja og knúsa hesa neyðars kirkju, sum ikki er liðug enn.

Okkara kanarisku dagar eru farnir at fækka. Vit hava ligið á Playa De Andores, har sjógvurin er turkis, og vit hava fingið so nógva sól og so nógv summar, sum ynskjast kann. Seinasta dagin – meðan hitin er upp á tað mesta – verða vit steðgað av einum sponskum umboðsmanni í fínum klæðum, sum gevur okkum eitt tilboð.

Vit kunnu fáa heiðurin at sleppa út at síggja Anfi Del Mar, sum er paradísdreymurin hjá norska ríkmanninum Bjørn Lyng. Tað skal ikki kosta okkum eitt oyra.

Kanska heldur umboðsmaðurin, at vit hava pengar, virðisbrøv ella onnur avkast – hetta gerst okkum greitt,

tá ið vit verða sett við eitt skrivibord til samrøðu um evt. investering. Skittur veri við tí… vit ganga plankan út.

Søgan um Anfi Del Mar er ótrúlig. Staðið var fram til 1992 ein fittlig vík randað av oyðimarkarheyggjum og fjallaholum. Hetta vildi norðmaðurin Bjørn Lyng sleppa at skapa um til eitt suðurhavsparadís, har tú og eg (sum hava pengar) fáa tilboð um at investera í ein lut (andeil), so at vit ein part av árinum kunnu búleikast her í villasta luksus.

Bjørn Lyng, sum býr her, og er ein blandingur av Mærsk McKinney Møller og Clint Eastwood, læt farmaskip føra 11.000 tons av kritahvítum sandi av Bahamas. Hann setti gartnarar at planta alla víkina við pálmatrøum, fikutrøum og túsundtals blomstrandi runnum, og eitt fjølment lið av handverkarum fór undir at byggja íbúðir úr morreyðum malargróti og glasi í 10 hæddum upp eftir fjallasíðuni. Svimjihyljar, matstovur og long strond-arkada við mótaklæðum frá Hugo Boss, Dior, La Costa, Gucci, Chanel, og hvat ið alt hetta nú eitur.

Tankar mínir leita til eina ávísa Stórutjørn, ið er umleið sama konseptið. Tað sigur seg sjálvt, at í Anfi Del Mar kann eingin búgva, sum ikki eigur pengar. Nógvar pengar.

Vit vóru altso komin á skeivt stað, men eygu míni vóru so stór sum tekoppar.

Økið var væl vart. Bert ein inngongd. Úr erva, ein elevator, har vaktarfólk hildu eitt vakið eyga við okkum og hinum, sum eisini vóru boðin út higar.

Her kundu so tú og eg og hann sjálvur Bjørn Lyng dusað okkum í gleði og gleimi og fingið so nógva sól, at húðin bleiv sum ein væl turkað lambssíða. Vit kundu staðið á vatnskíðum, snorklað, verið á kasino, spælt tennis, golf og poker.

Á hesum ovurstóru terrassunum við arkitektteknaðu møblunum kundu vit so sitið og spælt violin ella harmoniku og skoðað út yvir tað bláa havið, hvíta sandin í sól í dag, sól í morgin og sól til allar dagar…

Uttan vatn var einki av hesum til. Uttan vatn hevði okkara vakra bláa gongustjørna verið oyðin sum mánin, køld sum deyðin. Einki!

Fittu ungu vágbingarnir vóru vaknaðir. Skjótt var sindrið hjá okkum pakkað, og um ein tíma fóru vit á flog. Heim til Europu.

Heim til tað lítla váta landið við teimum væl skipaðu grannunum. Heim til gerandisdag og knetti, bussleiðina, Tey av Kamarinum og Gamla Bókahandil. Heim til Sunleif Rasmussen, múrin í Kirkjubø og modernaðu føroysku listina. Heim til tjóðskaparromantikkin og rocktónleikin. Heim til regnið. Tað vælsignaða vatnið.

Ikki so galið.

HANUS KAMBAN

# Amerikakvæðið

amerika amerika
tað var ein signing stór
tá ið kolumbus gamli um atlantshavið fór
at byggja mikla borg
at verja gud og demokratiið

amerika
vit uttan ravmagnstól
og uttan coca-cola aldri sóu frælsissól
og høvdu ikki superman
at verja gud og demokratiið

amerika
væl bíta tíni svørð
teir reyðu allar myrdi tú og rændi teirra jørð
við krossi og við krúti
fyri gud og fyri demokratiið

amerika
eg fagni tær í kvøld
av blálondum tú førdi hina dimmu trælafjøld
við koyrli og við leinkjum
fyri gud og fyri demokratiið

amerika
tú mikla frælsisørn
tú heimsøkti teir gulu teirra vív og teirra børn
við bíblium og bumbum
fyri gud og fyri demokratiið

amerika
tað fell so væl í lag
tey óføddu tú kryplaði og brendi fólk og fæ
við napalm og við eitri
fyri gud og fyri demokratiið

amerika ei kálvahjarta
høvdu kappar teir
sum royndu góðar gripir móti børnum í my lai
við hvøssum bajonettum
fyri gud og fyri demokratiið

amerika
tín heiður runga skal
frá watergate har vesturi til føroya mjørkadal
tú verjir dollarposan
og tú verjir gud og demokratiið

ALEXANDUR KRISTIANSEN

# Tá fáa vit frið

Um bert í okkar hjørtum
sanna ástin eigur búgv,
so verður ikki spurt
um húðarlit og trúgv,
um Buddha ella Allah
ella Kristusi vit tæna,
tá fáa vit frið
fyri gudi og fana.

# Havnin í Havn



**Hans Henrik Tholstrup.** Ljósmynd 2007.



# Keldur

**Blomstur í kavanum**

Steinbjørn B. Jacobsen: „Aldan og landi alda" er úr savninum *Tægr,* sum kom út í 1980.

Sámal Joensen-Mikines: „Súgur við lendingina". Olja 1952, 100 x 125 cm. Listasavn Føroya.

Martin Joensen: „Maðurin umborð" er úr savninum *Útrák,* sum kom út í 1949.

Óluva Johannessen: „Kanska fara". Leir 2008, staklutur. Listasavn Føroya.

Guðrið Helmsdal: „Mjørkanáttin" er úr savninum *Lýtt lot,* sum kom út í 1963. Yrkt í 1958.

Grønlendsk frumsøgn: „Sálin í hvalinum" er úr savninum *Svørt verða sólskin,* sum kom út í 1994. Ásmundur Johannesen týddi.

Mikkjal Dánjalsson á Ryggi: „Leggið út árar" (Grindadráp) er úr savninum *Yrkingar,* sum kom út í 1954. Yrkingin var fyrstu ferð prentað í *Tingakrossi* 1915.

Hans Pauli Olsen: „Uppskorin hvalur". Jarn 1985, L 70 cm. Listasavn Føroya.

Lydia Didriksen: „Blóð" er úr savninum *Gráglómur,* sum kom út í 1992.

Rannvá Kunoy: „Return to Paradise". Olja 2002, 186 x 255 cm. Randers Kunstmuseum.

Tróndur Patursson: „Náttúrulýsing". Olja 1991, 195 x 146 cm. Listasavn Føroya.

Rikard Long: „Vætan“ er úr *Kveikt og kannað,* sum Hanus Kamban legði úr hondum. Yrkingin var fyrstu ferð prentað í *Tingakrossi* 1916.

V. U. Hammershaimb: „Blankans ríma“ er úr *Færøsk Anthologi,* sum kom út í 1891.

Heðin M. Klein: „Grasrót“ er úr savninum *Veggjagrøs,* sum kom út í 1994.

Ólavur Michelsen: „Rossini á Skoradali“ er úr savninum *Brøgd og bjørg,* sum kom út í 1979. Prentað í *Følv* í 1972.

Jack Kampmann: „Elduvík“. Olja 1952, 70 x 85 cm. Listasavn Føroya.

Bárður Oskarsson: „Kroppur“. Akryl 2005, 90 x 100 cm. Listasavn Føroya.

Tóroddur Poulsen: „Fepurdreymur um blomstrini“ er úr savninum *Eygnamørk,* sum kom út í 2004.

Jens Kristian Vang, „Mótasýning“. Ljósmynd 2008.

Jakob Jakobsen: „Teir sjey svanirnir“ er úr savninum *Sagnir og ævintýr,* sum kom út í 1985.

Edward Fuglø: „Nornurnar“. Akryl á lørifti 2006, 160 x 680 cm, partur. Landssjúkrahúsið.

Guðrið Helmsdal: „Í skýmingini“ er úr savninum *Lýtt lot,* sum kom út í 1963. Yrkt í 1958.

MARMAR (Marianna Mørkøre og Maria Arnell): „Fragmented Unison“. Ljósmynd 2006, www.marmar.nu

**Eg ikki eg**

Sigri M. Gaïni: „Eg eri“ er úr savninum *Orð og andlit,* sum kom út í 1997.

Karsten Hoydal: „Barnið, bergið og blómurnar“ er úr savninum *Teinur og tal,* sum kom út í 1972.

Petur Pólson: „1. (myrkur), 2. (lýsi)“ er úr savninum *Guru,* sum kom út í 1999.

Heiðrik á Heygum: „Through the looking-glass“. Vatnlitir 2007, 50 x 73 cm.

Regin Dahl: „Ikki komi eg til tín“ er úr savninum *Beltisgyrði,* sum kom út í 1949.

Carl Jóhan Jensen: „The reverend dünn's concept of God“ er á fløguni *September í bjørkum sum kanska eru bláar,* sum kom út í 2006.

Hans A. Djurhuus: „Hagin og kirkjan“ er úr savninum *Undir víðum lofti,* sum kom út í 1934.

Hanus Kamban: „Undir tínum veingjabreiði“ er úr savninum *Dóttir av Proteus,* sum kom út í 1980.

Bárður Eklund: „Varðin“. Ljósmynd 2008.

Sigrun Gunnarsdóttir: „Einglavakt“. Olja 2001, 120 x 90 cm.

Tita Vinther: „Segl“. Vevmynd 2007.

Kristian Osvald Viderø: „Himnafaðir, eg teg biði“ er úr bókarverkinum *Á annað Suðurlandið, Ferð mín til Jorsala oman av himni,* sum kom út í 1990.

Tóroddur Poulsen: „Fjarskifti“ er úr savninum *Eygnamørk,* sum kom út í 2004.

Ingálvur av Reyni: „Genta í rúmi“. Olja 1992, 110 x 85 cm.

William Heinesen: Brot úr „Móðir Sjeystjørna“. Heðin Brú føroyskaði. Týðingin kom út í 1975. Upprunabókin kom út í 1952.

Svanhild Strøm: „Latitude“. Installation 2004, H 50 cm. Listasavn Føroya.

Lydia Didriksen: „Frostrósan“ er úr savninum *Gráglómur,* sum kom út í 1992.

Lina Sandell (Jákup Dahl týddi): „Ongum er so trygt“ er

úr *Sálmabók Føroya kirkju*, sum kom út í 1991. Sálmurin er yrktur í 1856 og týddur til føroyskt í 1937.

Marius Olsen: „Sjálvsmynd". Radering 1989. 59 x 39,5 cm. Listasavn Føroya.

Alexandur Kristiansen: Brot úr yrkingini „Man guð vera nøgdur". Er úr savninum *Gud er danskari,* sum kom út í 2003.

**Hví stendur tú her**

Rói Patursson: „Býurin (og reklaman í glugganum)" er úr savninum *Yrkingar,* sum kom út í 1969.

Annika Hansen: „Power". Olja 2008, 120 x 100 cm. Listasavn Føroya.

Sólrún Michelsen: „Summi renna í stuttum brókum" er úr tíðarritinum *Vencil* nr.1, sum kom út í 2006.

Hanni Bjartalíð: „Uttan heiti". Olja 1999, 80 x 60 cm .

Agnar Artúvertin: „Hundurin" er úr tíðarritinum *Vencil* nr. 2, sum kom út í 2007.

Firouz Gaïni: „Prógvið" er úr savninum *Gávur skulu rindast aftur,* sum kom út í 2005.

Hanus Kamban: „Sangur um flyting" er úr sangbókini *Grøna Sangbókin,* sum kom út í 1993. Er á útgávuni *Vælferðavísur* hjá Kára P., sum kom út í 1979.

Astrid Andreasen: „Æti". Akryl 2008, 40 x 40 cm.

Oddvør Johansen: Brot úr skaldsøguni *Tá ið eg havi málað summarhúsið* (bls. 18-33), sum kom út í 2001.

Beinta av Reyni: „Barnaminni". Olja 2001, 150 x 125 cm.

William Heinesen: „Sjálvband og samstýri". Oljukrit 1952, 74,5 x 54,5 cm. Listasavn Føroya.

Gunnar Hoydal: „Bræv til Marionnu" er bræv, sum Gunnar skrivaði dóttrini Marionnu 8. oktober 1992.

Beinta av Reyni: „Eminem aka Slim Shady“. Olja 2006, 270 x 200 cm.

Heine Hestoy: „Taskan“ er úr tíðarritinum *Birting,* sum kom út í 1995.

Poul F. Joensen: „Samfelagið“ er úr savninum *Millum heims og heljar,* sum kom út í 1964.

Høgni Magnussen: „Á G!“. Ljósmynd 2007.

**Eg fann teg**

Sendistovan: „Máltræ“. Grafiskt snið 2009.

Jóannes Paturson: „Eg veit ein kvist“ er úr *Songbók Føroya Fólks,* sum kom út í 1997. Yrkingin var prentað í *Føringatíðindum* nr. 5 í 1894.

Rasmus Effersøe: „Úr øllum ættum“ er úr *Songbók Føroya Fólks,* sum kom út í 1997. Yrkingin stóð í *Dimmalætting* í 1889. Yrktur í Svøríki umleið 1880.

Christian Matras: „Móðurmálið“ er úr heildarsavninum *Leikur og loynd,* sum kom út í 1975. Yrkingin stóð á fyrsta sinni í *Tingakrossi* í 1938. Hon var vígd føroyskum studentum.

Petur & Petur: „Eg elski mína mús“. Lýsing 2005.

Haldur Suni: „Eg'ið“ er úr savninum *Skuggar av tonkum,* sum kom út í 1996.

Agnar Artúvertin: „Message 5“. Yrkingin er úr tíðarritinum *Outsidermagazin* nr. 2/3, sum kom út í 2006 og fekk 1. virðisløn í YrkFOzt-kappingini. Layout eftir Ole Wich.

Jónley á Løgmansbø: „Message 28“. Yrkingin er úr tíðarritinum *Outsidermagazin* nr. 2/3, sum kom út í 2006 og fekk 2. virðisløn í YrkFozt-kappingini. Layout eftir Ole Wich.

Diana Joensen: „Message 18“. Yrkingin er úr tíðarritinum

*Outsidermagazin* nr. 2/3, sum kom út í 2006 og fekk 3. virðisløn í YrkFOzt-kappingini. Layout eftir Ole Wich.

Heðin Kambsdal: „Kona". Olja 2004, 80 x 65 cm.

Petur Pólson: „Loynimálið – Bábel revisited" stóð í *Dimmalætting* 12. apríl 2006.

Óli Petersen: „Málfúti". Tekning 2006.

Stefan í Skorini: „Málslig intoleransa skeiklar almenna kjakið" stóð í *Sosialinum* 30. august 2006.

Eivør Pálsdóttir: „Mín móðir" er á fløguni *Eivør,* sum kom út í 2004.

Sigri M. Gaïni: „Minst til" er úr savninum *Orð og andlit,* sum kom út í 1997.

Hans A. Djurhuus: „Høsnatos" stóð í *Ævintýr,* sum kom út í 1929.

Ruth Smith: „Nes". Olja 1955, 45 x 51 cm.

Jóanes Nielsen: „Fyri tvær fløskur av konjakki" er úr søgusavninum *Á landamørkunum vaksa blomstur,* sum kom út í 1986.

Anna Katrina Højgaard: „Føroysk delikatessa". Ljósmynd 2007.

Tóroddur Poulsen: „Dulnevni" er úr savninum *Eygu á bliki,* sum kom út í 1993.

Fríðrikur Petersen: „Søgan um floksmenninar" er úr *Føroyskar bókmentir í úrvali* 2. bd, sum kom út í 1964. Prentað á fyrsta sinni í *Dimmalætting* í 1884.

Jacob Olsen: „Fjallaoyggjar í kava". Olja 1925, 43 x 60 cm. Listasavn Føroya.

Erla Marita Askham: „Kvinna við vesikummu". Olja 2007, 240 x 240 cm.

Kári P.: „Meirlutin ræður" er úr sangbókini *Grøna sangbókin,* sum kom út í 1993. Er á útgávuni *Hinumegin ringvegin,* sum kom út í 1992.

Heine Hestoy: „Óboðin ferðamaður“ er úr tíðarritinum *Birting*, sum kom út í 1997.

Christian Matras: „Hitt blinda liðið“ er úr heildarútgávuni *Leikur og loynd*, sum kom út í 1975. Yrkt í 1920.

Astrid Andreasen: „Babyboom“. Ull 1997, 258 x 159 cm. Listasavn Føroya.

**Regnið og lívið**

Hávamál (ørindi 76 og 77). Er á http://www.ismennt.is/not/gsaem/MM/212.htm (íslendska mentanetið) undir *Mál og menningarsaga* eftir Guðmund Sæmundsson.

Tummas Jákup Thomsen: „Uttan heiti“. Steinprent 1998, 35 x 35 cm. Listasavn Føroya.

Hávamál (ørindi 76 og 77). Regin í Líð føroyskaði. *Hávamál (tala hins høga)* kom út í 1945.

Nordahl Grieg: „Til ungdommen“ er úr savninum *Håbet*, sum kom út í 1946. Yrkt í 1936.

Marius Olsen: „Mynd við flaggstong“. Silkiprent 1994, 63 x 77 cm. Listasavn Føroya.

Karl Bruckner (Erla Olsen týddi): Brot úr „Sadako vil liva“, sum kom út í 1975. Bókin kom á fyrsta sinni út á týskum í 1961.

Annika á Lofti: „Tár“. Tár og akrylglas 2008, D 20 mm H 15 mm.

Poul F. Joensen: „Heimspolitikkur“ er úr savninum *Lívsins kvæði*, sum kom út í 1955.

„Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi“. Einfaldari útgáva, sum 1. flokkur í Hoydølum hevur týtt úr enskum til undirvísingarendamáls. Er á www.amnesty.fo

Fridtjof Joensen: „Móðir og barn“. Fura 1987, H 55 cm. Listasavn Føroya.

Wolf Biermann (Turið Sigurðardóttir týddi): „Eggjan“ er úr tíðarritinum *Brá* nr.1, sum kom út í 1982. Yrkingin kom út á týskum í 1968. Upprunaheitið er „Ermutigung“.

Jan Müller og Jóannes Dalsgaard: „Mandela – hugtak og ímynd“. Blaðgrein í *Sosialinum* nr. 137, 18. juli 2008.

Jóannes Dalsgaard: „Framtíðin“ er úr savninum *Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari*, sum kom út í 1987.

Malan Poulsen: „Vón“ er úr savninum *Ímillum*, sum kom út í 1986.

Margretha Nónklett: „Mannarættindadagurin 2006“. Røða hildin á Tjóðpalli Føroya 10. desember 2006. Er á www.amnesty.fo

Steintór Rasmussen: „Tey dansa eins og skuggar“ er úr sangbókini *Grøna Sangbókin*, sum kom út í 1993. Er á útgávuni *Amnesty tónar*, sum kom út í 1991.

Jan Guillou (Leikgerð: Benny Haag/Hans Tórgarð týddi): Brot úr leikritinum *Óndskapurin*, sum Gríma pallsetti í 1999. Leikritið kom út á svenskum í 1995. Bókin kom út í 1981.

Bárður Dal Christiansen: „Maybe: a Battle“. Akryl, spray enamel og indian ink 2008, 130 x 180 cm.

Oddvør Johansen: „Við eygum so stórum sum tekoppar“ er ritroynd úr tíðarritinum *Vencil* nr.1, sum kom út í 2006.

Edward Fuglø: „Microstate Hiker“. Akryl á lørifti 2008, 210 x 260 cm. Norðurlandahúsið.

Hanus Kamban: „Amerikakvæðið“ er úr bókini *Grøna sangbókin*, sum kom út í 1993. Er á útgávuni *Vælferðavísur* hjá Kára P., sum kom út í 1979.

Alexandur Kristiansen: „Tá fáa vit frið“ er úr savninum *Útskot*, sum kom út í 1983.

Hans Henrik Tholstrup: „Havnin í Havn“. Ljósmynd 2007.

# Innihaldsyvirlit eftir høvundi/listafólki


Agnar Artúvertin: Hundurin .......................... 147
Agnar Artúvertin: Message 5 .......................... 199
Alexandur Kristiansen: Brot úr „Man guð vera nøgdur" ... 133
Alexandur Kristiansen: Tá fáa vit frið.................. 318
Anna Katrina Højgaard: Føroysk delikatessa ............. 223
Annika á Lofti: Tár.................................... 268
Annika Hansen: Power................................... 138
Astrid Andreasen: Babyboom ............................ 251
Astrid Andreasen: Æti ................................. 153
Bárður Dal Christiansen: Maybe: a Battle ............... 299
Bárður Eklund: Varðin.................................. 95
Bárður Oskarsson: Kroppur.............................. 63
Beinta av Reyni: Barnaminni............................ 163
Beinta av Reyni: Eminem aka Slim Shady ................ 180
Carl Jóhan Jensen: The reverend dünn's concept of God .. 91
Christian Matras: Hitt blinda liðið ................... 250
Christian Matras: Móðurmálið........................... 196
Diana Joensen: Message 18 ............................. 201
Edward Fuglø: Microstate Hiker ........................ 309
Edward Fuglø: Nornurnar ............................... 74
Eivør Pálsdóttir: Mín móðir............................ 211
Erla Marita Askham: Kvinna við vesikummu .............. 242
Firouz Gaïni: Prógvið ................................. 150
Fridtjof Joensen: Móðir og barn ....................... 274
Fríðrikur Petersen: Søgan um floksmenninar ............ 231
Guðrið Helmsdal: Í skýmingini ......................... 78
Guðrið Helmsdal: Mjørkanáttin ......................... 29
Gunnar Hoydal: Bræv til Marionnu ...................... 173

Haldur Suni: Eg'ið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 198
Hanni Bjartalíð: Uttan heiti. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 146
Hans A. Djurhuus: Hagin og kirkjan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 93
Hans A. Djurhuus: Høsnatos . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 213
Hans Henrik Tholstrup: Havnin í Havn. . . . . . . . . . . . . . . . . 320
Hans Pauli Olsen: Uppskorin hvalur . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34
Hanus Kamban: Amerikakvæðið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 316
Hanus Kamban: Sangur um flyting. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 152
Hanus Kamban: Undir tínum veingjabreiði. . . . . . . . . . . . . 94
Heðin Kambsdal: Kona . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 202
Heðin M. Klein: Grasrót . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 52
Heiðrik á Heygum: Through the looking-glass . . . . . . . . . . . 87
Heine Hestoy: Óboðin ferðamaður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 244
Heine Hestoy: Taskan. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 181
Høgni Magnussen: Á G!. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 190
Ingálvur av Reyni: Genta í rúmi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 117
Jack Kampmann: Elduvík. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 55
Jacob Olsen: Fjallaoyggjar í kava . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 237
Jakob Jakobsen: Teir sjey svanirnir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73
Jan Guillou (Leikgerð: Benny Haag/Hans Tórgarð týddi):
Brot úr „Óndskapurin“. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 295
Jan Müller og Jóannes Dalsgaard: Mandela – hugtak og ímynd 282
Jens Kristian Vang: Mótasýning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 70
Jóanes Nielsen: Fyri tvær fløskur av konjakki. . . . . . . . . . . . 222
Jóannes Dalsgaard: Framtíðin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 288
Jóannes Patursson: Eg veit ein kvist . . . . . . . . . . . . . . . . . . 193
Jónley á Løgmansbø: Message 28 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 200
Karl Bruckner (Erla Olsen týddi): Brot úr „Sadako vil liva“. 261
Karsten Hoydal: Barnið, bergið og blómurnar . . . . . . . . . . . 83
Kári P.: Meirilutin ræður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 243
Kristian Osvald Viderø: Himnafaðir, eg teg biði . . . . . . . . . 114
Lina Sandell (Jákup Dahl týddi): Ongum er so trygt . . . . . . 130

Lydia Didriksen: Blóð . . . 38
Lydia Didriksen: Frostrósan . . . 124
Malan Poulsen: Vón . . . 290
Margretha Nónklett: Mannarættindadagurin 2006 . . . 291
Marius Olsen: Mynd við flaggstong . . . 260
Marius Olsen: Sjálvsmynd . . . 132
Marmar: Fragmented Unison . . . 79
Martin Joensen: Maðurin umborð . . . 14
Mikkjal Dánjalsson á Ryggi: Leggið út árar . . . 33
Nordahl Grieg: Til ungdommen . . . 257
Oddvør Johansen: Brot úr „Tá ið eg havi málað summarhúsið“ . . . 155
Oddvør Johansen: Við eygum so stórum sum tekoppar . . . 305
Ólavur Michelsen: Rossini á Skoradali . . . 54
Óli Petersen: Málfúti . . . 207
Óluva Johannessen: Kanska fara . . . 23
Petur & Petur: Eg elski mína mús . . . 197
Petur Pólson: 1. (myrkur) . . . 85
Petur Pólson: 2. (lýsi) . . . 88
Petur Pólson: Loynimálið – Bábel revisited . . . 203
Poul F. Joensen: Heimspolitikkur . . . 272
Poul F. Joensen: Samfelagið . . . 189
Rannvá Kunoy: Return to Paradise . . . 39
Rasmus Effersøe: Úr øllum ættum . . . 195
Regin Dahl: Ikki komi eg til tín . . . 90
Rikard Long: Vætan . . . 47
Rói Patursson: Býurin (og reklaman í glugganum) . . . 136
Ruth Smith: Nes . . . 215
Sámal Joensen-Mikines: Súgur við lendingina . . . 13
Sendistovan: Máltræ . . . 192
Sigri M. Gaïni: Eg eri . . . 82
Sigri M. Gaïni: Minst til . . . 212

Sigrun Gunnarsdóttir: Einglavakt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 104
Sólrún Michelsen: Summi renna í stuttum brókum . . . . . . . 139
Stefan í Skorini: Málslig intoleransa skeiklar
almenna kjakið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 208
Steinbjørn B. Jacobsen: Aldan og landið alda . . . . . . . . . . . . 12
Steintór Rasmussen: Tey dansa eins og skuggar . . . . . . . . . . 294
Svanhild Strøm: Latitude . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 125
Tita Vinther: Segl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 111
Tóroddur Poulsen: Dulnevni. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 230
Tóroddur Poulsen: Fepurdreymur um blomstrini. . . . . . . . . 69
Tóroddur Poulsen: Fjarskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 116
Tróndur Patursson: Náttúrulýsing. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 46
Tummas Jákup Thomsen: Uttan heiti. . . . . . . . . . . . . . . . . . . 255
V. U. Hammershaimb: Blankans ríma . . . . . . . . . . . . . . . . . . 49
William Heinesen (Heðin Brú føroyskaði):
Brot úr „Móðir Sjeystjørna“ . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 118
William Heinesen: Sjálvband og samstýri . . . . . . . . . . . . . . . 172
Wolf Biermann (Turið Sigurðardóttir týddi): Eggjan . . . . . . 280

# Innihaldsyvirlit eftir heiti


1. (myrkur): Petur Pólson . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 85
2. (lýsi): Petur Pólson . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 88
Aldan og landið alda: Steinbjørn B. Jacobsen . . . . . . . . . . . 12
Amerikakvæðið: Hanus Kamban . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 316
Á G!: Høgni Magnussen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 190
Babyboom: Astrid Andreasen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 251
Barnaminni: Beinta av Reyni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 163
Barnið, bergið og blómurnar: Karsten Hoydal . . . . . . . . . . . 83
Blankans ríma: V. U. Hammershaimb . . . . . . . . . . . . . . . . . . 49
Blóð: Lydia Didriksen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 38
Bræv til Marionnu: Gunnar Hoydal . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 173
Býurin (og reklaman í glugganum): Rói Patursson . . . . . . . 136
Dulnevni: Tóroddur Poulsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 230
Eg elski mína mús: Petur & Petur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 197
Eg eri: Sigri M. Gaïni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 82
Eg veit ein kvist: Jóannes Patursson . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 193
Eg'ið: Haldur Suni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 198
Eggjan: Wolf Biermann (Turið Sigurðardóttir týddi) . . . . . . 280
Einglavakt: Sigrun Gunnarsdóttir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 104
Elduvík: Jack Kampmann . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 55
Eminem aka Slim Shady: Beinta av Reyni . . . . . . . . . . . . . . . 180
Fepurdreymur um blomstrini: Tóroddur Poulsen . . . . . . . . 69
Fjallaoyggjar í kava: Jacob Olsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 237
Fjarskifti: Tóroddur Poulsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 116
Fragmented Unison: Marmar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 79
Framtíðin: Jóannes Dalsgaard . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 288
Frostrósan: Lydia Didriksen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 124
Fyri tvær fløskur av konjakki: Jóanes Nielsen . . . . . . . . . . . . 222

Føroysk delikatessa: Anna Katrina Højgaard . . . . . . . . . . . . 223
Genta í rúmi: Ingálvur av Reyni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 117
Grasrót: Heðin M. Klein . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 52
Hagin og kirkjan: Hans A. Djurhuus . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 93
Havnin í Havn: Hans Henrik Tholstrup . . . . . . . . . . . . . . . . 320
Hávamál (ørindi 76 og 77) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 254
Hávamál (ørindi 76 og 77) (Regin í Líð føroyskaði) . . . . . . 256
Heimspolitikkur: Poul F. Joensen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 272
Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi . . . . . . 273
Himnafaðir, eg teg biði: Kristian Osvald Viderø . . . . . . . . . . 114
Hitt blinda liðið: Christian Matras . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 250
Hundurin: Agnar Artúvertin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 147
Høsnatos: Hans A. Djurhuus . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 213
Ikki komi eg til tín: Regin Dahl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 90
Í skýmingini: Guðrið Helmsdal . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 78
Kanska fara: Óluva Johannessen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 23
Kona: Heðin Kambsdal . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 202
Kroppur: Bárður Oskarsson . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 63
Kvinna við vesikummu: Erla Marita Askham . . . . . . . . . . . . 242
Latitude: Svanhild Strøm . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 125
Leggið út árar: Mikkjal Dánjalsson á Ryggi . . . . . . . . . . . . . . 33
Loynimálið – Bábel revisited: Petur Pólson . . . . . . . . . . . . . 203
Maðurin umborð: Martin Joensen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
Mandela – hugtak og ímynd: Jan Müller og Jóannes Dalsgaard 282
Man guð vera nøgdur: Alexandur Kristiansen. . . . . . . . . . . . 133
Mannarættindadagurin 2006: Margretha Nónklett . . . . . . . 291
Maybe: a Battle: Bárður Dal Christiansen . . . . . . . . . . . . . . . 299
Málfúti: Óli Petersen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 207
Málslig intoleransa skeiklar almenna kjakið: Stefan í Skorini 208
Máltræ: Sendistovan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 192
Meirilutin ræður: Kári P. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 243
Message 5: Agnar Artúvertin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 199

Message 18: Diana Joensen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 201
Message 28: Jónley á Løgmansbø . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 200
Microstate Hiker: Edward Fuglø . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 309
Minst til: Sigri M. Gaïni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 212
Mín móðir: Eivør Pálsdóttir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 211
Mjørkanáttin: Guðrið Helmsdal . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29
Móðir og barn: Fridtjof Joensen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 274
Móðir Sjeystjørna: William Heinesen
(Heðin Brú føroyskaði) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 118
Móðurmálið: Christian Matras . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 196
Mótasýning: Jens Kristian Vang . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 70
Mynd við flaggstong: Marius Olsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 260
Náttúrulýsing: Tróndur Patursson . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 46
Nes: Ruth Smith . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 215
Nornurnar: Edward Fuglø . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 74
Ongum er so trygt: Lina Sandell (Jákup Dahl týddi) . . . . . . 130
Óboðin ferðamaður: Heine Hestoy . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 244
Óndskapurin: Jan Guillou (Leikgerð: Benny Haag/
Hans Tórgarð týddi) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 295
Power: Annika Hansen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 138
Prógvið: Firouz Gaïni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 150
Return to Paradise: Rannvá Kunoy . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 39
Rossini á Skoradali: Ólavur Michelsen . . . . . . . . . . . . . . . . . 54
Sadako vil liva: Karl Bruckner (Erla Olsen týddi) . . . . . . . . . 261
Samfelagið: Poul F. Joensen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 189
Sangur um flyting: Hanus Kamban . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 152
Sálin í hvalinum: Grønlendsk frumsøgn:
(Ásmundur Johannesen týddi) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30
Segl: Tita Vinther . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 111
Sjálvband og samstýri: William Heinesen . . . . . . . . . . . . . . 172
Sjálvsmynd: Marius Olsen . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 132
Súgur við lendingina: Sámal Joensen-Mikines . . . . . . . . . . . 13

Summi renna í stuttum brókum: Sólrún Michelsen ...... 139
Søgan um floksmenninar: Fríðrikur Petersen ........... 231
Taskan: Heine Hestoy .............................. 181
Tá fáa vit frið: Alexandur Kristiansen.................... 318
Tá ið eg havi málað summarhúsið: Oddvør Johansen ..... 155
Tár: Annika á Lofti................................. 268
Teir sjey svanirnir: Jakob Jakobsen ..................... 73
Tey dansa eins og skuggar: Steintór Rasmussen .......... 294
The reverend dünn's concept of God: Carl Jóhan Jensen . . 91
Through the looking-glass: Heiðrik á Heygum ........... 87
Til ungdommen: Nordahl Grieg ...................... 257
Undir tínum veingjabreiði: Hanus Kamban ............. 94
Uppskorin hvalur: Hans Pauli Olsen .................. 34
Uttan heiti: Hanni Bjartalíð ......................... 146
Uttan heiti: Tummas Jákup Thomsen .................. 255
Úr øllum ættum: Rasmus Effersøe ..................... 195
Varðin: Bárður Eklund .............................. 95
Við eygum so stórum sum tekoppar: Oddvør Johansen ... 305
Vón: Malan Poulsen ................................ 290
Vætan: Rikard Long ................................ 47
Æti: Astrid Andreasen .............................. 153